*Løgtingsins umboðsmaður*
*Ársfrágreiðingin 2002*

# *LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR*

## *Ársfrágreiðingin 2002*

Tórshavn 2003

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2002
© 2003, Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Hestprent

ISBN 99918-969-0-2

# *Innihaldsyvirlit*

I. Um embætið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8

II. Gongdin í 2002 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10

III. Hagtøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11

IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum
í málum avgreidd í 2002 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21

***10. Málsviðgerðartíð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21***

10.1. Kommunal skattakærunevnd – kæruviðgerð . . . . . 21

10.2. Almannastovan – flýggjan
av skjølum til kærunevnd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30

10.3. Almannastovan – umsókn
um ansingarstuðul . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30

10.4. Almannastovan og Føroya Kærustovnur
- kæruviðgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31

10.5. Vinnuframagrunnurin
– umsókn um stuðul . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

***11. Innlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 33***

11.1. Løgmansskrivstovan –
innlit í telefonupprit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 33

***21. Kommunu-, umhvørvis- og byggimál v.m. . . . . . . . . . . . . 37***

21.1. Metingarnevndin /
Hósvíkar kommuna – ognartøka . . . . . . . . . . . . . . . 37

***22. Skattur og avgjøld v.m. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 54***

22.1. Fíggjarmálaráðið – mismunur
í sambandi við MVG . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 54

***23. Vinnulívs- og Fiskivinnumál v.m.* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . *74***

23.1. Fiskimálastýrið – mismunur í sambandi
við veitan av loyvum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 74

23.2. Fiskimálastýrið –
skráseting av ræðisavmarking. . . . . . . . . . . . . . . . . . 76

***27. Undirvísing, gransking og mentan v.m.* . . . . . . . . . . . . . . *97***

27.1. Mentamálaráðið / Løgmansskrivstovan
– skúlin á Trøllanesi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 97

27.2. Útvarp Føroya
– politiskt stýrdur tíðindaflutningur . . . . . . . . . . . . 147

27.3. Mentamálaráðið – broytan
av givnum ársmetum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 161

27.4. Útvarp Føroya – útihýsing
og óhøviskur málburður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 177

***28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.* . . . . . . . . . . . *225***

28.1. Vinnumálastýrið – uppsøgn og
vantandi endursetan av stjóra . . . . . . . . . . . . . . . . . . 225

28.2. Mentamálastýrið – vantandi
starvssetan av lærara . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 261

28.3. Fíggjarmálastýrið / Mentamálastýrið
– lønarflokking . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 304

V. Eftirlitsvitjanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 305

***1.1. Eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum* . . . . . . . . . . . . . . . . . . *305***

VI. Skjøl

***1. Umboðsmanslógin.* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . *330***

***2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann* . . . . . . . . . . . *334***

Lógaryvirlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 338

Leitorð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 343

# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2002. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2003.

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:

I. Um embætið
II. Gongdin í 2002
III. Hagtøl
IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2002
V. Eftirlitsvitjanir
VI. Skjøl:
   1. Umboðsmanslógin
   2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

Tórshavn, mai 2003.

*Joen H. Andreassen*

# I. Um embætið

Sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5-ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins (§ 1). Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í starvi sínum er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði lands- og kommunalu fyrisitingina. Harumframt eru feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, umframt interkommunalir felagsskapir fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum (§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5).

Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær umsitingareindirnar, ið eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hendan vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4).

Umboðsmaðurin kann eisini av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5).

Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at

gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, sum hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10).

Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá (§ 12).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Eg varð tann 2. november 2000 av Føroya Løgtingi valdur sum tann fyrsti Løgtingsins umboðsmaður fyri tíðarskeiðið 1. januar 2001 til 31. desember 2005, men við tað, at eg sat í øðrum embæti tá, bar mær ikki til at taka við starvinum fyrr enn 1. mai 2001.

Skrivstovuhølini eru á 2. hædd í bygninginum Niels Finsensgøta 39 í Tórshavn, sum Føroya Realkredittstovnur eigur. Umframt meg sjálvan húsast her løgfrøðiligi medarbeiðari mín, Johnhard Klettheyggj, ráðgevi, og Laila Egholm, skrivstovufulltrúi.

Adressan er Niels Finsensgøta 39, Postsmoga 1339, FO 110 Tórshavn. Teldupostadressan er: lum@lum.fo, og heimasíðan eitur: www.lum.fo.

# *II. Gongdin í 2002*

Sum nevnt tók eg við starvinum sum Løgtingsins umboðsmaður tann 1. mai 2001. Í 2001 fekk eg tilsamans 39 klagur, harav 25 vóru endaliga avgreiddar í 2001. Hinar 14 vóru allar avgreiddar, tá eg í endanum av juni 2002 lat ársfrágreiðingina fyri 2001 úr hondum.

Í 2002 havi eg upprættað 34 mál, sum innihildu tilsamans 45 klagur. Av teimum eru 38 endaliga avgreiddar í 2002. Tilsamans eru sostatt avgreiddar 52 klagur í 2002.

Av teimum 7 klagunum, sum ikki vóru avgreiddar við árslok 2002, havi eg boðað formansskapi Løgtingsins frá, at eg í tí eina førinum má haldast at vera ógegnigur. Formansskapurin hevur síðani vent sær til Fólkatingsins umboðsmann, Hans Gammeltoft-Hansen, ið hevur átikið sær at viðgera mál, har eg eri ógegnigur. Av hinum 6 klagunum, sum stóðu eftir við ársenda 2002, eru 5 avgreiddar pr. 1. apríl.

Í 17 av teimum avgreiddu málunum eru álit skrivað, og eru tey øll løgd út á heimasíðu mína í anonymiseraðum líki. Eisini eru flestu teirra tikin við í hesa ársfrágreiðingina, somuleiðis í anonymiseraðum líki.

Umframt klagurnar havi eg av mínum eintingum við heimild í § 6, stk. 5, í umboðsmanslógini tikið eitt mál til viðgerðar, og í oktober 2002 vóru eg og medarbeiðarar mínir á eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum. Frágreiðingin um hesa eftirlitsvitjan er at finna í ársfrágreiðingini.

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í august luttók eg í einum slíkum fundi, ið varð hildin í Suðurgrønlandi. Í mai 2003 er ætlanin at hava ein slíkan fund í Føroyum og í desember 2003 í Danmark.

Eisini umboðsmenninir í øllum Norðanlondunum halda regluliga fundir umleið annaðhvørt ár. Næsti fundur av hesum slagi verður í Finlandi í 2003, og eri eg boðin við til henda fundin.

# *III. Hagtøl*

**Klagur innkomnar í 2002 býttar á myndugleikar**

Í 2002 blivu upprættaði 34 mál, sum innihildu 45 sjálvstøðugar klagur. Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

(Talva 1)

| ***Myndugleiki:*** | ***Klagur:*** |
|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 1 |
| Fíggjarmálastýrið | 3 |
| Vinnumálastýrið | 1 |
| Fiskimálastýrið | 2 |
| Almanna- og Heilsumálastýrið | 1 |
| Oljumálastýrið | 1 |
| Mentamálastýrið | 4 |
| Løgtingið v.m. | 2 |
| Almannastovan | 5 |
| Hjálpartólamiðstøðin | 2 |
| Kommunur | 4 |
| Føroya Handilsskúli | 1 |
| Útvarp Føroya | 3 |
| Føroya Kærustovnur/kærunevndin í almannamálum | 3 |
| Heimarøktin & Serforsorgin | 1 |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 1 |
| Vinnuframagrunnurin | 1 |
| Metingarnevndin | 1 |
| Føroya Rættur | 1 |
| Húsalánsgrunnurin | 1 |
| Yvirfriðingarnevndin | 1 |
| Løgreglan | 1 |
| Arbeiðsloysisskipanin og kærunevndin hjá ALS | 2 |
| Føroya Sjómansskúli | 1 |
| Bileftirlit Føroya | 1 |
| **Tilsamans** | **45** |

**Innkomnar klagur í 2002 býttar á málsøki og klaguinnihald**

Klagurnar, sum komu inn í 2002 kunnu býtast upp eftir málsøki og innihaldi, sum gjørt er niðanfyri:

(Talva 2)

| *Málsøki* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* | *Klagur um atburð v.m.:* |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 8 | 5 | 3 | |
| Fiskivinnumál | 2 | 1 | 1 | |
| Almannamál | 9 | 5 | 4 | |
| Umhvørvi/friðing | 1 | 1 | | |
| Skattur v.m. | 1 | 1 | | |
| Undirvísing | 3 | 3 | | |
| Stuðul | 3 | 1 | 2 | |
| Byggimál/leigumál | 3 | 2 | 1 | |
| Innlit | 5 | 4 | 1 | |
| Tíðindaflutningur/fjølmiðlar | 3 | 1 | | 2 |
| Fyrispurningar | 3 | 1 | | 2 |
| Ymiskt | 4 | 4 | | |
| **Tilsamans** | **45** | **29** | **12** | **4** |

**Klagur endaliga avgreiddar í 2002**

Av teimum 45 klagunum, sum komu inn í 2002 vóru 38 endaliga avgreiddar innan 31. des 2002, og ein klaga er latin setiumboðsmanni. Harumframt vóru avgreiddar 14 klagur, sum vóru innkomnar (men ikki avgreiddar) í 2001. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

(Talva 3)

| *Myndugleiki* | *Klagur* | *Avvístar* | *Við-gjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu /tilmæli* | *Viðgjørdar átala/til-mæli givið* |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 2 | | 2 | 2 | |
| Fíggjarmálastýrið | 3 | 1 | 2 | 1 | 1 |
| Vinnumálastýrið | 2 | 1 | 1 | | 1 |
| Fiskimálastýrið | 4 | 2 | 2 | 1 | 1 |
| Alm.- og Heilsumálastýrið | 2 | 2 | | | |
| Oljumálastýrið | 1 | 1 | | | |
| Mentamálastýrið | 7 | 2 | 5 | | 5 |
| Løgtingið v.m. | 2 | 2 | | | |
| Almannastovan | 6 | 3 | 3 | | 3 |
| Hjálpartólamiðstøðin | 1 | 1 | | | |
| Kommunur | 6 | 5 | 1 | | 1 |
| Føroya Handilsskúli | 1 | 1 | | | |
| Útvarp Føroya | 3 | | 3 | 1 | 2 |
| Føroya Kærustovnur/ kærunevndin í almannamálum | 2 | 1 | 1 | 1 | |
| Serforsorgin | 1 | 1 | | | |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 1 | 1 | | | |
| Vinnuframagrunnurin | 1 | | 1 | 1 | |
| Metingarnevndin | 1 | | 1 | | 1 |
| Føroya Rættur | 1 | 1 | | | |
| Húsalánsgrunnurin | 1 | 1 | | | |
| Yvirfriðingarnevndin | 1 | 1 | | | |
| Løgreglan | 1 | 1 | | | |
| Føroya Sjómansskúli | 1 | 1 | | | |
| Kommunalar skattakærunevndir | 1 | | 1 | | 1 |
| **Tilsamans** | **52** | **29** | **23** | **7** | **16** |

Av teimum 6 ikki-avgreiddu klagunum, eru 5 endaliga viðgjørdar pr. 1. apr. 2003. Ein klaga (innkomin 25. nov.) er framvegis til viðgerðar.

**Klagur avvístar í 2002**

Í 2002 blivu 29 klagur avvístar av ymiskum orsøkum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

(Talva 4)

| ***Avvísingarorsøk*** | ***Klagur*** |
|---|---|
| Innkomin ov seint; § 6, stk. 2 | 2 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur; § 6, stk. 3 | 9 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum; § 6, stk. 4 | 11 |
| Uttanfyri heimildarøki; § 4 | 3 |
| Afturkallað/fyrispurningur | 4 |

**Viðgjørdar klagur í 2002 býttar á málsøki**

Tey málini sum blivu endaliga viðgjørd í 2002 kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

(Talva 5)

| ***Málsøki*** | ***Klagur*** |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 5 |
| Fiskivinnumál | 2 |
| Almannamál | 4 |
| Skattur v.m. | 2 |
| Undirvísing | 3 |
| Stuðul | 1 |
| Byggimál/leigumál | 2 |
| Innlit | 1 |
| Tíðindaflutningur/fjølmiðlar | 3 |
| **Tilsamans** | **23** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**

Í teimum 23 endaliga viðgjørdu klagunum hevur viðgerðartíðin verið hendan: (Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 6)

| *Klaga innkomin:* | *Partshoyring liðug* | *Klaga avgreidd* | *Viðgerðar-tíð aftaná partshoyring* | *Viðgerðar-tíð tilsamans* |
|---|---|---|---|---|
| 01.05.01 | 15.10.01 | 15.01.02 | 3 mðr. | 8 mðr. 14 dg. |
| 01.05.01 | 23.01.02 | 21.02.02 | 29 dg. | 9 mðr. 20 dg. |
| 03.07.01 | 02.04.02 | 16.04.02 | 14 dg. | 9 mðr. 13 dg. |
| 03.07.01 | 02.04.02 | 16.04.02 | 14 dg. | 9 mðr. 13 dg. |
| 23.07.01 | 07.01.02 | 22.02.02 | 1 mðr. 15 dg. | 7 mðr. |
| 20.08.01 | 25.10.01 | 11.02.02 | 3 mðr. 17 dg. | 5 mðr. 22 dg. |
| 27.08.01 | 15.04.02 | 16.05.02 | 1 mðr. 1 dg. | 8 mðr. 19 dg. |
| 27.08.01 | 15.04.02 | 16.05.02 | 1 mðr. 1 dg. | 8 mðr. 19 dg. |
| 30.08.01 | 07.12.01 | 04.03.02 | 2 mðr. 25 dg. | 6 mðr. 4 dg. |
| 09.11.01 | 14.03.02 | 09.04.02 | 26 dg. | 5 mðr. |
| 21.01.02 | 15.04.02 | 26.06.02 | 2 mðr. 11 dg. | 5 mðr. 5 dg. |
| 21.01.02 | 15.04.02 | 26.06.02 | 2 mðr. 11 dg. | 5 mðr. 5 dg. |
| 16.04.02 | 08.05.02 | 04.07.02 | 1 mðr. 26 dg. | 2 mðr. 18 dg. |
| 23.04.02 | 16.05.02 | 12.07.02 | 1 mðr. 26 dg. | 2 mðr. 19 dg. |
| 29.04.02 | 12.06.02 | 10.07.02 | 28 dg. | 2 mðr. 11 dg. |
| 29.04.02 | 12.06.02 | 10.07.02 | 28 dg. | 2 mðr. 11 dg. |
| 24.05.02 | 25.11.02 | 17.12.02 | 22 dg. | 6 mðr. 23 dg. |
| 24.05.02 | 25.11.02 | 17.12.02 | 22 dg. | 6 mðr. 23 dg. |
| 06.06.02 | 18.09.02 | 07.10.02 | 19 dg. | 4 mðr. 1 dg. |
| 17.06.02 | 19.10.02 | 23.10.02 | 4 dg. | 4 mðr. 6 dg. |
| 18.06.02 | 19.10.02 | 21.11.02 | 1 mðr. 2 dg. | 5 mðr. 3 dg. |
| 02.07.02 | 15.11.02 | 28.11.02 | 13 dg. | 4 mðr. 26 dg. |
| 02.07.02 | 15.11.02 | 28.11.02 | 13 dg. | 4 mðr. 26 dg. |
| **Viðgerðartíð í miðal:** | | | **1 mðr. 10 dg.** | **5 mðr. 26 dg.** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum:**
Í teimum 29 avvístu klagunum hevur viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 7)

| *Klaga innkomin:* | *Partshoyring liðug* | *Klaga avgreidd* | *Viðgerðar-tíð aftaná partshoyring* | *Viðgerðar-tíð tilsamans* |
|---|---|---|---|---|
| 15.10.01 | 07.01.02 | 15.01.02 | 8 dg. | 3 mðr. |
| 20.11.01 | 03.01.02 | 10.01.02 | 7 dg. | 1 mðr. 21 dg. |
| 20.12.01 | | 02.01.02 | 13 dg. | 13 dg. |
| 20.12.01 | | 02.01.02 | 13 dg. | 13 dg. |
| 02.01.02 | 20.03.02 | 20.03.02 | 0 dg. | 2 mðr. 18 dg. |
| 10.01.02 | 18.01.02 | 21.01.02 | 3 dg. | 11 dg. |
| 18.01.02 | 22.01.02 | 22.01.02 | 0 dg. | 4 dg. |
| 14.03.02 | 14.03.02 | 14.03.02 | 0 dg. | 0 dg. |
| 09.03.02 | 12.03.02 | 12.03.02 | 0 dg. | 3 dg. |
| 09.03.02 | 12.03.02 | 12.03.02 | 0 dg. | 3 dg. |
| 09.04.02 | | 22.04.02 | 13 dg. | 13 dg. |
| 08.05.02 | 13.05.02 | 13.05.02 | 0 dg. | 5 dg. |
| 18.04.02 | | 29.04.02 | 11 dg. | 11 dg. |
| 02.05.02 | | 02.05.02 | 0 dg. | 0 dg. |
| 28.05.02 | | 29.05.02 | 1 dg. | 1 dg. |
| 03.06.02 | 13.06.02 | 14.06.02 | 1 dg. | 11 dg. |
| 04.06.02 | 27.06.02 | 27.06.02 | 0 dg. | 23 dg. |
| 20.06.02 | | 26.06.02 | 6 dg. | 6 dg. |
| 20.06.02 | | 26.06.02 | 6 dg. | 6 dg. |
| 11.09.02 | 03.10.02 | 11.10.02 | 8 dg. | 1 mðr. |
| 11.09.02 | 03.10.02 | 11.10.02 | 8 dg. | 1 mðr. |
| 12.10.02 | | 25.10.02 | 13 dg. | 13 dg. |
| 22.10.02 | | 25.10.02 | 3 dg. | 3 dg. |
| 15.10.02 | | 12.11.02 | 28 dg. | 28 dg. |
| 12.11.02 | | 18.11.02 | 6 dg. | 6 dg. |
| 12.11.02 | | 18.11.02 | 6 dg. | 6 dg. |
| 29.11.02 | | 02.12.02 | 3 dg. | 3 dg. |
| 12.12.02 | | 13.12.02 | 1 dg. | 1 dg. |
| 13.12.02 | 19.12.02 | 19.12.02 | 0 dg. | 6 dg. |
| **Viðgerðartíð í miðal:** | | | **5 dg.** | **16 dg.** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum:**

Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur hevur málsvíðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 8)

| *Klagur* | *Viðgerðarartíð aftaná partshoyring* | *Viðgerðarartíð tilsamans:* |
|---|---|---|
| Viðgerðartíð í miðal: | 20 dg. | 2 mðr. 29 dg. |

**Klagur innkomnar í 2002 býttar á myndugleikar**



## Klagur innkomnar í 2002 býttar á málsøki




## Klagur innkomnar í 2002 býttar eftir klaguinnihaldi



## Klagur endaliga avgreiddar í 2002




## Klagur avvístar í 2002 býttar eftir avvísingarorsøk



## Klagur vi gjørdar í 2002 býttar á málsøki




## Innkomnu klagurnar býttar eftir innkomumánaði



# *IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2002*

## 10. Málsviðgerðartíð

### 10.1. Klaga um viðgerðartíðina hjá kommunalari skattakærunevnd

A hevði í desember 2000 sent einari kommunalari skattakærunevnd eina kæru í sambandi við, at Toll- og Skattstova Føroya ikki vildi góðkenna ein frádrátt uppá uml. 160.000 kr. Talan var um pening, sum A hevði goldið í 1999 fyri ábyrgd og tap vegna P/R B. A klagaði til umboðsmannin 17. juli 2001. Samstundis sendi A eisini eina kæru til Landsskattakærunevndina, sum tók málið til viðgerðar sambært § 17, stk. 4 í Skattafyrisitingarlógini.

Vísandi til § 6, stk. 3 í umboðsmanslógini avvísti umboðsmaðurin klaguna viðvíkjandi sjálvari avgerðini um ikki at góðkenna frádráttin, tí at hendan avgerð ikki var endalig í fyrisitingarligum høpi. Klagan var tó viðgjørd viðvíkjandi spurninginum um drúgvu málsviðgerðartíðina hjá kommunalu skattakærunevndini. Umboðsmaðurin átalaði, at málið hevði ligið meira enn 8 mðr. hjá nevndini, uttan at nakað varð hent við málinum yvirhøvur. Um orsøkin til hetta var vantandi fyrisitingarlig hjálp hjá skattakærunevndini, mælti umboðsmaðurin nevndini og avvarandi kommunum til at fáa hesi viðurskiftini í rættlag. (J.nr. 200100044)

**Klagan**

(A) hevur við brævi, dagfest 17. juli 2001 sent mær soljóðandi klagu:

> „Undirritaði vil við hesum heita á umboðsmannin um at hyggja eftir máli mínum tí eg haldi, at fyrisitingarligt misstak er hent (trygdin/rættartrygdin).

Hjáløgd eru øll skriv í málinum, og um tygum ynskja at samrøða við meg um málið, vil eg fegin hitta tygum.“

Við klaguni vóru løgd avrit av brævaskifti millum (A) og ymsar skattamyndugleikar umframt avrit av einari kæru til Landsskattakærunevndina, somuleiðis dagfest 17. juli 2001.

Av tí, at sjálv klagan til umboðsmannin er sera stuttorðað og lítið ítøkilig, varð (A) boðsendur at koma á fund við umboðsmannin 27. aug. 2001.

(A) greiddi á hesum fundinum m.a. frá, at hann ikki hevði fingið nakra avgerð frá kommunalu skattakærunevndini viðvíkjandi kæruni, sum hann hevði sent nevndini 15. des. 2000. Kæran snúði seg um, at Toll- og Skattastova Føroya, Streymoyar øki ikki vildi góðkenna ein skattafrádrátt áljóðandi uml. 160.000 kr. Talan var um eina upphædd, sum (A) hevði goldið í 1999 fyri ábyrgd og tap vegna P/R (B).

Á fundinum vísti (A) mær eitt skriv, dagfest 24. aug. 2001 frá Føroya Kærustovni, har boðað varð honum frá, at umsitingin hjá kommunalu skattakærunevndini uppá fyrispurning frá Føroya Kærustovni hevði upplýst, at kærumálið hjá honum ikki var klárt at leggja fyri kommunalu skattakærunevndina, og væntandi ikki kundi leggjast fyri nevndina fyrr enn um nakrar mánaðir. Tað sást tí ikki at vera grundarlag fyri at bíða eftir einari avgerð frá kommunalu skattakærunevndini, og tí mælti Kærustovnurin honum til, at kæran varð flutt til Landsskattakærunevndina.

Eg greiddi á fundinum (A) frá, at eg í løtuni, vísandi til § 6, stk. 3 í umboðsmanslógini, ikki kundi viðgera innihaldið ella realitetin í klaguni, tí at fyrisitingarligi kærumøguleikin ikki var troyttur, men at spurningurin um viðgerðartíðina hjá kommunalu skattakærunevndini fór at vera kannaður nærri.

Við skrivi, dagfest 28. aug. 2001 avvísti eg klaguna við undantaki av spurninginum um drúgvu málsviðgerðartíðina hjá kommunalu skattakærunevndini, og sama dag var ein fyrispurningur sendur nevndini hesum viðvíkjandi. Nevndin bleiv biðin um at greiða mær frá, hví málið framvegis ikki var avgreitt, og hví viðgerðartíðin hevði verið so drúgv.

Við skrivi, dagfest 1. okt. 2001 hevur nevndin svarað mær soleiðis:

**„<u>Viðv. kæru hjá (A) til skattakærunevndina.</u>**
Víst skal verða til skriv umboðsmannsins frá 28. august 2001, har m.a. sagt verður, at kærarin einki hevur frætt aftur frá skattakærunevndini um gongdina í kærumálinum. Hetta er ikki heilt rætt – samanber niðanfyri.

Tann 22. desember 2000 hevur hann (og advokaturin) fingið skriv um, hvussu viðgerðin av kæruni fer fram. Hann fær eisini at vita, at innan 3 mánaðir hendir neyvan nakað serligt, og harnæst fær hann at vita um kærumøguleikan til landsskattakærunevndina aftaná, at 3 mánaðar freistin er farin.

Tann 29. mars 2001 spyr advokaturin, um kæran er móttikin, og hvussu langt málið er komið; hetta verður svarað honum hiðanifrá við skrivi frá 2. apríl 2001. Við skrivi frá 27. september 2001 spyr advokaturin aftur, hvussu langt hetta mál er komið, og verður hiðanifrá svarað honum í skrivi frá 1. oktober 2001.

Tað kann verða skoytt uppí, at (A) av og á hevur tosað við medarbeiðara á skrivarastovuni hjá skattakærunevndini, og er hann soleiðis eisini munnliga kunnaður og vitandi um, hvussu gongst við málinum.

Í august 2001 (primo) sigur Føroya Kærustovnur um telefon/mail, at nú var álíkningin fyri 1999 kærd víðari til landsskattakærunevndina, og uppá fyrispurning fekk stovnurin at vita, at avgerð í málinum var ikki tikin í skattakærunevndini, og at eftir kærugongdini (røðini) gingu nakrir mánaðir afturat.

Eftirfylgjandi boðar Føroya Kærustovnur (landsskattakærunevndin) við skrivi frá 30. august 2001 frá, at stovnurin hevur móttikið kæru, dagfest 17. juli 2001, um skattsetingina fyri 1999 hjá omanfyri nevnda. Eisini verður sagt, at tá hendan skattseting var kærd til skattakærunevndina í desember 2000, og avgerð enn ikki er tikin, verður biðið um, at skattakærunevndin ikki ger meira við málið.

Skattakærunevndin hevur síðani við skrivi frá 5. september 2001 (og við avriti til Føroya Kærustovn) boðað omanfyri nevnda frá, at kæruviðgerðin í skattakærunevndini er støðgað, tí kæran verður mett sum burturdottin sambært starvsskipanini (§ 13, stk.

2)/ skattafyrisitingarlógini (§ 17, stk. 4), og at tí verður í hesum høpi ikki gjørt meira við málið.

Til spurning umboðsmannsins um, hví hetta kærumálið ikki er avgreitt enn, og hví málsviðgerðin hevur verið so drúgv í hesum máli, kann verða sagt, at málsviðgerð í skattakærumálum sum heild er drúgv, at spurningarnir kunnu verða fjølbroyttir, og at málið hjá omanfyrinevnda er einki eindømi.

Tað verður tó roynt at stíla ímóti at halda freistina uppá 3 mánaðir í skattafyrisitingarlógini § 17, stk. 4, har møguleiki annars tá er givin fyri at lata kæruna til landsskattakærunevndina, hóast skattakærunevndin ikki hevur gjørt sín úrskurð.

Men enn er tíverri nakað væl eftir á hetta mál, og roynt verður eisini at stremba eftir at avgreiða skattakærumál so skjótt sum gjørligt og nøkulunda í tí innkomnu røðini."

Við skrivi, dagfest 3. okt. 2001 bað eg kommunalu skattakærunevndina um at lata mær til láns øll skjølini viðvíkjandi kæruni frá (A). Somuleiðis bað eg skattakærunevndina um innan 4 vikur at greiða mær nærri frá:

- málsviðgerðargongdini í kærumálum av hesum slagnum, herundir málsviðgerðartíðini,
- hvussu stórt árliga talið er á ávikavist innkomnum og endaliga viðgjørdum kærum hjá nevndini, og
- hvørjar umstøðurnar eru hjá kommunalu skattakærunevndini at virka undir, bæði fíggjarliga og fakliga.

Við skrivi, dagfest 5. nov. 2001 hevur nevndin svarað mær soleiðis:

„Víst skal verða til skriv umboðsmannsins frá 28. august 2001, svarskriv skattakærunevndarinnar frá 1. oktober 2001 og til skriv umboðsmansins frá 3. oktober 2001, har biðið verður um tilfar og frágreiðingar, herundir um fíggjarligu og fakligu umstøðurnar.

1. Viðvíkjandi málsviðgerðini í skattakærumálum skal verða víst til skattafyrisitingarlógina (t.d. §§ 16 og 17) og til starvsskipanina (t.d. §§ 8, 9 og 11). Málsviðgerðartíðin er rættuliga ymisk, men eftir fyrireikingarviðgerð fær kærarin frá skatta-

kærunevndini uppskot til avgerð, har hesin tá hevur møguleikar til at gera munnligar/skrivligar viðmerkingar og ella biðja um fund við nevndina. Soleiðis er málsgongdin ofta long til partarnir til fulnar eru lidnir við fleiri viðgerðum/fundum til málið endaliga kann avgerðast og avgreiðast.

2. Viðvíkjandi talinum snýr tað seg um einar 105 kærur. Tað eru umleið trý ár síðani skattakærunevndin fór at virka, og 25 eru ikki avgreiddar, har tann elsta er eitt ár; tað kann verða skoytt uppí, at onkur kæra hevur gingið í áravís, harav onkur er, sum enn ikki er liðug, av tí at hon gongur umaftur. Eisini kann verða skoytt uppí, at umleið 25-30 % av málunum verða kærd víðari til landsskattakærunevndina, og skal skattakærunevndin í sambandi við hesar kærur gera álit í málunum – samanber § 25, stk. 2, í skattafyrisitingarlógini.

3. Viðvíkjandi umstøðunum er at siga, at tá skattakærunevndin byrjaði, varð mett neyðugt við trimum medarbeiðarum, av tí at skattakærumál ofta eru bæði tung og tíðarkrevjandi, eins og ein 3 mánaðar freist í høvuðsheitum er galdandi. Tað fakliga umhvørvið, ið eisini er tíðarkrevjandi, snýr seg m.a. um fakligan lesnað, skeiðvirksemi, kunning í nevndar/medarbeiðara høpi, samband við kommunur og landsstovnar á skattliga økinum, eins og ávíst samband millum skattakærunevndir innan- og uttanlands. Fíggjarætlanin var tillagað hareftir, men higartil hava tveir medarbeiðarar tikið sær av fyrireikingini av kærunum. Seinasta árið hevur nevndin arbeitt við at fáa økt medarbeiðara talið og í tí høpi verið í samband við Tórshavnar kommunu; vónandi er hetta nú við at koma í rættlag.

- Viðvíkjandi kæruni hjá skattgjaldaranum (A) kann verða skoytt uppí, at við skrivi frá 4. september 2001 biður Toll- og Skattstova Føroya (T&S), Stýrið, um álit frá skattakærunevndini í sambandi við kæruna til landsskattakærunevndina. Stýrið ásetur freistina til 15. september 2001 (10 dagar), sum í hesum føri er óvanliga stutt, og sum tá ikki bar til at halda. Við skrivi frá 5. oktober 2001 til skattakærunevndina sigur Føroya Kærustovnur (FK) seg hava móttikið ummælið frá stýrinum, dagfest

2. oktober 2001, og at hetta soleiðis verður sent kæraranum (A) til kunningar og møguligar viðmerkingar.

Hóast freistin hjá skattakærunevndini at gera álit er farin, ynskir Føroya Kærustovnur uppá fyrispurning kortini at fáa hetta, og miðað verður eftir at fáa álitið liðugt skjótast gjørligt.

Skrivið frá nevndini varð 14. des. 2001 sent (A) til ummælis, men er hesin ikki komin við fleiri viðmerkingum til málið.

**Málsgongdin**

Sambært skjølunum frá kommunalu skattakærunevndini hevur gongdin í málinum, sum hevur týdning fyri viðgerð mína av klaguni, verið hendan:

- 15.12.2000 sendir advokatur vegna (A) kommunalu skattakærunevndini eina kæru. Nakrar dagar seinni kærir (A) sjálvur til nevndina.
- 22.12.2000 sendir nevndin (A) og advokatinum eina móttøkuváttan, har eisini verður greitt frá mannagongdini hjá nevndini í slíkum kærumálum, eins og greitt verður partinum frá, hvørji rættindi hesin hevur undir viðgerðini av málinum.
- 22.12.2000 verður kæran send Toll- og Skattstovu Føroya (Streymoyar økið) til ummælis.
- 25.01.2001 sendir Toll- og Skattstova Føroya kærunevndini sítt ummæli umframt annað rúgvusmikið tilfar (60-70 síður tils. – móttikið 29.01)
- 29.03.2001 spyr advokaturin í brævi (móttikið 02.04), hvussu langt málið er komið.
- 02.04.2001 svarar kærunevndin advokatinum, at málið sum so ikki er byrjað.
- 30.08.2001 boðar Føroya Kærustovnur kommunalu skattakærunevndini frá (móttikið 31.08), at kæran er flutt til Landsskattakærunevndina, og biðjur samstundis nevndina steðga viðgerðini.
- 05.09.2001 boðar nevndin (A) og Landsskattakærunevndini frá, at málið er steðgað.

## *Niðurstøða*

*Kæran frá (A) til kommunalu skattakærunevndina snúði seg um, hvørt ein skattafrádráttur áljóðandi uml. 160.000 kr. kundi góðkennast sambært skattalóggávuni ella ikki.*

*Skattakærunevndin fekk longu 29. jan. 2001 ummælið frá Toll- og Skattstovu Føroya viðvíkjandi kæruni, men sambært innsendu skjølunum hendir síðani einki í málinum. Tískil varð kæran eftir áheitan flutt til viðgerðar í Landsskattakærunevndini, og fráboðan send kæraranum um hetta 5. sept. 2001.*

*Skattakærunevndin hevur í frágreiðing sínari til mín, dagfest 1. okt. 2001 umborið seg við, at skattakærumál sum heild eru drúgv, at spurningarnir kunnu vera fjølbroyttir, og at hetta málið ikki er nakað eindømi í so máta.*

*Havandi í huga, at kæran í roynd og veru „einans“ snýr seg um, hvørt ein skattafrádráttur kann vera loyvdur ella ikki, kann eg ikki góðtaka hesa umberingina.*

*Talan er ikki um eitt mál, har størri kanningar skulu gerast, men um ein tulkingarspurning um, hvørt nevndi frádrátturin er loyvdur ella ikki sambært lóggávuni. Hóast tulkingarspurningar kunnu verða truplir og tíðarkrevjandi, er tað avgjørt ikki nøktandi, at einki er hent við málinum frá tí, at ummælið kemur frá Toll- og Skattstovu Føroya 29. januar 2001 og fram til 5. september 2001, tá kærumálið verður tikið úr hondunum á kommunalu skattakærunevndini og lagt fyri landsskattakærunevndina. Eg fari tí at átala hetta.*

*Tað er ikki í fyrisitingarlógini ásett nøkur generel lógarregla um, hvussu drúgv viðgerðin av einum máli kann ella skal vera. Generelt kann bert staðfestast, at øll mál eiga at verða viðgjørd innan eina rímuliga tíð. Hvat rímilig tíð er veldst alt um, hvussu umfatandi málini eru, hvørjar kanningar skulu til og arbeiðsbyrðuna hjá viðkomandi fyristingarmyndugleika.*

*Hinvegin er tað í skattakærumálum sum hesum lagt upp til, at málini eiga at verða avgreidd innan 3 mánaðir. Hetta framgongur av § 17, stk. 4 í skattafyrisitingarlógini, har sagt verður, at um kæran ikki er avgreidd 3 mánaðir aftaná, at hendan er latin kommunalu skattakærunevndini, kann kæran verða latin beinleiðis til Landsskattakærunevndina.*

*At skattafyrisitingarlógin tryggjar einum skattaborgara, sum heldur seg hava verið fyri órætti, at fáa málið viðgjørt av kommunalu skattakærunevndini, áðrenn hann møguliga fer víðari til landsskattakærunevnd og dómstólarnar, má metast sum ein týðandi rættartryggleiki. Hesin tryggleiki verður í veruleikanum tikin frá viðkomandi, um hann noyðist at fara beinleiðis til landsskattakærunevndina, tí at kommunala skattakærunevndin ikki tekur eina avgerð innan eina rímiliga tíð.*

*Um orsøkin til, at kommunala skattakærunevndin ikki fær viðgjørt skattakærur innan rímuliga tíð, er vantandi fyristingarlig hjálp, so kann nevndin sambært § 5 í kunngerð nr. 48 frá 15. apr. 1998 um starvsskipan fyri kommunalar skattakærunevndir krevja, at hesin trupulleikin verður loystur.*

*Eg fari tí at mæla kommunalu skattakærunevndini fyri Tórshavnar øki og avvarandi kommununum til at fáa hesi viðurskiftini í rættlag sum skjótast. Í skrivi sínum til umboðsmannin, dagfest 5. nov. 2001 vísir nevndin á, at hon arbeiðir við at fáa økt um umsiting sína, og havi eg í hesum sambandi eisini lagt til merkis, at Tórshavnar Kommuna við lýsing í Sosialinum 27. okt. 2001 hevur søkt eftir einum løgfrøðingi, hvørs høvuðsarbeiðsøkið verður hjá kommunalu skattakærunevndini.*

*Í brævinum til umboðsmannin, dagfest 1. okt. 2001 greiðir nevndin eisini frá 3-mánaða freistini í § 17, stk. 4 í skattafyrisitingarlógini, og at miðjað verður eftir at kunna halda hesa freistina. Hetta kann eg ikki annað enn taka undir við. Nevndin sigur tó, at enn er væl eftir á mál hesum viðvíkjandi. Eg fari í hesum sambandi at biðja nevndina um at lata meg frætta aftur um eitt ár ella so, hvussu gongst við hesum málsetningi.*

*Eg havi lagt til merkis, at kommunala skattakærunevndin beinanvegin sendi kæruna til ummælis hjá Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki samsvarandi § 16 í skattafyrisitingarlógini, eins og móttøkuváttan og ein sera greið kunning um kæruviðgerðina varð send (A) og advokati hansara. Sagt varð í brævinum, at avgerð neyvan fór at vera tikin innan 3 mánaðir, og í hesum sambandi varð (A) kunnaður um møguleikan fyri at kæra beinleiðis til Landsskattakærunevndina, tá hesir 3 mánaðirnir vóru gingnir.*

*Hóast tað sum nevnt ikki er nøktandi, at avgerð ikki kundi takast innan 3 mánaðir, ella í hvussu er innan rímiliga tíð, má kunningin í*

*sjálvum sær sigast at vera fyrimyndarlig, eins og tað er góður fyrisitingarsiður at senda partinum eina móttøkuváttan fyri innkomin skriv.*

*Eisini má tað metast at vera samsvarandi góðum fyrisitingarsiði, at advokaturin, tá hann við skrivi, dagfest 29. mars 2001 spurdi, hvussu gekst við málinum, alt fyri eitt fekk svar hesum viðvíkjandi.*

*Umframt at geva kommunalu skattakærunevndini fyri Tórshavnar øki eina átalu fyri drúgvu ella vantandi málsviðgerðina í hesum máli, geri eg ikki meira við klaguna.*

## 10.2. Klaga um viðgerðartíðina hjá Almannastovuni at lata Føroya Kærustovni umbiðin skjøl

Við skrivi, dagfest 24. mai 2001 kærdi A eina avgerð hjá Almannastovuni til Kærunevndina í almannamálum (Føroya Kærustovn), og við skrivi, dagfest 29. mai 2001 bað Føroya Kærustovnur Almannastovuna um at senda sær skjølini í málinum. Tá einki hendi, sendi Føroya Kærustovnur Almannastovuni 2 rykkjaraskriv, dagfest ávikavist 29. juni og 20. august 2001. A klagaði 27. aug. 2001 til umboðsmannin um viðgerðartíðina hjá Almannastovuni í hesum sambandi. Eftir at umboðsmaðurin tann 11. sept. hevði sent Almannastovuni klaguna til ummælis, lat Almannastovan tann 26. september 2001 Føroya Kærustovni skjølini og eitt kæruummæli.

Umboðsmaðurin gav Almannastovuni eina átalu fyri, at tað hevði tikið meira enn 3 1/2 mánað at lata Kærustovninum skjølini í málinum. (J.nr. 200100048 – Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina)

## 10.3. Klaga um málsviðgerðartíðina hjá Almannastovuni av umsókn um ansingarstuðul

A klagaði 15. apríl 2002 til umboðsmannin um málsviðgerðartíðina hjá Almannastovuni. Klagan snúði seg um, at A hevði søkt um ansingarstuðul fyri at vera heima hjá brekaðum barni, men at Almannastovan framvegis ikki hevði svarað umsókn hennara. Umsóknin varð send Almannastovuni við skrivum, dagfest ávikavist 28. apríl og 26. mai 1998. Í februar 2002 høvdu bæði Almanna- og heilsumálastýrið og Føroya Kærustovnur heitt á Almannastovuna um at avgreiða hetta málið. Umboðsmaðurin sendi Almannastovuni klaguna til ummælis 17. apríl 2002. Almannastovan sendi 8. mai 2002 A svar uppá umsóknina. Í svarinum harmaðist Almannastovan um, at umsóknin ikki varð svarað fyrr. Almannastovan greiddi samstundis umboðsmanninum frá ymiskum øðrum møguleikum,

sum Almannastovan hevði arbeitt við í sambandi við A, eins og at ein av orsøkunum til, at viðgerðin hevði tikið so drúgva tíð var, at A hevði flutt millum ymsar bústaðir í Føroyum. Umboðsmaðurin staðfesti, at hóast ymsu meinbogarnar, og at A møguliga ikki hevði vilja virkað við til loysnirnar, sum Almannastovan arbeiddi við, so var ein viðgerðartíð uppá 4 ár als ikki nøktandi. Almannastovan fekk tí eina átalu fyri viðgerðina av hesari umsóknini. (J.nr. 200200014 – Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina)

## 10.4. Klaga um seina málsviðgerðartíð hjá Føroya Kærustovni og Almannastovuni

A hevði 15. november 2000 kært eina avgerð hjá Almannastovuni til kærunevndina í almannamálum (Føroya Kærustovn). Klagan til umboðsmannin snúði seg um viðgerðartíðina hjá Føroya Kærustovni og Almannastovuni av hesum kærumálinum, sum framvegis ikki varð avgreitt, tá ið klagan varð latin umboðsmanninum 29. apríl 2002. Almannastovan lat eftir áminningarskriv í febr., mars og juni 2001 Kærustovninum ummælið og skjølini 8. aug. 2001. Eftir at Kærustovnurin hevði vent sær til ymsar barnaverndarnevndir, m.a. tí at ymisk viðurskifti ikki vóru nóg greið, setti Kærustovnurin aftur Almannastovuni nakrar spurningar um siðvenjuna á økinum. Hetta var gjørt í skrivi, dagfest 19. des. 2001. Hóast áminningar í febr., apríl og mai 2002, svarar Almannastovan ikki skrivinum fyrr enn 15. mai 2002. Kærunevndin tók avgerð í málinum 19. juni 2002.

Umboðsmaðurin helt einki grundarlag vera fyri at fýlast á fyrireikingina hjá Føroya Kærustovni av hesum málinum, tí at Kærustovnurin hevði hildið gongd í málinum mestsum alla tíðina. Hinvegin gav hann Almannastovuni eina átalu fyri viðgerðartíðina – bæði viðvíkjandi at lata Kærustovninum umbidna kæruummæli/skjølini og viðvíkjandi at svara spurningunum um siðvenjuna. (J.nr. 200200018 – Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina)

## 10.5. Klaga um drúgvu viðgerðartíðina hjá Vinnuframagrunninum av umsókn um stuðul – Grundgeving

(A) hevði latið umboðsmanninum eina klagu í sambandi við viðgerðina hjá Vinnuframagrunninum av umsókn frá Føroya Heimavirkisfelag um stuðul til søluframsýningina Hendur & Hugflog. Í einari blaðgrein, sum varð løgd við klaguni var nevnt, at viðgerðartíðin hjá Vinnuframagrunninum av umsóknini hevði verið so drúgv, at tað av somu orsøk ikki var møguligt at finna aðrar loysnir.

Felagið hevði 27. febr. 2002 søkt Vinnuframagrunnin um stuðul svarandi til 54 % av útreiðslunum til søluframsýningina. Við skrivi, dagfest 19. mars hevði Vinnuframagrunnurin játtað felagnum 25 % í stuðuli. Við skrivi, dagfest 26. mars søkti felagið um, at umsóknin bleiv tikin upp til nýggja viðgerð, tí at framsýningin stóð og fall við, at stuðulin bleiv umleið ta upphædd, sum søkt varð um. Hendan umsóknin varð móttikin 2. apríl, og við skrivi, dagfest 30. apríl játtaði Vinnuframagrunnurin at veita upp til 40 % í stuðuli av ætlaðu útreiðslunum. Við skrivi, dagfest 1. mai takkaði verkætlanarleiðarin Vinnuframagrunninum fyri stuðulin, men boðaði samstundis frá, at framsýningin bleiv avlýst, tí hendan ikki kundi haldast, tí at stuðulin ikki var nøktandi fyri tiltakið. Hann spyr samstundis, hví verkætlanin ikki fekk tann stuðul, sum hon hevði fingið undanfarin ár. Við skrivi, dagfest 12. juni svaraði Vinnuframagrunnurin, at høvuðsorsøkin til skerda stuðulin var, at peningur ikki var tøkur til at játta fulla upphædd til allar umsóknirnar, og at grunnurin tí hevði gjørt av at játta øllum umsóknunum, men við skerdari upphædd.

Umboðsmaðurin helt hvørki grundarlag vera fyri at finnast at málsviðgerðartíðini ella avgerðini hjá grunninum. Hann staðfesti tó, eins og Vinnuframagrunnurin hevur ásannað undir umboðsmansviðgerðini, at avgerðin hjá Vinnuframagrunninum, ið ikki til fulnar gekk umsøkjaranum á møti, átti at havt verið grundgivin sambært § 21 jbr. § 23 í Fyrisitingarlógini. (J.nr. 200200027 – Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina)

# 11. Innlit

## 11.1. Klaga um noktan av innliti í upprit viðvíkjandi telefonsamrøðu millum løgmann og danska forsætismálaráðharran – Grundgeving

Løgmansskrivstovan hevði noktað SVF innlit í eitt upprit frá telefonsamrøðu 7. august 2001, sum løgmaður hevði havt við danska forsætismálaráðharran um gongdina í sjálvstýrismálinum. Grundgevingin hjá Løgmansskrivstovuni var, at talan var um eitt innanhýsis arbeiðsskjal, sum var undantikið rættinum til skjalainnlit sambært § 7 í lógini um alment innlit.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at talan var um innanhýsis arbeiðsskjal sambært § 7, og at grundarlag var ikki fyri at finnast at metingini hjá Løgmansskrivstovuni um, at skjalið ikki innihelt veruligar upplýsingar av stórum týdningi fyri málið, jbr. § 11 í lógini. SVF hevði tí ikki rætt til skjalainnlit í hetta uppritið. Løgmansskrivstovan ásannaði, at grundgevingin fyri at nokta innlit hevði ikki verið nóg væl greinað, og hesum tók umboðsmaðurin undir við, og gjørdi hann tí ikki meira við málið. (J.nr. 200100045)

**Klagan**

Sjónvarp Føroya hevur við skrivi, dagf. 10. aug. 2001 sent mær soljóðandi klagu:

> „Kæra um avgerð hjá løgmansskrivstovuni viðv. almennum innliti í uppriti um telefonsamrøðu 7. august 2001 millum Anfinn Kallsberg, løgmann og Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharra.
>
> Hervið verður kært um omanfyristandandi.
>
> Í fyrsta lagi, tí løgmaður alment í fleiri førum vísir til júst hesa samrøðuna, sum avgerandi í aktuellu politisku gongdini.
>
> Í øðrum lagi við tí grundgeving, at løgmanskrivstovan seinastu árini í heilum hevur sent almenninginum tey skriv, sum løgmaður og landsstýrismenn hava skrivað ella móttikið frá danska for-

sætisráðharranum og øðrum ráðharrum. Júst hendan telefonsamrøðan má metast javnt við eitt brævaskifti.

Í triðja lagi nevni eg, at um ikki ber til at fáa innlit í alt uppritið, so átti at verið møguligt at fingið innlit í teir partar, sum løgmaður hevur umrøtt alment."

Viðlagt klaguni var svar Løgmansskrivstovunnar uppá fyrispurningin um innlit frá SVF. Svarið er sent SVF við telduposti 10. aug. 2001 og er soljóðandi:

„Víst verður til telefonsamrøðu okkara hin 8. august 2001, har tú biður um innlit í upprit um telefonsamrøðu millum løgmann Anfinn Kallsberg og forsætismálaráðharran Poul Nyrup Rasmussen.

Løgmansskrivstovan metir ikki, at umsókn tín kann verða gingin á møti. Hendan avgerð okkara er grundað á, at vit meta, at nevnda skjal er innanhýsis arbeiðsskjal ætlað til egna nýtslu. Víst verður m.a. til § 7 í lógini um alment innlit."

Klagan varð tann 23. august 2001 send Løgmansskrivstovuni til ummælis, eins og biðið var um at fáa umrødda uppritið latið til láns.

Løgmansskrivstovan hevur við skrivi, dagf. 14. sept. 2001 svarað mær soleiðis:

„Víst verður til skriv títt dagfest 23. august 2001, har Løgmansskrivstovan verður biðin um at koma við viðmerkingum til klagu frá Sjónvarpi Føroya um noktan av almennum innliti í upprit um telefonsamrøðu millum løgmann, Anfinn Kallsberg og danska forsætismálaráðharran, Poul Nyrup Rasmussen hin 7. august 2001.

Fyrst er at siga, at Løgmansskrivstovan avgjørdi ikki at geva innlit í áður nevnda skjal, tí dentur varð lagdur á, at talan er um eitt innanhýsis arbeiðsskjal. Slík skjøl eru ikki fevnd av rættindunum til alment innlit sambært § 7 í lógini um alment innlit.

Harafturat metti Løgmansskrivstovan, at skjalið ikki inniheldur upplýsingar um veruligar umstøður, ið eru av stórum týdningi fyri málið, og sum tí eigur at latast innlit í sambært § 11, stk. 1, hóast undantakið í § 7.

Løgmansskrivstovan metti, at skjalið heldur ikki eigur at latast innlit í við atliti at fullveldistilgongdini og viðurskiftunum við donsku stjórnina í síni heild í hesum máli. Noktan av innliti kundi tí eisini grundast á § 13, stk 1 nr. 6 í lógini um alment innlit. Av hesum fylgir eisini, at Løgmansskrivstovan heldur ikki helt, at nevnda skjal átti at latast innlit í eftir meginregluni um meirinnlit sambært § 4, stk. 1, 2. pkt. í lógini um alment innlit.

Í svari Løgmansskrivstovunnar dagfest 10. august 2001 uppá munnliga fyrispurningin um innlit í nevnda telefonupprit verður m.a. víst á § 7 í lógini um alment innlit. Tað hevði helst verið rættast, um Løgmansskrivstovan gav sær betri stundir at svara, so at grundgevingin fyri noktanini beinanvegin var meira útgreinað.

Annars er at siga, at Løgmansskrivstovan í síni málsviðgerð av hesum fyrispurningi ikki hevur tikið atlit at, hvat løgmaður hevur greitt frá í fjølmiðlunum. Hinvegin er hædd tikin fyri, hvussu Løgmansskrivstovan hevur viðgjørt fyrispurningar um innlit av innanhýsis frágreiðingum í sama máli. Løgmansskrivstovan hevur nevniliga noktað innlit í innanhýsis frágreiðingar frá samráðingarfundum millum Føroya landsstýri og donsku stjórnina við somu grundgevingum sum nevndar í hesum brævi.“

## *Niðurstøða*

*Eg havi frá Løgmansskrivstovuni fingið nevnda upprit viðvíkjandi telefonsamrøðu 7. august 2001 millum Anfinn Kallsberg, løgmann, og Poul Nyrup Rasmussen, táverandi forsætismálaráðharra, og er tað fyri mær eingin ivi um, at talan er um innanhýsis skjal, ið sambært § 7 í lógini um alment innlit sum útgangsstøði ikki er fevnt av rættinum til alment innlit.*

*Innanhýsis skjal kann tó sambært § 11 vera fevnt av rættinum til alment innlit, um tað inniheldur veruligar upplýsingar, sum eru av stórum týdningi fyri málið.*

*Eftir at hava lisið uppritið gjølla haldi eg meg ikki hava grundarlag fyri at finnast at metingini hjá Løgmansskrivstovuni um, at skjalið ikki inniheldur upplýsingar um veruligar umstøður, ið eru av stórum*

*týdningi fyri málið. Eg havi tí ikki grundarlag fyri at finnast at, at Løgmansskrivstovan hevur noktað SVF innlit í nevnda upprit.*

*Noktan av innliti er ein avgerð, sum sambært § 21 í fyrisitingarlógini krevur grundgeving, um hon verður fráboðað skrivliga.*

*Fráboðanin fór í hesum føri fram við teldupostí, og má hetta roknast sum ein skrivlig fráboðan, ið krevur grundgeving. Slík grundgeving er eisini givin, men sum tað framgongur av tí, sum er ført fram omanfyri viðvíkjandi § 7 og § 11 í lógini um alment innlit, var grundgevingin í teldupostinum ikki nøktandi. Løgmansskrivstovan hevur eisini ásannað í skrivinum, sum er endurgivið frammanfyri, at grundgevingin átti at havt verið betur útgreinað, og hesum taki eg undir við.*

*Eg geri tí ikki meira við málið.*

# 21. Kommunu-, umhvørvis-, byggi-/leigumál og friðing

## 21.1. Klaga um endurgjald fyri ognartikið lendi og um málsviðgerðartíðina hjá Metingarnevndini – Ógegni

Hósvíkar kommuna ognartók í 1995 part av ognini hjá A. Eftir úrslitaleysar tingingar millum kommununa og A, flutti kommunan honum í 1997 1.600 kr. fyri ognartikna lendið. A, sum ikki góðtók upphæddina, sendi kommununi peningin aftur og kravdi meting. Advokatur kommununar skrivaði sama ár eina áheitan til Metingarnevndina um at fáa ognartikna lendið mett, men síðani hendi einki aftur. Klagan var vend móti Metingarnevndini, men við tað, at nevndin segði seg ongantíð hava móttikið nakra áheitan um meting, varð kommunan drigin inn í málið.

Tá tað ikki kundi prógvast, at Metingarnevndin hevði móttikið áheitanina frá kommununi um at fremja eina meting av lendinum, hevði umboðsmaðurin einki grundarlag fyri at finnast at nevndini í hesum sambandi. Hinvegin er endurgjaldsspurningurin ikki avgreiddur, og umboðsmaðurin mælti tí kommununi til at fáa metingina frá hondini og seta trygd fyri kostnaðin. Formaðurin í Metingarnevndini er undir umboðsmansviðgerðini av hesum málinum komin við fleiri rættiliga avgjørdum útsøgnum um, hvussu høgt endurgjaldið fyri hesa ognartøkuna kundi væntast at blíva. Av somu orsøk metti umboðsmaðurin, at formaðurin hevði sátt so miklan iva um sítt gegni, at hann ikki átti at luttaka í einari meting av hesum málinum. Hósvíkar Kommuna hevur seinni boðað frá, at hon ikki fer at gera meira við hetta málið, og umboðsmaðurin hevur tí sent Løgmálaráðnum málið við atliti at § 55 í Kommunustýrislógini. (J.nr. 200200030)

**Klagan**

Umboðsmaðurin hevur fingið eina klagu frá (A). Klagan, sum er dagfest 28. juni 2002, er soljóðandi:

„Eg vil kæra um framgangsmátan, sum Metingarnevndin brúkar, tá ið teir fara ella um teir hava verið til arbeiðis. Eg kærdi um eina ognartøku, sum Hósvíkar Kommuna framdi móti okkum í 1994. Eg skrivaði til Landsstýri og Matrikulstovuna og mótmælti. Beinanvegin so fekk eg at vita, at tað var eitt krav frá Landsstýrinum til Metingarnevndina, (B) um at fara á staðið. (B) kastar bóltin til (C), fangavørð á Politistøðini í Havn.

Eg skrivaði til Hósvíkar Kommunu um at fáa hetta í rættlag 8/4-97, men onki svar. Síðan skrivaði eg til Føroya Landsstýri 7/5-97. Síðan havi eg tosa við Landsstýri fleiri ferðir. Síðsti landsstýrismaður eg tosaði við var (D). (*D er fulltrúi, mín viðm.*) 15/3-2002 tá hava Løgmansskrivstovan sent skriv til (B), J.nr. 818-25/94, men onki svar. Kunnu tit hjálpa mær."

**Málsgongdin**

Í 1990 breiðkaði Hósvíkar Kommuna eitt vegastrekki sambært prosjekti, sum Felagskommunala Teknistovan í Hvalvík hevði gjørt, soleiðis at m.a. partar av Matr. nr. ..., ið var ogn hjá (A), vórðu lagdir undir vegin.

Í skrivi, dagfest 23. apríl 1991 frá Felagskommunalu Teknistovuni til Hósvíkar kommunu stendur m.a.:

„Viðvíkjandi jørð undir vegnum móti Leitinum, og til breiðkan av vegnum svinginum við húsini hjá (E).

Allir sum eiga fram við vegnum, uttan (A) hava góðtikið og skriva undir uppá, at lata stykki undir nevndu vegir fyri 40,- kr. $m^2$.

(A) hevur verið hjá (F) fyri at fáa ráðgeving, og fingu vit eitt bræv dagfest 06.11.90, sum er eitt mótmæli frá (A).

Sambært hjáløgdu skitsu er ætlanin, at gerða arbeiði júst sum (A) krevur.

Eftir at hava tosa við (F) aftur í hesum mánanum, hava vit fingið ynskini hjá (A) meira útgreina, í brævi dagfest 16.04.91.

Sum tað sæst so ynskir (A) at at fáa tveir veggir av bilskýlinum stoyptar og dekk lagt í, soleiðis at koyrandi er frá verandi parkeringsplássi og inn á dekki í erva.

Vit her á Teknistovuni hava verið og hugt at umstøðunum

einaferð aftrat, vit eru komnir til tað niðurstøðu at um kommunan skal gera arbeiði so er helst best, at keypa elementir, bæði til veggir og dekk.

Eftir verandi dagsprísum kemur hetta at kosta um 35.000,00 kr. tó kunnu tilboðini í løtuni fara longur niður.

Ein annar møguleiki er so eisini, at kommmunan letur (A) fáa tilfar t.v.s. sand, sement og jarn til at gerða garaguna við og so lata hann sjálvan gerða arbeiði uttan løn.

(A) ynskir eisini, at niðari kantur av vegnum mótið Leitinum verður stoyptur, og at hann fær eina innkoyring uppá 5 m. suður móti garaguni, hetta má metast at vera rímiligt ynskið, og skuldi ikki kosta so ógvuliga nógv heldur.

Vit mugu geva (A) rætt í tí, at parkeringspláss hansara verður partvís skert, uttan at hann fær nakran fordeil av hesum, sum hinir eigararnir helst hava fingið.“

Royndir vórðu at gera semju millum (A) og kommununa. Við skrivi, dagfest 6. juli 1994 sendi táverandi advokatur (A’s), kommununi eitt uppskot til sáttmála, sum var undirskrivað av (A).

Kommunan havnaði uppskotinum við soljóðandi skrivi, dagfest 6. oktober 1994:

**„<u>Viðvíkjandi lendi til veg av matr. nr. ... í Hósvík.</u>**

Hervið skal vera sagt frá, at kommunan ikki kann góðtaka uppskoti til sáttmala sum sakførari tygara hevur sent kommununi.

Tað eru nú 4 ár síðani at málið byrjaði, og tað sær ikki út til at semja fæst.

Bygdaráðið metir, at tygum kunna ikki fáa meira fyri lendi enn hinir eigararnir hava fingið.

Samtykt varð á fundi tann 9. september at ognartaka lendi.“

Við skrivi, dagfest 20. febr. 1995 (J.nr. 818-25/90) boðar Landsstýri advokatinum hjá kommununi, (G), frá, at tað góðtekur ognartøkuna, men at um semja ikki fæst um endurgjaldið, eiga partarnir at leggja

hendan spurningin fyri metingarnevndina, sum ásett er í § 15 í býarskipanarlógini.

Við skrivi, dagfest 2. mai 1995 boðaði Matrikulstovan (A) og Hósvíkar Kommunu frá, at matr. nr. ... Hósvíkar bygd letur 40 m$^2$ til almennan veg litra “i“.

Við skrivi, dagfest 16. mai 1995 sendi (A) landsstýrinum klagu um ognartøkuna. Men við skrivi, dagfest 8. juni 1995 boðaði landsstýrið honum frá, at tað ikki kundi ganga klaguni á møti. Í skrivinum stendur m.a.:

> ...
>
> „Tá klagan snýr seg um endurgjaldið, sum kommunan eigur at lata fyri ognartikna lendið, kann landsstýrið ikki taka støðu til málið, men skal hesin spurningur avgerast av eini metingarnevnd, sum sett verður eftir § 15 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir. Hetta er eisini boðað kommununi í skrivi landsstýrisins frá 20. februar 1995, um loyvi til ognartøku eftir § 41 í kommunulógini.“
>
> ...

Við skrivi, dagfest 6. juni 1995 boðar (G), advokatur kommununi frá, at ognartøkan nú er endaliga tinglýst.

18. febr. 1997 hevur kommunan vegna ognartøku flutt (A) eina upphædd áljóðandi 1.600,- kr. 12. mars sama árið flytir (A) kommununi peningin aftur við einari átekning um, at hann ikki tekur í móti olmussu.

Við stuttorðaðum skrivi til kommununa, dagfest 14. mars 1997 krevur (A), at Metingarnevndin kemur uppí hetta málið. Við skrivi, dagfest 8. apríl sama árið, biður (A) kommununa um svar, hvørt kommunan fer at boðsenda Metingarnevndini ella ikki.

Við skrivi, dagfest 21. apríl 1997 vendir kommunan sær aftur til (G), advokat, fyri at fáa hjálp viðv. málinum um ognartøkuna og áheitanunum frá (A).

Við skrivi, dagfest 4. juni 1997 boðar (G), advokatur, (A) frá, at hann umboðar kommununa, og at Metingarnevndin nú verður biðin um at koma uppí málið. Sama dagin skrivar advokaturin til Landsstýrið og spyr, hvør er formaður í Metingarnevndini. Við skrivi,

dagfest 10. juni 1997 fær advokaturin svar frá Landsstýrinum, um at formaður í Metingarnevndini er (B).

Við skrivi, dagfest 20. juni 1997 boðar kommunan (G), advokati frá, at lendið er asfalterað eftir, at tað er ognartikið. Við skrivi, dagfest 24. juni boðar advokaturin kommununi frá, at hóast lendið er asfalterað, so skal virðismeting kortini fara fram.

Sama dagin skrivar (G), advokatur bræv til Metingarnevndina við áheitan um at virðismeta ognartikna lendi. Skrivið er soljóðandi:

> „(innskrivað bræv)
>
> **Viðv. ognartøku av 40 m$^2$ av matr. nr. ..., Hósvík hjá (A)...**
> Hjálagt sendi eg avrit av skrivi, dagfest 20.02.1995, frá Føroya Landsstýri, har boðað verður frá, at um semja ikki fæst millum kommununa og eigaran, so skal spurningurin um endurgjaldsupphæddina leggjast fyri metingarnevndina sambært § 15 í býarskipanarlógini.
>
> Eg fari við hesum at heita á metingarnevndina um vinaliga at virðismeta nevnda lendi, og eg sendi í hesum sambandi hjálagt avrit av skrivi frá Matrikulstovuni og kort yvir ognina.“

Sum nevnt niðanfyri sigur formaðurin fyri Metingarnevndina, (B), seg hvørki finna ella at hava móttikið hesa áheitanina, og nevndin hevur framvegis ikki framt nakra meting av umrødda lendi.

15. mars 2002 hevur (A) umvegis telefonina vent sær til Løgmansskrivstovuna um málið.

Tann 22. mars 2002 hevur Løgmansskrivstovan sent Metingarnevndini soljóðandi skriv:

> „(A) hevur tann 15. mars 2002 vent sær til Løgmansskrivstovuna um eitt ognartøkumál í Hósvík. Málið er upprunaliga frá uml. 1994.
>
> Sambært upplýsingunum frá (A) er spurningurin um endurgjald, fyri tað, sum kommunan ognartók frá honum, ongantíð avgreiddur.
>
> Vísandi til § 15 í býarskipanarlógini verður málið sent Metingarnevndini sum rætta myndugleika. Hjálagt verður sent avrit av

teim skjølum, sum Løgmansskrivstovan hevur í málinum, j.nr. 818-25/94.

Avrit av hesum skrivi er sent til (A) og Hósvíkar kommunu."

Við skrivi, dagfest 13. juni 2002 sendir Metingarnevndin kommununi soljóðandi áheitan:

„Vísandi til skrivliga áheitan, dagfest 22. mars 2002 frá Løgmansskrivstovuni, viðv. ognartøku av uml. 40 m$^2$ frá matr. nr. ... Hósvík, eigari (A).

Verður Hósvíkar kommuna, sambært § 17 í nevndu lóg, biðin um at seta 15000,- kr. á konto 6460 – 158.839.9 í Føroya Banka sum trygd.

Tá metingarnevndin hevur fingið váttan um, at peningurin er goldin, verður farið undir metingina skjótast tilber.

Vinarliga
(C) skrivari"

Einki sæst í skjølunum hjá kommununi, hvørt hon hevur svarað hesari áheitanini frá Metingarnevndini. Men í skrivinum til umboðsmannin, dagfest 19. aug. 2002, sum er endurgivið niðanfyri, sigur kommunan, at Metingarnevndin einki hevur at gera í hesum málinum nú, tá málið ikki varð avgreitt, tá biðið varð um hetta. Kommunan sigur seg heldur ikki kunna rinda fyri metingina nú so nógv ár aftaná, at arbeiðið er umbiðið.

Sambært tingbókini átti (A) eigindómin, Matr. nr. ... Hósvík, tá eigindómsdómur varð sagdur tann 18. august 1981 sum grundarlag undir tingbókini fyri hesa bygd, og fram til 1996, tá eigindómurin varð seldur á tvingsilsuppboðssølu. Tann 9. apríl 1996 er tinglýst auktiónsskeyti til Føroya Sparikassa, tann 26. september 1996 er tinglýst skeyti til (H), og tann 6. oktober 1998 er tinglýst skeyti til (I) og (J).

**Partshoyringin**

Við skrivi, dagfest 2. juli 2002 bað umboðsmaðurin Løgmansskrivstovuna um at lata honum øll skjølini í málinum, sum er nevnt í

klaguni. Við skrivi, dagfest 5. juli 2002 lat Løgmansskrivstovan umboðsmanninum hesi skjølini.

Í telefonsamrøðu 15. juli í ár, hevur (B) uppá fyrispurning frá umboðsmanninum um, hvussu virksemi hjá Metingarnevndini verður fíggjað, greitt frá, at tað er ognartakandi myndugleikin, sum rindar fyri hetta virksemi, tvs. ferðing, fundarpening v.m. Viðv. hesum konkreta málinum vísti (B) á, at Metingarnevndin hevði fingið hetta málið til viðgerðar fyri kortum, og at nevndin fór at royna at finna eina loysn beinanvegin.

Við skrivi, dagfest 16. juli 2002 varð klagan send Metingarnevndini til ummælis, eins og biðið varð um øll skjølini í málinum.

Við skrivi, dagfest 1. aug. 2002 hevur formaðurin í Metingarnevndini, (B) sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

„Í skrivi dagfest 16. juli 2002, J.nr. 200200030/7, verður metingarnevndin biðin um viðmerkingar til málið hjá (A) matr. nr. …, Hósvík, og um avrit av øllum skjølum, sum metingarnevndin hevur í málinum. Av tí at metingarnevndin bert er verulig, tá ið hon formliga er innkallað til fundar, loyvi eg mær sjálvum út frá bestu sannføring at svara skrivi tygara.

Fyrst skal nevnast, at (A) var heima hjá mær fyri okkurt um 3–4 árum síðani og greiddi frá hesum málinum. Eg haldi, at eg bað hann fáa kommununa at seta eina ognartøku í verk, soleiðis at metingarnevndin gjøgnum landsstýrið kundi fáa eina áheitan frá kommununi, tí so hevði tað verið kommunan, sum kom at gjalda fyri metingina. Hetta hevur verið vanlig mannagongd í sambandi við, at kommunur taka lendi til vegagerð.

Eg havi leingi verið í villareiði um hetta málið. Eitt, sum eg havi verið bangin fyri er, at hetta málið kom at hava við sær, at (A) sjálvur kom at gjalda fyri útreiðslurnar fyri metingina, tí alt virkaði nokkso fløkt. Møguliga hevur hetta verið ógrundaður ampi hjá mær. Men eg vildi ikki at (A) skuldi koma í ta støðuna.

Eitt annað, sum hevur virkað ósambæriligt hevur verið, at endurgjaldið fyri lendið, sum talan er um, 40 m$^2$, og sum eg kann nevna her, kanska bert snýr seg um 1500 til 1800 kr, ikki stendur mát við kostnaðin fyri at savna metingarnevndina at viðgera

hetta málið. Kommunan hevur sum kunnugt bjóðað 40 kr/$m^2$, sum er tað sama, ið (A) krevur.

Nevnast kann, at (A) er fluttur úr Hósvík fyri fleiri árum síðani. Vegurin er gjørdur fyri langt síðani, stykkið er hampað og at kommunan vil til eina og hvørja tíð gjalda honum eina vanliga samsýning fyri tað, sum tikið er til veg. Ein stuðlaveggur, sum eigarin gjørdi á sinni datt niður og hevur kommunan latið hann gera av nýggjum.

Hinvegin vil kommunan ikki við tilknýti til ognartøkuna gjalda fyri m.a. sproytlakering av bili og ráðgevaraumkostningar. Sjálvur haldi eg eisini, at hetta eru viðurskifti, sum mugu greiðast á annan hátt, uttan um metingarnevndina.

Eg havi av eintingum verið á staðnum og hugt at umstøðunum og eisini borið hetta upp á mál fyri borgarstjóranum í Hósvík. Hann sigur, at ongin trupulleiki er fyri at kommunan rindar peningin. Kommunan flutti fyri langt síðani eigaranum 1600 kr fyri lendið, men hesin hevur ikki vilja tikið ímóti upphæddini.

Annars kann nevnast, at stykkið er hampuliga frágingið og hevur ikki liðið nakran virðismiss. Og at frá drúgvum royndum komi eg persónliga ikki til annað enn, at (A) ikki fær annað burtur úr eini metingarviðgerð enn á leið tað, sum kommunan longu hevur bjóðað honum.

At enda kann eg nevna, at Metingarnevndin sum slík ikki hevur fingið nakra formliga áheitan um at meta hesa ognartøkuna. Eg havi umhugsað, at vent mær til (A) at mæla honum til at taka av tilboðnum frá kommununi, men eg ivist framvegis í, um tað formliga er rætt at taka hetta stigið.“

Sum ein avleiðing av hesum svarinum, sendi umboðsmaðurin 9. aug. 2002 Hósvíkar Kommunu eitt skriv, har biðið varð um eina frágreiðing um hetta málið og um avrit av skjølunum. Kommunan varð biðin um at greiða umboðsmanninum frá, hvørt hon hevði biðið Metingarnevndina um at virðismeta ognartikna lendi, og um hetta ikki var gjørt, hví so var.

Við skrivi, dagfest 19. aug. 2002 hevur Hósvíkar Kommuna latið umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

„Hósvíkar kommuna vil hervið afturvísa, at málið ongantíð er sent til Metingarnevndina.

Hjálagt avrit av skrivi frá (G) sent til Metingarnevndina 24.06.1997.

Av tí at kommunan ongantíð frætti frá Metingarnevndini, og matr. nr. … er selt 2 ferðir síðani, hevur kommunan mett at viðurskiftini við matr. nr. … langt síðani eru avgreidd.

Avtalan varð kr. 40,00 pr. $m^2$ og hevur kommunan goldið hesa upphædd, men (A) sendi peningin aftur til kommununa við teirri viðmerking, at tikið verður ikki ímóti olmussu. Hjálagt avrit.

Viðmerkjast skal, at kommunan hevur havt tætt samband við eigararnar av matr. nr. ..., tvs. teir sum eru komnir aftaná (A). Kommunan hevur gjørt avtalir við eigararnar, og eru hesar avtalur hildnar.

T.d. stuðlamúr, garðar og asfalterað túni (Hetta er gjørt í samband við vegarbeiði og liðugtgerð av útstykking.) Kostnaður uml. kr. 200.000,00.

Báðir partar eru vælnøgdir við úrsliti.

Sostatt skuldi Metingarnevndin onki havt at gjørt í hesum málið nú, tá málið ikki varð avgreitt tá biðið varð um tað. Kommunan metir seg hava goldið tað til matr. nr. ... sum avtalað varð.

Kommunan metir seg ikki kunna gjalda kostnaðin til Metingarnevdina so nógv ár eftir at arbeiði er umbiðið.“

Við skrivinum varð løgd ein fráboðan frá Føroya Sparikassa, um at (A) hevði flutt tær goldnu 1.600 kr. retur til kommununa við einari átekning um, at hann ikki tekur ímóti olmussu. Eisini var eitt avrit av einum innskrivaðum brævi, dagfest 24. juni 1997 frá advokati kommununar til Metingarnevndina, har biðið verður um meting av ognartikna lendinum. Skrivið er endurgivið frammanfyri.

Hetta tilfarið varð sent Metingarnevndini og (A) til ummælis við skrivi, dagfest 2. sept. 2002.

Við skrivi, dagfest 25. sept. 2002 hevur (B) svarað umboðsmanninum soleiðis:

„Í skrivi dagfest 2. september 2002, J.nr. 200200030 / 14 viðvíkjandi klagu frá (A) og meting og ognartøku, biðjur umboðsmaðurin metingarnevndina c/o (B) greiða sær frá um, hvørt nevndin hevur móttikið innskrivað bræv dagfest 24.06.1997, J.nr. 318/1997.004, har heitt er á metingarnevndina um at virðismeta 40 $m^2$ av matr. nr. ..., Hósvík, ið ætlandi skal nýtast til veg.

Satt at siga, so hvørki finna vit ella minnast vit at hava fingið tílíkt skriv. Eg havi kortini biðið (G) hugt í goymslurnar hjá sær og eg havi biðið postverkið hugt í sínar goymslur, fyri at vita um tað sæst at vit hava fingið og móttikið eitt tílíkt innskrivað bræv. Um eg hoyri aftur frá teimum vil eg lata tykkum vita tað beinan vegin.

Og fyri at taka eitt sindur aftur í aftur er tað soleiðis, at eg visti ikki um hetta málið fyrr enn (A) vitjaði meg, fyri nú skjótt langt síðani.

Út frá teimum upplýsningum sum eg fekk, setti eg meg sjálvsagt í samband við kommununa.

Kommunan segði mær, at málið var fløkt og tó avgreitt, við at hon hevði rinda fyri lendið tað sum **báðir partar vóru samdir um**, men at (A) vildi hava onnur viðurskifti avgreidd í sama umfari, við metingarnevndini sum parti, og tók hann tí ikki av upphæddini frá kommununi.

Eg eri bangin fyri, at verður meting nú sett í verk á hesum grundarlagi og við tí kostnaði tað hevur við sær, so fer kommunan at stevna. Tað havi eg skilt á lagnum.

Eg eri eisini bangin fyri at (A) kann koma í tað støðu, -m.a. við at taka aðrar endurgjaldsspurningar uppí málið um sjálva ognartøkuna-, at hann kann koma at skula gjalda eina nógv størri upphædd enn tær 1500–1800 krónurnar, sum liggja í sjálvum ognartøkuspurninginum. /Kommunan hevur sagt mær, at hon er til reiðar at rinda ta teirra millum avtalaðu upphæddina fyri lendið beinan vegin og nær tað skal vera/“

Við skrivi, dagfest 22. okt. 2002 bað umboðsmaðurin Hósvíkar Kommunu um at greiða honum nærri frá tí, sum varð ført fram í skrivinum frá 19. aug. 2002. Spurt varð, nær tey arbeiðini, sum víst er til í fyrra skrivinum eru gjørd / goldin, og um hesi arbeiði hava

havt nakað samband við ognartøkuna av matr. nr. .... Í skrivinum hevði kommunan sagt, at hon metti seg at hava goldið tað til matr. nr. ..., sum avtalað var. Spurt var tí, hvørja avtalu sipað var til, nær og hvønn hendan avtalan varð gjørd við, og hvat innihaldið í avtaluni var.

Hósvíkar Kommuna hevur latið umboðsmanninum øll skjølini í málinum, men hevur ikki svarað fyrispurninginum frá 22. okt. 2002.

Við skrivi, dagfest 22. okt. 2002 spurdi umboðsmaðurin Metingarnevndina, hvørt tað hevði eydnast at fáa staðfest, um nevndin nakrantíð hevði fingið metingaráheitanina frá advokatinum hjá kommununi. Í skrivinum frá 25. sept. hevði (B) upplýst, at hann var bangin fyri, at um meting var sett í verk nú, kom (A) at rinda eina nógv størri upphædd enn tær 1500-1800 kr., sum liggja í sjálvum ognartøkuspurninginum. Spurt varð tí, hvussu hetta skuldi skiljast, um nakað fordømi var um, at nevndin hevði álagt ekspropriatinum at rinda fyri metingina, og um so var, í hvørjum førum hetta kundi gerast aktuelt.

Við skrivi, dagfest 24. okt. 2002 hevur (B) svarað umboðsmanninum soleiðis:

> „Í skrivi tygara dagfest 22. oktober 2002 seta tygum metingarnevndini nakrar spurningar, sum eg loyvi mær at svara á hendan hátt.
>
> Til spurningin um, hvat Postverkið og (G) advokatur eru komin til í sambandi við áheitan um meting av matr. nr. ... í Hósvík er at siga, at hesi ikki hava funnið nøkur skjøl, sum kunnu staðfesta at tílíkt skriv er sent metingarnevndini. Starvsfólk á báðum støðum hava sagt mær, at málið er ov gamalt til at tey kunnu finna avrit ella váttanir um hetta.
>
> Hinvegin sigur kommunan mær, at hon ynskir ikki at metingarnevndin kemur uppí málið nú.
>
> Til spurningin um at eg eri bangin fyri, at (A) kann koma í ta støðu, at hann skal rinda eina nógv størri upphædd enn tær 1500–1800 kr., sum liggja í ognartøkuspurninginum verður spurt
>
> • hvat meinast við hetta
>   Svar: Støðan er hon, at (A) og kommunan hava verið samd um eina upphædd uppá 1600 kr, fyri tað økið, sum er farið

undir vegbreiðking. Her sipi eg til skjalið **„Sáttmáli** millum Hósvíkar kommunu og (A), ... (undirskrivað av A)“

Í hesum skjali vil (A) hava 40 kr fyri teir 40 kvadratmetrarnar, sum fara til veg. Hetta gevur 1600 kr. Kommunan hevur flutt hesa upphædd, sum (A) ikki vil taka ímóti, tí hann vil hava at kommunan rindar honum fyri at sproytlakera bil og fyri ráðgeving frá (F) og (K), og hann vil hava eitt byggiloyvi til bilhús í sama umfari.

Sostatt er semja um lendisendurgjaldið, men (A) hevur víst hesum frá sær, við tað at hann hevur ynskt at eisini onnur viðurskifti, ognartøkuni óviðkomandi, verða viðgjørd og endurgoldin honum. Hetta framgongur í sama skjali í málinum.

Orðingin „størri upphædd enn tær 1500–1800 kr., sum liggja í málinum“ skal skiljast soleiðis, at endurgjaldið fyri lendið er onkunstaðni har á leið, og at helst er endurgjaldsupphæddin bert tær 1600 kr, sum kommunan hevur bjóðað. (eg kann ikki sjálvur áseta ein neyvan prís)

Umframt hevur borgarstjórin í Hósvík víst á fyri mær,
A-

at um onnur viðurskifti enn sjálvur spurningurin um endurgjaldið fyri lendið koma uppí ognartøkumálið, so stevnir kommunan beinan vegin m.a. við støði í, at semja longu er um endurgjaldið fyri lendisspurningin og, at annað sum (A) tekur uppí trætumálið er endurgjaldsmálinum fyri lendistøkuna óviðkomandi.

B-

at um metingarnevndin nú tekur málið upp við tí kostnaði hetta hevur við sær (kanska 5000 — 8000 kr) og við støði í, at partarnir eru og hava verið samdir um júst endurgjaldið fyri lendið, so stevnir kommunan (A) og møguliga eisini Metingarnevndini, tí at semja er um sjálvt endurgjaldið fyri lendið, nevniliga tann upphædd, sum (A) hevur kravt og sum kommunan flutti honum.

Tað er her, at eg eri bangin fyri, at (A) møguliga (eg endurtaki *møguliga)* kann koma at missa meir enn tær 1500–1800 kr, sum liggja í sjálvum ognartøkuspurninginum.

Eg haldi at tað kann hugsast, at (A) í sambandi við eitt rættarmál *møguliga* kann koma at skula rinda fyri sakarkostnað í einum máli, -har partarnir longu eru samdir um prísin, -har upphæddin kanska ikki verður broytt av metingarnevndini og hetta, -at (A) til eina og hvørja tí kann fáa útgoldið avtalaðu upphæddina fyri lendistøkuna.

- Finst nakað dømi um, at metingarnevndin hevur álagt einum ekspropriati at rinda fyri metingina.
  Svar: Eg veit ikki um tílíkt dømi.

- Í hvørjum førum kann hetta gerast aktuelt.
  Svar: Eg veit ikki nær tílíkt kann gerast aktuelt. Og eg dugi ikki at meta um, hvørt tað við rættarmáli í væntu, sum kommunan sigur seg vilja reisa, kann koma fyri.

—

Fyri at siga sum er, so haldi eg persónliga, at hetta málið er klutrut, og at óviðkomandi ting eru blandað saman, sum ikki hoyra einum metingarmáli til.
Støðan er jú tann, at semja er um endurgjaldið fyri lendið og at hin spurningurin um billakering og ráðgeving er ikki mál hjá metingarnevndini.

Ger kommunan sum hon hevur sagt fyri mær viðvíkjandi rættarsøkn og (A) ikki fær viðhald í sínum sjónarmiðum, ja, so kann (A) *møguliga* koma at rinda fyri t.d. sakarkostnað eina nógv størri upphædd enn tær 1500 — 1800 kr., sum liggja í sjálvum ognartøkuendurgjaldinum. Eg vil sum nevnt royna at gera mítt til, at (A) ikki óneyðugt kemur at missa pening orsakað av hesum málinum. Og eg vildi ynskt, at hann tók ímóti teimum 1600 kr. frá kommununi og at hann síðani greiddi hin spurningin viðvíkjandi bilinum og peningin fyri ráðgeving sum eitt mál fyri seg, leyst av Metingarnevndini.“

Í tveimum skrivum, dagfest 28. okt. 2002 hevur (A) gjørt viðmerkingar til ávikavist Hósvíkar Kommunu og (B). Skrivini eru soljóðandi:

„Eg veit ikki hvat er gali við Hósvíkar kommunu og (G).

Hevði Hósvíkar kommuna havt tætt samband við okkum, sum teir ólógliga brutu seg inn á, tá í eingin var heima. Hvat hinir eigarnir siga og gera, tað kann ongantíð hava nakað við meg at gera. Høvdu Hósvíkar kommuna verið at tosa við, so høvdu vit sikkurt eisini verið væl nøgd. Teir eri ikki at høgga ella stinga.“

„Fyri at taka eitt sindur aftur í aftur. Tá eg var hjá (B) og greiddi honum frá hvussu eg var viðfarin. Tá segði (B), at tað sum var gjørt í hesum máli var brand ólógligt.

Teir kunnu ikki bróta seg inn á fólk upp á handan mátan. So spurdi (B) meg hvussu nógvar $m^2$ talan var um. Eg segði, at teir hava fingið tað til 40 $m^2$, so fór (B) at hyggja í kort sum hann hevði og rokna tað út. Hann segði tað var 57 $m^2$. Hann skrivar, at kommunan segði málið var fløkt við, at hava rinda tað sum báðir partar vóru samdir um. Eg havi ikki verið samdur við hvørki Hósvíkar kommunu ella biði Metingarnevndina um nakað sum helst, so eg skilji ikki hvat (B) tosar um.

P/S. (B) segði tá eg var og tosaði við hann, at tá í nakað skuldi ognartakast, tá skuldi eigarin fáa hetta at vita, men tað fekk eg ikki fyrr enn tað var ognartikið.

Tá høvdu teir havt ein veg í gjøgnum túni hjá mær uttan sum takk fyri.

Bilurin hjá okkum bleiv totalt oyðilagdur av stein sløgum, so (B), eg kenni ikki til nakra avtalu um 40 kr. $m^2$.“

## *Niðurstøða*

*Sambært § 18 í umboðsmanslógini kann umboðsmaðurin ikki viðgera viðurskifti, sum stava frá tíðarskeiðinum frammanundan 1. jan. 2001. Eg fari tí heldur ikki at taka støðu til tað, sum er farið fram í hesum máli áðrenn hendan dagin.*

*Tað stendur tó greitt, at (A) ikki hevur verið nøgdur við ta upphæddina, sum kommunan flutti honum fyri ognartikna lendið, og at hann tí sendi kommununi peningin aftur. Av somu orsøk er spurningurin um endurgjald fyri hesa ognartøkuna framvegis ikki avgreiddur, og eg eri tí ikki avskorin frá at viðgera júst hendan spurningin, hóast sjálv ognartøkan er staðfest í 1995.*

*Sambært kommununi hevur semja verið millum partarnar um, at kommunan skuldi rinda (A) 40 kr. fyri m$^2$, men eg dugi ikki at síggja, at tað er nakað grundarlag fyri hesari uppfatan í teimum skjølunum, sum eg havi havt til láns frá kommununi, og í tí tilfari, sum annars hevur verið til taks í málinum, heldur tvørturímóti. Um kommunan og (A) hava gjørt avtalu um endurgjaldið, havi eg ilt við at skilja, at kommunan, gjøgnum advokat sín, 24. juni 1997 tekur stig til at fáa meting setta í verk.*

*Um so er, at kommunan heldur fast við, at avtala er gjørd um endurgjaldið fyri ognartøkuna, so er hetta ein spurningur, sum eg ikki kann taka støðu til, men sum kommunan má royna í rættinum.*

*§ 73, stk. 1 í Grundlógini er soljóðandi:*
*„Ejendomsretten er ukrænkelig. Ingen kan tilpligtes at afstå sin ejendom, uden hvor almenvellet kræver det. Det kan kun ske ifølge lov og mod fuld erstatning.“*

*Ognartøkan, sum er framd í 1995, er heimilað í § 12, stk. 1 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir. Sambært § 15 í somu lóg, verður endurgjaldið fyri slíka ognartøku, um semja ikki fæst í lag, ásett av einari metingarnevnd. § 15 er soljóðandi:*

> „Støddin á tí endurgjaldi, sum ognarmaður eftir §§ 12-14 eigur at fáa, verður, um semja ikki er fingin í lag, sett av eini metingarnevnd. Í hesi nevnd sita 2 manns, ið landsstýrið velur fyri 6 ár í senn, annar teirra skal verða formaður nevndarinnar og tveir málinum óviðkomandi menn, fyri hvørt serstakt mál sær valdir av dómsvaldinum. Standa atkvøðurnar á jøvnum, kemur sýslumaðurin í teirri sýslu, sum málið viðvíkir í nevndina sum avgerðarmaður. Tiltaksmenn skulu verða kosnir fyri hvønn nevndarlim.“

*Sum nevnt hevur (A) sambært § 73 í Grundlógini krav uppá fult endurgjald fyri sín miss, og kunnu partarnir ikki semjast um endurgjaldið, skal hetta ásetast av nevndu metingarnevnd.*

*Tað er kommunan, sum hevur ognartikið lendi, og tað er sostatt kommunan, sum hevur ábyrgdina av, at endurgjaldsspurningurin verður avgreiddur. Fæst eingin semja, má kommunan tí taka stig til at fáa endurgjaldið ásett við meting. Tað er í hesum sambandi ikki nóg mikið at skriva til Metingarnevndina; men kommunan eigur eisini at fylgja málinum upp, um einki meira hendir.*

*Nú eru 8 ár fráliðin, síðan ognartøkan varð framd, og eftir øllum at døma 12 ár síðani økið varð tikið. Tað er sostatt uppá tíðina, at hetta málið verður avgreitt.*

*Eg fari tí at mæla Hósvíkar Kommunu til at seta ta trygd, sum Metingarnevndin hevur kravt, so at ein meting av ognartikna lendinum kann fáast frá hondini. Eg fari eisini at mæla kommununi til at bera kostnaðin av hesari metingini.*

*Eg fari at biðja Hósvíkar Kommunu um at lata meg frætta, hvørt hon fylgir hesum tilmælunum.*

*Sambært § 3, stk. 1, nr. 5 í fyrisitingarlógini er ein persónur ógegnigur um tað eru viðurskifti, sum kunnu hugsast at vekja iva um, hvørt viðkomandi heldur við einum av pørtunum. Sum eitt dømi um hetta kann nevnast, at viðkomandi persónur frammanundan gevur til kennar, hvørja støðu hann hevur til mál, sum enn ikki er viðgjørt.*

*Við teimum úttalilsum um støddina á ognartøkuendurgjaldinum, sum (B) er komin við í skrivum sínum, dagfest ávikavist 1. aug., 25. sept. og 24. okt. 2002, til mín, haldi eg hann hava sátt slíkan iva um sítt gegni, at hann ikki eigur at luttaka í viðgerðini hjá Metingarnevndini av hesum máli.*

*Eg skal tí mæla til, at tiltaksmaður verður innkallaður at viðgera hesa metingina í staðin fyri (B).*

*Klagan snúði seg eisini um málsviðgerðartíðina hjá Metingarnevndini. Eftir at hava tosað við Postverk Føroya, má tað ásannast, at tað ikki ber til við vissu at fáa staðfest í dag, hvørt Metingarnevndin hevur fingið áheitanina frá advokati kommununar, dagfest 24. juni 1997. Eg má tí lata ivan koma nevndini til góðar hesum viðvíkjandi.*

*Eg havi tí ikki grundarlag fyri at finnast at Metingarnevndini í hesum sambandi.*

*Hinvegin hevur Metingarnevndin fingið eina áheitan frá Løgmansskrivstovuni við skrivinum, dagfest 22. mars 2002. Nevndin hevur síðani vent sær til kommununa við skrivi, dagfest 13. juni 2002, og biðið kommununa um at veita trygd fyri metingarkostnaðinum. Við tað at eingin trygd er sett, er ikki meira hent í málinum.*

*Eg havi tí heldur ikki grundarlag fyri at finnast at Metingarnevndini viðvíkjandi skrivinum, dagfest 22. mars 2002. Við tað at (A) tann 28. juni 2002 hevur sent klagu higar, og kommunan hevur givið úttrykk fyri, at Metingarnevndin einki hevur við málið at gera, er tað heldur einki at siga til, at Metingarnevndin ikki hevur gjørt meira við málið, fyrr enn mín niðurstøða fyriliggur.*

# 22. Skattur og avgjøld v.m.

## 22.1. Klaga um mismun í sambandi við meirvirðisgjald av heimavirkaðum vørum

Heimavirkið X klagaði um, at tað orsakað av nøkrum treytum, sum settar vóru av Fíggjarmálaráðnum, var fyri mismuni í mun til kappingarneytarnar viðvíkjandi meirvirðisgjaldinum. X keypti vørur frá framleiðarum og seldi tær víðari. X mátti tí rinda MVG av hesum sølum, men hevði í flestu førum einki MVG at mótrokna frá keypskostnaðinum, tí at seljararnir av hesum vørum vóru ikki MVG-skrásettir. Kappingarneytarnir harafturímóti seldu vørurnar í ávísingarsølu, soleiðis at framleiðararnir stóðu sum eigarar av vørunum, til tær vóru seldar. Við tað at framleiðslan hjá hvørjum einstøkum framleiðara vanliga lá undir 20.000 kr. árliga, sluppu hesir sambært § 4 í MVG-lógini undan meirvirðisgjaldi, um teir annars uppfyltu tær treytir, sum Toll- og Skattstova Føroya hevði sett upp eftir danskari fyrimynd. Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at einki var at finnast at hesum treytum, og at tað ikki var heimild til at sleppa X undan MVG, tá X ikki vildi ganga undir hesar treytir. Hann dugdi sostatt ikki at síggja, at Fíggjarmálaráðið ella Toll- og Skattstova Føroya høvdu gjørt nakað skeivt í hesum máli. (J.nr. 200200026)

**Klagan**

Við skrivi, dagfest 14. juni 2002 hevur (X) Heimavirki sent umboðsmanninum eina klagu, ið er soljóðandi:

> „Hin 10. december 2001 sendi (X) Heimavirki umboðsmanninum mappu við avritum av skrivum, ið heimavirkið hevur sent ymiskum stovnum og sum er sent Kappingarráðnum.
>
> Hin 10. apríl í ár hevur heimavirkið sent umboðsmanninum avrit av áminningarskrivi til Kappingarráðið, har spurt verður um, hvat hent er í málinum.
>
> Í skrivi dagfest 23. apríl í ár sigur Kappingarráðið frá, at tað hevur sent skrivið frá heimavirkinum til fíggjarmálastýrið, at Kappingarráðið ger ikki meira við málið, og at avgerðin kann ikki

kærast. Kappingarráðið sendir heimavirkinum avrit av skrivinum til fíggjarmálastýrið.

Hin 7. í hesum fær heimavirkið skriv frá fíggjarmálastýrinum dagfest 21. mai í ár. Í 3. seinasta stk. í skrivinum vísir fíggjarmálastýrið á, at reglurnar um ávísingarsølu eru ikki danskar, men at talan er um almennar treytir, sum skulu vera loknar, áðrenn søla kann allýsast sum ávísingarsøla.

Í mappuni við avritum av skrivum, sum heimavirkið sendi umboðsmanninum, er avrit av skrivi frá Toll- og Skattstovu Føroya dagfest 22. juni 1994 til Menningarstovuna har víst verður til brævaskifti 2. mai og 17. juni 1994 og fund 24. marts 1994 um broyting í avrokning av MVG á heimavirkaðum vørum, ið førir við sær, at sama skipan, sum donsku toll- og skattamyndugleikarnir hava tikið viðvíkjandi ávísingarsølu kann nýtast, fyri at kostnaðurin á heimavirkaðum vørum kemur niður á rímuligari støði.

Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya hevur tikið ta avgerð, at fyri at danska skipanin skal kunna nýtast í Føroyum skulu samsvarandi treytir vera loknar. Treytirnar eru: 1, 2, 3, 4, 5 og 6, sum nevndar eru í skrivinum.

(X) Heimavirki kann tað sama lata handilin aftur, sum at fara at taka ímóti vørum og ikki gjalda tær, fyrr enn tær eru seldar, tí tey, ið lata vørur til heimavirkið, ynskja at fáa pengarnar fyri vørurnar, so skjótt sum gjørligt, og nógv av hesum fólkum eru fólkapensjonistar, ið hava brúk fyri pengunum til dagligar útreiðslur.

Nevndin fyri (X) Heimavirki loyvir sær at biðja Løgtingsins Umboðsmann kanna, um Toll- og Skattstova Føroya hevur heimild at seta frammanfyrinevndu treytir, ið eru kappingaravlagandi, í gildi, treytir, sum ikki eru eftir handilsligum reglum fyri smásøluhandil og sum gera, at vørur frá heimavirkinum eru umleið 25% dýrari, enn onnur heimavirkir og onnur selja heimavirkaðar lutir fyri.

Løgtingsins umboðsmaður verður biðin um at siga sína hugsan um hesar kappingaravlagandi reglur.“

Hóast Kappingarráðið er nevnt í klaguni, hevur (A) í telefonsamrøðu

17. juni í ár, uppá fyrispurning frá umboðsmanninum, boðað frá, at klagan ikki snýr seg um leiklutin hjá Kappingarráðnum í hesum málinum.

Skrivið frá Fíggjarmálaráðnum til (X) Heimavirki, dagfest 21. mai 2002, sum víst er til í klaguni, er soljóðandi:

„Fíggjarmálastýrið hevur móttikið skriv, sum (X) Heimavirki hevur sent Kappingarráðnum og Vinnumálastýrinum viðvíkjandi mvg-viðurskiftunum hjá (X) Heimavirki. Hetta málið er áður viðgjørt í Fíggjarmálastýrinum og í stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Vinnumálastýrið hevur í skrivi, dagfest 08.08.2000, fingið svar viðvíkjandi mvg-viðurskiftunum hjá (X) Heimavirki frá stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya. Tað eru sostatt næstan tvey ár síðan málið varð avgreitt í stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya og Fíggjarmálastýrinum.

Í omanfyri nevnda skrivi, dagfest 08.08.2000, varð boðað frá, at (X) Heimavirki, eins og hini heimavirkini í Føroyum, kann søkja stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya um loyvi at avgreiða sølu av heimavirkaðum vørum við ávísingarsølu undir fylgjandi treytum:

1. Framleiðarin má ikki vera mvg-skrásettur viðvíkjandi handli av samsvarandi vørum.
2. Sølan skal fara fram beinleiðis millum tann privata framleiðaran og keyparan. Framleiðarin kann tó geva sølubúðini skrivliga fulltrú at umboða seg.
3. Sølubúðin er millumgongulið í søluni, og skrivar rokning til framleiðaran fyri ávísingarprovisjónina, men má ikki skriva rokning fyri ta seldu vøruna.
4. Sølubúðin hevur ikki ábyrgd av feilum viðvíkjandi vøruni.
5. Um framleiðarin skrivar rokning fyri vøruna, skal rokningin verða skrivað til keyparan.
6. Um sølubúðin umboðar framleiðaran, skal ein dags dato kvittan skrivast við innkrevjing av gjaldi frá keyparanum. Bæði navnið á framleiðaranum og hjá keyparanum skulu standa á kvittanini, men ikki navnið á sølubúðuni. Navnið á sølubúðuni kann tó eisini standa á kvittanini, um tað greitt framgongur, at sølubúðin bert umboðar framleiðaran.

Sambært meirvirðisgjaldslógini er øll vinnulig søla av vørum og tænastum yvir 20.000,- kr. meirvirðisgjaldsskyldug, undantikið tey undantøk, sum eru nevnd undir § 2, stk. 3, og meirvirðisgjald. Seljarin av hesum tænastum kann harafturímóti ikki draga meirvirðisgjaldið av keyptum vørum og tænastum frá. Talan er tí um ikki meirvirðisgjaldsskrásett virksemi.

Herumframt er, sambært § 12 í meirvirðisgjaldslógini, í nøkrum førum eisini talan um meirvirðisgjaldsskrásett virksemi, har sølan er frítikin fyri meirvirðisgjald. Hetta merkir við øðrum orðum, at meirvirðisgjaldssatsurin viðvíkjandi søluni er null. Seljarin skal í hesum førum ikki leggja meirvirðisgjald afturat søluni, men kann draga meirvirðisgjaldi av keyptum vørum og tænastum frá.

Tað er tí púra greitt ásett í meirvirðisgjaldslógini, hvat virksemi er umfatað av meirvirðisgjaldi og hvørji undantøk eru.

(X) Heimavirki rekur meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi og er tí meirvirðisgjaldsskrásett. (X) Heimavirki selur m.a. heimavirkaðar vørur, sum verða keyptar frá fólki, ið ikki eru meirvirðisgjaldsskrásett, runt um í landinum. (X) Heimavirki keypir sostatt vøruna uttan meirvirðisgjald og kann tí ikki draga nakað keypsavgjald frá, men selur vøruna víðari sum vanliga meirvirðisgjaldsskylduga vørusølu.

Um talan skal verða um ávísingarsølu, skal (X) Heimavirki ikki keypa vøruna frá framleiðarunum, men bert virka sum eitt millumlið millum framleiðara og keypara. Ómaksgjaldi, ið (X) Heimavirki tekur fyri hesa tænastu, er meirvirðisgjaldsskyldugt.

Ávísingarsøla er tí rættiliga nógv øðrvísi enn vanlig søla av vørum, har handilin keypir vøruna inn á vørugoymsluna og gerst ánari av vøruni. Í sambandi við ávísingarsølu verður handilin ongantíð ánari av vøruni. Ávísingarsøla er sambært meirvirðisgjaldslógini ein tænasta. Tað eru t.d. heimvirkir og sethúsasølur, sum avgreiða sína søla við ávísingarsølu.

(X) Heimavirki hevur fingið upplýst, hvørjar treytir skulu verða loknar fyri at søla kann avgreiðast sum ávísingarsøla. Talan er um almennar treytir í sambandi við skjalprógv av ávísingarsølu.

Øðrvísi treytir verða ikki settar (X) Heimavirki, enn øðrum virkjum, ið avgreiða sína sølu við ávísingarsølu. Hetta hevur (X) Heimavirki eisini allatíðina fingið upplýst.

Avrit av øllum skjølunum í málinum eru viðløgd.“

**Gongdin í málinum**

(X) Heimavirki er sjálveigandi stovnur við heimstaði í … Í viðtøkum stovnsins frá 30. oktober 1978 stendur m.a.:

> ...
>
> § 3.
>
> Endamálið hjá (X) Heimavirki er at fremja heimavirki í Føroyum á føroyskum botni og at styðja søluna av heimavirkaðum lutum.
>
> …
>
> § 4.
>
> Møguligt rakstraryvirskot hjá (X) Heimavirki verður lagt aftrat ognunum sambært § 2, og kunnu ognirnar bert verða nýttar til frama fyri endamál heimavirkisins.
>
> …
>
> § 9.
>
> Heldur (X) Heimavirki uppat at virka, verða ognirnar at nýta til frama fyri stovnseting av handarbeiðsskúla í Føroyum.
>
> ...

Vísandi til kunngerð nr. 166 frá 3. desember 1992 um frítøku fyri avgjaldsskyldu sambært lóg um meirvirðisgjald fyri vælgerandi tiltøk søkti (X) Heimavirki við skrivi, dagfest 4. mars 1993 Toll- og Skattstovu Føroya um at sleppa undan at rinda meirvirðisgjald av vørum, ið verða seldar í heimavirkinum.

Við skrivi, dagfest 23. apríl 1993 játtaði Toll- og Skattstova Føroya umsóknina við heimild í nevndu kunngerð. Frítøkan skuldi vera virkandi frá 1. januar 1993.

Við nýggjari kunngerð nr. 136 frá 17. juni 1993 um frítøku fyri at rinda avgjald sambært løgtingslóg um meirvirðisgjald fyri vælgerandi tiltøk varð kunngerð nr. 166 frá 3. desember 1992 tikin av.

Vísandi til nýggju kunngerðina boðaði Toll- og Skattstova Føroya við skrivi, dagfest 2. juli 1993, (X) Heimavirki frá, at avgjaldsfrítøkan, sum stovnurin hevði fingið við skrivinum frá 23. apríl 1993, varð afturkallað. Um orsøkina til hetta stendur í skrivinum:

„Kunngerð nr. 136 heimilar ikki standandi frítøkum, men bert

> frítøku fyri tiltøk. Orsøkin til at kunngerð nr. 166 er farin úr gildi er at hon er kappingaravleiðandi, og er ikki í tráð við meirvirðisgjaldsskipanina.“

Í 1994 reisti Menningarstovan í samráð við (Y) Heimavirki spurningin um avrokning av meirvirðisgjaldi við sølu av heimavirkaðum vørum yvir fyri Toll- og Skattstovuni. Í hesum sambandi hevði fundur verið á Toll- og Skattstovu Føroya, har tosað varð um broyting av avrokning av heimavirkaðum vørum, sum førdi við sær somu skipan sum donsku toll- og skattamyndugleikarnir høvdu tikið viðvíkjandi ávísingarsølu, ið kundi nýtast, fyri at kostnaðurin á heimavirkaðum vørum kundi koma niður á eitt rímiligari støði.

Við skrivi, dagfest 22. juni 1994 boðaði Toll- og Skattstova Føroya Menningarstovuni frá, at stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya hevði tikið ta avgerð, at fyri at danska skipanin skuldi kunna nýtast í Føroyum, skuldu samsvarandi treytir verða loknar. Hesar vóru tær somu, sum eru endurgivnar frammanfyri í skrivinum frá Fíggjarmálaráðnum, dagfest 21. mai 2002.

Við skrivi, dagfest 24. juni 1994 boðaði Menningarstovan m.ø. (X) Heimavirki frá avgerðini hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Í skrivinum varð lagt aftrat:

> „Vit hava fingið at vita frá Toll- og Skattstovuni, at skipanin í fyrsta lagi kann koma at virka frá 1. juli 1994. **Legg tó til merkis, at sølubúðirnar skulu søkja Toll og Skattstovuna, Stýrið um loyvi at avgreiða ávísingarsølu sambært hesum reglum.**“

Frá 1994 til 1998 fór eitt brævaskifti fram millum (X) Heimavirki og ymiskar landsstýrismenn og løgtingsformannin. Tað er tó ikki neyðugt at koma nærri inn á hetta í sambandi við viðgerðina av hesari klaguni.

Við skrivi, dagfest 23. juni 2000 vendi (X) Heimavirki sær til (B), landsstýrismann í vinnumálum. Hetta varð gjørt fyri at vísa á ta (sambært Heimavirkinum) kappingaravlaðaðu støðuna, sum (X) Heimavirkið metti seg vera í mótvegis hinum heimavirkjunum í Føroyum. Orsøkina segði Heimavirki vera, at hini heimavirkini vóru sloppin undan at rinda meirvirðisgjald av keypskostnaðinum av

vørum teirra. Heitt varð tí á Vinnumálastýrið um at bera so í bandi, at (X) Heimavirki kundi koma undir somu reglur sum kappingarneytarnir, ella at Vinnumálastýrið fekk broytt lógina, soleiðis at heimavirkaðir lutir blivu undantiknir meirvirðisgjaldinum.

Vinnumálastýrið svaraði (X) Heimavirki aftur við skrivi, dagfest 14. aug. 2000. Vinnumálastýrið hevði vent sær til Fíggjarmálastýrið við spurninginum, og varð aftursvarið frá Fíggjarmálastýrinum til Vinnumálastýrið sent Heimavirkinum. Sambært hesum svari, stóð ta (X) Heimavirki frítt, eins og hini heimavirkini høvdu gjørt, at søkja Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið um at sleppa at avgreiða sølu sína av heimavirkaðum lutum við ávísingarsølu. Treytirnar fyri slíkari ávísingarsølu vóru nevndar í svarinum, og vóru treytirnar samsvarandi teimum, sum eru endurgivnar frammanfyri úr skrivinum frá Fíggjarmálastýrinum, dagfest 21. mai 2002.

Tann 6. apríl 2001 sendi (X) Heimavirki (C), landsstýrismanni soljóðandi skriv:

> „Hin 16. november 2000 ringdi avgreiðslan í Vinnumálastýrinum til (X) Heimavirki og boðaði frá, at umboð fyri heimavirkið kundu koma á fund í Vinnumálastýrinum miðvikumorgunin hin 22. november kl. 9.00.
>
> (D) hevði forfall og møtti tí bert (A). (A) greiddi frá tí kappingaravlaðandi støðu (X) Heimavirki er komið í vegna tess, at Toll- og Skattstova Føroya hevur givið kappingarneytunum loyvi til bert at rokna M.V.G. av vinninginum og ikki sum lógin sigur av søluprísinum. Fundurin endaði við, at tú baðst (E), fulltrúa, taka sær av málinum og spurdi hann, um hann ikki kláraði at geva heimavirkinum svar í fyrstu vikuni av december. Hann játtaði hesum. Men nú eru 4 1/2 mánaðir farnir og enn er einki svar komið.
>
> (X) Heimavirki hevur vent sær til (F), advokat og spurt eftir hvørjari lógarheimild Toll- og Skattstova Føroya hevur givið hinum heimavirkjunum loyvi til bert at rokna M.V.G. av vinninginum í staðin fyri av søluprísinum. (F) advokatur skrivar vísandi til hjálagda skriv frá honum, at hann dugir ikki at síggja, at Toll- og Skattstova Føroya hevur heimild at seta slíka treyt.
>
> Hin 20. december 1998 vóru (D) og (A) á fundi í Fíggjarmála-

stýrinum. Á fundi vóru (G), (H) og (I). (G), fíggjarmálaráðharri, segði, at arbeitt var við at broyta M.V.G. lógina, og at heimavirkið skuldi frætta aftur. Men nú 2 ár og 4 mánaðir eru farnir, er onki hent, men (X) Heimavirki hevur hetta tíðarskeiðið goldið landskassanum yvir 300.000 kr. í M.V.G. og kemst hetta av, at (X) Heimavirki onki inngangandi M.V.G. hevur uppá vørukeypið. Áhugavert hevði verið at fingið at vita, hvussu lítið kappingarneytarnir hava goldið hetta sama tíðarskeiðið í M.V.G. til landskassan.

(X) Heimavirki væntar at frætta, hvat er hent í málinum.“

Í skrivinum frá (F), advokati, dagfest 20. desember 2000, til (X) Heimavirki stendur m.a.:

...

„Sum eg skilji er tann avgerandi spurningurin í hesum máli, um Toll- og Skattstova Føroya hevur lógarheimild til at krevja av føroysku heimavirkinum, at tey ikki skulu rinda fólkunum pengarnar í hondina fyri at heimavirkini skulu sleppa undan at gjalda mvg. av keypsprísi + vinning.

Eg havi roynt at kanna hetta í lógini og dugi ikki at síggja, at Toll og Skattstova hevur heimild at seta slíka treyt fyri at heimavirkini skulu vera frítikin at rinda mvg. av keypsprísi + vinningi og ikki bert av vinninginum, sum hini heimavirkini gera, tí tey ganga undir ásettu treytirnar hjá Toll og Skattstovu Føroya.“

**Partshoyringin**

Við skrivi, dagfest 2. juli 2002 varð klagan frá (X) Heimavirki send Fíggjarmálaráðnum til ummælis, eins og biðið var um skjølini í málinum og eina frágreiðing um treytirnar, sum settar vóru Heimavirkinum í skrivinum, dagfest 21. mai 2002.

Við skrivi, dagfest 9. juli 2002 (móttikið 18. juli) hevur Fíggjarmálaráðið sent umboðsmanninum viðmerkingar sínar til klaguna, eins og avrit av skjølunum eru latin umboðsmanninum. Skrivið er soljóðandi:

„Fíggjarmálaráðið hevur 3. juli 2002 móttikið kæru til ummælis, sum (X) Heimavirki hevur sent umboðsmanninum. (X) Heima-

virki kærir Fíggjarmálaráðið til umboðsmannin, tí (X) Heimavirki vil ikki góðtaka tær treytir, sum verða settar, fyri at (X) Heimavirki kann avgreiða sølu av heimavirkaðum vørum við ávísingarsølu.

Fíggjarmálaráðið fer tí at greiða nærri frá málinum niðanfyri. Fyrst verður ein stutt frágreiðing um meirvirðisgjaldslógina, síðan ein frágreiðing um málið hjá (X) Heimavirki og um treytirnar, ið verða settar í sambandi við ávísingarsølu.

Løgtingslógin um meirvirðisgjald kom í gildi 1. januar 1993, og var ein fylgja av, at Føroyar høvdu gjørt eina nýggja handilsavtalu við ES. Føroyska meirvirðisgjaldslógin er ein beinleiðis avskrift av donsku meirvirðisgjaldslógini frá 1993. Í dag er meirvirðisgjaldslóggavan harmoniserað í øllum ES, og tað eru bert smærri møguleikar fyri frávikum í einstøku londunum.

Sambært § 1 í meirvirðisgjaldslógini skal avgjald rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutningi úr útlondum.

Av tí at vinnan dregur avgjaldið á keyptum vørum og tænastum frá, veksur avgjaldið ikki við talinum av søluliðum. Avgjaldsgrundarlagið er sostatt samlaða søluavgjaldið minus keypsavgjaldið í øllum liðum, og talan verður tí um eitt avgjald á virðisøkingina í hvørjum einstøkum søluliði.

Meirvirðisgjaldið verður tí rindað av ikki meirvirðisgjaldsskrásettum keyparum, sum keypa vørur og tænastur uttan at kunna draga keypsavgjaldið frá. Hetta er í høvuðsheitinum privat nýtsla, men eisini annað virksemi, sum ikki er meirvirðisgjaldsskyldugt og tí ikki er meirvirðisgjaldsskrásett.

Næstan allar vørur og tænastur eru meirviðisgjaldsskyldugar, og er árliga sølan hjá einum virki ella einstaklingi størri enn 20.000 kr. skal viðkomandi meirvirðisgjaldsskrásetast, sí § 4 í meirvirðisgjaldslógini.

Í § 2, 3. stk., í meirvirðisgjaldslógini er ásett, hvørjar tænastur eru undantiknar avgjaldsskyldu. At tænasturnar eru undantiknar avgjaldsskylduni merkir, at tænasturnar verða seldar uttan avgjaldsfría sølan, sum er ásett undir § 12. Tað er tí púra greitt ásett í meirvirðisgjaldslógini, hvat virksemi er undantikið meirvirðisgjaldsskyldu og hvør søla er frítikin meirvirðisgjald.

Í málinum hjá (X) Heimavirki er spurningurin, hvønn leiklut

(X) Heimavirki hevur í sambandi við sølu av heimavirkaðum vørum. Er talan um sokallaða ávísingarsølu, har (X) Heimavirki fær provisjón frá framleiðaranum fyri at vera millumgongulið í søluni, so skulu tær seks treytirnar omanfyri vera loknar fyri at (X) Heimavirki bert skal rinda meirvirðisgjald av provisjónini.

Tað skal viðmerkjast, at treytirnar omanfyri ikki eru danskar treytir, sum stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya hevur sett í gildi í Føroyum uttan lógarheimild. Talan er um almennar treytir, sum skulu vera loknar, áðrenn søla kann allýsast sum ávísingarsøla. Spurningurin um lógarheimild er tí burturvið.

Endaliga niðurstøðan er sostatt, at (X) Heimavirki kann søkja stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya um loyvi at avgreiða sølu av heimavirkaðum vørum við ávísingarsølu. Málið er endaliga avgreitt úr Fíggjarmálastýrinum.

Ljósprent av hesum skrivi er sent Kappingarráðnum og Vinnumálastýrinum.“

Við skrivi, dagfest 18. juli 2002 varð skrivið frá Fíggjarmálaráðnum sent Heimavirkinum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 8. aug. hevur Heimavirkið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Nevndin fyri (X) Heimavirki hevur umrøtt skrivið og skal gera hesar viðmerkingar til skrivið frá Fíggjarmálaráðnum dagfest 9. juli 2002 um klagu frá (X) Heimavirki.

Í 1. stk. í skrivinum stendur:
„(X) Heimavirki vil ikki góðtaka tær treytir, sum verða settar, fyri at (X) Heimavirki kann avgreiða sølu av heimavirkaðum vørum við ávísingarsølu.“

Nevndin fyri (X) Heimavirki veit ikki betur, enn at handilsmál eru danskt málsøki, ið er ikki yvirtikið. Orðið „ávísingarsøla stendur ikki í Føroysk-Donsku orðabókini og heldur ikki í Donsk-Føroysku orðabókini. Í handilsmáli verður orðið „konsignatiónsvørur“ brúkt, tá ið handil tekur ímóti vørum, sum handil hevur ikki ráð at hava á vørugoymslu. Serligar reglur hava verið galdandi fyri bókingar av „konsignatiónsvørum“. Treytirnar, ið Fíggjar-

málastýrið setur (X) Heimavirki fyri ávísingarsølu av heimavirkaðum lutum, kunnu ikki verða nýttar í smásøluhandli. Annars átti kanska mál sum hetta at verið sent Keypmannafelagnum til ummælis, fyri at fáa at vita, hvat felagið heldur um treytir sum hesar. Víst skal annars vera til skriv frá Toll- og Skattstovu Føroya dagfest 22. juni 1994, skriv frá Menningarstovuni dagfest 24. juni 1994 og skriv frá (X) Heimavirki til Føroya Landsstýri dagfest 10. oktober 1994 í sama máli.

Í 3. stk. 2. petti stendur:
„Føroyska meirvirðisgjaldslógin er ein beinleiðis avskrift av donsku meirvirðisgjaldslógini frá 1993."

Viðmerking frá nevndini:
„Í skrivi frá Fíggjarmálastýrinum til (X) Heimavirki dagfest 7. juni 2002 stendur í 3. seinasta stk:

„Tað skal viðmerkjast, at treytirnar omanfyri ikki eru danskar treytir, sum stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya hevur sett í gildi í Føroyum uttan lógarheimild. Talan er um almennar treytir, sum skulu vera loknar, áðrenn søla kann allýsast sum ávísingar søla. Spurningurin um lógarheimild er tí burturvið."

Viðmerking:
Heitt verður á Løgtingsins Umboðsmann at taka støðu til, um so er.

Í 5. stk. stendur:
„Av tí at vinnan dregur avgjaldið av keyptum vørum og tænastum frá, veksur avgjaldið ikki við talinum av søluliðum. Avgjaldsgrundarlagið er sostatt samlaða søluavgjaldið minus keypsavgjaldið í øllum liðum, og talan verður tí um eitt avgjald á virðisøkingini í hvørjum einstøkum søluliði."

Viðmerking:
(X) Heimavirki hevur onki avgjald at draga frá vørukeypinum, av tí at øll tey, ið selja handvirkaðar lutir til (X) Heimavirki, eru ikki M.V.G. skrásett, t.v.s. at handilin hevur so at siga bert útgangandi M.V.G. av handvirkaðum føroyskum vørum til sølu.

Í stk. 11, 3. petti stendur:

„(X) Heimavirki keypir sostatt vøruna uttan meirvirðisgjald og kann tí ikki draga nakað keypsavgjald frá, men selur vøruna víðari sum vanlig meirvirðisgjaldsskylduga vørusølu.“

Viðmerking:

Hetta er grundin til klaguna!

„Í stk. 13. stendur:

„Ávísingarsøla er tí rættuliga nógv øðrvísi enn vanlig søla av vørum, har handilin keypir vøruna inn á vørugoymsluna og gerst ánari av vøruni. Í samband við ávísingarsølu verður handilin ongantíð ánari av vøruni. Ávísingarsøla er sambært meirisvirðisgjaldslógini ein tænasta. Tað eru t.d. heimavirkir og sethúsasølur, sum avgreiða sína sølu sum ávísingarsølu.“

Viðmerking:

Vísandi til stk. 13, 2. petti skal verða upplýst, at hetta letur seg ikki gera í handli sum heimavirkinum, av tí at tey, ið lata handvirkaðar vørur til handilin, vilja hava pengarnar í hondina.“

Við skrivi, dagfest 2. sept. 2002 vóru viðmerkingarnar frá Heimavirkinum sendar Fíggjarmálaráðnum til ummælis.

Við teldubrævi, sent umboðsmanninum 11. sept. 2002, hevur Fíggjarmálaráðið boðað umboðsmanninum frá, at Fíggjarmálaráðið ikki hevur fleiri viðmerkingar til málið. Við skrivi, dagfest sama dagin, hevur umboðsmaðurin boðað Heimavirkinum frá, at málið nú bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

**Umboðsmansviðgerðin**

Fyri at fáa lýst umrøddu skipanina við meirvirðisgjaldsfríari ávísingarsølu betur, hevur umboðsmaðurin tann 3. oktober havt ein fund við umboð fyri Fíggjarmálaráðið og Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið.

Johnhard Klettheyggj, fulltrúi hevur gjørt hesa frásøgnina frá fundinum:

…Umboðsmaðurin (LUM) hevði boðsent Fíggjarmálaráðnum (FMR) at koma á fund fyri at greiða honum nærri frá teimum treytunum, sum settar eru (X) Heimavirki (m.a. í skrivinum,

dagfest 21. mai 2002), fyri at virkið kann sleppa at avgreiða sølu sína sum ávísingarsølu og harvið einans rinda meirvirðisgjald av søluvinninginum. Eisini vildi umboðsmaðurin hava FMR at greiða honum frá, hvussu hendan skipanin bleiv umsitin mótvegis teimum heimavirkjunum, sum nýttu hesa skipanina. Fundurin var avtalaður at vera á umboðsmansstovninum 3. okt., kl. 15.

| | |
|---|---|
| Fyri FMR vóru møtt: | (J), aðalstjóri |
| | (K), fulltrúi |
| | (L), Toll&Skatt, Stýrið |
| | (M), Eftirlitið |

| | |
|---|---|
| Fyri LUM vóru møttir: | Joen H. Andreassen (JHA) |
| | Johnhard Klettheyggj (JK) |

JHA beyð vælkomin og greiddi frá teimum faktisku umstøðunum í málinum, sum (X) Heimavirki (XHV) hevði vent sær til umboðsmannin við. Hann vísti á, at XHV hevði noktað fyri at fara undir ávísingarsølu og harvið sleppa undan einum parti av meirvirðisgjaldinum, og at málið tí var greitt hesum viðvíkjandi. XHV hevði tó eisini pástaðið, at skipanin var kappingaravlaðandi fyri XHV í mun til hini heimavirkini. Av hesari orsøk vildi JHA hava lýst, hvussu hendan skipanin virkaði í praksis – bæði viðv. treytunum í skrivinum frá 21. mai 2002, og hvussu eftirlit varð hildið við hinum heimavirkjunum.

JHA vísti á, at einki løgið var í teirri 1. treytini.

Viðv. treyt nr. 2 spurdi JHA, um heimavirkini høvdu eina konsignatiónsgoymslu, har meirvirðisgjaldsfríu vørurnar blivu hildnar fyri seg. (J) greiddi frá, at skipanin er tann, at heimavirki ikki eigur vøruna, men einans selur hesa vegna eigaran / framleiðaran. JHA spurdi, um tað var eitt krav, at peningurin frá hesari søluni var hildin fyri seg sjálvan. (L) segði seg ikki vita um so var, men at Toll&Skatt kravdi, at hendan sølan framgekk av skjølunum.

JHA spurdi, hvussu heimavirkini avroknaðu meirvirðisgjaldi. (J) greiddi frá, at hetta var gjørt á tann hátt, at ein meirvirðisgjaldsuppgerð bleiv latin inn hvønn ársfjórðing.

JHA vísti á, at einki løgið var í treytunum 3 og 4.

Viðv. treyt nr. 5 spurdi JHA, um framleiðarin framgekk á rokningini, sum handilin lat keyparunum. Hetta vóru umboðini fyri FMR ikki greið yvir.

(J) og (M) greiddu frá, at bæði (Y) – og (Z) Heimavirki nýttu hesa skipanina við ávísingarsølu. JHA spurdi, um hesi virkini høvdu havt nakrar trupulleikar av hesari skipanini. (L) og (M) søgdu seg ikki hava hoyrt um slíkar trupulleikar.

Uppá fyrispurning um, hvussu eftirlitið virkaði í hesum førinum, greiddi (M) frá, at vegna vantandi orku, var ikki møguligt at fara í smálutir við øllum, men at tey hugdu at skjølunum, og gjørdu neyvari kanningar, um so var, at okkurt sá ivasamt út.

Fundurin var lokin kl. 15.45."

## *Niðurstøða*

*Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum stendur m.a.:*

„**§ 1.** Sambært hesi lóg skal avgjald rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum...

...

**I. Vavið á avgjaldsskylduni.**

**§ 2.** Avgjaldsskyldan er galdandi fyri allar nýggjar og brúktar vørur...

*2. stk.* Avgjaldsskyldan er galdandi fyri allar tænastur, undantikið tær, sum eru nevndar í 3. stk.

*3. stk.* Hesar tænastur eru undantiknar avgjaldsskylduni:

a. Viðgerð á sjúkrahúsi, læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.
b. Almanna umsorgan og stuðul, herímillum vøggustovur, barnagarðar, frítíðarheim, vistarheim, umlættingarheim o.t. privatir ella almennir stovnar.
c. Undirvísing í skúla ella á fróðskaparsetri, faklig útbúgving,

herímillum endurútbúgving, og onnur frálæra, ið líkist skúla ella fakligari útbúgving. Undirvísing í máli, tónleiki, fimleiki, handarbeiði, tekning, bókhaldi og maskinskriving er at rokna sum sovorðin útbúgving.

d. Mentunarligt virksemi, herímillum bókasøvn og forngripasøvn, o.t. Tó eru útvarps- og sjónvarpssendingar, sýning av sjónleiki og filmi, konsertir o.t. avgjaldsskyldug.
e. Ítróttur og ítróttartiltøk.
f. Fólkaflutningur. Flutningur av akførum við skipum hjá strandferðsluni innanoyggja.
g. Tænastur hjá postverkinum.
h. Útleiga, uppsiting og umsiting av fastari ogn. Tó er útleiga av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.t. avgjaldsskyldug og útleiga av tjaldingarakfars- og reklamustaði.
i. Tryggingarvirksemi.
j. Banka- , sparikassa- og fíggjarvirksemi. Eisini útleiga av bankboksum.
k. Eydnuspæl og tílíkt.
l. Rithøvunda- og tónaskaldavirksemi og annað listarligt virksemi.
m. Tænastur beinleiðis í samband við jarðarferðir.
n. Ferðamannastovuvirksemi og ferðamanna leiðbeiningar- og upplýsingarvirksemi.

...

*5. stk.* Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri frítøku frá avgjaldsskylduna í sambandi við tiltøk, hvørs yvirskot óskerd fara til vælgerandi endamál ella endamál, sum á annan hátt eru almannagagnlig.

## II. Virki, ið skulu rinda avgjald.

**§ 3.** Avgjald skal rindast av:

Tí, sum rekur sjálvstøðugt vinnuvirki við sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

...

**§ 4.** Tann, sum hevur eina árliga sølu av vørum og tænastum, ið er minni enn 20.000 kr., skal ikki rinda avgjald sambært § 3.

...

> **§ 5.** Tann, sum sambært §§ 3-4 skal rinda avgjald, skal fráboða virki sítt til skrásetingar hjá Toll- og Skattstovu Føroya...“

*Tað er sostatt rætt, sum ført er fram av Fíggjarmálaráðnum í skrivinum frá 21. mai 2002, at øll vinnulig søla av vørum og tænastum yvir 20.000 kr. er meirvirðisgjaldsskyldug, tó við teimum undantøkum, sum eru nevnd undir § 2, stk. 3 í meirvirðisgjaldslógini. Sambært tí, sum er ført fram frammanfyri um kunngerð nr. 136 frá 17. juni 1993, má tað leggjast til grund, at heimildin fyri frítøku fyri avgjaldsskyldu sambært § 2, stk. 5 í lógini ikki umfatar standandi frítøku, men bert frítøku fyri einstøk tiltøk.*

*Av tí, at (X) Heimavirki keypir vørurnar frá framleiðarunum fyri síðani at selja tær víðari, eri eg samdur við Fíggjarmálaráðnum í, at tað við hesi mannagongd ikki er heimild fyri at sleppa (X) Heimavirki undan avgjaldsskylduni.*

*Mótvegis uppáhaldinum hjá (X) Heimavirki um, at tað er kappingaravlaðandi, at kappingarneytarnir sleppa undan meirvirðisgjaldi av keypsprísinum, men bert rinda meirvirðisgjald av vinninginum, tí at sølan fer fram sum ávísingarsøla, hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at sami møguleiki stendur (X) Heimavirki í boði.*

*Ávísingarsøla, ella konsignatión sum tað eitur á fremmandum máli, er ikki nakað serføroyskt fyribrigdi, og eg dugi ikki at síggja, at tað hevur nakran týdning, at Toll- og Skattstova Føroya hevur nýtt danska fyrimynd, tá treytirnar fyri at góðkenna ávísingarsølu vórðu settar upp.*

*Hugtakið ávísingarsøla ella konsignatión er ikki eins og t.d. hugtakið kommissión lýst í lóggávuni. Løgfrøðihøvundar tykjast at vera samdir um, at kjarnan í hugtakinum er, at framleiðari ella seljari varðveitir ognarrættin til lutin ella vøruna, til endaliga sølan er farin fram.*

*W.E. von Eyben lýsir hugtakið soleiðis í Juridisk Ordbog, 8. útg.:*

> „**konsignation:** nu oftest i samme betydning som kreditkonsignation (s.d.); tidl. fællesbetegnelse for såvel kommission (s.d.) som kreditkonsignation, idet det betegnede al videreforhandling gennem et mellemled uden opgivelse af ejendomsretten til det solgte.
>
> ...
>
> **kreditkonsignation** (el. konsignation): levering af varer under

ejendomsforbehold til videresalg for modtagerens egen regning, jfr. derimod kommission (s.d.), hvor kommissionæren handler for kommittentens regning."

*A. Vinding Kruse skrivar í Købsretten, 3. útg. á bls. 132 um konsignatión m.a.:*

„Ved salg fra leverandør (fabrikant, importør eller grosserer) til forhandler (detaillist) er det i mange tilfælde almindeligt at lade „salget" ske ved, at leverandøren (konsignanten) giver forhandleren (konsignataren) varerne i „*konsignation*" (eller „kreditkonsignation"). Denne salgsform kan i sine forskellige udformninger minde både om salgskommission og om salg med ejendomsforbehold; men forskellighederne er dog normalt så store, at der ikke kan være tale om at anvende henholdsvis kommissionsloven eller kreditkøbsloven direkte på konsignationsforhold. Derimod vil KBL alt efter omstændighederne i det enkelte kontraktsforhold kunne finde direkte anvendelse på forholdet mellem konsignanten og konsignataren.

Den almindelige konsignationsaftale går ud på, at leverandøren overgiver forhandleren et varelager til videresalg, men således at leverandøren forbeholder sig ejendomsretten til de varer, der ikke bliver videresolgt. For de usolgte varers vedkommende aftales det endvidere ofte, at forhandleren både har returneringsret og -pligt. Iøvrigt pålægges det forhandleren at føre et nøjagtigt og særskilt regnskab vedrørende konsignationsvarerne, således at hele mellemværendet holdes adskilt fra hans øvrige forretning, ligesom han med mellemrum (som oftest månedligt) skal afregne med leverandøren for de i perioden stedfundne salg til de priser, som leverandøren har betinget sig. Forhandleren må så ved videresalget beregne sig sin egen avance."

*Michael Elmer og Lise Skovby skriva í Ejendomsretten 1, 2. útg. á bls. 121 og 122 m.a.:*

„Konsignation er en salgsform, hvor en sælger har forbeholdt sig ejendomsretten til det solgte, men samtidig indrømmet køberen

adgang til videresalg. Konsignation adskiller sig fra almindeligt køb med ejendomsforbehold ved, at køberen har tilladelse til at videresælge det solgte, og fra kommission ved, at mellemmanden (køberen) handler for egen regning og således selv får gevinsten eller tabet ved videresalget. Konsignation vil i almindelighed kun kunne tænkes ved salg til erhvervsdrivende. Der vil typisk være tale om handelskøb vedrørende en flerhed af genstande.

...

De betænkeligheder og skuffelsesmuligheder, som konsignation indebærer, gør det imidlertid nødvendigt at supplere de almindelige krav til ejendomsforbehold med krav om, at varerne klart lader sig adskille fra andre varer, at der sker afregning til sælger i takt med videresalget, og at der føres en vis kontrol hermed og med varernes tilstedeværelse."

*Mads Bryde Andersen skrivar um evnið í Praktisk Aftaleret frá 1995 á bls. 611 m.a.:*

„**I.** *Kendetegn*; Ved en aftale om konsignation (eng. consignment) giver en leverandør (kaldet *konsignanten*) en forhandler (kaldet *konsignataren*) ret til at videresælge en genstand, samtidig med at han tager et ejendomsforbehold i genstanden. Når han sælger produktet videre, handler konsignataren i eget navn (d.v.s. forpligter sig selv) og for egen regning (d.v.s. tjener og taber selv, hvad transaktionen kaster af sig). Da konsignantens mulighed for at opretholde ejendomsforbehold i det solgte, beror på hans reelle interesse i de genstande (det varelager), der ikke sælges, er det en nødvendig bestanddel af transaktionen, at usolgte genstande returneres til konsignanten. Da videresalgsrisikoen for så vidt er hans, er det en sandhed med modifikationer, at salget sker for konsignatarens regning. Men kan derimod sige, at konsignanten finansierer konsignatarens køb og – alt efter aftalens indhold – fritager ham for tab som følge af svigtende afsætning.

Konsignation forekommer navnlig i forhandlerforhold, der involverer formuegoder af stor værdi, der omsættes i forholdsvis få transaktioner, f.eks. maskiner og teknisk udstyr. Man taler om „*kreditkonsignation*", når konsignanten leverer produkterne i fast

regning til konsignataren. Det essentielle i transaktionen er her den kredit, der tilstås konsignataren, og som gør det muligt for ham at finansiere et butikslager af sådant udstyr (f.eks. bestående af motorkøretøjer eller edb-udstyr).“

*Eg havi skilt umrøddu skipan við ávísingarsølu soleiðis, at framleiðarar av heimavirkaðum vørum, hvørs árliga framleiðsla ikki hevur eitt virði uppá meira enn 20.000 kr., sambært § 4 í lógini sleppa undan meirvirðisgjaldi og harvið eisini undan at verða meirvirðisgjaldskrásettir hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Tá talan er um ávísingarsølu, standa hesir framleiðarar framvegis sum eigarar av vøruni, til sølubúðin hevur selt hana, og skal sølubúðin tá bert rinda mvg av samsýningini, sum sølubúðin skal hava fyri at selja vøruna fyri framleiðaran.*

*Er talan harafturímóti um framleiðarar, sum hava eina framleiðslu uppá meira enn 20.000 kr., er eingin heimild fyri at frítaka hesar fyri mvg. Hesir framleiðarar eru meirvirðisgjaldsskyldugir, og skulu leggja meirvirðisgjald á vørurnar, sum teir lata sølubúðunum. Hetta er galdandi uttan mun til, um talan er um vanliga sølu ella um ávísingarsølu. Sølubúðin skal í slíkum førum rinda meirvirðisgjald av søluprísinum, men tó við frádrátti av tí meirvirðisgjaldinum, sum framleiðarin hevur lagt omaná vøruna.*

*Í skrivinum, dagfest 8. august 2002 hevur (X) Heimavirkið m.a. ført fram:*

„Treytirnar, ið Fíggjarmálastýrið setur (X) Heimavirki fyri ávísingarsølu av heimavirkaðum lutum, kunnu ikki verða nýttir í smásøluhandli.“

*Til hetta er at siga, sum eisini er nevnt frammanfyri úr verkinum Praktisk Aftaleret, at ávísingarsøla ella konsignatión serliga verður nýtt, tá talan er um sølu av kostnaðarmiklum lutum, men hetta hevur einki við greiningina av sjálvum hugtakinum at gera. Eru treytirnar annars loknar, er talan um ávísingarsølu, antin talan er um kostnaðarmiklar lutir ella ikki. At tørvur serliga er á hesum søluhátti, tá talan er um kostnaðarmiklar sølulutir, er ein annar spurningur, sum einki hevur við sjálvt hugtakið at gera.*

*Eg eri tí ikki samdur við (X) Heimavirki í, at hesin søluháttur ikki kann nýtast í smásøluhandli av heimavirkaðum lutum.*

*Treytin um, at framleiðarin ikki má vera mvg-skrásettur, er ein beinleiðis avleiðing av § 4 í lógini. Eg havi heldur ikki grundarlag fyri at halda annað enn, at hinar treytirnar eru settar fyri at tryggja, at tað veruliga er talan um ávísingarsølu og ikki um vanliga sølu.*

*Eg havi tí einki at siga til tær treytirnar, sum skattavaldið hevur sett fyri at góðkenna slíka sølu sum ávísingarsølu.*

*Eftir tí, sum kom fram á fundinum við umboðini fyri Fíggjarmálaráðið og Toll- og Skattstovu Føroya tann 3. oktober 2002, tykist eftirlitið við umrøddu ávísingarsøluni av heimavirkaðum vørum higartil at hava verið so sum so. Men av tí, at talan er um sera smáar upphæddir sæð í mun til tær samlaðu mvg-upphæddirnar, sum skattavaldið annars skal hava eftirlit við, havi eg ikki nakað at siga til, at eftirlitið við umrøddu ávísingarsølum ikki er raðfest hægri.*

*Fyri at taka samanum, so dugi eg ikki at síggja, at Toll- og Skattstova Føroya hevur gjørt nakað skeivt í hesum máli. Eg dugi heldur ikki at síggja, at (X) Heimavirki er fyri mismuni í mun til hini heimavirkini, tí at sama skipanin, sum hini heimavirkini nýta, stendur eisini (X) Heimavirki í boði.*

*Eg geri tí ikki meira við hetta málið.*

## 23. Vinnulívs- og Fiskivinnumál v.m.

### 23.1. Klaga um at øll ikki eru eins fyri lógini, tá Fiskimálastýrið umsitur fiski- og veiðuloyvi

A, sum hevði átt fiskifarið S1, sum var selt á tvingsilssølu 28. november 1996, søkti um at varðveita veiðurættindini hjá S1, og varð hetta játtað av Fiskimálastýrinum við skrivi, dagfest 31. januar 1997. A stovnaði seinni partafelag, sum keypti S2 úr Íslandi. Skipið fekk navnið S3. Trupulleikar viðvíkjandi fiskimøguleikunum hjá hesum skipi í norskum sjógvi førdu við sær, at skipið varð flutt avaftur landinum, og varð útflutningsloyvi játtað 16. januar 1998. Tann 9. februar 1998 vendi A sær til Fiskimálastýrið við fyrispurningi um fiskirættindini, sum S3 hevði havt. Stýrið svaraði við skrivi, dagfest 18. februar 1998, at veiðuloyvið var farið úr gildi, og at A sostatt ikki hevði nøkur fiskirættindi at flyta yvir á onnur skip. Aftaná brævaskifti søkti A við skrivi frá 26. apríl 2000 Fiskimálaráðið av nýggjum um antin at fáa rættindi til fiskiskap eftir upsa og toski í Norðsjónum-Barentshavinum, fiskiskap við trolbáti á Føroyagrunninum ella permanent loyvi til rækjufiskiskap á Flemmish Cap. Fiskimálastýrið sýtti við skrivi, dagfest 31. mai 2000 umsóknini við tilvísing til versnandi støðuna í Barentshavinum, at heimild ikki var fyri at økja talið av veiðuloyvum til trolfiskiskap undir Føroyum, og tey skerdu rættindini til rækjufiskiskap á Flemmish Cap. Fiskimálastýrið hevði áður veitt A tilsøgn um fyribilsrættindi til rækjufiskiskap við Flemmish Cap, og helt seg ikki kunna geva honum tilsøgn um eitt meira permanent loyvi. Í klaguni varð eisini ført fram, at A var viðgjørdur øðrvísi enn aðrir umsøkjarar, og nevndi A nøkur ítøkilig dømi um hetta.

Avgerðin um, at A ikki átti nøkur fiskirættindi at flyta yvir á eitt møguligt innflutt skip, var tikin áðrenn 1. januar 2000, og kundi umboðsmaðurin tí sambært § 18, stk. 2 í umboðsmanslógini ikki viðgera hendan spurningin. Viðvíkjandi avgerðini frá 31. mai 2000 var ikki grundarlag fyri at halda, at grundgevingarnar fyri hesari ikki vóru sakligar. Heldur ikki vóru dømini, sum A hevði nevnt viðvíkjandi

øðrum umsøkjarum, prógv fyri, at hann var órættvíst viðgjørdur í mun til hesar. (J.nr. 200100004 – Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina)

## 23.2. Klaga um skrásetingina av einari ræðisavmarking, hóast eigarin av farinum frammanundan hevði heitt á Fiskimálastýrið um at ógilda hesa

Í sambandi við eina avtalu um sølu av veiðu-/fiskiloyvinum frá bátinum S1 til S2, hevði seljarin undirskrivað og latið keyparanum eina ræðisavmarking viðvíkjandi bátinum S1. Tá tað vísti seg at vera trupult at fáa keypspeningin, sendi seljarin 17. juli 2001 Fiskimálastýrinum eitt skriv, har hann heitti á stýrið um at ógilda ræðisavmarkingina, sum eftir ætlan skuldi skrásetast á S1, vísandi til, at avtalan millum partarnar var burturdottin vegna avtalubrot. 6. aug. 2001 varð ræðisavmarkingin latin inn til Skipaskrásetingina. Skipaskrásetingin sendi 17. aug. 2001 Fiskimálastýrinum ræðisavmarkingina, sum tá var blivin skrásett. 28. aug. 2001 svaraði Fiskimálastýrið seljaranum, at tað ikki kundi leggja seg útí eitt møguligt stríð millum partarnar, men staðfesti at ræðisavmarkingin var skrásett, og at stýrið ikki fór at taka støðu til áheitanina um at ógilda hesa, fyrr enn greiða varð fingin á, hvør átti rættindini. Veiðuloyvið bleiv seinni skrivað út til S2.

Umboðsmaðurin gav Fiskimálastýrinum eina átalu fyri hesa mannagongdina, tí at stýrið við at leggjast á boðini frá seljarunum, og lata ræðisavmarkingina skráseta, júst hevði lagt seg útí stríðið millum partarnar, og harvið flutt rættindini frá øðrum bátinum til hin. (J.nr. 200100059)

**Klagan**

Við skrivi, dagfest 23. okt. 2001 hevur (A) sent Landsstýrismálanevndini eina klagu um: „ósømiligan fram/atburðarhátt frá Fiskimálastýrinum“. Landsstýrismálanevndin hevur við skrivi, dagfest 8. nov. 2001 sent klaguna til umboðsmannin.

Av tí, at klagan ikki var heilt ítøkiliga orðað, valdi umboðsmaðurin í fyrstu syftu at boðsenda (A) at koma á fund við umboðsmannin fyri at greiða frá, hvat tað var, sum hesin ynskti at klaga um.

Á hesum fundinum, sum varð hildin 13. nov. 2001, greiddi (A) frá, at hann 30. mai 2001 hevði gjørt eina avtalu við innflytara av einum báti um, at hesin skuldi keypa loyvini hjá báti klagarans, (S1), fyri kr. 450.000, harav kr. 250.000 skuldu fella til gjaldingar beinanvegin, tá

loyvini vóru flutt yvir á innflutta bátin, og restin skuldi rindast innan 1 ár frá 1. august 2001 at rokna. Samstundis hevði (A) undirskrivað eina ræðisavmarking, sum var latin keyparanum. Tá tað vísti seg at vera trupult at fáa peningin frá keyparanum, sendi (A) 17. juli 2001 Fiskimálastýrinum eitt skriv fyri at taka ræðisavmarkingina aftur, orsakað av avtalubroti.

Klagan snúði seg sostatt um, at Fiskimálastýrið hevði latið hesa ræðisavmarkingina, sum (A) hevði undirskrivað 30. mai 2001, skrá-seta í aug. mánaði, hóast (A) við skrivi til Fiskimálastýrið, dagfest 17. juli 2001 hevði afturkallað ræðisavmarkingina.

Við skrivi, dagfest 13. nov. 2001 bað umboðsmaðurin Fiskimála-stýrið um at lata honum øll skjølini viðvíkjandi hesum málinum, fyri at hann kundi taka støðu til, um hetta var eitt mál, sum hann kundi ella átti at taka til viðgerðar.

Við skrivi, dagfest 16. nov. 2001 fekk umboðsmaðurin skjølini sendandi frá Fiskimálastýrinum. Við skrivi, dagfest 29. november boðaði umboðsmaðurin klagaranum og Fiskimálastýrinum frá, at hann fór at taka klaguna til viðgerðar.

**Gongdin í málinum**

Sambært skjølunum hevur gongdin, sum hevur týdning fyri við-gerðina hjá umboðsmanninum av hesum máli, verið hendan:

- 13. juni sendir (Adv. 1) eitt telefaks til Fiskimálastýrið, har biðið verður um váttan fyri, at viðløgd skjalprógv – eitt avrit av váttan um ræðisavmarking viðvíkjandi bátinum (S1) og eitt fyribils málibræv fyri ein Viksund 43-bát – verður góðtikið sum grundarlag fyri eini umsókn um útskriving av veiðuloyvi til ein Viksund 43-bát, sum (B) ætlaði at flyta inn úr Noregi.
- Við skrivi til advokatin, dagfest 15. juni 2001 játtar Fiskimála-stýrið umsókn um innflutningsloyvi treytað av, at báturin verður skrásettur í Føroya Skipaskráseting. Somuleiðis verður tilsøgn givin um at flyta veiði- og fiskiloyvið hjá (S1) yvir á innflutta bátin treytað av, at eigarin av (S1) við ræðisavmarking váttar, at báturin ikki aftur verður settur inn í vinnuligan fiskiskap á føroysku landleiðunum, og at báturin ikki má seljast uttan so, at keyparin góðtekur hesa avmarking í nýtsluni av bátinum. Henda váttan verður at skriva á skipsblaðið hjá

fiskifarinum í føroysku skipaskránni. Innflutningsloyvið er galdandi í 3 mðr.

- (A) sendir 17. juli 2001 Fiskimálastýrinum eitt telefaks, har hann boðar frá, at avtalan millum hann og innflytaran av nýggja bátinum frá sama degi at rokna verður gjørd til einkis vegna avtalubrot, og at (S1) skal halda fram við at hava bæði veiði-/fiskiloyvið um hendur. Somuleiðis verður heitt á Fiskimálastýrið um at ógilda ræðisavmarkingina, sum skuldi setast á (S1). Biðið verður um hesa váttan frá Fiskimálastýrinum sum skjótast, av tí at (S1) heldur áfram við at nýta síni rættindir ífylgi sínum veiði-/fiskiloyvi 4A.
- Við skrivi, dagfest 6. aug. 2001 sendir (Adv. 1) Skipaskráseting Føroya váttanina um ræðisavmarking frá 30. mai 2001, til skrásetingar á blaðið hjá (S1).
- Ræðisavmarkingin er stemplað sum innkomin til skipaskrásetingina 6. aug. 2001 (dagbóka-nr. 323). Tilmeldari av ræðisavmarkingini er Fiskimálastýrið, sum eisini hevur átalurætt eftir váttanini.
- Føroya Skipaskráseting sendir tann 17. aug. 2001 Fiskimálastýrinum ræðisavmarkingina í skrásettum líki.
- Við skrivi til (A), dagfest 28. aug. 2001 váttar Fiskimálastýrið móttøkuna av telefaksinum 17. juli. Sagt verður í skrivinum, at Fiskimálastýrið ikki leggur seg út í avtalur, sum eru gjørdar viðvíkjandi loyvunum hjá (S1), og hvat annars er farið fram millum avtalupartarnar. Fiskimálastýrið staðfestir, at í einum øðrum máli, sum hevur verið til viðgerðar í stýrinum, er tilsøgn givin til innflutning av útróðarbáti, og til at fiskirættindini hjá (S1) kunnu flytast á innflutta bátin. Somuleiðis staðfestir Fiskimálastýrið, at eigarin av (S1) hevur undirskrivað eina váttan um ræðisavmarking, sum er tilmeldað og skrásett hjá Føroya Skipaskráseting. Fiskimálastýrið sigur seg bert hava áhuga í at vita, hvør hevur ræðisrættin yvir loyvinum hjá (S1). Grundað á, at hetta tykist ógreitt, boðar Fiskimálastýrið (A) frá, at stýrið fer at bíða við at taka støðu til áheitanina um at ógilda ræðisavmarkingina í (S1).

**Partshoyringin**

Við nevnda skrivi frá 29. nov. 2001 sendi umboðsmaðurin Fiskimálastýrinum klaguna frá (A) til ummælis við grundarlagi í hesum upplýsingum:

...

- (A) hevur undirskrivað ræðisavmarkingina 30. mai 2001.
- (A) hevur afturkallað ræðisavmarkingina við telefaksi til Fiskimálastýrið (Fiskivinnustovuna), sent/móttikið í Fiskimálastýrinum 17. juli 2001.
- Fiskimálastýrið hevur latið ræðisavmarkingina til skipaskrásetingina 6. aug. 2001 (dagbókanr. 323), og er hendan endaliga skrásett 17. aug. 2001.
- Fiskimálastýrið (Fiskivinnustovan) svarar 28. aug. 2001 skrivinum frá (A) (dagf. 17. juli), at stovnurin ikki leggur seg útí eitt møguligt partsstríð, men staðfestir hinvegin at ræðisavmarkingin er undirskrivað av eigaranum, eins og hon er tilmeldað og skrásett í skipaskrásetingini.

...

Við skrivi, dagfest 10. jan. 2002 ger Fiskimálastýrið viðmerkingar til klaguna frá (A). Fiskimálstýrið skrivar m.a.:

...

Her skal viðmerkjast, at avgreiðslan av umbønini frá (A) um at ógilda ræðisavmarkingina tók heldur langa tíð. Hetta komst lutvíst av nevndu viðurskiftum. Harafturat var málið uppi í eini tíð, tá fólk eru í summarfrí – í hesum føri eisini fulltrúin, sum hevði málið um hendi og deildarstjórin.

Lagt skal vera afturat, at vóru umstøður at avgreitt umbønina frá (A) fyri 06.08.01, so hevði høvuðsniðurstøðan verið tann sama, sum í skrivinum frá 28.08.01.

**Viðv. orsøkini til umbønina frá (A) um at ógilda ræðisavmarkingina.**

Støða Fiskimálastýrisins er ikki at leggja seg út í partsstríð í málum sum hesum. Men av tí, at tað seinni er komið fram, at avtalubrotið snúði seg um, at seljarin hevur havt trupult við at fáa pengarnar frá keyparinum, tí Fiskimálastýrið ikki skrivaði nýggja bátinum

fiskiloyvi, skulu nakrar viðmerkingar gerast til henda partin av málinum.

Sambært skrivi til Fiskimálastýrið frá (Adv. 2) hjá (A), 24.10.01, er tað ein áseting í avtaluni frá 30.05.01 um, at (A) skuldi fáa eitt kontantgjald, „tá loyvini til (B) verða útskrivað“, og sum ikki varð hildin.

Í frásøgnini frá fundi millum Løgtingsins Umboðsmann og (A) verður sagt á leið tað sama; kontantgjaldið skuldi rindast, „tá loyvini verða flutt á nýggja bátin“.

Um so er, at umbønin til Fiskimálastýrið um at ógilda ræðisavmarkingina í (S1) var ein avleiðing av, at keyparin ikki fær hildið gjaldstreytirnar í avtaluni, tí Fiskimálastýrið ikki skrivaði (S2) loyvini, so er vert at hava hesi viðurskifti í huga:

Í lóg um vinnuligan fiskiskap (§7) er ásett, at vinnuligur fiskiskapur bert kann fara fram við fiskiførum, sum sambært ognarviðurskiftunum eru heimahoyrandi í Føroyum og hava veiðuloyvi. Hetta merkir, at veiðuloyvi og fiskiloyvi bert kunnu útskrivast fiskiførum, sum eru skrásett í føroysku skipaskránni. Vanlig mannagongd í málum, sum hesum er, at loyvini verða skrivað, tá Fiskimálastýrið hevur fingið váttan um at nýggja fiskifarið er skrásett í Føroya Skipaskráseting.

Tann 15.06.01 varð innflutningsloyvi veitt (S2), samstundis sum tilsøgn varð givin um, at fiskirættindini hjá (S1) kundu flytast á innflutta bátin.

Skrivið frá Fiskimálastýrinum 15.06.01 var eisini ein tilsøgn um veiðuloyvi og fiskiloyvi, treytað av, at ásetingarnar í §8 í lógini vóru loknar. Ein av hesum treytum var, at (S1) varð tikin úr vinnuligum fiskiskapi. Hetta var longu gjørt við, tað at eigarin av bátinum undirskrivaði váttan um ræðisavmarking tann 30.05.01. Av tí at hinar treytirnar vóru loknar, er niðurstøðan hjá Fiskivinnustovuni, at (S2) longu hevði veiðuloyvi og fiskiloyvi, tá keypssáttmálin og ræðisavmarkingin vórðu undirskrivað.

Eftir hesum er ilt at síggja, at atvoldin til, at keyparin ikki fær hildið gjaldstreytirnar í avtaluni, er at Fiskimálastýrið ikki skrivaði (S2) loyvini. Eftir lóg um vinnuligan fiskiskap og vanligari mannagongd kundu loyvini ikki útskrivast (S2), fyrrenn báturin var

skrásettur í Føroyum. At tað so dregur út við at fáa nýggja bátin til Føroya, kann neyvan leggjast Fiskimálastýrinum til byrðu.

Lagt kann verða afturat, at Fiskivinnustovan ikki fekk áheitan um at skriva innflutta bátinum loyvini. Partarnir hava heldur ikki gjørt vart við, at orðingarnar í tilsøgnini frá 15.06.01 ikki vóru nøktandi.

**Leiklutur Fiskivinnustovunnar í sambandi við ræðisavmarkingina**

Klagan frá (A) til Løgtingsins Umboðsmann snýr seg um framferðina hjá Fiskimálastýrinum í sambandi við, at ræðisavmarkingin fyri (S1) verður skrásett, hóast hendan verður afturkallað av seljaranum.

Sum tað sæst av hjálagda yvirliti yvir gongdina í málinum varð ræðisavmarkingin undirskrivað tann 30.05.01, samstundis sum avtalað varð millum (A) og (B), at báturin, ætlanin var at innflyta úr Noreg, kundi yvirtaka fiskirættindini hjá (S1).

Fiskivinnustovan fær fyrstu ferð kunnleika til undirskrivaðu ræðisavmarkingina 13.06.01, tá (Adv. 1), um telefaks, sendir avrit av henni saman við øðrum skjølum, í sambandi við umsókn um innflutningsloyvi og loyvi at flyta fiskirættindini.

Her skal vera skotið inn, at í flestu førum verða ræðisavmarkingar á fiskiførum, sum skulu út fyri nýggj ella innflutt før, ikki tilmeldaðar Skipaskrásetingini fyrrenn stutt fyri, at nýggj ella innflutt før verða skrásett, og tá øll onnur viðurskifti í sambandi við yvirtøkuna av fiskifarinum eru komin í rættlag. Í hesum føri er ræðisavmarkingin undirskrivað 30.05.01, tilmeldað 06.08.01 og endaliga skrásett 17.08.01. Nýggi báturin varð skrásettur í Føroyum 27.09.01.

Av skrivliga tilfarinum, sum Fiskivinnustovan hevur í málinum sæst ikki, hvør hevur borið Skipaskrásetingini frumritið av ræðisavmarkingini 06.08.01.

Í sambandi við sjálva ræðisavmarkingina skal annars vera víst á, at hóast talan er um ein standardtekst, so er ræðisavmarkingin ikki eitt skjal, sum Fiskivinnustovan hevur sent til undirskrivingar. Hetta sæst m.a. av, at einki prentað journalnummar er á skjalinum.

Somuleiðis er einki skrásett í journalskipanini um, at Fiski-

vinnustovan hevur móttikið frumrit av ræðisavmarkingini. Hetta verður nevnt, tí vanlig mannagongd í málum sum hesum er, at Fiskimálastýrið sendir frumritið av váttan um ræðisavmarking til umsøkjarar at undirskriva, saman við tilsøgnum um loyvi at flyta fiskirættindi verður send. Umsøkjarar verða bidnir um at senda undirskrivaðu váttanina aftur til Fiskivinnustovuna, sum síðani meldar hana til skrásetingina.

Í hesum føri fær Fiskivinnustovan ikki frumritið av váttan um ræðisavmarking fyri (S1) fyrrenn Skipaskrásetingin sendir hana saman við fráboðan frá 17.08.01 um, at hon er skrásett."

...

Viðheft viðmerkingunum frá Fiskimálastýrinum varð eitt yvirlit yvir gongdina í málinum um (S2) og (S1). Sambært hesum yvirliti varð (S2) skrásettur í Føroya Skipaskráseting tann 27. september, og fiskiloyvi skrivað farinum tann 3. oktober 2001.

Viðmerkingarnar frá Fiskimálastýrinum vóru sendar klagaranum til ummælis, og við skrivi, dagfest 21. jan. 2002 gjørdi klagarin m.a. hesar viðmerkingar:

...

„Her er nógv at tríva í fyrst til nakrar ivaspurningar t.d er **Fiskimálastýrið ikki høvuðsavgreiðslan?**

Og teir stovnar í hoyra til henda høvuðsstovn eru **Fiskivinnustovan og somuleiðis Føroya Skipaskráseting ikki undirlagdir hesum sama høvuðsstovni ?**

Tá ið vit koma við hesum spurnarteknum so sær út frá (C) at hetta **er ikki so.**

**Lat eitt vera greitt** samskifti ímillum Fiskimálastýrið og (Adv. 1) vegna (B) og somuleiðis Fiskimálastýrið og (A) er fari alt, sum tað er, fyrst ígjøgnum høvuðsdyrnar síðan til undirstovnarnar hesum viðvíkjandi.

Og eisini vilja vit gera vart við tað, sum nú kemur fram frá sjálvum (C) at hetta skjal sum eitur ræðisavmarkingin tykist ikki vera fullfíggja og hetta legði man til merkis ikki fyrr eftir at fingið var til vega um alment innlit í septembur mánað í fjør, at hvørki dagsett ei heldur J.nr var ásett á hesa nevndu ræðisavmarking.

Løgtingsins Umboðsmaður verður hervið biðin um at halda okkum til góðar fyri okkara afturhaldni í hesum.

Og fara vit til Fiskimálastýrins orðingar hesum viðvíkjandi sum eru heldur ræðandi og mótsigandi sær sjálvum í hesum viðurskiftun verður hervið endurgivið **„Málið byrjaði tann 13 juni 2001, tá Fiskivinnustovan fekk telefaksbræv frá (Adv.1), har hann fyri (B) søkti um innflutningsloyvi til útróðrabátin (S2) úr Noreg og um at flyta veiðu og fiskiloyvi hjá (S1) yvir til innflutta bátin. Við í umsóknini fylgdi ymiskt tilfar m.a avrit av eini váttan um ræðismarking undirskriva av eigarinum av (S1).** og víðari verður sagt endurgivið **„Niðurstøðan var, at grundarlag var fyri at ganga umsóknini á møti og umsøkjarin fekk tilsøgn um hetta tann 15 juni 2001.“** Víðari verður sagt eisini endurgivið **„Lagt kann verða afturat, at Fiskivinnustovan ikki fekk áheitan um at skriva innflutta bátinum loyvini.**

**Partarnir hava heldur ikki gjørt vart við, at orðingarnar í tilsøgnini frá 15 juni 2001 ikki vóru nøktandi** „Hartil er at viðmerkja frá (A) síðu, fekk ikki hetta skriv fyrr enn vit bóðu um alment innlit hesum viðvíkjandi og harvið ongin atfinning, sjálvs-sagt frá okkara síðu, ein heldur løgin atburður vilja vit meina, við at ikki senda uppruna loyvishavarinum hetta sama skriv. Vit vilja endurgeva meir frá Fiskimálastýrins síðu har teir siga soljóðandi **„Av skrivliga tilfarinum, sum Fiskivinnustovan hevur í málinum sæst ikki, hvør hevur borið Skipaskrásetingini frumritið av ræðisavmarkingini tann 6 aug 2001.“** Heilt ótrúðligt enn einfer kemur undan kavi at her er lítið eftirlit við øllum og sera løgið tí henda ræðisavmarkingin verður send til Fiskimálastýrið 17 aug 2001, sum innkom til skipaskrásetingina tann 6 aug 2001 dagbóka nr. 323 hvørs tilmeldarans navn er Fiskimálastýrið 100 Tórshavn ífylgi viðheft uppí J. nr 20000914-5/ 1100-115. Vit fara enn einafer at endurgeva hvat Fiskimálastýrið sigur um hetta sama skjal **„Í samband við sjálva ræðisavmarkingina skal annars vera víst á, at hóast talan er um ein standardtekst, so er ræðisavmarkingin ikki eitt skjal, sum Fiskivinnustovan hevur sent til undirskrivingar. Hetta sæst m.a av, at einki prentað journalnummar er á skjalinum“** Henda staðfesting frá (C) er sera ræðandi og enn verri hetta skjal verður nýtt sum endaligt prógv

til upptøku, hví góðkenna teir so hetta skjal og verri er, at hesin sami uppruna loyvishavarin hevur ógilda hesa somu ræðisavmarking sum einki virðið hevur av nøkrum slag tað hevur (C) sjálvur staðfest. Vit fara enn einafer at endurgeva haldi okkum til góðar, men hetta er neyðugt
**„Málið byrjaði tann 13 juni 2001, tá ið Fiskivinnustovan fekk telefaksbræv frá (Adv. 1), har hann fyri (B) søkti um innflutningloyvi til útróðrabátin (S2) úr Noreg og loyvi at flyta veiðu og fiskiloyvi hjá (S1) yvir á innflutta bátin. Við í umsóknini fylgdi ymiskt tilfar m.a avrit av eini váttan um ræðisavmarking, undirskrivað av eigarinum av (S1) dagsett hin 30 maj 2001 sum yvirhøvir ikki er dagsett.** “ Við hesi endurgevan fyri aðru ferð tykist henda umrødda *ræðisavmarkanin* í veruleikanum einki virði hava yvirhøvur, skal hetta skiljast sum *skjalafalsan* sum (C) ber fram og siga teir ikki soleiðis vit endurgeva **„Í hesum føri fær Fiskivinnustovan ikki frumritið av váttan um ræðisavmarking** (hetta er tað sama skjali tosan er um allan vegin ígjøgnum sum teir nevna frumrit/avrit) hevur **Fiskimálastýrið** sign. av (D) vátta tilsøgn og somuleiðis **Fiskivinnustovan** sign av (E) og til seinast endaliga vátta av **Skipskráseting Føroya** sign. ? tí ikki stendur greitt hvør hevur sign. í hesum føri, men tað broytir onki hesum viðvíkjandi, tí hetta skjal fer ígjøgnum heilar tríggjar mynduleikar uttan at nakar eygar hvørki manglandi dato ei heldur J.nr. Tað sum hevði verið meir nágreiniligt og eftirfarandi var um Fiskimálastýrið kravdi at skriva út ein nýggja ræðisavmarkan við **journal nummari og somuleiðis dagsdato** til undirskrift fyri at hetta skjal hevði tað veruliga trúvirðið, sum teir sjálvir vilja vera við hesum viðvíkjandi.

Til restina sum verður nevnt av (C), hevur einki við hetta at gera, men vil viðkomandi heldur til einkis gera hesa viðgerð og sum ikki krevur nakra viðmerking yvirhøvur frá okkara síðu.

Lat okkum fara til lógir hesum viðvíkjandi.
Lógin um vinnuligan fiskiskap § 8 stk 4. (eitt brot) „kann landsstýrismaðurin eftir umsøkn veita eigarinum tilsøgn um veiðuloyvi til annað fiskifar ístaðin, sum skal verða skrásett í skipaskránni innan 2 ár frá tí degi, at tilsøgnin er givin.“

Vit halda áfram hesu fer burturúr Skrásetingar lógini B skráseting av rættindum.

§ 35 1.) (eitt brot) „Innihaldi í skjali, sum verður umbiðið at skráseta skal vera endalig fastsett“

§ 36 1.) „Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann fyriseta gjøllari reglur, hvat krevjast skal sum prógv fyri eyðkenni og mynduleika hjá útgevera, fyri rættleikan av skjølum og fyriløgdum próvførslum, hvussu skjøl skulu síggja út og hvussu mikið skal fylgja við av eftirskjølum ella fotokopi av skjølum, sum meldast til ella verða fyrivíst skrásetingini.“

§ 37 stk 2. „Um so er, at skjal ikki heldur treytirnar í § 32-36 fyri skráseting, skal tað vísast aftur.“

§ 37 stk.3 „Um so er at okkurt vantar, sum ætlast at kunna fáast í lag, kann skipaskrásetingin tó fyriseta freist at útvega tørvandi próvførslu, at skráseting kann fara fram, soleiðis at burturvísing verður ikki gjørd, fyrr enn freistin er úti og próvførslan ikki komin til tað tíð.“

Við hesum nevndu paragrafum í her eru nevndar so hevði einki og vit siga einki veri til hindurs ella ímót, at gingið á møti við okkara ógildiskrav av hesari nevndu ræðis avmarking tann 17 juli 2001. Man kundi hildi áfram, men tað nýtist ikki tí her er framt ikki bara umsitingar feilir, men so sanniliga lógarbrot eingin ivi um tað og tykist sum um Landsstýrismálanevndin hevur avgreitt hetta í so skjótt við at beina hetta til Løgtingsins Umboðsmann innan eina vika frá móttøku.

So vit fara eisini, somuleiðis sum (C), at taka saman um hvat er farið fram hesum viðvíkjandi, við viðmerkingum.
*Undirskriva verður sáttmáli ímillum (A) og (B) viðlagt eini ræðisavmarkan uttan einum journal nummari frá Fiskimálastýrinum (stendur ovast til høgru á sama skjalið) tann 30 maj 2001 sum ikki stendur á dagsett men er vátta at so er meir enn einafer av sjálvum Fiskimálastýrinum tann 15 juni 2001 og eftir tað dagsdato.*

(B) við (Adv. 1) senda hesa avtalu til Fiskimálastýrið tann 13 juni 2001.

Fiskimálastýrið váttar tilsøgn til hesa umsøkn frá (B) tann 15

juni 2001. (Hetta er treytað av, at eigarin av (S1) við eini ræðisavmarking uttan einum journal nummari váttar fyri hesum). Hetta er í sær sjálvum er heilt ótrúligt men men ikki nokk við tað tí einki skriv kemur til uppruna loyvishavarinum í hendi viðvíkjandi hesi tilsøgn.

*(A) sendur faksskriv til Fiskimálastýri att. Fiskivinnustovuna um at ógilda hesa nevndu ræðisavmarking tann 17 juli 2001 vegna avtalubrot (sum í veruleikanum ikki er ein fullfíggja ræðisavmarkan, tí einki journal nummar er til steðar tað er so komið fram nú aftaná).*

Fiskimálastýrið sendur svar til (A) tann 28 aug 2001 nakað seint siga teir sjálvir og skyldast hetta m.a summar frítíð osv. tað við lít frá okkara síðu vilja vit meina, nei heldur er orsøkin tann, at ivamál er komin í hesi avgerð (tí henda avmarking hvørki er verulig og ei heldur skrásett) Og siga har at teir vilja ikki leggja seg út í avtalur partanna millum viðvíkjandi hesum (uttan at hava nakra skrivliga staðfestan um avtalubrot er fari fram ella ikki) Tað er í hvussu so er ikki ífylgi alment innlit, sum (A) hevur fingi til vega frá Fiskimálastýrinum og kemur eitt skjal fram nú (fyri hetta tíðarskeið frá 15 juni til og við 4 sept 2001) so hava teir beinleiðis sagt órætt yvir fyri okkum. Tað kann Løgtingsins Umboðsmaður eisini staðfesta við teim skjølum vit hava útflýggja.

So til seinast kemur nakað fram um hvussu og hvat er farið fram hesum viðvíkjandi eftir hetta ífylgi (C) tað tykist sum um teir hava miskilt okkurt, tí talan snýr seg um teirra avgerð eftir 17 juli 2001 og til 28 aug 2001 tað stendur rimmar fast.

So til seinast er tað ófrávíkjiligt okkara niðurstøða út frá tí seinasta frágreiðing sum Fiskimálastýrið hevur útgivið her, er fari fram ein tvinga yvirtøka av ræðisrættinum av teimum uppruna loyvum hoyrandi til (S1) hvørs eigari er (A) sum verður gjørd uppá ófullfíggjað ræðisavmarking sum grundstøðið og hóast Fiskimálastýrið fær skriv um at ógilda hesa ræðisavmarking (uttan journal nummari og dato) verður tað ikki gingið á møti.“

...

Í einum ískoytisskrivi, dagfest 23. jan. 2002 kemur (A) m.a. við hesum viðmerkingum:

> ...
>
> „Teir í Fiskimálastýrinum siga seg ikki vera komin við hesari ræðisváttan hóast tað stendur ovast til høgru „Navn tilmeldarans: Fiskimálastýrið 100 Tórshavn" og siga samstundis ikki vita hvør hevur latið hetta skjal inn til Skipaskráseting Føroya."
>
> ...

Viðmerkingarnar frá (A) vóru sendar Fiskimálastýrinum til ummælis, og er stýrið við skrivi, dagfest 11. febr. 2002 komið við hesum viðmerkingum:

> ...
>
> „Fiskimálastýrið hevur ikki so nógv at leggja afturat frágreiðingini og viðmerkingum í skrivinum til Umboðsmannin frá 10. januar 2002.
>
> Niðan fyri eru viðmerkingar til nakað av tí, ið verður sagt í skrivinum frá (A), dagfest 21. januar 2002, sum Fiskimálastýrið heldur hevur týdning fyri klaguna til Umboðsmannin — í hvussu so er óbeinleiðis:
>
> - Í eftirtíð kann Fiskimálastýrið ásanna, at tað kanska hevði verið skilagott at sent upprunaliga loyvishavarinum avrit av skrivinum, sum veitti (B) innflutningsloyvi og at flyta loyvini hjá (S1) á innflutta bátin. Men sæð í bakspegilinum dugir Fiskimálastýrið ikki at síggja, at tað er „løgin atburður" ikki at gera tað. Fatanin hjá Fiskimálastýrinum var, at partarnir høvdu undirskrivað keypssáttmála, sum bar í sær, at veiðurættindini hjá (S1) vórðu latin eigarinum av (S2) at ráa yvir. Somuleiðis fekk Fiskimálastýrið um hálvan juni 2001 avrit av váttan um ræðisavmarking, sum (A) hevði undirskrivað. Undir hesum umstøðum varð roknað við, at viðurskiftini vóru í lagi, og at tað var nóg mikið at samskifta við advokatin hjá keyparinum, (Adv. 1), og at hesin kunnaði partarnar um, hvat hendi í málinum.
> - Fiskimálastýrið hevur ongantíð sagt, at váttanin um ræðisavmarking einki virði hevur, tí journalnr. manglar. Í skrivinum frá 10. januar 2001 varð vantandi journal nr. nevnt fyri at vísa

á, at talan ikki var um eitt skjal, ið Fiskimálastýrið hevði sent til undirskrivingar.

- Viðvíkjandi dagfesting kann bert staðfestast, at ræðisavmarkingin, sum Fiskimálastýrið fekk avrit av 12. juni 2001, og frumskjalið, sum Fiskimálastýrið fekk frá Føroya Skipaskráseting 17. august 2001 er dagfest 30. mai 2001.
- Hóast Fiskimálastýrið stendur sum tilmeldari av ræðisavmarkingini, so sæst ikki av skrivliga tilfarinum, sum Fiskimálastýrið hevur í málinum, hvør hevur borið Skrásetingini ræðisavmarkingina.
- Í skrivinum frá (A) verður víst til § 8, stk. 4, í lógini um vinnuligan fiskiskap. Fiskimálastýrið dugir ikki at síggja, hvønn týdning henda lógargrein hevur fyri hetta málið

Lagt kann vera afturat, at Fiskimálastýrið ikki fer at gera viðmerkingar til ákærurnar í skrivinum frá (A) um „skjalafalsan“, „lógarbrot“ og um at hava„beinleiðis sagt órætt“, eitt nú tí, at grundgevingarnar fyri hesum og samanhangurin tær eru settar fram í, er so ógreiður.“

Skrivið frá Fiskimálastýrinum varð sent klagaranum til ummælis, og við skrivi, dagfest 24. februar 2002, kom hann við hesum viðmerkingum:

„Vit fara hervið gera okkara viðmerkingar somuleiðis niðurstøður hesum viðvíkjandi og leggjast skal til frá okkara síðu, at hetta skriv verður tað síðsta frá okkum viðvíkjandi hesum máli, um so er at Løgtingsins Umboðsmaður fær enn eitt skriv frá Fiskimálastýrinum sum svar uppá okkara skriv, so vinarliga útflýggja okkum tað.

Fyrst av øllum hava vit lagt til merkis, at (C) hevur onga viðmerking til tað seinra brævi tann 23 jan 2002. Og eisini hava vit lagt til merkis, at hesin sami (C) vísir ikki á nakrar lógir, sum hava við slíkt at gera á jú einfer § 7 úr „Lógini um vinnuligan fiskiskap“ halt okkum til góðar, hví slíkt afturhaldni við lógum, tá ið teir frá Fiskimálastýrinum hava fari fram á slíkan hátt mótvegis (A) higartil.

Læt okkum sláa fast lógir eru til hesum viðvíkjandi „Lógin um vinnuligan fiskiskap“ naka væl meir enn teir í Fiskimálastýrinum vilja vera við og hvat við løgtingslóg nr. 9 fra 5 mars 1970 um skráseting av skipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 23 mei 1997 uppdeilt í tríggjar bólkar Skráseting av skipum/ skráseting í farskránni/almennar reglur. Og løgtingslógin um ábyrgd landsstýrismanna nr. 90 frá 4 juni 1996 við broyting við løgtingslóg nr. 131 frá 3 dec. 1996. Vit kunna óiva koma fram á meir lógir hesum við víkjandi, men her er ein trupuleiki ífylgi aðalstjóranum sjálvum citat **„Í skrivinum frá (A) verður víst til § 8 stk 4, í lógini um vinnuligan fiskiskap. Fiskimálastýrið dugir ikki at síggja, hvønn týdning henda lógargrein hevur fyri hetta málið.“** Men kanska er (C) ikki greiðir yvir at persónar, feløg og so sanniliga tað útinnandi valdi eru løgd undir tær lógir í galda hesum viðvíkjandi tað skal vera eftirfylgt. Ikki hvat siðvenja, vanlig mannagongd ella søguligur framferða háttur.

Lat okkum so fara til lógir hesum málið viðvíkjandi vit endurgeva sum (C) sigur **„Í eftirtíð kann Fiskimálastýrið ásanna, at tað kanska hevði verið skilagott at sent upprunaliga loyvishavarinum avrit av skrivinum,“**

Hvør er upprunaloyvishavarin hetta tíðarskeiðið frá 15 juni og fram eftir? Har kunnu vit vátta ífylgið Fiskiveiðieftirlitinum, ein uppgerð, av hvat okkara loyvi hevði eftir av fiskidøgum tann 29 aug 2001.

Hví senda hesa uppgerð til okkum, tá ið ífylgi Fiskimálastýrið sigur at (A) hevur fráskriva sær hesi somu rættindir. Hvat sigur lógin um vinnuligan fiskiskap hesum viðvíkjandi. *§ 8 stk. 4 kann landstýrismaðurin eftir umsøkn veita eigarinum tilsøgn um veiðiloyvi til annað fiskifar ístaðin.* Bert fyri at minna á hvør er upprunaloyvishavarin í hesum tíðaskeiðið, so hatta orði **skilagott** er ikki so skilagott hóast alt og okkara egna viðmerking løgin atburður er óneyðugt orð í hesum samanhangi har geva vit (C) rætt.

**„Fiskimálastýrið hevur ongantíð sagt, at váttanin um ræðismarking einki virði hevur tí journal nr. manglar“** hvat sigur lógin B. Skráseting av rættinum § 36 *„Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann fyriseta gjøllari reglur, hvat skal krevjast sum prógv fyri eyðkenni og mynduleika hjá útgevara,* „hvar er henda

váttan frá Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, sum gevur tí persóni/felag at skriva hesa ræðisavmarking, ífylgi (C) so er henda nevnda ræðisavmarking ikki útskriva frá Fiskimálastýrinum/Fiskivinnustovuni? Tí havandi í huga so hevur (C) sjálvur sagt „ **tí vanlig mannagongd í málum sum hesum er, at Fiskimálastýrið sendir frumritið av váttan um ræðisavmarking til umsøkjara at undirskriva, saman við tilsøgnum um loyvi at flyta fiskirættindir verður send. Umsøkjarar verða bidnir um at senda undirskrivaðu váttanina aftur til Fiskivinnustovuna, sum síðan meldar hana til skrásetingina.** Tað sum her meinast við vanlig mannagongd, er lógarfest mannagongd og umsøkjarar meinast við upprunaloyvis havari/ar søkja vegna hann/teir í skulu yvirtaka hesið rættindi, tí alt annað kann ikki góðtakast ífylgi lógini hesum viðvíkjandi.

Vit kunnu eisini endurgeva hvat lógin um ábyrgd landsstýrismanna sigur.

§ 2 og landsstýrismenn hava ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra.

§ 4 Tá reglurnar í borgarligu revsilógini um medvirkni til eitt lógarbrot verða nýttar, skal løgmaður ella landsstýrismaður verða mettur at hava medvirkað til gerðina hjá einum undirmanni, tá stk. 1, hann hevur verið vitandi um, at gerðin fór at verða framd, og hann hann hevur latið vera við at royna at forða hesum.

stk. 2, gerðin hevur verið eitt neyðugt ella natúrligt miðal til at seta í verk eina avgerð, sum løgmaður ella landsstýrismaður hevur ábyrgdina av,

stk. 3, hann, við ikki í rímiligan mun at hava ført eftirlit og ásett reglur, hevur virkað fyri, at gerðin er vorðin framd.

§ *5 ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært lógtinslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihald hansara.*

Hetta er enn meir ræðandi og skelkandi enn áður hildið, hesum viðvíkjandi hvussu tilvildarligt alt er farið fram hesum viðvíkjandi, frá byrjan av heilt ótrúligt aðra viðmerking kann man ikki koma fram á í núverandi støðu.

Tað sum vit enn einafer bert kunnu staðfesta so dyggiliga er, at

her er farin ein tvinga yvirtøka av ræðisrættindum hjá (S1) „hvørs eigari er (A). Og tað fara vit ikki lata fara aftur við borðinum tað skal man gera sær greitt.

Hervið fara vit at enda okkara ummæli/viðmerkingar hesum viðvíkjandi og sum sagt áður vit gevast við hesum skrivi, sum tað síðsta til Fiskimálastýri umvegis Løgtingsins Umboðsmann, men um so er, at Fiskimálastýri sendir eitt svar til Løgtinsins Umboðsmann, so fara vit vinarliga at heita á tykkum um at útflyggja okkum hetta svar/skriv."

...

Skrivið frá klagaranum varð sent Fiskimálastýrinum til ummælis, sum við skrivi dagfest 12. mars 2002, m.a. hevði hesar viðmerkingar:

...

„Fiskimálastýrið hevur latið sínar viðmerkingar fyrst í svarskrivum dagsett hin 10. januar 2002 og 11. februar 2002. Hesar grundgevingar og viðmerkingar standa við tó soleiðis, at um gongdina í málinum skal verða lagt aftrat, at hóast mannagongdin við at lata inn váttan um ræðisavmarkingar til Skipaskránna vanliga fer fram á tann hátt, at tann av Fiskimálastýrinum ætlaða ræðisavmarking verður latin umsøkjaranum at fylla út og at senda inn aftur, fyri síðani av Fisimálastýrinum sum tilmeldari at vera latin Skrásetingini, so forðar hetta ikki fyri, at ein advokatur vegna partarnar letur ræðisavmarkingina beinleiðis til Skipaskrásetingina. Henda mannagongd hevur eisini verið góðtikin og serstakliga, tá fráboðanin er latin Fiskivinnustovuni frammanundan. Hjálagt er avrit av fylgiskrivi frá (Adv. 1) dagsett 6. august 2001. Men hetta skriv var ikki tókt fyri starvsfólkunum í Fiskimálastýrinum (Fiskivinnustovuni), sum annars høvdu málsviðgerðina av málinum um hendi. Eisini kann verða lagt aftrat, at (Adv. 1), advokatur, hevur í fleiri ár starvast á Fiskivinnustovuni og eisini fyrisiti Skipaskrásetingina. Høvuðsinnihaldið í váttanini um ræðisavmarking, sum hevur verið nýtt í hesum máli, er tað sama, sum brúkt verður í dag.

Eftirsum hetta mál hevur verið kært til Løgtingsins Umboðsmann, til Landsstýrismálanevndina og løgmaður er eisini nevndur, so hevur Fiskimálastýrið roynt at avdúka málið so gjølla sum

gjørligt, og hevur í hesum sambandi roynt at fáa partarnar í málinum at seta seg niður fyri at tosa um tað, sum farið er fram. Eisini hevur stýrið roynt at finna fram til, um partarnir, sum gjørdu avtaluna 30. mai 2001, hava ætlanir um at gjøgnumføra hana hóast tær seinkingar, sum hava verið í verkætlanini við at flyta Viksund bátin til Føroya.

Til tess at røkka hesum hevur Fiskimálastýrið fingið váttað, at partar av avtaluni eru hildnar, og at tann trygdin, sum skuldi útgjaldast (A), er útgoldin.

Fiskimálastýrið hevur ta áskoðan, at málið er sera álvarsamt og kann tykjast sum ein tilætlað roynd at varðveita 2 bátar í skipanini.

Fiskimálastýrið fer at kanna málið víðari og verður við hesum víst til nýggjar upplýsingar í málinum sambært hjáløgdu fundarfrásøgn."

Nevnda fundarfrásøgn var frá einum fundi tann 5. mars 2002 millum (A) og umboð fyri Fiskimálastýrið. Sambært frásøgnini upplýsti (A) á fundinum, at einki var goldið, fyrr enn ein bankatrygd stór NKR. 200.000, sum advokaturin hjá keyparanum, (Adv. 1), hevði í hondum, varð loyst eftir tógvi stríð gjøgnum (Adv. 3). Av hesari upphædd hevði (A) fingið útgoldið umleið DKR. 150.000.

(A) hevur boðað umboðsmanninum frá, at hann ikki ynskti at gera fleiri viðmerkingar til hetta málið, sum tí er tikið upp til endaliga viðgerð.

Tá (A) tann 18. mars 2002 ringdi til skrivstovuna hjá umboðsmanninum, varð hann spurdur um, hvussu tað bar til, at sambært frágreiðing hansara til umboðsmannin var talan um sølu av loyvinum hjá (S1), men at tað sambært bløðunum: Oyggjatíðindi og Dimmalætting var talan um eina leiguavtalu. Uppá fyrispurningin greiddi (A) frá, at talan upprunaliga var um eina søluavtalu, men at hendan seinni varð broytt til eina leiguavtalu. Seinni sama dag kom (A) framvið við einum avriti av einari avtalu, ið er soljóðandi:

AVTALA.
Millum undirritaða:
Upprunaeigara av veiði og fiskiloyvi (A) og nýtslutakara (B).

1. Partarnir eru samdir um, at tann núverandi eigari (A) gevur hervið (B) loyvið til nýtslu av veiði / og fiskiloyvið mótvegis einum gjaldi, hvarí upphæddin fyri veiðiloyvið er kr. 200.000 og 100 fiskidagar áljóandi kr. 1.500,- pr. dag ella til 1. marts 2002. Frá 1. marts fellur bæði veiðiloyvið og fiskiloyvið aftur til (A).
2. Um avtalugrundarlagi ikki verur yvirhildi, við eitt nú rætt-stundis inngjaldan fellur avtalan burtur.
3. Tá (B) hevur fingi vátta hesa avtalu góðkenda frá fiskimála-stýrinum verur upphæddin áljóðandi kr. 200.000,- at flyta til: ... konto no. ...
4. Avtalan kemur í gildið umleið 25. juni 2001.
5. Gjald fyri fiskidagar fellur 1. í hvørjum mána. Við fyrsta gjald 1.august 2001. Til konto no. ...

Dato: 1. juni 2001 1/6-2001
(A)(sign.) (B)(sign.)

Tann 25. mars 2002 hevur umboðsmaðurin frá (A) móttikið soljóð-andi avrit av einum skrivi, dagfest 6. november 2002 frá (Adv. 3) til klagaran:

„Vit hava nú móttikið original bankgaranti, sum vit hava sent aftur til kreditkassan í Noreg.

Fortreytirnar fyri útgjalding av garantiupphæddini eru hereftir loknar.

Málið viðv. bankatrygdini verður hereftir avroknað, so sum niðanfyri tilskilað:

Inngjald frá Kreditkassen Nkr. 200.000 = Dkr. 186.200,00

Vit hava lagt út í stevningsgjaldi á dómaraskrivstovuni tykkara vegna:

...

Saldo til útgjaldingar: **Dkr. 175.335,00**

Sum dags dato er flutt á konto tykkara í Føroya Banka kt. nr.

Tit frætta annars nærri tá nakað nýtt fyriliggur í sakini.“

Tann 25. mars 2002 hevur umboðsmaðurin havt eina telefonsamrøðu við (Adv. 3) sum váttaði, at upphæddin, sum nevnd er í skrivinum, snúði seg um eina trygd, sum var sett í sambandi við flutning av veiðuloyvinum hjá klagaranum til ein innfluttan bát. Nevnda upphædd var partur av samlaða gjaldinum fyri veiðuloyvið, og at (Adv. 3) skuldi krevja restina inn. Hann hevði tí skrivað stevning, sum varð latin rættinum, men seinni tikin aftur eftir boðum frá (A).

Tann 25. mars 2002 hevur umboðsmaðurin í telefonini eisini tosað við Skipaskrásetingina um mannagongdina viðvíkjandi skrásetingum av ræðisavmarkingum. Skipaskrásetingin upplýsti, at Fiskimálastýrið altíð, ella at kalla altíð, stendur sum tilmeldari av skjølum viðvíkjandi ræðisavmarkingum. Hetta merkir tó ikki, at tað í øllum førum er Fiskimálastýrið sjálvt, sum letur skjølini inn til skrásetingar. Tað kann eins væl vera ein advokatur ella partarnir sjálvir.

## *Niðurstøða*

*Sum fráboðað bæði Fiskimálastýrinum og (A), snýr viðgerðin hjá umboðsmanninum av hesum málinum seg einans um leiklutin hjá Fiskimálastýrinum í sambandi við, at (A) afturkallaði ræðisavmarkingina og í tí sambandi bað Fiskimálastýrið um at ógilda hesa.*

*Hóast tað má leggjast til grund, at tað ikki er Fiskimálastýrið, sum hevur latið skjalið um ræðisavmarkingina inn til Skipaskrásetingina til skrásetingar á blaðið hjá (S1), so var stýrið við skrivinum, dagfest 13. juni 2001, frá (Adv. 1) vitandi um, at eitt skjal um ræðisavmarking varð sett upp og undirskrivað. Tá stýrið tann 17. juli 2001 fekk telefaksskrivið frá klagaranum, visti tað, at ræðisavmarkingin varð undirskrivað, og at klagarin ynskti at taka hana aftur við teirri grundgeving, at avtalan millum keypara og seljara ikki varð hildin. Stýrið átti tí beinanvegin at havt tikið stig til, at ræðisavmarkingin ikki varð latin inn til skrásetingar, og um hetta longu var gjørt, at roynt at kalla hana aftur. Hetta hevði stýrið rætt til av tí, at stýrið stóð sum tilmeldari av skjalinum.*

*Umberingin hjá Fiskimálastýrinum um, at tað var fyri ikki at leggja seg út í viðurskiftini hjá pørtunum, at tað bar seg at, sum tað gjørdi, kann als ikki góðtakast. Júst við at leggjast á boðini frá klagaranum um*

*afturkallingina av ræðisavmarkingini, hevur Fiskimálastýrið lagt seg út í hesi viðurskifti.*

*Spurningin um avtaluviðurskiftini millum partarnar mugu teir sjálvir greiða antin í semju ella við rættaravgerð. Skrásetingin av ræðisavmarkingini átti tí ikki at verið framd, fyrr enn hesi viðurskifti vóru avklárað. Í hesum sambandi verður eisini víst til § 37 jbr. § 35 í lógini um skráseting av skipum.*

*Í skrivi Fiskimálastýrisins frá 10. januar 2002 verður m.a. ført fram:*

...

- *„Skrivið frá Fiskimálastýrinum 15.06.01 var eisini ein tilsøgn um veiðuloyvi og fiskiloyvi, treytað av, at ásetingarnar í § 8 í lógini vóru loknar. Ein av hesum treytum var, at (S1) varð tikin úr vinnuligum fiskiskapi. Hetta var longu gjørt við, tað at eigarin av bátinum undirskrivaði váttan um ræðisavmarking tann 30.05.01. Av tí at hinar treytirnar vóru loknar, er niðurstøðan hjá Fiskivinnustovuni, at (S2) longu hevði veiðuloyvi og fiskiloyvi, tá keypssáttmálin og ræðisavmarkingin vórðu undirskrivað.“ (mín undirstriking)*

...

*Henda uppfatan, sum her tykist at koma til sjóndar, er beinleiðis í stríð við § 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap, tí eftir hesi grein er tað ikki nóg mikið at ein váttan um ræðisavmarking verður undirskrivað; men hon skal eisini vera skrásett í skipaskránni fyri at kunna vera grundarlag undir flyting av veiðuloyvi frá einum fari yvir á annað. Skrivið frá Fiskimálastýrinum, dagfest 15. juni 2001, til (Adv. 1), átti tí at havt verið orðað samsvarandi lógini. Tað skal tó ásannast, at tað verður tilskilað í skrivinum, at váttanin verður at skriva á skipsblaðið hjá farinum í føroysku skipaskránni. Men einki er nevnt um rættarvirkningin av, um hetta verður gjørt ella ikki.*

*Av tí, at skráseting av ræðisavmarkingini er ein fortreyt fyri at flyta veiðuloyvið frá báti klagarans til innflutta farið, er tað heldur ikki hald í sjónarmiðinum hjá Fiskimálastýrinum um, at vandi var fyri, at bæði førini fingu veiðuloyvi, um ræðisavmarkingin ikki varð skrásett. Hetta tí, at so leingi ræðisavmarkingin ikki var skrásett, kundi innflutta farið sambært lógini um vinnuligan fiskiskap ikki fáa nakað veiðuloyvi.*

*Sum nevnt er tað uppfatanin hjá umboðsmanninum, at Fiskimála-*

*stýrið beinanvegin, tá tað tann 17. juli 2001 fekk skrivið frá klagaranum um afturkalling av avtaluni og ræðisavmarkingini, átti at havt tikið stig til at forða fyri, at ræðisavmarkingin varð skrásett, til viðurskiftini partanna millum vóru avklárað, og gevi eg tí Fiskimálastýrinum eina átalu fyri sín leiklut í hesum sambandi.*

*Burtursæð frá hesum og av tí, at hvørki Fiskimálastýrið ella umboðsmaðurin kunnu leggja seg út í sáttmálaviðurskiftini millum seljara og keypara av umrødda veiðuloyvi, verður ikki gjørt meira við málið hiðani.*

# 27. Undirvísing, Gransking v.m.

## 27.1. Klaga viðvíkjandi skúlanum á Trøllanesi – Skyldan at lýsa mál

Bygdaráðið fyri Mikladals kommunu, ið eisini umfatar bygdina Trøllanes, gjørdi í november 2000 av, at skúlin á Trøllanesi, ið hevði staðið tómur síðani 1988, skuldi lata uppaftur við skúlaárs byrjan 2001/2002. Í januar 2001 tók eitt nývalt bygdaráð hesa samtyktina av, og gjørdi av, at skúlin á Trøllanesi kortini ikki skuldi opna aftur. Foreldur á Trøllanesi vendu sær síðani til Mentamálastýrið, og táverandi landsstýrismaður í mentamálum gjørdi av, at skúlin skuldi opna aftur í august 2001. Mentamálastýrið tók hesa avgerð aftur tann 24. august 2001. Foreldrini klagaðu síðani til Kommunudeildina á Løgmansskrivstovuni, ið kom til ta niðurstøðu, at fundurin um at broyta fyrru samtyktina hevði verið lógligur, og at kommunustýrið ikki var farið út um sínar heimildir. Spurningurin, um tað var lógligt at leggja skúlan niður uttan fólkaatkvøðu sambært § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini, varð lagdur fyri Mentamálastýrið, sum kom til ta niðurstøðu, at henda grein ikki var brotin, tí talan var ikki um ein virkandi skúla.

Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at finnast at avgerðunum hjá Løgmansskrivstovuni og Mentamálastýrinum um at avgerðin hjá kommunustýrinum var lóglig. Kortini ivaðist hann í, um landsstýrissmaðurin í mentamálum ikki hevði havt heimild til at taka avgerð um at opna skúlan aftur. Umboðsmaðurin kundi tó ikki annað enn taka undir við, at hendan avgerðin seinni varð tikin aftur, tí at málið var als ikki lýst á nøktandi hátt, áðrenn landsstýrismaðurin tók hesa avgerðina. Løgmaður hevði givið Mentamálastýrinum eina átalu fyri fyrisitingarligu mannagongdina í málinum, og hesum kundi umboðsmaðurin bert taka undir við. (J.nr. 200200007)

**Klagan**

21. jan. 2002 fekk umboðsmaðurin eina klagu frá (A1-A6). Klagan, ið er dagfest 12. jan. 2002 er soljóðandi:

„Vit undirritaðu foreldur at skúlabørnunum á Trøllanesi loyva

okkum hervið at kæra tær avgerðir, sum tiknar eru í skúlamálinum á Trøllanesi, til Løgtingsins umboðsmann.

Kæran fevnir um avgerðir hjá kommunustýrinum fyri Mikladals kommunu, um avgerðir hjá Mentamálastýrinum og avgerðir hjá Løgmansskrivstovuni (kommunala eftirlitinum).

Í skrivi dagfest 11. september 2001 sendu vit kæru til Kommunala Eftirlitið viðvíkjandi avgerð hjá nývalda kommunustýrinum fyri Mikladals kommunu um ikki at taka uppaftur skúlagongdina á Trøllanesi.

Í kæruni vístu vit á, at nývalda kommunustýrið á sínum fyrsta fundi, sum varð hildin 9. januar 2001, samtykti at strika samtyktina frá bygdaráðsfundinum 15. november 2000 um at taka skúlagongdina á Trøllanesi uppaftur frá skúlaársbyrjan 2001. Í kæruni vístu vit á, at hesin fundurin varð ikki kunngjørdur frammanundan, soleiðis sum ásetingarnar í kommunustýrislógini siga, og at samtyktir gjørdar á fundinum heldur ikki vórðu almannakunngjørdar sambært lógini.

Í kommunustýrislógini grein 13, stk. 1 stendur: „Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nærri reglur um vanligar fundir verða ásettar í fundarskipan. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.“ Og í grein 27, stk. 2 stendur: „Yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, eins og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund, skulu verða kunngjørd við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu.“

Í skrivi dagfest 14. august 2001 hevur Mikladals bygdarráð eisini vent sær til Løgmansskrivstovuna við fyrispurningi um, annaðhvørt fundurin í bygdarráðnum 9. januar 2001 var lógligur ella ikki. Í svarinum, sum er dagfest 16. august 2001, verður m.a. sagt: „Spurt verður um fyrsti fundurin í kommunustýrinum var lógligur, og harvið um samtyktir á hesum fundi eru galdandi. Víst verður á, at fundurin vegna ókunnleika til kommunustýrislógina ikki var lýstur alment.“

Svarið frá Løgmansskrivstovuni er soljóðandi: „Eftir eina ítøkiliga meting er niðurstøðan hjá Løgmansskrivstovuni, at fyrsti fundurin var lógligur. Henda meting er grundað á, at tað snýr seg um fyrsta fundin í einum nýggjum kommunustýri, har allir

limirnir vóru nývaldir, og at ásetingin bert hevði verið fylgd, um fráfarna kommunustýrið hevði ásett og almannakunngjørt nær, ið vanligu fundirnir skulu haldast." Í svarinum til okkara verður víst til hetta svarið.

Í okkara kæru til Løgmansskrivstovuna søgdu vit m.a.: „Tá undanfarna kommunustýri hevur samtykt at lata skúlan uppaftur, kann ein nýggj samtykt av nýggja kommunustýrinum ikki avtaka fyrru samtyktina, uttan so at farið verður fram eftir ásetingunum í fólkaskúlalógini við m.a. fólkaatkvøðu." Her svarar løgmansskrivstovan: „...men spurningurin um hvørt samtyktin er í samsvar við fólkaskúlalógina er málsøki, ið liggur hjá Mentamálastýrinum. Tí er hesin parturin av kæruni sendur Mentamálastýrinum til viðmerkingar, áðrenn hann verður viðgjørdur av okkum."

Í svarinum frá Mentamálastýrinum verður m.a. sagt: „Eftir Mentamálastýrisins meting er § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini ætlað sum trygd hjá foreldrum, soleiðis at skilja, at foreldur at børnum í skúlaøkinum hava lógarásettan rætt til at krevja fólkaatkvøðu, um niðurlegging av einum *virkandi* kommunuskúla, um børn teirra ganga í hesum skúlanum. Skúlin á Trøllanesi var ikki ein virkandi skúli í januar 2001, og kommunustýrið kundi tí broyta fyrru samtyktina eftir vanligu reglunum."

Men í fólkaskúlalógini stendur onki um, at tað skal vera ein *„virkandi"* skúli. Har stendur (§ 29, stk. 5*):* „Um eitt kommunustýri hevur gjørt av at leggja ein skúla niður, so skal tað verða kunngjørt í føroysku bløðunum. Um í minsta lagi 30% av teimum íbúgvum í viðkomandi skúlaumdømi, ið hava valrætt til kommunustýrið, seta fram innan ein mánaða eftir kunngerðina skrivliga áheitan um tað, so skal kommunustýrið halda atkvøðugreiðslu um at leggja skúlan niður."

Hendan møguleika hava vit foreldur at skúlabørnunum á Trøllanesi ongantíð havt. Orsøkin er heilt einfalt tann, at tað ongantíð enn er kunngjørt í føroysku bløðunum, at bygdarráðið fyri Mikladals kommunu hevur samtykt at niðurleggja skúlan á Trøllanesi. Núverandi bygdarráð hevur ikki sett nakra slíka kunngerð í føroysku bløðini, og onki av teim undanfarnu bygdarráðunum hevur gjørt tað. Ella skal niðurstøðan hjá Mentamálastýrinum skiljast soleiðis, at hvørja ferð ein bygdarskúli ikki er ein

virkandi skúli, so kann viðkomandi bygdarráð uttan um reglurnar í fólkaskúlalógini samtykkja, at skúlin verður niðurlagdur?

Vit kundu eisini hugsað okkum, at Løgtingsins umboðsmaður útgreinar, hvat orðið skúlaøki í fólkaskúlalógini fevnir um. Er Trøllanes eitt skúlaøki fyri seg ella eru Mikladalur og Trøllanes eitt og sama skúlaøki? Okkum er komið fyri oyra, at fyri nøkrum árum síðani samtykti bygdarráðið fyri Kvívíkar kommunu at niðurleggja skúlan í Leynum. Tá vóru Leynar roknað sum eitt skúlaøki fyri seg. Meira enn 30% av veljarunum í Leynum kravdu fólkaatkvøðu og meira enn 50% av veljarunum í Leynum atkvøddu ímóti, at skúlin varð niðurlagdur. Sostatt helt skúlin fram.

Ætlanin hevur altíð verið, at tá børn í skúlaaldri aftur vóru á Trøllanesi, skuldi skúlin takast í nýtslu aftur. Men av tí at skúlin ikki var í nóg góðum standi, valdi seinast sitandi bygdarráð ístaðin fyri at taka skúlan í nýtslu beinanvegin, at gera íløgur ár um ár í ábøtur á skúlan, so hann var í góðum standi, tá hann varð tikin í nýtslu aftur. Vit foreldur valdu at vera tolin og góðtóku hesa avgerð.

Av tí at bygdarráðsformaðurin í seinast sitandi bygdarráð ikki tók undir við, at skúlin varð tikin í nýtslu aftur, vóru bert fáar av ætlaðu ábótunum á skúlan framdar og avsetti peningurin tí ikki brúktur. Móti endanum á seinasta valskeiði tók ein meirluti í bygdarráðnum tí avgerð um at staðfesta, at skúlin skuldi takast í nýtslu aftur skúlaárið 2001-2002 og vónaðu, at avsetti peningurin bleiv brúktur til tær umvælingar, ið væntaðu í, fyri at skúlin kundi góðkennast av skúlamyndugleikunum.

Tað skal viðmerkjast, at fíggjarætlanin hjá Mikladals Kommunu, við ásetingini um íløgur til ábøtur á skúlan hvørt ár, vóru sendar kommunala eftirlitinum til góðkenningar, og hava hesar verið góðkendar uttan viðmerking.

Talið á skúlabørnum í bygdini er vaksið støðugt, og vit meta tað vera altavgerandi fyri trivnaðin í bygdini og fyri børnini, at skúlagongd eisini er í teirra heimliga umhvørvi.“

...

**Gongdin í málinum**
Í einum innanhýsis uppriti frá Mentamálastýrinum, dagfest 15. aug. 2001 er greitt soleiðis frá forsøguni í málinum:

> „Í Mikladals kommunu eru tveir skúlabygningar, annar í Mikladali og hin á Trøllanesi. Seinast í 80'unum var næmingagrundarlagið á Trøllanesi minkað so nógv, at í 1988 fór seinasti næmingurin úr skúlanum á Trøllanesi, og síðan hava øll skúlabørnini í Mikladals kommunu gingið í skúla í Mikladali.
>
> Seinastu árini hevur skúlabarnatalið á Trøllanesi verið í støðugum vøkstri, og skúlaárið 2001/2002 eru 8 av teimum 14 skúlabørnunum í Mikladals/Trøllanes skúla av Trøllanesi. Av teimum er eitt í 7. árg., eitt í 6. árg., tvey í 4. árg., eitt í 3. árg, eitt í 2. árg. og tvey í 1. árg.
>
> Økta barnatalið á Trøllanesi hevur havt við sær eitt ynski frá foreldrunum um at leggja ein part av skúlagongd teirra í skúlan á Trøllanesi.
>
> Í 1997 heittu foreldur á Trøllanesi á bygdaráðið um at taka skúlagongdina í skúlanum á Trøllanesi uppaftur á tann hátt, at børnini kundu ganga í skúla í báðum bygdunum aðruhvørja viku ísenn. Málið var viðgjørt í bygdaráðnum 04.07.97, men fekk ikki undirtøku. Málið var síðan viðgjørt á fundi í skúlanevndini 20.07.97, men fekk heldur ikki undirtøku her.
>
> Skúlamyndugleikarnir á staðnum tóku sostatt ikki undir við málinum um at taka skúlagongdina í skúlanum á Trøllanesi uppaftur í 1997, og hetta tók táverandi Landsskúlafyrisiting til eftirtektar."
>
> ...

Tann 2. nov. 2000 sendi (A1), sum tá var limur í kommunustýrinum fyri Mikladals kommunu, kommununi soljóðandi skriv:

„**Viðvíkjandi skúlunum í Mikladals Kommunu.**
Í sambandi við at tað fyriliggur ein kanning um útbygging av skúlanum í Mikladali, fari eg at nýta høvið til at reisa málið um skúlabygningin á Trøllanesi til støðutakan. Setið tí hervið 2 punkt undir atkvøðugreiðslu.

1. Skúlagongdin verður tikin uppaftur í skúlanum á Trøllanesi við skúlaársbyrjan 2001. Skúlin verður settur í stand og gjørdur klárur til undirvísing í verandi skúlaárið.

2. Støðutakan um at niðurleggja skúlan á Trøllanesi. Farið verður fram, sum fólkaskúlalógin ásetur.“

Tann 15. nov. 2000 var fundur í kommunustýrinum, har m.a. skrivið frá (A1) kom til viðgerðar. Í gerðarbókini stendur hesum viðvíkjandi:

...

„4. Uppskot frá (A1) um at atkvøða um at
Opna skúlan á Nesi aftur við skúlaársbyrjan av 2001.
(B) og (C) vildu ikki hava hetta mál fram aftur, mettu at tað var avgreitt í 1997. (A1), (A6) og (D) vildu hava atkvøðugreiðslu.
3 atkvøður vóru fyri at opna aftur, (B) og (C) vóru ímóti.
Støðutakan um at niðurleggja skúlan á Trøllanesi.
4 atkvøður ímóti, ein fyri.

...

6. Fíggjarætlan fyri 2001.
Fíggjarætlanin javnvigar við 925.599,-
Barnafrádráttur 3.000,-, skattaprosent 16 %
Íløgur saml. 285.000,-, kunnu møguliga flyta frá kirkjugarðinum til skúlan um hetta er neyðugt.“

...

Tann 15. nov. 2000 sendi Mentamálastýrið Mikladals kommunu soljóðandi skriv:

„**Viðvíkjandi skúlagongd í Mikladals kommunu.**
Vísandi til telefonsamrøðu við (E), skúlanevndarformann, um

málið viðvíkjandi skúlagongdini hjá børnunum í Mikladali og á Trøllanesi verður við hesum send frágreiðing um málsviðgerðina.

Í skrivi til Mikladals bygdaráð, dagfest 27. apríl 1997 heita foreldur á Trøllanesi á bygdaráðið um at taka skúlagongdina í skúlanum á Trøllanesi uppaftur. Skotið verður upp, at ein hóskandi skúlagongd fyri børnini hevði verið at gingið í skúla í báðum bygdunum aðruhvørja viku.

Málið var viðgjørt í bygdaráðnum á fundi 4. juli 1997. Undir atkvøðugreiðsluni vóru tvær atkvøður fyri, tvær ímóti og ein atkvøddi ikki. Málið fekk sostatt ikki undirtøku í bygdaráðnum.

Málið varð síðan viðgjørt í skúlanevndini á fundi 20. juli 1997 og fekk heldur ikki undirtøku her. Hetta verður boðað frá í skrivi dagfest 30. juli 1997 til táverandi landsskúlafyrisiting.

Skúlamyndugleikarnir á staðnum t.e. bygdaráð og skúlanevnd tóku sostatt ikki undir við málinum um at taka skúlagongdina í skúlanum á Trøllanesi uppaftur.

Hetta hevur táverandi landsskúlafyrisiting tikið til eftirtektar.“

Við skrivi, dagfest 20. nov. 2000 heitti (A1) á kommununa um at geva sær skrivligt svar uppá viðtøkuna frá bygdaráðsfundinum 15.11.2000 viðvíkjandi skúlanum á Trøllanesi. Hetta svar fekk (A1) við skrivi frá kommununi, dagfest 28. nov. 2000, ið endurgav tað, sum er endurgivið omanfyri úr gerðabókini hjá kommununi um fundin tann 15. november 2000. Hjálagt skrivinum var avrit av skrivinum til kommununa frá Mentamálastýrinum, dagfest 15. nov. 2000.

Við skrivi, dagfest 18. des. 2000 heittu foreldrini á skúlanevndina í Mikladals kommunu um fund í skúlanum á Trøllanesi at fáa í lag eitt orðaskifti millum teirra og skúlanevndina.

Sama dag sendu foreldrini skriv til Útoyggjanevndina um, at tað verður ikki við teirra vilja, at skúlabørnini á Trøllanesi verða flutt til Mikladals í skúla. Í skrivinum verður m.a. ført fram:

...

„Eftir fleiri áheitanir til avvarandi myndugleikar røkist einki fyri at vit fáa skúlabørnini aftur til bygdina í skúlatíðini. Hetta kennist ógvuliga svárt og meiningsleyst, tá skúli er á Trøllanesi og 6 skúlabørn (8 komandi skúlaár), sum hoyra til bygdina.“

...

Við skrivi, dagfest 20. desember 2000 boðaði skúlanevndin foreldrunum frá, at tað bar ikki nevndini til at halda fund fyri jól, og at mannagongdin annars var tann, at biðið verður um fund við skúlanevndina um eitt ávíst evni, og at nevndin síðani gevur fundarboð. Í skrivinum varð annars mælt til at bíða, til niðurstøða var komin frá Landsskúlafyrisitingini.

Í november 2000 var kommunustýrisval, og hevði nýggja kommunustýrið í Mikladals kommunu sín fyrsta fund tann 27. desember 2000. Á hesum fundinum, ið var fullmannaður, vóru einans val av formanni og næstformanni á skránni. (E) varð valdur til formann og (F) til næstformann.

Kommunustýrið hevði fund aftur tann 9. januar 2001, og er um fundin hetta ført í gerðabókina:

> „Fundur settur í skúlanum í Mikladali 9. jan 01, allir limir møttir. Evni á fundinum var skúlamálið og tað at seinasta bygdaráð við meiriluta samtykti at opna skúlan á Trøllanesi aftur.
>
> Atkvøðugreiðsla verður um evni og samtykt verður við 3 atkvøðum fyri at skúlin skal ikki opna aftur, men vit eru tó opin fyri at okkurt t.d. handaligt kundi verið í skúlanum á Trøllanesi.
>
> Bræv verður sent til Landsskúlafyrisitingina.
>
> Fundur lokin.
>
> (E) (sign.) (G) (sign.) (F) (sign.)“

Sama dag undirskrivaðu bygdaráðslimirnir eitt hondskrivað bræv til Undirvísingar- og Mentamálastýrið við kunning um tiknu avgerðina. Hetta skrivið, ið er sent stýrinum í eitt sindur broyttum líki, dagfest 14. jan. 2001 og er undirskrivað av bygdaráðsformanninum, er soljóðandi:

> „Vit vilja hervið koma við einum kunnandi skrivi um, at bygdaráðið hevur á fundi 09.01.01 havt skúlamálið til viðgerðar. Av tí at onki meiri er hent í málinum, hava vit samtykt at seta úr gildi avgerðina um at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur, sum seinasta bygdaráð samtykti í des. 2000.
>
> Grundgevingin fyri hesum er, at vit meta tað ikki vera gott fyri børnini at vera flutt ímillum skúlarnar t.d. aðruhvørja viku. Eisini

er tað fíggjarstøðan hjá kommununi, ið ger seg galdandi. Tað er dýrt at reka tveir skúlar og vildu vit tá heldur ynskt at gjørt meiri við núverandi skúla, og sostatt havt EIN góðan skúla. Tó eru vit opin fyri at einkultar handaligar lærugreinir kundu verið í skúlanum á Trøllanesi, so sum vit tosaðu um.“

Við skrivi, dagfest 22. januar 2001 til (A2) váttaði skrivarin hjá Útoyggjanevndini, (H), móttøkuna av skrivinum frá borgarum búsitandi á Trøllanesi, um at tað var ímóti viljanum hjá borgarunum á staðnum, at børnini á Trøllanesi verða flutt til Mikladals at ganga í skúla. Sagt varð í skrivinum, at Útoyggjanevndin hevði møguleika fyri at taka málið upp í álitinum, og at nevndin hevði vent sær til Mentamálastýrið við fyrispurningi um skúlatrupulleikarnar á Trøllanesi. Stýrið hevði boðað nevndini frá, at arbeitt varð við málinum.

Tann 29. januar 2001 sendu foreldrini Undirvísingar- og Mentamálastýrinum soljóðandi skriv:

„**Viðvíkjandi skúlanum á Trøllanesi !**

Síðani umboð frá Undirvísingar og Mentamálastýrinum vóru her á Trøllanesi og hugdu at skúlanum, hava vit undirritaðu foreldur gjørt tvær royndir at viðgera skúlamálið við ávikavist foreldrini úr Mikladali og Skúlanevndina, (sí skjal nr. 1 og 2).

Hesir fundir vóru úrslitaleysir tí ongin úr Mikladali møtti upp. Í svari sínum til fundarfráboðanina frá okkum vísti skúlanevndin á at Undirvísingar og Mentamálastýrið arbeiðir við uppskoti til loysn av málinum, (sí skjal nr. 3).

Vit vilja við hesum skrivið, gera støðu okkara greiða, viðvíkjandi skúlagongd á Trøllanesi. Ynski okkara er, at minst helvtin av undirvísingini fer fram í skúlanum á Trøllanesi. Tað vil siga at lærari kemur í skúlan, og børnini her í bygdini fara við skúlatasku til gongu í skúla, sum vanligt er á øðrum smáplássum í Føroyum.“

Við skrivi, dagfest 24. apríl 2001, bóðu foreldrini um fund við landsstýrismannin í undirvísingar- og mentamálum vísandi til, at stýrið hevði gjørt uppskot viðvíkjandi skúlagongdini í Mikladals kommunu, sum ikki hevði gingið teirra ynskjum á møti.

Fundur varð hildin millum Mentamálastýrið og foreldrini tann 14. juni 2001, og hevur (I), Mentamálastýrið, gjørt hesa fundarfrásøgn:

„Fundur við fólk av Trøllanesi 14. juni 2001, kl. 11.00
Fundurin var nakað seinkaður orsakað av fjølmiðlafundinum fyrr um morgunin

Møtt á fundi: (J), (K), (A1, A2, A4, A5 og A6) og (I)

Evni á fundinum: Skúlagongdin hjá næmingunum á Trøllanesi.

(J) greiddi frá málinum. Hann var á Trøllanesi fyri umleið trimum vikum síðani og hugdi eftir skúlaviðurskiftunum.

(J) hevur boðað frá alment, at grundarlag er fyri at lata skúlan uppaftur, og at skúlagongdin verður býtt javnt millum bygdirnar. Næsta skúlaár verða 8 skúlabørn á Trøllanesi og 6 í Mikladali, men lokalpolitikkararnir bakka ikki ætlanina upp.

Eftir áheitan frá (J) greiddi (I) frá arbeiðinum, ið Mentamálastýrið hevur gjørt í hesum máli síðani í heyst.

(J) greiddi víðari frá, at samgonguskjalið sigur, at bygdaskúlarnir skulu varðveitast. Hann segði, at hann hevði gjørt av, at skúlagongd verður aftur í skúlanum á Trøllanesi, og miðað verður eftir at býtið av undirvísingartíðini millum báðar skúlarnar verður helvt um helvt næsta skúlaár.

Eitt av foreldrunum legði fram uppskot um, at lærarin verður fyrrapart í aðrari bygdini, seinnapart í hinari og skiftir um aðru hvørja viku. Støða var ikki tikin til hetta uppskot, tí at (J) hevur heitt á fólkaskúladeildina at gera uppskot um, hvussu skúlagongdin verður skipað næsta ár.

Fólkaskúladeildini varð álagt at boða skúlamyndugleikunum á staðnum frá avgerðini hjá landsstýrismanninum og senda uppskot um, hvussu undirvísingin kann verða skipað. (I) var biðin um at avgreiða málið.“

Við skrivi, dagfest 20. juli 2001 boðaði Mentamálastýrið Mikladals kommunu frá, at landsstýrismaðurin í mentamálum hevði gjørt av,

at skúlagongdin í Trøllanes skúla verður tikin uppaftur tann 20. august 2001. Í skrivinum verður lagt aftrat:

...

„Avgerðin er grundað á, at næsta ár verða 8 skúlabørn á Trøllanesi, og eiga tey eisini at fáa umstøður til at ganga ein part av skúlatíðini í heimbygdini.

Mælt verður tí til, at skúlagongdin verður býtt millum bygdirnar Mikladal og Trøllanes.“

Tann 31. juli 2001 var fundur í Mentamálastýrinum millum umboð fyri stýrið, Mikladals kommunu og foreldrini á Trøllanesi. Eisini var (L), skrivari í Føroya Kommunufelag við á fundinum. (L) hevur gjørt hesa fundarfrásøgn:

„Frágreiðing frá fundi í Mentamálastýrinum 31.07.01, kl. 10:00.

Fyri MMS: (K), (I) og (M).
Fyri Mikladals kommunu: (E), (G) og (L).
Fyri Trøllanesfólk: (A4).

(K): báðir skúlar skulu brúkast tí Trøllanesskúlin er ongantíð niðurlagdur og heldur ikki stongdur. Spurningurin um at finna býti man kann vera samdur um **sum gagnar børnunum best.**

(M): Var við (I) seinasta heyst í Kallsoynni og kannaðu skúlarnar. Høvdu fund (3. des) við skúlanevndina. Báðir skúlarnir eru lítlir og kanningin vísti at nakað mátti gerast við báðar skúlarnar. (Trøllanes-)Foreldrana ynski at skúli á Trøllanesi verður aftur tikin í brúk. Politisk avgerð at varðveita bygdaskúlarnar.

(I): Tóku myndir av bygningunum. Rúmið á loftinum (Í Mikladali) kann innrættast og brúkast til undirvísing. WC viðurskifti vánalig. Trongligt men nosligt. Fyrimunir at avhaldshúsið er beint við síðuna av skúlanum og kann brúkast. Ikki pláss fyri øllum næmingunum á Trøllanesi. Mentamálaráðharrin hevur tikið avgerð um at undirvísing skal vera á báðum støðunum. Heldur næmingarnar vera væl fyri og duga væl.

(E): kommenterar fundin mentamálaráðharrin hevði í Kallsoynni;

(L): Spyr hvør hevur reist hetta málið.

(I): Sigir frá at foreldrini høvdu samband við mentamálastýrið

(L): vísir á at mannagongdin er ógvuliga óheppin, við tað at mentamálastýrið heldur hevur havt samráðingar við skúlanevndina og ikki við kommunustýrið sum er høvuðsmyndugleikin. Vísir eisini á, at einasta fysiska skjalið kommunan hevur, er avgerðin hjá mentamálaráðharranum.

(G): vísir á, at bygningurin á Trøllanesi krevur ábøtur, takið er asbest og isoleringin er partvís flamingoplátur.

Fundurin endaði kl. 12:00."

Í einum uppriti til landsstýrismannin í mentamálum, dagfest 15. aug. 2001 hevur (M), Mentamálastýrið givið hesa frásøgn um fundin:

...

„31.07.01 var fundur í Mentamálastýrinum við bygdaráð og skúlanevnd í Mikladals kommunu. Skúlamyndugleikarnir í Mikladali høvdu skrivaran í Føroya Kommunufelag við sær sum ráðgeva. Ætlanin við fundinum var at viðgera avgerðina hjá fyrrverandi landsstýrismanninum saman við lokalu myndugleikunum við atliti at, hvussu henda avgerð kundi setast í verk á hátt, sum allir partar kundu góðtaka. Bygdaráðsformaðurin vísti stóra ónøgd við hesa avgerð og ivaðist í, um landsstýrismaðurin hevði heimild til at taka eina slíka avgerð uttan um lokalu myndugleikarnar. Skrivarin í Kommunufelagnum førdi eisini sama sjónarmið fram. Ein av skúlanevndarlimunum, ið er av Trøllanesi, førdi fram, at foreldrini á Trøllanesi høvdu roynt at komið á tal við skúlanevndina um málið, men hetta hevði ikki borið til. Hesin nevndi eisini, at peningur var avsettur til endamálið. Niðurstøðan av hesum fundi gjørdist, at fólkaskúladeildin skuldi gera uppskot um, hvussu avgerð landsstýrismansins skuldi setast í verk. Dentur varð lagdur á, at hetta skuldi gerast í samstarvi við skúlastýri og læraran í Mikladali. Verandi landsstýrismaður, (K) luttók á fundinum. Spurdur hvørt hann tók undir við avgerðini hjá fyrrv. landsstýrismanninum, svaraði (K), at tað gjørdi hann í høvuðsheitum, men at hann legði seg ikki útí á hvønn hátt og hvussu hetta varð framt í verki. Hann legði stóran dent á, at funnin var ein loysn á málinum, sum allir partar kundu góðtaka.

> Undirvísingarleiðararnir í Fólkaskúladeildini gjørdu síðan eitt uppskot um, hvussu skúlagongdin kundi býtast millum báðar skúlarnar. Hetta varð lagt fyri landsstýrismannin, men hann helt, at málið mátti viðgerast og mýkjast meira, áðrenn hetta uppskot varð sent skúlamyndugleikunum í Mikladali.“
>
> ...

Við skrivi, dagfest 7. august 2001 til m.a. (A1) boðaði Mentamálastýrið til fundar tann 13. í s.m. í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík til at umrøða skúlagongdina í Mikladals/Trøllanes skúla skúlaárið 2001/2002. Í omanfyri nevnda uppriti til landsstýrismannin stendur m.a. um fundin:

> ...
>
> „13.08.01 vóru undirvísingarleiðararnir í Fólkaskúladeildini á fundi við skúlastýri í Mikladals kommunu. Fundurin var í Klaksvík. Ætlanin við fundinum var at viðgera málið saman við skúlastýrinum til tess at finna eina loysn. Roynt varð at vísa á ymsar møguleikar viðvíkjandi skúlagongd í skúlanum á Trøllanesi, men meirilutin í skúlastýrinum gjørdi greitt, at skúlastýrið tók undir við sjónarmiðunum hjá bygdaráðnum viðvíkjandi hesum máli. Tey vóru ikki sinnað at viðgera uppskot um skúlagongd í einum skúlahøli, sum bygdaráðið ikki vildi nýta til hetta endamál. Formaðurin í skúlastýrinum vísti á, at sambært løgfrøðinginum hjá teimum, so hevði landsstýrismaðurin ikki heimild til at taka ta avgerðina, hann tók um at lata skúlagongdina byrja aftur í skúlanum á Trøllanesi. Á fundinum varð eisini nomið við spurningin um at leggja skúlan á Trøllanesi niður. Formaðurin í skúlastýrinum vísti í hesum sambandi á, at sambært løgfrøðingi teirra, so var skúlin á Trøllanesi ikki ein sjálvstøðugur skúli, og tí hevði bygdaráðið ikki fyri neyðini at niðurleggja skúlan sambært reglunum í fólkaskúlalógini.“
>
> ...

Uppritið kemur til hesa niðurstøðu:

> „Støðan í málinum viðvíkjandi skúlagongd í skúlanum á Trøllanesi er í stuttum hendan:

Fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum tók avgerð um at taka skúlagongdina í skúlanum á Trøllanesi uppaftur.
Lokalu skúlamyndugleikarnir t.e. bygdaráð og skúlastýri taka ikki undir við hesari avgerð og vísa á, at avgerð landsstýrismansins er ikki bygd á haldgott løgfrøðiligt grundarlag.
Hóast roynt hevur verið at funnið eina loysn við áhaldandi samráðingum millum partarnar, so hevur hetta ikki eydnast higartil. Av tí, at Mentamálastýrið ikki hevur nakað løgfrøðiligt responsum, standa vit ov veik í málsviðgerðini.

Mælt verður tí til at fáa til vega eitt løgfrøðiligt responsum, áðrenn onnur stig skulu takast í málinum."

Tann 14. august 2001 sendi bygdaráðið Løgmansskrivstovuni, att. (N), soljóðandi skriv:

„Mikladals Bygdaráð hevði sín fyrsta fund 09.01.01. Hesin fundur varð ikki lýstur alment, grundað á, at allir bygdaráðslimirnir vóru nýggir og høvdu ikki fingið innlit í nýggju kommunulógina, sum vit uml. 2 vikur seinni vóru á fundi til at verða kunnaði um.

Nú er ivi sáddur, um hesin fundur var lógligur og um samtykt, tikin á hesum fundi, tískil er galdandi.

Tó er fundarfrásøgn til almanna kunnan skriva frá hesum fundi eins væl og tað er gjørt frá fylgjandi fundum.

Vísandi til tvær telefonsamrøður við teg, har vit hava fingið munnliga játtan fyri, at hesin fundur er lógligur, vilja vit nú vinarliga biðja teg um at geva okkum hesa játtan skrivliga."

Tann 16. august 2001 svaraði Løgmansskrivstovan fyrispurninginum frá kommununi soleiðis:

„Spurt verður um fyrsti fundurin í kommunustýrinum var lógligur, og harvið um samtyktir á hesum fundi eru galdandi. Víst verður á, at fundurin vegna ókunnleika til kommunustýrislógina ikki var lýstur alment.

Ásetingin um almannakunngerðing av vanligum kommunustýrisfundum er í § 13, stk. 1, 3. pkt. í kommunustýrislógini og er

soljóðandi: „Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.“

Eftir eina ítøkiliga meting, er niðurstøðan hjá Løgmansskrivstovuni, at fyrsti fundurin var lógligur. Henda meting er grundað á, at tað snýr seg um fyrsta fundin í einum nýggjum kommunustýri har allir limirnir vóru nývaldir, og at ásetingin bert hevði kunnað verið fylgd, um fráfarna kommunustýri hevði ásett og almannakunngjørt nær, ið vanligir fundirnir skuldu haldast.

Annars kann verða víst á, at tað ikki er eitt treytaleyst krav, at allir fundir eru almannakunngjørdir. Víst verður í hesum sambandi til § 13 stk. 2, 3. pkt, ið ásetur at: „Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.“

Ásetingin um viðtøkuføri er at finna í § 14 í kommunustýrislógini sum ásetur, at kommunustýrið er viðtøkuført, um í minsta lagi helmingurin av kommunustýrislimunum er á fundi, og stk. 2. ásetur at um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið meirilutin av teimum, ið greiða atkvøðu, hevur atkvøtt fyri uppskotinum. Stendur á jøvnum, er uppskotið fallið. Eru hesi formkrøv hildin í sambandi við, at avgerðin er tikin, hevur avgerðin gildi.“

Sum mælt til í innanhýsis uppritinum til landsstýrismannin (brot endurgivin omanfyri) gjørdi (O), fulltrúi í Mentamálastýrinum eina løgfrøðiliga frágreiðing um skúlaviðurskiftini á Trøllanesi. Frágreiðingin, ið er dagfest 23. august 2001, er soljóðandi:

„Fyrrverandi landsstýrismaður (J) tók í mai 2000 avgerð um, at skúlin á Trøllanesi skuldi lata upp aftur eftir summarfrítíðina. Sitandi kommunustýrið og skúlastýrið í Mikladals skúla taka ikki undir við avgerð landsstýrismansins, og støðan tykist fastlæst. Gongdin í málinum verður viðgjørd í innanhýsis frágreiðing frá (M), dagfest 15. august 2001, og víst verður til hesa frágreiðing.

Fyri at lýsa og greina málið løgfrøðiliga, er neyðugt at viðgera tveir høvuðsspurningar:

1. Er Trøllanes skúli niðurlagdur ella burturfallin ?
2. Hvørja heimild hevur landsstýrismaðurin at áleggja komm-

unustýrinum undirvísingarvirksemi (ella øðrvísi bygnað) í kommununi ?

**Viðvíkjandi 1**

Í fólkaskúlalógini frá 22. mars 1979, sum var galdandi um tað mundið, tá ið seinasti næmingurin fór úr skúlanum á Trøllanesi í 1988, vóru greiðar reglur fyri formligu mannagongdini í sambandi við, at ein skúli skuldi niðurleggjast. Í lógini var m.a. ásett, at kommunustýrið kundi avgera at lata skúlan aftur, og at hetta skuldi kunngerast í føroysku bløðunum. Um fleiri enn 30 % av íbúgvunum ynsktu tað, skuldi atkvøðast um niðurleggingina, og avgerðin kundi tá útsetast til eftir eitt komandi kommunustýrisval. Hvørki henda ella galdandi fólkaskúlalóg viðgera, hvussu farast skal fram, um eingir innskrivaðir næmingar eru eftir í skúlanum, og tað er tí ein tulkingarspurningur, hvørt skúlin á Trøllanesi kann metast sum „fallin burtur“ sum skúlaeind, tá ið seinasti næmingurin fór úr skúlanum í 1988, ella um skúlin bert hevur ligið í dvala hetta tíðarskeiðið.

Tað eru nógv viðurskifti, sum tala fyri, at skúlin á Trøllanesi er fallin burtur sum skúli. Hugtakið skúli má metast sum ein løgfrøðilig eind, har skúlabygningurin bert er ein partur av eindini. Tá ið eingin næmingur og lærari er eftir, fellur skúlin ella eindin burtur. Tá ið børn aftur verða innskrivað í skúlan, kann kommunustýrið við góðkenning landsstýrisins skipa skúlavirksemið av nýggjum.

Kommunustýrið í Mikladali/Trøllanesi tók 15. november 2000 avgerð um at taka skúlagongdina uppaftur eftir summarfrítíðina 2001, men avgerðin varð sett úr gildi longu 9. januar 2001 av nývalda kommunustýrinum, t. v. s. áðrenn skúlin fór undir virksemi aftur. Her verður ikki tikin støða til, hvørt seinna samtyktin er formliga í lagi, tí at niðurleggingarreglan er einans til frama fyri íbúgvararnar og ikki eitt mál, sum gevur landsstýrismanninum heimild at fara inn við kravi um atkvøðugreiðslu sambært § 29, stk. 5, í fólkaskúlalógini.

Formligu ásetingarnar um at niðurleggja skúlar í fólkaskúlalógini eru eitt slag av rættartrygd fyri íbúgvarnar í kommununi. Hesir eiga at fáa fráboðan um ætlanina at niðurleggja skúlan. Lítil

ivi er um, at fólk á Trøllanesi vistu, at skúlin lat aftur orsakað av vantandi næmingatilgongd, og at ein formlig niðurlegging sambært fólkaskúlalógini tí var óneyðug. Tá ið børn í skúlaaldri aftur komu í bygdina, var eingin samtykt gjørd í kommunustýrinum um at lata skúlan aftur, og ei heldur var nakað framtak gjørt frá foreldranna síðu í 9 ár fyri at lata skúlan uppaftur (passivitetur), og niðurstøðan kann ikki vera onnur, enn at kommunustýrið og íbúgvarnir í kommununi hava viðurkent støðuna. Í 1997 gjørdu foreldrini skrivliga vart við støðuna, men tá var hvørki kommunustýrið ella skúlanevndin sinnað at lata skúlan upp aftur.

**Viðvíkjandi 2**

Sambært § 47, stk. 3, í fólkaskúlalógini hevur kommunustýrið ábyrgdina av, at hóskandi undirvísingarhøli eru tøk til undirvísingina, men tað er hvørki í lógini ella í øðrum reglum ásett, hvar hølisumstøður til undirvísingina skulu skipast í kommununi, ella um hesar skulu skipast í fleiri støðum ella sum deildir av verandi skúlum. Hesi viðurskifti eru latin kommunustýrinum at avgera. Landsstýrismaðurin kann seta ávís krøv til dygd og innrætting, men tað er annars kommunustýrið, sum einsamalt tekur avgerðina. Kommunustýrið hevur skyldu at útvega høli til allar næmingar í kommununi og skal sambært lógini skipa fyri næmingaflutningi eftir nærri reglum. Kommunustýrið í Mikladals/Trøllanes kommunu kann vísa á hølismøguleikar í skúlanum í Mikladali. Landsstýrismaðurin kann tí ikki við fólkaskúlalógini áleggja kommunustýrinum at lata skúlan uppaftur.

**Niðurstøða**

Niðurstøðan er grundað á ta tulking, at skúlin á Trøllanesi var fallin burtur sum skúli, tá ið seinasti næmingurin fór úr skúlanum í 1988 – ella í seinasta lagi, tá ið skúlanæmingar aftur vóru í bygdini og íbúgvarnir uttan formligt mótmæli sambært niðurleggingarreglunum í fólkaskúlalógini lótu viðurskiftini um seg ganga.

Sambært fólkaskúlalógini hevur kommunustýrið lógarfestan rætt til at taka avgerð um hvar, og hvussu nógvir skúlar eru í kommununi, og um hesir skúlar eru deildir av øðrum sjálvstøð-

ugum skúlum í kommununi. Um so er, at ein skúli við nemingum verður niðurlagdur, skal kommunustýrið skipa fyri niðurleggingini sambært § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini, men tá ið eingir næmingar eru í skúlanum, krevst eingin formlig niðurlegging. Landsstýrismaðurin hevur bert ávísar góðkenningar- og eftirlitisuppgávur í sambandi við, at kommunalir skúlabygningar verða tiknir í nýtslu. Rætturin hjá kommunum at skipa fyri hølisviðurskiftunum í fólkaskúlanum er lógarásett, og landsstýrismaðurin kann tí ikki áleggja kommunustýrinum at lata skúlan uppaftur, uttan at hetta verður fatað sum ágangur móti kommunala sjálvstýrinum.“

Tann 24. august 2001 sendi landsstýrismaðurin í mentamálum fjølmiðlunum soljóðandi tíðindaskriv:

Landsstýrismaðurin í mentamálum boðar við hesum frá, at hann ikki hevur heimild at áleggja kommunustýrinum í Mikladals kommunu at taka skúlagongdina í skúlanum á Trøllanesi uppaftur.

Landsstýrismaðurin hevði roknað við, at málið kundi loysast við samstarvi millum skúlamyndugleikarnar á staðnum og landsmyndugleikarnar, men gongdin í málinum hevur víst, at kommunustýrið hevur ikki hug at ganga ynskinum hjá landsstýrismanninum og foreldrunum á Trøllanesi á møti.

Landsstýrismaðurin mælir til, at skúlagongdin í skúlanum á Trøllanesi verður tikin uppaftur soleiðis, at ein partur av undirvísingini kann fara fram á Trøllanesi á sama hátt sum í hinum partinum av Kalsoynni, men heimildir landsstýrismansins røkka ikki til at loysa málið uttan vælvild frá lokalu skúlamyndugleikunum.

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at málið hevur stóran týdning fyri foreldrini á Trøllanesi og vil tí stuðla hesum tiltaki.

Lat tað enn eina ferð verða sagt, at frá landsstýrismansins síðu er viljin til staðar til at loysa málið, men hetta kann bert gerast innan fyri galdandi heimildir.“

Tann 3. sept. 2001 setti (P), aðalstjóri í Mentamálastýrinum í verk eina innanhýsis kanning í sambandi við skrivið frá Mentamálastýr-

inum til Mikladals kommunu, dagfest 20. juli 2001. Aðalstjórin setti í hesum sambandi (I), undirvísingarleiðara nakrar spurningar:

„Í skrivi, dagf. 20. juli 2001 (máltal: 32301/07/010847/3), hevur tú skrivað eitt skriv til Mikladals Bygdaráð og Mikladals Skúlanevnd, har m.a. verður skrivað: „Sagt verður frá, at landsstýrismaðurin í mentamálum hevur gjørt av, at skúlagongdin í Trøllanes Skúla verður tikin uppaftur 20. august 2001.“.

Orsakað av, at landsstýrismaðurin ikki hevur heimild til at taka slíka avgerð, verður tú biðin um, at svara niðanfyri nevndu spurningar:

1. Hvør hevur tikið stig til, at omanfyri nevnda skriv er skrivað? (Her verður fyrst og fremst hugsa um tað er tú ella landsstýrismaðurin, sum hevur tikið stig til, at skrivið er skrivað. Hvør hevur heitt á hvønn og hvussu?)
2. Hvørja løgfrøðiliga ráðgeving hevur tú útvega tær í sambandi við hetta mál og serliga í sambandi við avgreiðslu av omanfyri nevnda skrivið? (Her verður serliga hugsað um, nær og hvønn løgfrøðing tú hevur tosað við. Sum eg havi skilt tað, so hevur tú ikki tosað við løgfrøðingarnar í stýrinum. Er tað rætt?)
3. Hvørjum øðrum hevur tú ráðført teg við í stýrinum í hesum máli, t.v.s. í sambandi við, at hetta skriv er skrivað?
4. Hví skrivið er journaliserað í mál nr. 010847 (Ráðlegging/yvirtímar Mikladals/Trøllanesar skúla 2001/2002) og ikki mál nr. 010546 (Skúlabygnaður sum heild — niðurlegging av bygdaskúlum)?
5. Annað, sum tú heldur hevur týdning fyri, at fáa greiðu á, hví embætismaður skrivar eitt skriv, sum ein landsstýrismaður ikki hevur heimild at taka avgerð um, uttan at ráðføra seg við sakkunnleika ella fyrisitingarligu leiðsluna í stýrinum?

Svar eigur at fyriliggja undirritaða í seinasta lagi mikudagin tann 5. september 2001 kl. 09.00.“

Longu sama dagin svaraði (I) aðalstjóranum soleiðis:

„Eg fari við hesum at svara fyrispurningum tygara í tí raðfylgju, teir eru settir:

1. Skrivið havi eg sent eftir boðum frá fyrrverandi landsstýrismanninum (J) og í samráð við (K), landsstýrismann. Eg havi á ongan hátt sjálv tikið avgerð um at senda nevnda skriv. Eisini havi sett meg í samband við deildarstjóran og hin undirvísingarleiðaran, at mær var álagt at senda skrivið. Eg havi onga ábending fingið um, at skrivið ikki skuldi verða sent. Sí annars frágreiðing frá fundi í Mentamálastýrinum 14. juni 2001.
2. Eg havi ikki sett meg í samband við løgfrøðing, tá ið eg sendi skrivið. Orsøkin er, at eg ikki havi verið málsviðgeri í hesum máli, og tí helt eg, at løgfrøðiligi parturin var greiddur, áðrenn stýrið tók stig til, at skúlagongdin á Trøllanesi skuldi takast uppaftur. Eg havi tó ávegis hjálpt til at avgreitt partar av málinum fyrst eftir áheitan frá deildarstjóra og síðani frá landsstýrismanninum, og eg havi ikki hoyrt heimildarspurningin hjá landsstýrismanninum umrøddan, fyrr enn á fundinum í Mentamálastýrinum 31. juli 2001.

Leiklutur mín í hesum máli hevur verið:

a) Í sambandi við at skúlagongdin skuldi takast upp aftur í skúlanum á Trøllanesi, vóru (M), (Q) og (I), 2. des. 2000, eftir áheitan frá deildarstjóranum á fundi í Mikladals Skúla. Eg var biðin um at fara við (M) fyrst og fremst fyri at hyggja eftir undirvísingarligu umstøðunum í báðum skúlunum. Fundurin var við læraran og umboð fyri bygdaráð og skúlanevnd. Á fundinum var viðgjørt, í hvørjum vavi skúlagongd eisini kundi skipast í skúlanum á Trøllanesi.

   Tað var týðiligt, at tað var munur á, hvørja skipan umboðini í báðum bygdunum kundu taka undir við. Umboðini í Mikladali góðtóku, at børnini í Mikladali gingu ein dag um vikuna í skúla á Trøllanesi, meðan umboðið av Trøllanesi ikki helt, at tað var nóg mikið, at skúlin á Trøllanesi bara var brúktur ein dag hvørja viku. Eingin avgerð var tikin á staðnum, men avgjørt var, at Mentamálastýrið skuldi gera eitt uppskot um skipan av undirvísing í báðum skúlunum og tilmæli um, hvørjar lærugreinir kundu vera í hvørjum skúlanum. Hetta uppskot fór at

verða sent skúla og skúlamyndugleikunum á staðnum til ummælis.

Eftir fundin í Mikladali var málið viðgjørt í fólkaskúladeildini, og avrátt var, at handaverk og list og møguliga nakrir tímar afturat skuldu vera í skúlanum á Trøllanesi, meðan restin av undirvísingini skuldi vera í Mikladali. Deildarstjórin heitti á (M) um at gera uppskot um tílíka skipan.

b) 14. juni 2001 um morgunin heitti skrivarin hjá (J) á undirritaðu um at møta á fundi kl. 11.00 við foreldur at skúlabørnum á Trøllanesi. (M) var staddur uttanlands í arbeiðsørindum og ikki bar deildarstjóranum til at møta. Á fundinum vóru umframt landsstýrismannin eisini (K), ið tók við sum landsstýrismaður seinnapart sama dag, og fimm foreldur av Trøllanesi. Fundurin snúði seg um skúlan á Trøllanesi, og boðaði (J) foreldrunum frá, at hann hevði tikið avgerð um, at skúlagongdin í Trøllanes skúla skuldi verða tikin upp aftur skúlaárið 2001/2002. Hann segði eisini, at hann hevði boðað frá hesum alment á fjølmiðlafundi fyrr um morgunin. (I) fekk boð um at senda skriv til skúlamyndugleikarnar á staðnum um hesa avgerð, og at fólkaskúladeildin eisini skuldi senda skúlamyndugleikunum uppskot um, hvussu undirvísingin kundi verða skipað.

Eg sendi ikki skrivið til skúlamyndugleikarnar fyrr enn ein mánað eftir, at avgerðin var tikin. Orsøkin til hetta var, at fólkaskúladeildin arbeiddi við uppskotinum um, hvussu undirvísingin kundi verða skipað, men málið dróg út, tí tað vísti seg at vera sera trupult at gera eina skipan, sum foreldrini í báðum bygdunum kundu taka undir við.

Eg greiddi deildarstjóranum og hinum undirvísingarleiðaranum frá avgerðini hjá landsstýrismanninum og avgjørt var, at eg skuldi senda skrivið. Eg tók eisini málið upp við (K), og hann tók undir við, at skrivið skuldi verða sent til skúlamyndugleikarnar í Mikladals/Trøllanesar kommunu, tí at (J) hevði tikið avgerð um at skúlagongdin skuldi verða tikin uppaftur, og hann hevði eisini kunngjørt hetta bæði í fjølmiðlunum og fyri foreldrunum á Trøllanesi.

c) 31. juli 2001 var fundur í Mentamálastýrinum við Mikladals/

Trøllanesar bygdaráð og skúlaráð. Skrivarin í Føroya Kommunufelag møtti eisini saman við bygda- og skúlaráðnum. Fyri Mentamálastýrið luttóku landsstýrismaðurin og báðir undirvísingarleiðararnir. Undirritaða skipaði ikki fyri fundinum, men fekk boð frá (M) um, at landsstýrismaðurin boðaði okkum til fundar. Endamálið við fundinum var við støði í avgerðini hjá landsstýrismanninum, um at skúlagongdin í Trøllanesar Skúla verður tikin uppaftur skúlaárið 2001/2002, at fáa eina avgerð um, hvussu undirvísingin kann verða skipað, so at skúlagongd verður bæði í Mikladals- og Trøllanes skúla.

Eingin semja fekst á fundinum, og skrivarin hjá Føroya Kommunufelag spurdi eftir heimildini hjá landsstýrismanninum í hesum máli og eftir frágreiðingum í málinum. Landsstýrismaðurin tók saman um og segði, at fólkaskúladeildin skuldi gera uppskot til skúlaætlan um at skipa skúlagongd í báðum bygdunum, og at fundur bleiv við skúlastýrið fyrst í august mánað.

d) Eftir fundin bað landsstýrismaðurin (M) og (I) gera uppskot til skúlaætlan fyri Mikladals/Trøllanes skúla. Henda ætlan var gjørd sama dag. Eisini viðgjørdu vit tað, ið kom fram á fundinum. Sjálv var eg ógvuliga bilsin yvir at hoyra, at spurningur var settur við heimildina hjá landsstýrismanninum og at Mentamálastýrið ikki hevði nakra løgfrøðiliga niðurstøðu um hetta sjónarmið, og mælti eg til, at vit fingu løgfrøðing at greiða hetta sum skjótast. Avgjørt var, at (M) skuldi seta seg í samband við (O) um at faa málið lýst løgfrøðiliga.

Eisini heitti landsstýrismaðurin á (M) og (I) um at hava fund við skúlastýrið til tess at fáa eina skipan um skúlagongdina í lag.

e) 13. august 2001 var fundur við skúlastýrið í Mikladals/Trøllanes skúla. Fundurin var hildin í Skúlanum á Ziskatrøð. Á fundinum vóru limirnir í skúlastýrinum, tó møtti tiltakslimurin fyri bygdaráðslimin, og (M) og (I) fyri Mentamálastýrið.

(I) greiddi frá arbeiðsuppgávunum hjá skúlastýrinum og síðani var roynt at fáa eina semju í málinum um at skúlagongdin skuldi verða tikin uppaftur á Trøllanesi nakrar tímar um vikuna.

Skúlastýrið greiddi frá, at teir kundu ikki skipa undirvísingina soleiðis, tí at bygdaráðið var bara sinnað at brúka annan skúlan. Formaðurin í skúlastýrinum vísti eisini á løgfrøðiligar niðurstøður í hesum spurningum:

- Heimildin hjá landsstýrismanninum at gera av, um skúlagongd skal vera í báðum skúlunum í kommununi
- Er Trøllanes skúli sjálvstøðugur skúli ella ikki?

Ikki bar til at koma til nakra niðurstøðu, og málsviðgerðin á fundinum var eisini ógvuliga stirvin, av tí at Mentamálastýrið framvegis onga løgfrøðiliga frágreiðing hevði í hesum máli.

f) Eftir fundin boðaði undirritaða frá, at hon ikki helt vera ráðiligt at hava fleiri semingsfundir, fyrr enn løgfrøðiligar niðurstøður vóru tøkar. Hetta boðaði eg eisini landsstýrismanninum frá í telefonsamrøðu.

g) 16. august 2001 sendi (M) undirritaðu uppskot til Frágreiðing í sambandi við skúlagongdina í Mikladals/Trøllanes skúla. Undirritaða tók í høvuðsheitum undir við frágreiðingini, men mælti til, at løgfrøðiligt responsum var fingið til vega, tí at annars bar ikki til hjá landsstýrismanninum at taka støðu, og vit fingu heldur ikki viðgjørt málið á rættan hátt.

Eisini áttu vit í frágreiðingini at vísa á støðuna hjá formanninum í skúlastýrinum, um at landsstýrismaðurin ikki hevði heimild at taka ta avgerðina, hann tók um at lata skúlagongdina byrja aftur í skúlanum á Trøllanesi og spurningin um, hvørt skúlin á Trøllanesi er sjálvstøðugur skúli ella ikki.

Sambært endaligu frágreiðingina hjá (M) eru hesi viðurskifti tikin við í tilmælið til landsstýrismannin, og landsstýrismaðurin hevur fylgt ráðunum og fingið løgfrøðiliga niðurstøðu til vega. Skjøl eru løgd hjá, sum vísa hetta.

3. Eg havi ráðført meg við omanfyrinevndu persónar í stýrinum, deildarstjóra, undirvísingarleiðara og landsstýrismann.
4. Í samráð við (M) gjørdi eg av at skráseta nevnda skriv í ráðleggingarsakina hjá Mikladals/Trøllanes skúla, av tí at nú var endalig støða tikin til, at skúlagongdin skuldi verða tikin uppaftur í Trøllanes skúla skúlaárið 2001/2002. Vanliga manna-

gongdin er, at øll skriv, sum snúgva seg um virksemi í skúlanum gjøgnum árið, verða skrásett í ráðleggingarmappuna hjá tí einstaka skúlanum.

5. Ivaleyst eru upplýsingar afturat, sum hava týdning í málinum, men júst nú komi eg ikki í tankar um nakað serstakt. Undirritaða er til reiðar at greiða frá um so er, at tað eru viðurskifti, sum tygum halda, ikki eru komin við."

Við skrivi, dagfest 3. september 2001 bað Løgmansskrivstovan (eftir áheitan frá løgmanni) Mentamálastýrið um at koma við einari frágreiðing um framferðarháttin hjá Mentamálastýrinum í Trøllanesmálinum.

Tann 11. september 2001 sendu (A1-A6) Kommunala eftirlitinum soljóðandi klagu:

„Undirritaðu borgarar í Mikladals kommunu vilja við hesum skrivi klaga um framferðarháttin, ið sitandi bygdarráð hevur nýtt í sambandi við skúlamálið á Trøllanesi.

Undanfarna bygdarráð samtykti á fundi 15.11.2000 at seta skúlan á Trøllanesi í stand og taka skúlagongd uppaftur á Trøllanesi við skúlaársbyrjan 2001.

Í fíggjarárinum 1999 blivu pengar settir av til nýggj vindeygu og oljufýr til skúlan á Trøllanesi. Í fíggjarárinum 2000 blivu pengar settir av til nýtt tak til skúlan á Trøllanesi. Av hesum umvælingum eru bara vindeyguni skift.

Sitandi bygdarráð strikaði samtyktina frá 15.11.2000 á bygdarráðsfundi 09.01.2001. Hesin fundur varð hvørki kunngjørdur áðrenn ella aftaná, sum lógin ásetur. Sum foreldur at skúlabørnunum á Trøllanesi vórðu vit ikki kunnaði um hesa avgerð, fyrr enn 28.08.2001, tá vit fingu samtyktina váttaða frá bygdarráðnum, eftir at hava spurt eftir henni.

Fyri okkum borgarar á Trøllanesi tykist tað sum bygdarráði tilætla hevur dult alt um málið viðvíkjandi skúlanum á Trøllanesi. Av somu orsøk bóðu vit um fund við bygdarráði hin 28.08.2001. Hendan fund hava vit ikki fingi enn.

Samanlagt hava hesar umstøður ført til at tey 8 skúlabørnini á

Trøllanesi (8 av íalt 14 skúlabørnum í kommununi) ikki eru møtt til undirvísing í Mikladals skúla enn.

Í okkara hugaheimi hevur bygdarráðssamtyktin frá 15.11.2000 lati okkum skúlan uppaftur. Tískil kann ein nýggj samtykt 09.01.2001 ikki niðurleggja skúlan, uttan fari verður fram sum fólkaskúlalógin ásetur, við fólkaatkvøðu osfr.“

Við skrivi, dagfest 13. september 2001, svaraði Mentamálastýrið skrivinum frá Løgmansskrivstovuni, dagfest 3. september 2001. Í skrivinum stendur m.a.:

**„Lýsing av framferðarháttinum um at lata upp aftur skúlan á Trøllanesi**

Víst verður til skriv títt, dagf. 3. september 2001, har heitt verður á Mentamálastýrið um at gera eina lýsing av framferðarháttinum viðvíkjandi málinum um at lata upp aftur skúlan á Trøllanesi, við serligum atliti til fyrisitingarligu mannagongdina frá tí at málið byrjaði.

...

1. Lýsing av framferðarháttinum viðv. málinum at lata upp aftur skúla á Trøllanesi.

   Málið er væl lýst í fleiri innanhýsis frágreiðingum. Fyrsta frágreiðingin, sum lýsir málið frá byrjan til tann 15. august 2001, er gjørd av (M), undirvísingarleiðara í Fólkaskúladeildini. Henda frágreiðing er løgd við sum skjal nr. 1.

Í hesi frágreiðing, sum er latin til landsstýrismanninum, verður m.a. mælt til at fáa til vega eitt løgfrøðiligt álit (responsum), áðrenn onnur stig verða tikin í málinum.

Tann 23. august 2001 letur (O), løgfrøðingur í Mentamálastýrinum, eina løgfrøðliga frágreiðing um skúlaviðurskiftini á Trøllanesi úr hondum. Henda frágreiðing er løgd við sum skjal nr. 2. Í sambandi við hesa frágreiðing vildi landsstýrismaðurin tryggja sær, at ikki aðrar rímiligar løgfrøðiligar tulkingar kundu gerast. Við tað at hin løgfrøðingurin var burturstaddur, so skeyt (O) upp, at hann og landsstýrismaðurin kundu tosa við (R), sakførara, um málið, grundað á, at hann kendi nógv til viðurskiftini í

fólkaskúlanum. Landsstýrismaðurin og løgfrøðingurin fóru sama dag at røða um innihaldið í uppritinum hjá (O) við (R). Løgfrøðingarnir vóru á einum máli um uppritið, tó undantikið av at einstøk orð vóru broytt, sum tó ongan týdning hevði fyri uppritið.

Tá ið undirritaði varnast, at eitt skriv, dagf. 20. juli 2001, er skrivað og sent til skúlamyndugleikarnar á staðnum, heitir undirritaði á (I), undirvísingarleiðara í Fólkaskúladeildini, sum hevur undirskrivað skrivið um, at greiða nærri frá í einari innanhýsis kanning, dagf. 3. september 2001. Kanningarsetningurin er hjálagdur sum skjal nr. 3.

(I) ger sína frágreiðing í málinum í frágreiðing, dagf. 3. september 2001, við tilhoyrandi skjølum. Frágreiðingin við skjølum er hjáløgd sum skjal nr. 4.

Umframt omanfyri nevndu skjøl kann verða skoytt uppí, at táverandi landsstýrismaður boðaði undirritaða frá fyrst í mai mánaði í ár, at hann ætlaði sær út í Kallsoynna at skoða skúlaviðurskiftini, serliga við atliti til málið um skúlagongdina í Mikladali og á Trøllanesi. Undirritaði boðaði táverandi landsstýrismanni frá, at hann átti at taka embætisfólk við og at hann mátti vera varin, tí eingin avgerð átti at takast fyrr enn málið varð væl og virðiliga lýst og kannað.

Síðani løgfrøðiliga álitið varð skrivað, hevur Mentamálastýrið í skrivi til Mikladals Sóknar Skúlastýri, dagf. 27. august 2001, boðað frá, at landsstýrismaðurin *„...hevur ikki heimild at seta í verk avgerðina hjá fyrrverandi landsstýrismanninum um at taka uppaftur skúlagongd í skúlanum á Trøllanesi.“* Í sama skrivi svarar Mentamálastýrið skúlastýrinum upp á skriv frá foreldrum, dagf. 17. august 2001, har tey boða frá, at teirra børn ikki møta til undirvísing í Mikladals skúla, so leingi minst 50% av undirvísingini ikki fer fram í skúlanum á Trøllanesi, at skúlastýrið verður biðið um at taka stig til, at børnini á Trøllanesi fáa ta kravdu undirvísingina við atliti til undirvísingarskylduna. Víst varð í hesum sambandi til § 40 og § 41, stk. 1 og stk. 2 í fólkaskúlalógini.

Síðani hevur samskifti (telefon, t-brøv og brøv) verið við skúlamyndugleikan á staðnum fyri at tryggja, at fortreytirnar fyri at undirvísingarskyldan kann útinnast er til staðar.

Tíverri eru viðurskiftini ikki komin undir land enn, men

skúlastýrið ger saman við Mentamálastýrinum tað tað kann fyri at tryggja, at undirvisingarskyldan verður framd.
Mentamálastýrið fylgir væl við, hvat fer fram.

Undirritaði er av tí fatan, at omanfyri nevndu frágreiðingar o.a. lýsa málið so mikið væl, at tær skuldu kunna verið hóskandi grundarlag undir svari til fyrra spurning."

...

Tann 19. september 2001 svaraði Kommunudeildin á Løgmansskrivstovuni klaguni frá (A1-A6) soleiðis:

„Í skrivi dagfest 11. september 2001 verður kært um, at:

1: Undanfarna kommunustýri samtykti at seta skúlan á Trøllanesi í stand og setti pengar av á fíggjarætlanini fyri 1999 til nýggj vindeygu og oljufýr, og á fíggjarætlanini fyri 2000 vóru pengar settir av til nýtt tak, men tann einasta umvælingin, ið er framd, er útskifting av vindeygum.
2: Undanfarna kommunustýri samtykti at taka skúlagongdina uppaftur á Trøllanesi, men nývalda kommunustýri samtykti at strika hesa samtykt á sínum fyrsta fundi, ið hvørki varð kunngjørdur áðrenn ella aftaná.
3: Biðið hevur verið um fund við kommunustýri, men hesin er ikki fingin í lag enn.
4: Tá undanfarna kommunustýri hevur samtykt at lata skúlan uppaftur, kann ein nýggj samtykt av nýggja kommunustýrinum ikki avtaka fyrru samtyktina, uttan so at farið verður fram eftir ásetingunum í fólkaskálalógini við m.a. fólkaatkvøðu.

Viðvíkjandi punkt 1:
Fíggjarætlanin er ein ætlan ið veitir ta fíggjarligu heimildina at fremja tað, ið er sett í ætlanina. Harumframt krevur eitthvørt tiltak eisini eina materiella heimild, t.v.s. at kommunustýrið eisini skal samtykkja at fremja tað, ið peningur er settur av til á fíggjarætlanini. Kommunustýrið kann tó broyta egnar samtyktir, og fíggjarætlanin kann broytast við eini eykajáttan. Av hesum fylgir, at kommunan kann lata verða við at fremja eina ætlan ella bert partvíst at fremja eina ætlan.

Niðurstøðan hjá Løgmansskrivstovuni er tí, at kommunustýrið ikki er farið út um sínar heimildir ella hevur brotið nakra áseting í kommunustýrislógini, tá tað bert hevur framt part av ætlaðu umvælingunum av skúlanum á Trøllanesi.

Viðvíkjandi punkt 2:
Løgmansskrivstovan hevur longu í samband við fyrispurning frá kommunustýrinum tikið støðu til hetta, og er niðurstøðan eftir eina ítøkiliga meting, at fyrsti fundurin hjá kommunustýrinum var lógligur, og at tær avgerðir ið luku ásetingina í kommunustýrislógini um samtykki av uppskotum eru galdandi. Sí eisini avrit av fyrispurningi og svari, ið er hjálagt.

Viðvíkjandi punkt 3:
Ein og hvør kann biðja um fund við kommunustýrið. Er ikki annað ásett í lóggávuni, er tað upp til kommunustýrið at gera av í hvønn mun eitt tílíkt ynski verður gingið á møti. Tí metir Løgmansskrivstovan seg ikki at hava heimild til at áleggja kommunustýrinum at hava fund við tykkum.

Viðvikjandi punkt 4:
Vísandi til punkt 3 er niðurstøðan hjá Løgmansskrivstovuni, at avgerðin hjá nývalda kommunustýrinum er í samsvar við ásetingarnar í kommunustýrislógini, men spurningurin um hvørt samtyktin er í samsvar við fólkaskúlalógina er málsøki, ið liggur hjá Mentamálastýrinum. Tí er hesin parturin av kæruni sendur Mentamálastýrinum til viðmerkingar, áðrenn hann verður viðgjørdur av okkum.“

Vísandi til at seinasti parturin av kæruni hoyrdi undir málsøkið hjá Mentamálastýrinum sendi Løgmansskrivstovan (Kommunudeildin) 25. sept. 2001 stýrinum soljóðandi skriv:

„Kommunudeildin á Løgmansskrivstovuni hevur móttikið kæru um ymisk viðurskifti í sambandi við málið um skúlan á Trøllanesi. Kommunudeildin hevur býtt kæruna í 4 punkt, og eru trý av teimum longu avgreidd. Við tað at síðsti partur av kæruni hoyrir undir málsøki hjá Mentamálastýrinum, verður Menta-

málastýrið við hesum biðið um at gera viðmerkingar til henda part av kæruni.

Viðlagt er avrit av kæru og avrit av svarið til kærarnar.“

Tann 3. okt. 2001 sendi Mentamálastýrið Løgmansskrivstovuni soljóðandi skriv:

„Í skrivi, dagfest 25. september 2001, biður Løgmansskrivstovan um viðmerkingar til pkt. 4 í kæruni frá foreldrum á Trøllanesi.

Við grundarlagi í svarinum frá Løgmansskrivstovuni til (A1 og A2), dagfest 19. september 2001, og tí vit annars kenna til málið, tekur Mentamálastýrið til eftirtektar, at samtyktirnar í kommunustýrinum 15. november 2000 og 9. januar 2001 eru lógligar. Spurningurin um, um seinna samtyktin skuldi verið lýst í øllum føroysku bløðunum fyri at fáa fult gildi, er eftir Mentamálastýrisins meting ivasamur.

Samtyktin í kommunustýrinum 15. november 2000 var ein princippavgerð um at lata skúlan uppaftur eftir summarfrítíðina 2001. Hvørki næmingar ella lærari vóru farin aftur í skúla, og skúlin virkaði ikki sum ein skúlaeind 9. januar 2001, tá nýggja kommunustýrið broytti fyrri avgerðina. Eftir Mentamálastýrisins meting er § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini ætlað sum trygd hjá foreldrum, soleiðis at skilja, at foreldur at børnum í skúlaøkinum hava lógarásettan rætt til at krevja fólkaatkvøðu, um niðurlegging av einum virkandi kommunuskúla, um børn teirra ganga í hesum skúlanum. Skúlin á Trøllanesi var ikki ein virkandi skúli í januar 2001, og kommunustýrið kundi tí broyta fyrru samtyktina eftir vanligu reglunum.“

Við skrivi, dagfest 4. oktober 2001 til (A1 og A2) boðaði Løgmansskrivstovan frá vísandi til skrivið frá Mentamálastýrinum, dagfest 3. oktober 2001, at niðurstøðan hjá Løgmansskrivstovuni var, at kommunustýrið ikki var farið út um sínar heimildir, tá avgerðin um at taka av avgerðina hjá undanfarna kommunustýri varð framd, og at avgerðin ikki var fevnd av ásetingunum í § 29, stk. 5, í fólkaskúlalógini. Skrivið er soljóðandi:

„Sum sagt frá í brævi, dagfest 19. september 2001, var tann parturin av kæruni, ið snúði seg um, um avgerðin hjá kommunustýrinum at avtaka samtyktina hjá undanfarna kommunustýri at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur var í tráð við ásetingarnar í fólkaskúlalógini, send Mentamálastýrinum til viðmerkingar.

Mentamálastýrið hevur í brævi, dagfest 3. oktober 2001, gjørt viðmerkingar, sí hjálagda avrit. Viðmerkingarnar hjá Mentamálastýrinum eru m.a.: „Samtyktin í kommunustýrinum 15. november 2000 var ein princippavgerð um at lata skúlan uppaftur eftir summarfrítíðina 2001. Hvørki næmingar ella lærari vóru farin aftur í skúla, og skúlin virkaði ikki sum ein skúlaeind 9. januar 2001, tá nýggja kommunustýrið broytti fyrru avgerðina. Eftir Mentamálastýrisins meting er § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini ætlað sum trygd hjá foreldrum soleiðis at skilja, at foreldur at børnum í skúlaøkinum hava lógarásettan rætt til at krevja fólkaatkvøðu um niðurlegging av einum virkandi kommunuskúla, um børn teirra ganga í hesum skúlanum. Skúlin á Trøllanesi var ikki ein virkandi skúli í januar 2001, og kommunustýrið kundi tí broyta fyrru samtyktina eftir vanligu reglunum."

Vísandi til viðmerkingarnar hjá Mentamálastýrinum er niðurstøðan hjá Løgmansskrivstovuni, at kommunustýrið ikki er farið út um sínar heimildir tá avgerðin um at avtaka avgerðina hjá undanfarna kommunustýri, varð framd, og at avgerðin ikki er fevnd av ásetingunum í § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini."

Við skrivi, dagfest 16. oktober 2001 sendi løgmaður (K), landsstýrismanni í Mentamálum soljóðandi skriv:

„Løgmaður hevur við heimild í § 33 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya tikið stig til at kanna málið um framferðarháttin hjá Mentamálstýrinum í málinum um at lata upp aftur skúlan á Trøllanesi.

Løgmansskrivstovan vendi sær tí til Mentamálastýrið 3. september 2001 við áheitan um eina lýsing av framferðarháttinum í hesum máli, við serligum atliti at fyrisitingarligu mannagongdini, frá tí at málið byrjaði.

...

Hin 14. september 2001 hevur Løgmansskrivstovan móttikið skriv frá Mentamálastýrinum, ið er ein lýsing av framferðarháttinum í málinum um at lata upp aftur skúlan á Trøllanesi. Løgmanskrivstovan hevur kannað lýsingina og mett um fyrisitingarligu mannagongdina.

Løgmaður vil við hesum átala, at landsstýrismaðurin tók avgerð um at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur, uttan at hann tryggjaði sær at heimild var fyri hesum.

Hóast landsstýrismaðurin seinni hevði boðað frá, at talan var um eitt mistak, so er fyrisitingarliga framferðin sera óheppin fyri borgararnar á Trøllanesi og í Mikladali.

...

Løgmaður staðfestir við støði í áðurnevndu lýsing frá Mentamálastýrinum, at fyrisitingarliga mannagongdin hevur als ikki verið nøktandi. Løgmaður heitir við hesum á landsstýrismannin um at bera so í bandi, at tílíkt ikki kemur fyri aftur.“

**Partshoyringin**

Við skrivum, dagfest 6. febr. 2002 varð klagan frá (A1-A6) til umboðsmannin send Løgmansskrivstovuni og Mentamálastýrinum til ummælis eins og biðið var um, at øll skjølini í málinum vórðu latin umboðsmanninum til láns. Samstundis fekk Mikladals kommuna eina fráboðan um, at klagan varð tikin til viðgerðar, fyribils ikki sum ein klaga mótvegis kommununi, men ístaðin mótvegis báðum stýrunum, ið høvdu staðfest avgerðina hjá kommunustýrinum. Kommunan varð kortini biðin um at lata umboðsmanninum øll skjølini í málinum.

Við skrivi, dagfest 22. febr. 2002 lat Løgmansskrivstovan umboðsmanninum umbidnu skjølini. Sagt var í skrivinum, at ummæli fór at verða latið seinni.

1. mars 2002 bar Mentamálastýrið umboðsmanninum teirra skjøl í málinum.

4. mars móttók umboðsmaðurin avrit av skjølunum frá Mikladals kommunu, send honum við skrivi, dagfest 25. febr. 2002.

Við skrivi, dagfest 27. febr. og sum var umboðsmanninum í hendi 6. mars 2002, hevur Mentamálastýrið gjørt hesar viðmerkingar til klaguna:

„Vísandi til skriv frá Løgtingsins umboðsmanni, dagfest 6. februar 2002, um skúlaviðurskiftini á Trøllanesi skal Mentamálastýrið við hesum gera nakrar viðmerkingar til skrivið frá foreldrunum. Viðmerkingarnar snúgva seg um okkara egnu avgerðir og viðurskifti í klaguni.

**Innleiðing**

Málsøkið fólkaskúlin er býtt sundur millum landsstýrismannin og skúlamyndugleikarnar á staðnum, sum er kommunustýrið og skúlastýrini. Uppgávubýtið er ásett í fólkaskúlalógini. Landsstýrismaðurin hevur m.a. meginfyrisitingina, yvirumsjónina og starvfólkaviðurskiftini undir sær, meðan kommunustýrið hevur ræðið á skúlahølum og undirvísingartilfari. Kommunustýrið hevur sbrt. § 26, stk. 1 skyldu at skipa fyri, at øll børn fáa undirvísing fyrstu 7 skúlaárini, og at hølisviðurskiftini eru í lagi. Tað er sostatt kommunustýrið á Mikladali, sum eigur og umsitir skúlabygningin á Trøllanesi.

**„Niðurlagdur“ ella „fallin burtur“**

Í klaguni frá foreldrunum verður víst á, at tað ikki stendur í § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini, at tað skal vera ein „virkandi“ fólkaskúli, tá ið skúlar vera niðurlagdir eftir hesi grein. Mentamálastýrið hevur í løgfrøðiligu frágreiðingini um skúlaviðurskiftini á Trøllanesi, dagfest 23. august 2001, víst á, at hugtakið „skúli“ má metast sum ein eind, har skúlabygningurin bert er ein partur av eindini. Eindin er samansett av næmingum, lærarum, hølum o.ø. Fólkaskúlalógin vísir á hesa eindina, tá ið orðið „skúli“ verður nýtt. Um so er, at næmingagrundarlagið svíkur, og seinasti næmingurin fer úr skúlanum, so er heldur einki grundarlag fyri at seta lærara, og tá er skúlin burtur, hóast skúlabygningurin framhaldandi er á staðnum. Tá ið seinasti næmingurin fór úr skúlanum á Trøllanesi í 1988, „fall skúlin burtur“ sum løgfrøðilig eind, hóast bygningurin var standandi og er nevndur skúli. Nógvir skúlar í Føroyum eru gjøgnum tíðirnar falnir burtur, av tí at seinasti næmingurin fór úr skúlanum, og tað hevur onga meining at niðurleggja teir eftir § 29, stk 5 í fólkaskúlalógini.

Í skrivinum frá foreldrunum verður víst á „...at hvørja ferð ein

bygdarskúli ikki er ein virkandi skúli, so kann viðkomandi bygdaráð uttan um reglurnar í fólkaskúlalógini samtykkja, at skúlin er niðurlagdur?" Til hetta er at siga, at tað er ikki neyðugt hjá bygdaráðnum at niðurleggja skúlan, tí hann fall burtur av sær sjálvum. § 29, stk 5 verður brúkt, tá ið myndugleikin aktivt tekur avgerð um at lata ein virkandi skúla við næmingum aftur.

Tá ið børn í undirvísingarskyldugum aldri aftur vóru í Trøllanesi, hevði kommunustýrið í Mikladali sambært § 26 í fólkaskúlalógini skyldu at skipa so fyri, at hesi børn fingu undirvísing í hóskandi hølum. Kommunustýrið í Mikladali gjørdi hetta við at vísa á skúlan í Mikladali og skipa fyri koyring, og er hetta í tráð við reglurnar í fólkaskúlalógini. Um kommunur, sum ongan virkandi skúla hava, í eitt tíðarskeið aftur fáa børn í undirvísingarskyldugum aldri, so hava tær skyldu at lata ein skúla í kommununi uppaftur. Tær flestu gera tað við at lata upprunaligu skúlarnar uppaftur, men kommunustýrið í Mikladali valdi eina aðra loysn.

**Samtyktirnar í kommunustýrinum**

Tá fráfarna kommunustýrið í november 2000 samtykti at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur, er hetta ein staðfesting av, at skúlin bert kundi latast uppaftur við einari samtykt í kommunustýrinum. Men skúlin fekk ongantíð tað innihald, ein skúli skal hava, tí næmingar vóru ikki innskrivaðir, ella lærari settur í starv. Verandi kommunustýrið kundi tí taka fyrru samtyktina av, uttan at hava § 29, stk 5 í huganum.

**Viðvíkjandi skúlaumdømi**

Í skrivinum frá foreldrunum verður víst á, at ivamál er um, „hvat orðið skúlaøki í fólkaskúlalógini fevnir um." Til hetta er at viðmerkja, at hóast tað er ásett í § 29 í fólkaskúlalógini, at skúlamyndugleikin kann áseta skúlaumdømismark millum teir sjálvstøðugu skúlarnar í kommununi, hava umdømismørkini lítlan og ongan týdning havt seinastu nógvu árini. Í viðmerkingunum til grein 29 í fólkaskúlalógini á bls. 121 í álitinum verður um skúlaumdømini sagt:

„Henda óformliga skipanin av „skúlaumdømum“ man heldur vera komin sum av sær sjálvum, og sum best hevur tykist hóskað í hvørjum einstøkum føri, uttan at stórvegis skrivligt býti upp í skúladømi tó man vera serliga nógv til skjals (smb. eisini viðmerkingarnar til § 32 um skúlabygnað); men nevndin vil tó mæla til, at hetta pettið verður standandi, sjálvt um tað í viðmerkingunum til 79-lógina stendur um hesa áseting, at hon „ hevur í roynd og veru ikki stórvegis týdning.“

Mentamálastýrið skal eisini gera vart við, at um so er, at eitt umdømismark upprunaliga var á Trøllanesi, so fall hetta mark ið hvussu er burtur, tá skúlin fall burtur sum skúlaeind í 1988. Eftir 1988 var bert ein skúli eftir í kommununi, og skúlaumdømið var tí alt økið í kommununi.“

Við skrivi, dagfest 7. mars 2002 og sent umboðsmanninum við telefaksi sama dagin, hevur Løgmansskrivstovan gjørt hesar viðmerkingar til klaguna:

„Víst verður til skriv, dagfest 6. februar 2002, har Løgmansskrivstovan verður biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl viðvíkjandi málinum um skúlan á Trøllanesi umframt eitt møguligt ummæli.

Klagan frá foreldrunum á Trøllanesi snýr seg m.a. um avgerðir, sum Løgmansskrivstovan hevur tikið í sambandi við tann fundin í kommunustýrinum fyri Mikladals kommunu, har gjørt varð av, at skúlagongdin á Trøllanesi ikki skuldi takast uppaftur.

Skjølini viðvíkjandi málinum um skúlan á Trøllanesi eru latin umboðsmanninum tann 22. februar 2002.

Løgmansskrivstovan hevur annars hesar viðmerkingar til málið:

Viðvíkjandi fyrispurninginum frá Mikladals kommunu um fyrsti fundurin varð lógligur verður víst til skriv Løgmansskrivstovunnar, dagfest 16. august 2001, (j. nr. 556-6-07-0001/2001/2) har kommunustýrinum varð boðað frá, at fundurin mátti metast at vera lógligur, hóast fundurin ikki var alment lýstur.

Viðvíkjandi kæruni frá 11. september 2001, sum foreldur á

Trøllanesi sendu Løgmansskrivstovuni um avgerð kommunustýrisins frá 9. januar 2001, verður víst til skriv Løgmansskrivstovunnar, dagfest 19. september 2001, (j. nr. 559-07-0001/2001 / 2) viðvíkjandi trimum av fýra spurningum, og til skriv Løgmansskrivstovunnar, dagfest 4. oktober 2001, (j. nr. 559-07-0001/2001 / 7) viðvíkjandi fjórða spurninginum.

Av tí at svarið uppá fyrispurning frá (S), løgtingsmanni til ... løgmann, viðvíkjandi avgerðum í sambandi við skúlamálið á Trøllanesi, svarar flestu spurningunum, sum klagan frá foreldrunum á Trøllanesi annars má metast at seta fyri Løgmansskrivstovunnar viðkomandi, verður at enda sum heild víst til løgtingsmál nr. 100-29 frá 2001, okkara j. nr. 111-0035/2001.

Í svarinum uppá fyrispurningin verður m.a. víst til almennu viðmerkingarnar til løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin). Viðmerkjast kann, at hesar eru at finna sum løgtingsmál nr. 82 frá 1999.

Eru annars ógreiðleikar, er Løgmansskrivstovan altíð fús at koma við neyðugum útgreiningum."

Fyrispurningurin frá (S) til løgmann, ið víst er til omanfyri, er soljóðandi:

*„Ár 2001, týsdagin 23. oktober, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá (S), løgtingsmanni sum var soljóðandi:*

**Fyrispurningur**

1. Kann eitt nývalt bygda(r)ráð á sínum fyrsta fundi gera annað enn at skipa seg og lýsa komandi fundir?
2. Hevur løgmaður skyldu at ógilda avgerðir, ið stríða ímóti grein 13, stk. 1, og grein 27, stk. 2 í kommunustýrislógini?
3. Ber til at leggja ein bygdarskúla niður uttan at fara fram eftir grein 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini?
4. Er talan um brot á eina 'garantiforskrift', tá ið fundur um mál, ið kann verða lagt til fólkaatkvøðu, ikki er lýstur og avgerðin ikki kunngjørd eftir lógini?

**Viðmerkingar:**

Í skrivi, dagfest 11. september 2001, sendu foreldur at skúlabørnum á Trøllanesi kæru til Kommunala Eftirlitið viðvíkjandi avgerð hjá nývalda kommunustýrinum fyri Mikladals kommunu um ikki at taka uppaftur skúlagongdina á Trøllanesi.

Í kæruni vísa foreldrini á, at í fíggjarárinum 1999 varð peningur settur av til nýggj vindeygu og oljufýr til skúlan á Trøllanesi, og at í fíggjarárinum 2000 varð peningur settur av til nýtt tak til skúlan. Foreldrini vísa eisini á, at undanfarna bygdarráð á fundi 15. november 2000 samtykti at seta skúlan í stand og at taka skúlagongdina á Trøllanesi uppaftur við skúlaársbyrjan 2001.

Síðani verður víst á, at nývalda kommunustýrið á sínum fyrsta fundi, sum varð hildin 9. januar 2001, samtykti at strika samtyktina frá bygdaráðsfundinum 15. november 2000 um at taka skúlagongdina á Trøllanesi uppaftur frá skúlaársbyrjan 2001. Í kæruni vísa foreldrini á, at hesin fundurin varð ikki kunngjørdur frammanundan, soleiðis sum ásetingarnar í kommunustýrislógini siga, og at samtyktir gjørdar á fundinum heldur ikki eru almannakunngjørdar sambært ásetingunum í kommunustýrislógini.

Í kommunustýrislógini stendur í grein 13, stk. 1: „Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nærri reglur um vanligar fundir verða ásettar í fundarskipan. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.“ Í grein 27, stk. 2 í somu lóg verður sagt: „Yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, eins og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund, skulu verða almannakunngjørd við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu.“

Í skrivi dagfest 14. august 2001, hevur Mikladals Bygdarráð eisini vent sær til Løgmansskrivstovuna við fyrispurningi um, annaðhvørt fundurin í bygdaráðnum 9. januar 2001 var lógligur ella ikki. Í svarinum, sum er dagfest 16. august 2001, verður m. a. sagt:

„Spurt verður um fyrsti fundurin í kommunustýrinum var lógligur, og harvið um samtyktir á hesum fundi eru galdandi. Víst verður á, at fundurin vegna ókunnleika til kommunustýrislógina ikki var lýstur alment.“ Síðani verður víst á, at ásetingarnar um

almannakunngering av vanligum kommunustýrisfundum er í grein 13, stk. 1.

So kemur hetta heilt einastandandi svarið frá Løgmansskrivstovuni, og eg haldi at nú skulu løgtingsmenn halda sær fast. Tað er soljóðandi: „Eftir eina ítøkiliga meting, er niðurstøðan hjá Løgmansskrivstovuni, at fyrsti fundurin var lógligur. Henda meting er grundað á, at tað snýr seg um fyrsta fundin í einum nýggjum kommunustýri, har allir limirnir vóru nývaldir, og at ásetingin bert hevði verið fylgd, um fráfarna kommunustýrið hevði ásett og almannakunngjørt nær, ið vanligu fundirnir skuldu haldast.“

Ja, hetta er heilt einastandandi, og ein fær hug at spyrja Føroya Løgmann, hvar markið gongur, nær eitt kommunustýri er so mikið gamalt, at kravt kann verða, at limirnir eru kunnugir við reglurnar í kommunustýrislógini? Er markið 10 dagar eftir, at kommunustýrið hevur tikið við, ella er tað 50 dagar aftaná, at kommunustýrisvalið hevur verið? Ella er tað ein, tveir ella fimm mánaðir eftir, at kommunustýrið hevur tikið við ella eftir, at valið hevur verið? Ella er hetta nakað sum løgmaður skal avgera í hvørjum einstøkum føri? Verður avgerðin hjá bygdaráðnum ikki sett til viks, so ber tað í sær, at nývald bygdarráð á sínum fyrsta fundi kunnu taka allar hugsandi avgerðir, uttan at fylgja demokratisku mannagongdini, sum liggur í kommunustýrislógini.

Formliga er skúlin á Trøllanesi ongantíð niðurlagdur. Har hevur bara ongin skúlagongd verið seinastu 14 árini. Tvørturímóti hevði undanfarna bygdarráðið fyri Mikladals kommunu ætlanir um, at skúlagongdin á Trøllanesi skuldi takast uppaftur við skúlaársbyrjan 2001. Hetta samtykti bygdaráðið á fundi 15. november 2000. Men 9. januar 2001 verður samtykt, at skúlin á Trøllanesi verður niðurlagdur, og hetta verður gjørt, uttan at gingið verður eftir reglunum í grein 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini um niðurlegging av skúlum.

Í fólkaskúlalógini grein 29, stk. 5, stendur: „Um eitt kommunustýri hevur gjørt av at leggja ein skúla niður, so skal tað verða kunngjørt í teimum føroysku bløðunum. Um í minsta lagi 30% av teimum íbúgvum í viðkomandi skúlaumdømi, ið hava valrætt til kommunustýrið, seta fram innan ein mánað eftir kunngerðina

skrivliga áheitan um tað, so skal kommunustýrið halda atkvøðugreiðslu um at leggja skúlan niður. Atkvøðurætt hava teir íbúgvar í skúlaumdøminum, ið hava atkvøðurætt til kommunustýrið. Landsstýrismaðurin ásetur greinligari reglur um tílíkar atkvøðugreiðslur. Verður úrslitið av atkvøðugreiðsluni, at í minsta lagi 50% av teimum, ið hava atkvøtt, ynskja at varðveita skúlan, verður hann varðveittur.“

Skúlabørnini á Trøllanesi og teirra foreldur, vóru vitandi um, at undanfarna bygdaráðið fyri Mikladals kommunu á fundi 15. november 2000 hevði samtykt, at skúlagongdin á Trøllanesi skuldi takast uppaftur frá skúlaársbyrjan 2001. Sostatt livdu tey í teirri trúgv, at børnini eftir summarfrítíðina í minsta lagi skuldu ganga í skúla í heimbygdini aðruhvørja viku. Men samtyktin frá 9. januar 2001, sum sambært ásetingarnar í fólkaskúlalógini skuldi verið kunngjørd í teimum føroysku bløðunum, hevur verið duld sum mansmorð í meira enn eitt hálvt ár. Ongin visti um hesa samtyktina fyrr enn dagurin, tá skúlagongdin skuldi byrja aftur eftir summarfrítíðina, stóð beint fyri durum. T.v.s., at borgararnir í kommununi hava ikki havt møguleika fyri at krevja fólkaatkvøðu innan ta freist, ið lógin ásetir.

Sostatt eru hvørki mannagongdirnar í kommunustýrislógini ella í fólkaskúlalógini fylgdar, og løgmaður má tí – við heimild í grein 55, stk. 1 í kommunustýrislógini – haldast at hava skyldu at ógilda eina slíka avgerð, ið er grundað á eina ólógliga og ódemokratiska mannagongd. Har stendur: „Hevur kommunustýrið tikið eina avgerð, sum er ímóti lóggávuni, kann landsstýrismaðurin ógilda avgerðina. Undir viðgerðini av málinum kann landsstýrismaðurin fyribils taka avgerðina av.“ Løgmaður kann ikki velja at lata avgerðina fara aftur við borðinum. Hendan skylda løgmans má haldast at vera serliga greið í hesum føri, har talan er um at leggja niður skúlar, tí lógin ásetir, at borgararnir í kommununi kunnu krevja fólkaatkvøðu um niðurleggingina. Í løgfrøðini verður tosað um hugtakið „garantiforskrift“; t.v.s. áseting av eini mannagongd, ið skal tryggja avgerðir, ið eru rættar og lógligar. Brot á garantiforskriftir føra altíð við sær, at ein avgerð verður ógildað.

Nú hava vit hoyrt og lisið, at løgfrøðingur í Mentamálstýrinum hevur gjørt eina meting av málinum og er komin til ta niðurstøðu, at passivitetur — tað at skúlagongd ikki hevur verið á Trøllanesi í fleiri ár — hevur niðurlagt skúlan. Og tað tykist at løgmaður hevur tikið hesa niðurstøðu til eftirtektar. Men hvar í fólkaskúlalógini stendur tað, at passivitetur kann niðurleggja ein skúla? Eg dugi ikki at finna nakra tílíka áseting! Harafturímóti eru heilt greiðar ásetingar í grein 29, stk. 5. Tað er als ikki neyðugt at gera løgfrøðisligar metingar og løgfrøðisligar niðurstøður í tí spurninginum. Tvørturímóti má haldast, at øll forsøgan og ikki minst avgerð bygdaráðsins 15. nov. gav borgarunum alla orsøk til at halda, at undirvísingin fór at verða tikin uppaftur á Trøllanesi.

Tað stutta av tí langa er, at kommunustýrisfundurin, har samtykt varð formliga at niðurleggja skúlan á Trøllanesi, varð í stríð við ásetingarnar í kommunustýrislógini, og at sjálv niðurleggingin ikki er farin fram eftir teim greiðu reglunum í fólkaskúlalógini. Men Føroya Løgmaður tykist bert á síggja millum fingrarnar við hesum. Ella tað, sum verri er, hann tykist at halda hondina yvir hesar mannagongdir, sum heilt greitt fremja brot á áðurnevndu lógir.

Seinastu mongu árini er nógv tosað um bygdarmenning. Sjálvur hevur løgmaður sett eina útoyggjanevnd. Frá hesi nevnd hava vit fingið eitt útoyggjaálit. Og løgmaður tosar áhaldandi um útoyggjapolitikk og um at menna útoyggjarnar. Hvussu samsvarar avgerðin hjá Løgmansskrivstovuni í skúlamálinum á Trøllanesi við alt tosið um útoyggjanevnd, útoyggjaálit og útoyggjapolitikk? Og til seinast: allir flokkar hava í virkisskrá síni, at í øllum bygdum, har skúlabørn eru, skal barnaskúli vera. Hvussu samsvarar avgerðin hjá Løgmansskristovuni við hetta?

Út frá hesum loyvi eg mær at seta løgmanni hesar spurningar."

Svarið frá løgmanni uppá fyrispurningin er soljóðandi:

„Á løgtingsfundi 24. oktober 2001 varð samtykt, at løgmaður skuldi svara soljóðandi fyrispurningi frá (S), løgtingsmanni:

1. Kann eitt nývalt bygda(r)ráð á sínum fyrsta fundi gera annað enn at skipa seg og lýsa komandi fundir?
2. Hevur løgmaður skyldu at ógilda avgerðir, ið stríða ímóti § 13, stk. 1, og grein 27, stk. 2 í kommunustýrislógini?
3. Ber til at leggja ein bygdarskúla niður uttan at fara fram eftir § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini?
4. Er talan um brot á eina 'garantiforskrift', tá ið fundur um mál, ið kann verða lagt til fólkaatkvøðu, ikki er lýstur og avgerðin ikki kunngjørd eftir lógini?

**Til nr. 1.**
Sambært § 3 í kommunuvallógini (løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 6. oktober 2000) fer regluligt val fram annan týsdag í november, og valskeiðið gongur frá 1. januar árið eftir.

Fyrsti fundurin hjá nývalda kommunustýrinum er umrøddur í § 12 í kommunustýrislógini (lógtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)). Har verður m.a. ásett, at nývalda kommunustýrið skal skipa seg í seinasta lagi innan árslok í valárinum, og at kommunustýrið skal vera fullmannað á fyrsta fundi.

Í viðmerkingunum til § 12 verður m.a. nevnt, hvørji mál eitt nývalt kommunustýri kann viðgerða innan árslok, t.e. áðrenn valskeiðið byrjar. Í tíðarskeiðinum til valskeiðið byrjar, kann nývalda kommunustýrið sostatt einans viðgerða tey mál, sum lógin ásetir, sum t.d. val av borgarstjóra, varaborgarstjóra, val av limum í fíggjarnevndina o.s.fr.

Spurningurin, um nývalda kommunustýrið eisini skal ella kann taka støðu til/lýsa komandi fundir á fyrsta fundinum, er ikki beinleiðis umrøddur í kommunustýrislógini ella viðmerkingunum til lógina. Avgerðir um, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir, skulu takast árliga, og hava ikki beinleiðis samband við tað at skipa kommunustýrið.

Tá tað snýr seg um fyrsta fundin, er Løgmansskrivstovan tí av teirri fatan, at hóast § 13, stk. 1 ásetir, at ársfundarætlanin skal verða almannakunngjørd við ársbyrjan, hoyra tílíkar avgerðir

ikki fyrsta fundinum til, men skulu hinvegin verða tiknar og almannakunngjørdar skjótast gjørligt, tá valskeiðið er byrjað.

Snýr tað seg hinvegin ikki um fyrsta vanliga fundin í byrjanini av valskeiðnum, eigur ein tílík avgerð eftir umstøðunum at verða tikin innan árslok, soleiðis at hon kann verða almannakunngjørd við ársbyrjan.

Á fundinum 9. januar 2001, og sum í fyrispurninginum verður umrøddur sum fyrsti fundurin hjá Mikladals kommunu, varð málið um skúlan í Trøllanesi viðgjørt. Á fundinum varð samtykt, at skúlin á Trøllanesi ikki skuldi lata upp aftur, sum undanfarna kommunustýrið hevði samtykt.

Fyri at eingin ivi skal vera, skal vera upplýst, at hetta var fyrsti vanligi fundur í kommunustýrinum í hesum valskeiðnum. Fyrsti fundur sambært kommunustýrislógini, t.e. tann fundurin har kommunustýrið skipar seg, og sum sambært lógini skal verða innan valskeiðið byrjar, varð sambært gerðabókini hjá kommununi hildin 27. desember 2000.

Fundurin 9. januar 2001 má sostatt javnsetast við aðrar vanligar fundir, soleiðis at skilja, at kommunustýrið kundi viðgerða øll mál, har kommunustýrið annars er málsførur myndugleiki.

**Til nr. 2.**

Hesin spurningurin má skiljast sundur. Fyrri spurningurin er, um avgerðir, sum alment eru ímóti ásetingunum í §§ 13 og 27 skulu ógildast. Seinni spurningurin er, um avgerðir, tiknar á fundum, sum ikki eru almannakunngjørdir sum ásett í §§ 13 og 27 ella har úrrit úr gerðabókini ikki er almannakunngjørt, skulu ógildast.

Viðvíkjandi fyrra spurninginum er at viðmerkja, at sambært viðmerkingunum til kommunustýrislógina skulu yvirlit yvir mál, ið koma fyri á fundi umframt úrrit úr gerðabókini frá seinasta fundi almannakunngerðast. Sambært almennu viðmerkingunum eru hesar nýggju reglurnar ein liður í kunningini av borgarunum.

Nýggju reglurnar um almannakunngerðing av ársfundarætlanini er á sama hátt sum yvirlit yvir mál og úrrit úr gerðabókini ein liður í kunningini av borgarunum. Sambært viðmerkingunum til lógina skal kommunustýrið árliga áseta, nær kommunustýris-

fundir skulu verða, og tað eigur at verða gjørt við atliti at møguleika borgaranna til hjáveru. Tað er tí hóskiligt at halda kommunustýrisfundir uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Tekur eitt kommunustýri t.d. avgerð um at leggja vanligu fundirnir soleiðis, at møguleiki borgaranna til hjáveru verður skerdur ella heilt útihýstur, vil ein tílík avgerð vera ein framferðarháttur, sum setur ætlaninar við lógini til viks. Tað kann tí hugsast, at ein tílík avgerð fer soleiðis út um karmarnar á ásetingunum í §§ 13, stk. 1 og § 27, stk. 2, so hon má metast at vera ólóglig.

Á sama hátt hevði verið við einari avgerð, har kommunustýrið samtykkir ikki at almannakunngerða ársfundarætlanina ella yvirlit yvir mál, ið koma fyri á fundi umframt úrrit úr gerðabókini frá seinasta fundi.

Heimildir landsstýrismansins eftir § 55 í kommunustýrislógini snúgva seg um tær avgerðir, sum eru ímóti lóggávuni. Er tað greitt, at ein avgerð, um t.d. ikki at almannakunngerða fundir o.l, ikki er í samsvari við §§ 13 og 27, og eru treytirnar eftir § 55 annars loknar, verður mett, at landsstýrismaðurin eftir umstøðunum hevði havt skyldu til at nýtt heimildirnar í § 55, herundir at ógilda eina ólógliga avgerð, ella at borið so í bandi, at kommunustýrið tók lógliga avgerð um viðurskiftini.

Sambært almennu viðmerkingunum til kommunustýrislógina verða meginreglurnar og grundleggjandi bygnaðurin í galdandi lóggávu um kommunustýrið varðveitt, og sum nevnt omanfyri eru nýggju reglurnar um almannakunngerðing av ársfundarætlanini, yvirliti yvir mál og úrriti úr gerðabókini ein liður í kunningini av borgarunum.

Til seinna spurningin er tí at viðmerkja, at Løgmansskrivstovan er av teirri fatan, at um kommunustýrið er viðtøkuført, verður fundurin ikki ólógligur orsakað av, at hann ikki er almannakunngjørdur sum partur av ársfundarætlanini, ikki er lýstur ítøkiliga ella um yvirlit yvir mál, ið koma fyri á fundinum ikki eru lýst frammanundan.

Ein tikin avgerð, har kommunustýrið annars er rættur myndugleiki, eigur tí í útgangsstøðinum ikki at verða ógildað, hóast reglurnar um kunning av borgarunum ikki eru fylgdar.

Á sama hátt verður ikki mett, at avgerðir á einum annars lógligum fundi skulu ógildast, um úrrit úr gerðabókini frá seinasta fundi ikki er ella verður almannakunngjørt. Her skal tó beinanvegin verða lagt aftrat, at hóast nýggju reglurnar um almenni/kunning av borgarunum ikki av sær sjálvum hava við sær, at tiknar avgerðir eru ógildigar ella skulu ógildast, eru viðkomandi reglur ikki hildnar, so hevur kommunustýrið til eina og hvørja tíð skyldu til at halda hesar reglur.

Er ein avgerð sostatt ikki almannakunngjørd til ta tíð og á tann hátt, sum lógin ásetir, eigur mistakið skjótast gjørligt at verða rættað eftirfylgjandi, og heldur eitt kommunustýri ikki reglurnar í § 13, stk. 1 og § 27, stk. 2, kann landsstýrismaðurin í seinna enda við heimild í § 55 í kommunustýrislógini áleggja einstøku kommunustýrislimunum, sum hava ábyrgdina av, at kommunustýrið ikki heldur skyldur sínar sambært nevndu greinum, tvingsilsbøtur til viðurskiftini eru fingin í rættlag.

Í hesum sambandi kann eisini verða nevnt, at sambært § 13, stk. 2 kann kommunustýrið hava eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað.

Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess. Er høvi ikki til at lýsa avgerðina um eykafund, og eru treytirnar fyri at halda eykafund annars loknar, má fyrilitið til kunning av borgarunum sostatt eftir umstøðunum víkja. Eykafundurin er sostatt ikki ólógligur orsakað av væntandi almannakunngerðing, eins og avgerðirnar, tiknar á tílíkum eykafundum, sum útgangsstøði eru fult lógligar.

**Til nr. 3.**

Í sambandi við fyrispurning frá kommunustýrinum og kæru frá foreldrum á Trøllanesi, dagfest ávikavist 14. august og 11. september 2001, varð spurningurin um viðgerðina av málinum um bygdarskúlan viðgjørdur. Við tað at fólkaskúlalógin hoyrir til málsøkið hjá Mentamálastýrinum, bað Løgmansskrivstovan Mentamálastýrið um ummæli til henda partin av kæruni.

Viðmerkjast kann, at niðurstøðan hjá Mentamálastýrinum sum kunnugt er, at § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini er ætlað sum trygd hjá

foreldrum, soleiðis at skilja, at foreldur at børnum í skúlaøkinum hava lógarásettan rætt til at krevja fólkaatkvøðu, um niðurlegging av einum virkandi kommunuskúla, um børn teirra ganga í hesum skúlanum.

Skúlin á Trøllanesi var ikki ein virkandi skúli í januar 2001, og kommunustýrið kundi tí broyta fyrru samtyktina eftir vanligu reglunum. Viðvíkjandi hesum partinum av fyrispurninginum verður tí sum heild víst til hjálagda avrit av skrivinum frá Mentamálastýrinum, dagfest 3. oktober 2001.

**Til nr. 4.**

Tá niðurstøðan hjá Mentamálastýrinum sum nevnt er, at kommunustýrið kundi avgreiða málið um bygdarskúlan eftir vanligum reglum, verður ikki mett, at avgerðin á fundinum tann 9. januar 2001 kann sigast at vera brot á eina sonevnda „garantiforskrift“, hóast fundurin ikki varð lýstur og avgerðin ikki kunngjørd eftir reglunum, sum ásettar eru í kommunustýrislógini.“

Við skrivi, dagfest 21. mars 2002 vóru viðmerkingarnar frá báðum stýrunum sendar (A1-A6) til ummælis. Sama dagin vóru ummælini frá Løgmansskrivstovuni og Mentamálastýrinum send kommununi og hinum stýrinum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 8. apríl 2002 boðaði Løgmansskrivstovan umboðsmanninum frá, at hon ongar viðmerkingar hevði til skrivið frá Mentamálastýrinum.

Við skrivi, dagfest 10. apríl 2002 hava (A1-A6) latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Ein viðmerking til skrivið frá Mentamálastýrinum í samband við klagu okkara. Undir yvirskriftini “Samtyktir í kommunustýrinum“ sigur Mentamálastýrið at samtyktin í november 2000 er ein staðfesting av, at skúlin einans kann lata uppaftur av einari samtykt í kommunustýrinum.

Eftir okkara uppfatan er hesin pástandur púra burturvið. Fyrst tí at undanfarin bygdarráð altíð hava sagt, at skúlagongdin á Trøllanesi verður tikin uppaftur tá ynski frá okkum er um tað. Í

> øðrum lagið hevði samtyktin til endamáls at fáa tær av bygdarráðnum samtyktu umvælingar førdar út í lívið, og ikki at lata formannin framhaldandi liggja oman á teimum. Í triðja lagið mugu vit gera vart við, at uppskotið til samtyktina í nov. 2000 var í 2 punktum. Punkt 2 skuldi til atkvøðugreiðslu um punkt 1 fall. Tá eitt nýtt bygdarráð strikar samtyktina av punkt 1 í januar 2001, so kunnu tey væl ikki bara síggja burtur frá punkt 2 – ella hvussu?
>
> Annars vilja vit vísa til fyrispurningin hjá (S) undir yvirskriftini „Viðmerkingar„.
>
> Hjálagt er bræv frá Mikladals bygdarráð til Løgmansskrivstovuna har Bygdarráðið sigur seg ikki kenna til grein 13, stk. 1 í kommunustýrislógini og seinni í sama brævið sigur seg at hava fylgt grein 27, stk. 2 í somu lóg."

Við skrivi, dagfest 1. mai 2002 boðaði umboðsmaðurin (A1-A6), kommununi og báðum stýrunum frá, at av tí, at eingin av myndugleikunum hevði gjørt viðmerkingar til skrivið frá umboðsmanninum, dagfest 21. mars 2002, bleiv klagan nú tikin upp til viðgerðar. Avrit av seinasta skrivinum frá (A1-A6) bleiv samstundis sent pørtunum til kunningar.

## *Niðurstøða*

*Sambært § 46 í fólkaskúlalógini eru kommunustýrið og skúlastýrið at rokna sum skúlamyndugleikar á staðnum. Kommunustýrið hevur sambært § 47, stk. 1 skyldu til at skipa so fyri, at íbúgvarnir í kommununi hava møguleika fyri at fáa ta í § 26 nevndu undirvísingina (tvs. tey fyrstu sjey skúlaárini), eins og at fígging er tøk til hesa. Sambært § 47, stk. 3 er tað eisini ábyrgd kommunustýrisins, at hóskandi undirvísingarhøli eru tøk til ta í § 26 nevndu undirvísingina, ella at avtala er gjørd við aðra kommunu um felags undirvísing.*

*Tað framgongur av málinum, at tað frá gamlari tíð bæði hevur verið skúlagongd í Mikladali og á Trøllanesi, og hava skúlabygningar verið til taks í báðum bygdunum. Hetta var sjálvsagt fyrr, tá vegasambandið, ið*

*tá var millum bygdirnar, verður havt í huga. Eftir at berghol er komið, og koyrandi er millum bygdirnar – eitt strekki, ið sambært Álmanakkanum er 6 km. – er hetta kanska ikki so sjálvsagt longur.*

*Í 1988 varð skúlagongdin á Trøllanesi niðurløgd, tí at einki skúlabarn tá var í bygdini, og er skúlagongdin ikki tikin uppaftur á Trøllanesi síðani.*

*Tann 15. november 2000 samtykti táverandi bygdaráð at taka skúlagongdina uppaftur á Trøllanesi við skúlaársbyrjan í 2001. Men longu 9. januar 2001 ger bygdaráðið, sum varð valt á kommunuvalinum í november 2000, nýggja samtykt um, at skúlin á Trøllanesi ikki skal opna aftur.*

*Tað er eingin ivi um, at eitt lógliga valt bygdaráð kann broyta ella taka av umrøddu samtyktina. Spurningurin er tí, um nýggja samtyktin annars var lóglig.*

*(A1-A6) hava ført fram, at fundurin tann 9. januar 2001, sum tey kalla fyrsti fundur hjá nýggja bygdaráðnum, var ólógligur, tí hann var ikki lógliga lýstur frammanundan. Tey hava í hesum sambandi víst til §§ 13, stk. 1 og 27, stk. 2 í kommunustýrislógini.*

*Til hetta er at siga, at fyrsti fundurin hjá nýggja bygdaráðnum ikki var tann 9. januar 2001, men tann 27. desember 2000, har nýggja bygdarráðið skipaði seg, eins og tað skal sambært § 12, stk. 1 í kommunustýrislógini (løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000). Kommunustýrislógin kom ikki í gildi í síni heild fyrr enn 1. januar 2001, men reglan um at valda bygdaráðið skal skipa seg innan árslok var eisini galdandi eftir § 4 í teirri gomlu kommunulógini (løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 við seinni broytingum).*

*Sambært § 13, stk. 1 í kommunstýrislógini skulu nærri reglur um vanligar fundir verða ásettar í fundarskipanini, og skal við ársbyrjan verða kunngjørt, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir skulu verða hildnir. Sambært § 27, stk. 2 skulu yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund verða almannakunngjørd.*

*Viðmerkingarnar til § 13 í kommunustýrislógini eru soljóðandi:*

„**Til stk. 1.** Ásetingin um, at kommunustýrið vanliga hevur fund eina ferð um mánaðin er ein vegleiðandi regla. Hon er tí ikki til hindurs fyri, at fleiri fundir verða hildnir, ella, at eingir vanligir fundir t.d. verða hildnir í summarfrítíðini. Kommunustýrið ger

sjálvt av, nær og hvar vanligir fundir verða hildnir. Kommunustýrið kann gera av, at halda fundir ávísar dagar í vikuni, dagstevndar dagar ella annað.

Tá ið kommunustýrið árliga ásetir nær kommunustýrisfundir skulu verða, so eigur tað at verða gjørt við atliti at møguleika borgaranna til hjáveru. Tað er tí hóskiligt at halda kommunustýrisfundir uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Tann samtykta fundarætlanin er bindandi, og skal hon sambært stk. 1, 2. pkt. verða almannakunngjørd. Sambært vanligum reglum, er tað eitt krav til fundarætlanina, at hon er so mikið greið, at borgararnir ikki aftaná almannakunngerðingina ivast í, nær kommunustýrisfundir verða hildnir. Henda ásetingin krevur sostatt, at bæði fundarrøðin og tann einstaki fundurin skulu verða almannakunngjørd.

**Til stk. 2.** Skulu eykafundir verða hildnir, so eiga teir at verða hildnir skjótast gjørligt. Vanliga reglan um fundarfráboðan ber við sær, at eykafundur eigur at verða fráboðaður einar fýra yrkadagar frammanundan, um so er, at málið tolir at bíða so leingi."

*Sum tað framgongur av viðmerkingunum, eru hesar reglur settar í lógina fyri at tryggja borgarunum innlit í og møguleika fyri at fylgja við í kommunustýrisarbeiðinum. Brot á reglurnar kunnu fáa avleiðingar fyri viðkomandi bygdaráð, men slík brot fáa ikki avleiðingar fyri teir einstøku bygdaráðsfundirnar, um teir annars eru lógligir.*

*Fundurin tann 9. januar 2001 var fullmannaður. Uttan mun til, hvussu fundurin annars var innkallaður, var hann tí viðtøkuførur. Tað er sostatt ikki nakað hald í sjónarmiðinum hjá (A1-A6) um, at fundurin tann 9. januar 2001 var ólógligur, tí at hann ikki var lógliga lýstur.*

*(A1-A6) hava eisini víst á § 29, stk. 5, í fólkaskúlalógini, ið er soljóðandi:*

„Um eitt kommunustýri hevur gjørt av at leggja ein skúla niður, so skal tað verða kunngjørt í teimum føroysku bløðunum. Um í minsta lagi 30 % av teimum íbúgvum í viðkomandi skúladømi, ið hava valrætt til kommunustýrið, seta fram innan ein mánað eftir kunngerðingina skrivliga áheitan um tað, so skal kommunustýrið halda atkvøðugreiðslu um at leggja skúlan niður. Atkvøðurætt

hava teir íbúgvar í skúlaumdøminum, ið hava atkvøðurætt til kommunustýrið. Landsstýrismaðurin ásetur greiniligari reglur um tílíkar atkvøðugreiðslur. Verður úrslitið av atkvøðugreiðsluni, at í minsta lagi 50 % av teimum, ið hava atkvøtt, ynskja at varðveita skúlan verður hann varðveittur."

*Sum nevnt omanfyri má tað leggjast til grund, at tað ikki hevur verið nøkur skúlagongd á Trøllanesi síðani 1988. Tað má eisini leggjast til grund, at tað ongantíð er gjørd nøkur formlig samtykt um at leggja skúlagongdina niður í bygdini. Hetta er komið av sær sjálvum, tí eingi børn í skúlaaldri vóru á Trøllanesi í 1988. Tað stendur tó framvegis ein skúlabygningur í bygdini, sum í síni tíð hevur verið nýttur til endamálið. At ein skúlabygningur er á Trøllanesi er ikki í sjálvum sær nóg mikið fyri at siga, at skúli er í bygdini.*

*Tað má eisini leggjast til grund, at samtyktin frá 15. november 2000 ikki var sett í verk, tá samtyktin frá 9. januar 2001 varð gjørd, og var støðan tí í veruleikanum tann sama sum undan 15. november 2000, nevniliga at eingin skúlagongd var á Trøllanesi.*

*Samtyktin hjá kommunustýrinum frá 9. januar 2001 um ikki at taka skúlagongdina á Trøllanesi uppaftur, var sostatt ikki ein avgerð um at niðurleggja ein virkandi skúla. Eg eri samdur við Mentamálastýrið um, at tað er ein treyt fyri, at farast skal fram eftir § 29, stk. 5 í fólkaskúlalógini, at talan er um niðurlegging av einum virkandi skúla. Kommunustýrið hevði sostatt ikki skyldu til at halda atkvøðugreiðslu um spurningin.*

*Tað er tí heldur ikki nøkur orsøk hjá mær at taka støðu til, hvør hevði rætt til at luttaka í einari atkvøðugreiðslu um spurningin, um hetta gjørdist aktuelt.*

*(A1-A6) hava sent Kommunuala eftirlitinum eina klagu. Kommunudeildin ella ta sonevnda „kommunala eftirlitið„ er tó ikki ein vanligur kærumyndugleiki. Talan er um ein eftirlitsmyndugleika, ið kann taka mál upp til viðgerðar/kanningar, sum hann verður kunnaður um. Hetta framgongur av § 56 í Stýrisskipanarlógini, har tað er ásett, at rættur kommunanna til at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins, verður ásettur í løgtingslóg.*

*Hetta merkir m.a., at „kommunala eftirlitið" er subsidiert í mun til*

*eitt nú ein lógarásettan kærumyndugleika á økinum, sí t.d. Jon Andersen, Forvaltningsret, 4. udg., s. 208.*

*Tá ein lesur svarið frá Kommunudeildini til klagararnar, so er hetta orðað sum eitt svar uppá eina kæru.*

*Havandi tað omanfyri standandi í huga, hevði tað kanska verið rættast, um Kommunudeildin sendi klaguna frá (A1-A6) víðari til viðgerðar hjá kærumyndugleikanum, sum sambært § 59 í fólkaskúlalógini er landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum. Hesin kundi so vent sær til Kommunudeildina viðvíkjandi teimum spurningunum, sum snúðu seg um eitt nú gildi av avgerðunum hjá kommunustýrinum.*

*Eg fari tó ikki at lasta Kommunudeildina fyri valda framferðarháttin, tí klagan snúði seg um fleiri ymisk viðurskifti, harav tey flestu snúðu seg um kommunurættarlig viðurskifti, eins og Kommunudeildin valdi at senda tann partin av klaguni, sum var fevndur av kæruheimildini í fólkaskúlalógini, til Mentamálastýrið til ummælis.*

*Av tí, at Kommunudeildin hevur tikið avgerð samsvarandi ummælinum frá Mentamálastýrinum, fær tað ongan innihaldsligan týdning fyri avgerðina, at hesin framferðarhátturin er valdur, heldur enn at klagan í sínari heild varð send Mentamálastýrinum.*

*Eg haldi sostatt ikki grundarlag vera fyri at átala Løgmansskrivstovuna, Kommunudeildina fyri viðgerðina av hesum máli.*

*Sum tað framgongur av tí, sum er nevnt frammanfyri, hevur táverandi landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum í mai 2001 tikið avgerð um, at skúlin á Trøllanesi skuldi lata uppaftur. Mentamálastýrið hevur fráboðað hesa avgerð við skrivinum frá 20. juli 2001; men longu við tíðindaskrivinum tann 24. august 2001 hevur Mentamálastýrið tikið avgerðina aftur við teirri grundgeving, at landsstýrismaðurin ikki hevði heimild til at taka avgerð um, at skúlin á Trøllanesi skuldi lata uppaftur.*

*Eg eri eitt sindur í iva um heimildarspurningin hesum viðvíkjandi. Eg skal í hesum sambandi vísa til § 57, stk. 7 og § 59 í fólkaskúlalógini.*

*§ 57, stk. 7, er soljóðandi:*

„Landsstýrismaðurin kann taka øll mál, ið eru av týdningi fyri fólkaskúlan, til viðgerðar.“

*§ 59 er soljóðandi:*

„Avgerð, sum skúlamyndugleikin á staðnum, herímillum eisini

leiðari skúlans, hevur tikið, kann verða kærd til landsstýrismannin í seinasta lagi 4 vikur, eftir at avgerðin er fráboðað...“

*Tá kommunala sjálvstýrið verður havt í huga og tær fíggjarligu avleiðingar, ið ein avgerð sum hendan kann fáa fyri eina kommunu, og serliga fyri eina so lítla kommunu sum Mikladals kommunu, so eigur ein slík avgerð at verða tikin við fyriliti og skili. Hetta kann ikki sigast um avgerðina hjá táverandi landsstýrismanni, sum ber týðulig brá av at vera tikin í skundi, uttan at hvørki heimildir, fortreytir ella avleiðingar eru kannaðar frammanundan.*

*Uttan mun til um landsstýrismaðurin hevur havt heimild til at taka avgerðina ella ikki, kann eg tí ikki annað enn taka undir við, at Mentamálastýrið hevur tikið avgerðina aftur.*

*Løgmaður hevur við skrivinum, dagfest 16. oktober 2001 givið Mentamálastýrinum eina átalu fyri fyrisitingarligu mannagongdina í hesum málinum. Eg kann bert taka undir við hesari átaluni, og síggi eg tí onga orsøk vera fyri at gera meira við málið.*

## 27.2. Klaga um, at tíðindaflutningurin hjá Útvarpi Føroya hevði verið politiskt stýrdur

A klagaði um, at tíðindaflutningurin hjá Útvarpi Føroya í málinum um leiklutin hjá Thorvaldi Stoltenberg í kanningararbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi, skuldi hava verið politiskt stýrdur.

Umboðsmaðurin helt einki grundarlag vera fyri hesari klaguni, men boðaði Løgtinginum, løgmanni og løgmálaráðharranum frá, at lóggávan á økinum er ófullfíggjað. Sambært § 6, stk. 2 í Kringvarpslógini kunnu avgerðir, sum Útvarpið tekur í spurningum um góðan fjølmiðlasið, kærast til fjølmiðlanevndina sambært fjølmiðlaábyrgdarlógini. Talan er sostatt um ein lógarásettan kærumøguleika, sum ikki finnist, tí lóggávan er ófullfíggjað. (J.nr. 200200017)

**Klagan**

Umboðsmaðurin fekk 23. apríl 2002 eina klagu frá (A) um tíðindaflutningin hjá Útvarpi Føroya. Í klaguni vil (A) vera við, at hesin tíðindaflutningur er politiskt stýrdur av Tórbirni Jacobsen, løgtings- og fólkatingsmanni. Sum grundgeving fyri hesum pástandi vísir (A) til tíðindaflutningin hjá Útvarpinum í sambandi við málið um leiklutin hjá fyrrverandi norska uttanríkis- og verjumálaráðharranum, Thorvald Stoltenberg í sambandi við kanningarbólkin, sum Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi hevur havt ætlanir um at seta á stovn. Í klaguni vísir (A) til eina aðra klagu, sum hann fyrr hevur sent umboðsmanninum viðvíkjandi tíðindaflutninginum hjá Útvarpi Føroya. Tann klagan er avgreidd frá umboðsmanninum, og verður tí ikki tikin við her. Í hesari klaguni sigur (A) m.a.:

> ...
>
> „Sum kunnugt byrjaði hetta málið við, at eg ætlaði at fáa staðfest ein gruna um, at útvarpið eins og hinir fjølmiðlarnir í einum serstøkum máli lat sín tíðindaflutning stýra av politikkara, sum var partur av sakini, og sum tá var landsstýrismaður.
>
> ...
>
> Men nú ber til at **dokumentera**, at útvarpið tilvitað virkar sum ein tíðindatænasta hjá sama politikkara, men nú í hansara eginleika av fólkatingsmanni.

Prógvið fyri hesum er Stoltenbergmálið. Greitt verður frá málinum í síni heild í FF-blaðnum, sum er hjálagt.

Stoltenberg greiðir sjálvur stutt frá hansara støðu í málinum: *Jeg sa „nei" da jeg blev klar over, at denne saken hadde andre hensigter end da den ble lagt for meg første gangen.*

At Stoltenberg váttar, at hann í fyrsta umfari játtaði seg eina ávísa uppgávu fyri NA-bólkin, er einki nýtt. Tað hevur hann gjørt alla tíðina. Men tá hann so kom eftir, at ætlaða uppgávan var ein onnur, enn hann hevði játtað, bakkaði hann út. Og ein má halda, at ein maður sum Stoltenberg má kenna munin millum hesi bæði tingini!

Tað, sum NA-bólkurin nú fer í holt við, er við manipulatión við veruleikanum at seta spurnaðartekin við trúvirðið hjá Stoltenberg. Men samstundis kemur bólkurin av óvart at dokumentera sítt egna trúvirði. Hetta verður víst við hjáløgdu skjølum úr heimasíðuni hjá bólkinum. Taktikkurin er at fyribrigdini „trygdarpolitikkur", „hernaðarpolitikkur" og „hernaðarmál" verða viðgjørd, sum um tey merktu tað sama.

Í presentatiónini av tíðindaskrivinum verður sagt, at Stoltenberg „meget gerne" vildi kanna „hernaðarmál í Føroyum og Grønlandi". Og grundgevingin fyri tíðindaskrivinum er, at TS samb. Sosialin sigur seg ongantíð hava játtað at kanna **hernaðarpolitisk** viðurskifti.

Men í sjálvum tíðindaskrivinum verður váttað, at TS hevur játtað at vera við at arbeiða við **„sikkerhedspolitiske** spørgsmål".

Endamálið er greitt at geva fólki ta fatan, at øll hesi orð standa fyri tí sama fyribrigdinum.

Men soleiðis er tað als ikki. Verður hugt at definitiónunum av hesum fyribrigdum eru tey hesi:

**Sikkerhedspolitik:**
Den del af et lands politik der sigter på 1) at skabe forudsætninger for at holde landets territorium frit for militære aktioner og 2) at tilvejebringe de bedst mulige betingelser for at nationen indenfor sine grænser bevarer friheden til at indrette sig som det selv ønsker.

**Forsvarspolitik, har hernaðarpolitikkur er ein partur**:
Den del af udenrigspolitikken, som ved militære midler har til formål at sikre statens territorium imod andre staters militære suverænitetskrænkelser eller direkte angreb.

Her er, sum tað skilst, avgerandi munur á, og hetta havi eg eisini fingið váttað frá Stoltenberg sjálvum. Út frá hesum kann staðfestast, at Thorvald Stoltenberg als ikki hevur givið tilsøgn um at kanna annað enn trygdarpolitik, og hann hevur ikki á nakran hátt givið tilsøgn um at gera eina kanning av hvat danir hava forvunnið uppá herstøðir í Grønlandi og Føroyum, soleiðis sum NA-bólkurin roynir at gera tað til. NA-bólkurin hevur uppá nakkan av Stoltenberg gjørt henda arbeiðssetningin, sum hann als ikki hevur góðkent.

Tískil er púra einki grundarlag fyri at sáa iva um trúvirðið hjá Thorvald Stoltenberg, sum annars fremstu statsleiðarar í vesturheiminum hava fult álit á.

Fyri at koma aftur til útvarpið: Hjálagt er tey tíðindi, sum útvarpið hevði tann 8. apríl. Sum tað sæst eru hesi tíðindi ein slavisk ókritisk endurtøka av tíðindunum hjá NA-bólkinum, og tey eru borin fram júst sum hesin bólkur vil hava tað: Nevniliga, at tað er Stoltenberg sum hevur villeitt føroyingar! Soleiðis hava lurtararnir eisini fata hesi tíðindini.

Tá hugsað verður um, hvussu langt hetta er frá veruleikanum, mugu júst hesi tíðindini verða ein dokumentatión fyri, at útvarpið rennur politisk ørindi fyri NA-bólkin, og at útvarpið ikki á nakran hátt er óheft, sum tað eigur at vera samb. kringvarpslógina.

Her kann verða skoytt uppí, at útvarpið í hesum máli ikki hevur gjørt nakað sum helst journalistiskt arbeiði. Tíðindini um, at Stoltenberg skuldi fara í holt við umrøddu uppgávu vóru í sær sjálvum sera ósannlík, tá ein kennir hvussu eldfimt hetta málið er, eisini innanhýsis í Danmark. Hetta skuldi sum sjálvfylgju ført við sær, at høvuðspersónurin varð spurdur um sínar ætlanir, ikki minst tá hugsað verður um hvør persónurin er. Og tað hevði lætt latið seg gera at seta seg í samband við Stoltenberg, tí hann stendur í telefonbókini fyri Oslo.

Stoltenberg frættir umvegis frá kunningum í Føroyum um uppgávuna, hann skal hava tikið uppá seg, og tað er í hvussu er ikki útvarpinum fyri at takka, at hesi tíðindi vórðu avsannað.

Men her síggja vit tað ófrættakenda, at tá tað so verður staðfest, at tíðindini eru skeiv, so má hetta undir ongum umstøðum ásannast og rættast av teimum, sum hava latið tíðindini og av teimum sum hava borið tey víðari. Nú ræður um at gera Stoltenberg til lygnara!

Og her stendur „óhefta“ útvarpið í fremstu røð. Ta endurgevur rátt manipulatiónirnar hjá NA-bólkinum uttan á nakran hátt at kanna málið.

Hetta verður eisini gjørt við at blanda hugtøkini „trygdarpolitik“ og „hernaðarmál“ saman, so lurtarin ikki skal vita, hvat ið er hvat, hóast tað má roknast at vera almenn vitan hjá tíðindafólki, at trygdarpolitikkur og hernaðarmál eru hvør sítt.

Framvegis verður Stoltenberg ikki kontaktaður, hóast hansara frágreiðing um málið er sera trúverdig og sannlík, og hóast tað er hann sum trætast til lygn.

Hesin tíðindaflutningurin er í stríð við øll prinsippir fyri óheftum tíðindaflutningi. Tað einasta prinsipp, sum hevur verið galdandi er at káva útyvir, at upprunaligu tíðindini um leiklutin hjá Stoltenberg vóru skeiv. Ein skeivleiki sum ikki hevði verið hendur, um tað bert var gjørt tað mest grundleggjandi journalistiska arbeiði í einum slíkum máli, nevniliga at kanna tað. Hitt prinsippið hevur verið at hjálpa politiskum áhugamálum at káva útyvir, at hesi hava borið skeiv tíðindi. Og í besta fall kann sigast, at hesi áhugamál ikki hava rættað hesi tíðindi, sjálvt ikki tá tey fingu staðfest, at Stoltenberg hevði tikið seg aftur, eisini at arbeiða við trygdarmálum.

Spurningurin er so bert hvat ein lurtari, sum øtast um hesa framferð kann gera. Allar royndir vísa, at tað er nyttuleyst at kæra til útvarpið sjálvt.

...

So spurningurin er hvat umboðsmaðurin sjálvur kann gera við tilætlaðan politiskan tíðindaflutning, sum talan er um. Og sum er eitt greitt brot á skyldina hjá útvarpinum at vera óheft av politiskum áhugamálum.“

**Útvarpstíðindini í Stoltenbergmálinum**

Sambært tíðindahandritunum frá Útvarpi Føroya hava tíðindini í Útvarpinum fríggjadagin 15. mars 2002, kl. 18.30 verið hesi:

> „Norðuratlantsbólkurin í Fólkatinginum er í løtuni í holt við at skipa teir fýra arbeiðsbólkarnar, kommisori'ini, sum skulu lýsa ymisk viðurskifti hjá føroyingum og grønlendingum.
>
> Til at hjálpa sær við hesum arbeiðinum hevur bólkurin fingið norðmannin Thorvald Stoltenberg.
>
> Thorvald Stoltenberg, sum millum annað er fyrrverandi uttanríkis- og verjumálaráðharri umframt at hann hevur verið ST-hákommisserur, skal hjálpa bólkinum at kanna uttanríkis- og trygdarpolitikkin í Norðuratlantshavi síðan 1945.
>
> Eisini hevur bólkurin fingið fólkarættarserfrøðingin Gudmund Alfredsson, sum er leiðari á Raul Wallenberg instituttinum í Lund í Svøríki, at hjálpa sær við arbeiðinum.
>
> Endamálið hjá Norðuratlantsbólkinum er at seta fýra arbeiðsbólkar við óheftum serfrøðingum at kanna fólkarættarligu og hernaðarligu viðurskiftini hjá føroyingum og grønlendingum í danska kongaríkinum.
>
> Harumframt skal ein bólkur kanna, hvørt tað ber til at bøta um ferðasambandið millum Føroyar, Ísland og Grønland, og fjórði bólkurin skal kanna socialu viðurskiftini hjá grønlendingum, sum eru búsitandi í Danmark.
>
> Norðuratlantsbólkurin miðar ímóti at fáa gongd á arbeiðið sum skjótast, og tað skal eftir ætlan vera liðugt síðst í komandi ári.“

Tíðindini leygarmorgunin 16. mars kl. 8.00 vóru sambært handritunum hesi:

> „Fyrrverandi norski uttanríkis- og verjumálaráðharrin, Thorvald Stoltenberg, hevur játtað at vera formaður í einum av bólkunum, sum norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi ætlar at seta at kanna og lýsa ymisk viðurskifti hjá grønlendingum og føroyingum í ríkisfelagsskapinum.

Thorvald Stoltenberg, sum eisini hevur verið ST-hákommiserur, er í dag forseti á deildini hjá Reyða Krossi í Norra.

Eisini hevur bólkurin fingið fólkarættarserfrøðingin Gudmund Alfredsson, sum er leiðari á Raul Wallenberg instituttinum í Lund í Svøríki at hjálpa sær.

Norðuratlantsbólkurin ætlar at seta fýra arbeiðsbólkar við óheftum serfrøðingum at kanna fólkarættarligu og hernaðarligu viðurskiftini hjá føroyingum og grønlendingum í danska kongaríkinum.

Harumframt skal ein av bólkunum eisini kanna, um ferðasambandið millum Føroyar, Ísland og Grønland kann bøtast, og sosialu viðurskiftini hjá grønlendingum sum búgva í Danmark skulu eisini kannast.

Norðuratlantsbólkurin ætlar, at arbeiðið skal byrja sum skjótast, og tað skal vera liðugt síðst í komandi ári.“

Sambært heimasíðuni hjá Útvarpinum vóru tíðindini sunnudagin, 7. apríl kl. 14.00 hesi:

„Lars Emil Johansen, fólkatingsmaður fyri Grønland, sigur við Portalin.fo, at Thorvald Stoltenberg broytti meining, eftir at hann hevði játtað at verið við í arbeiðinum hjá Norðuratlansbólkinum í Fólkatinginum. Tað er eitt mistak, at ikki er boðað frá í føroysku fjølmiðlunum, at Thorvald Stoltenberg ikki er við í arbeiðinum hjá Norðuratlansbólkinum kortini, sigur Lars Emil Johansen. Norðuratlansbólkurin boðaði frá í tíðindaskrivi í seinasta mánað, at fyrrverandi norski uttanríkis- og verjumálaráðharrin, Thorvald Stoltenberg hevði játtað at verið formaður í einum bólki, sum Norðuratlansbólkurin fer at seta at kanna og lýsa ymisk viðurskifti hjá grønlendingum og føroyingum í ríkisfelagsskapinum. Í dag skrivar Portalurin.fo, at seinnapartin fríggjadagin ringdi Lars Emil Johansen til Sosialin og segði, at tað var eitt mistak, at ikki varð boðað frá í føroysku fjølmiðlunum, at Stoltenberg ikki verður við kortini. Lars Emil Johansen segði við Sosialin, at tá hann fyrstu ferð tosaði við Stoltenberg, játtaði hann at vera við. Seinni ringdi hann so aftur og boðaði frá, at tað vildi hann kortini ikki. Lars Emil Johansen sigur grundgevingina vera, at Thorvald Stoltenberg

helt arbeiðsbyrðuna hjá sær gerast ov tunga. „Eg skilji væl Thorvald Stoltenberg og virði eisini hansara avgerð“ sigur Lars Emil Johansen við Portalin.fo. Hann sigur, at hann hevur greitt grønlendskum fjølmiðlum frá, at Stoltenberg kortini ikki verður við í arbeiðinum hjá Norðuratlansbólkinum í Fólkatinginum. Thorvald Stoltenberg segði við Sosialin í gjár, at tá Lars Emil Johansen ringdi, játtaði hann at verða ráðgevi í ávísum uttanríkispolitiskum máli. Stutt eftir gjørdist honum greitt, at Norðuratlansbólkurin hevði útnevnt hann at arbeiða við hernaðarmálum í útnorði. Tá boðaði hann frá, at hann ikki vildi vera við í nøkrum máli. „Eg fari ikki at leggja meg út í politisk mál, sum hava við danska kongaríki at gera“ sigur Thorvald Stoltenberg við Sosialin. Hann sigur við blaðið, at talan er um eina misskiljing, sum hann harmast um.“

Tíðindini mánadagin, 8. apríl, kl. 12.20 vóru sambært heimasíðuni hesi:

**…Thorvald Stoltenberg játtaði fyri Norðuratlantsbólkinum, at hann vildi arbeiða við uttanríkis- og trygdarpolitiskum málum**
Thorvald Stoltenberg vildi sera fegin vera við í bólkinum, sum skuldi kannað m.a. trygdarpolitisku viðurskiftini hjá Føroyum og Grønlandi. Sambært Norðuratlantsbólkinum bar hann seg seinni undan, tí arbeiðið var ov stórt. Sambært Sosialinum bar hann seg undan, tí hann vil ikki leggja seg út í hernaðarmál í útnorði. Tey eru eitt politiskt mál hjá danska kongaríkinum.

Norðuratlansbólkurin í Fólkatinginum skjalprógvar í dag, at Thorvald Stoltenberg játtaði at vera við í bólkinum, sum skuldi arbeiða við uttanríkis- og trygdarpolitiskum málum saman við einum føroyskum studenti og einum grønlendskum studenti í Danmark. Í einum brævi til Lars Emil Johansen, fólkatingsmann, váttar persónligi skrivarin hjá Thorvald Stoltenberg, at Stoltenberg hevur fingið brævið frá Lars Emil Johansen. Síðan stendur í svarinum til Lars Emil Johansen, at: „han har bedt mig meddele Dem, at han meget gerne vil deltage i ovennævnte gruppe“. Og ovennævnte gruppe er sambært brævinum hjá Lars Emil Johansen bólkurin, sum skal arbeiða við „de udenrigs- og sikkerhedspolitiske spørgsmål“. Norðuratlantsbólkurin spurdi eisini fyrrverandi

fólkatingsmannin Preben Vilhjelm, um hann vildi vera við í bólkinum, men eisini hann hevur boðað frá, at hann kann ikki, tí hann heldur seg ikki vera føran fyri at átaka sær eitt so stórt arbeiði, sigur Norðuratlantsbólkurin í tíðindaskrivi í dag. Somu grundgeving brúkti Thorvald Stoltenberg, tá hann seinni bar seg undan at vera við. Thorvald Stoltenberg segði við Sosialin leygardagin, at hann játtaði at vera ráðgevi í ávísum uttanríkispolitiskum máli. Stutt eftir, sigur hann, gjørdist honum greitt, at Norðuratlantsbólkurin hevði útnevnt hann at arbeiða við hernaðarmálum í útnorði. Tá boðaði hann frá, at hann ikki vildi vera við í nøkrum máli. „Eg fari ikki at leggja meg út í politisk mál, sum hava við danska kongaríki at gera“ sigur Thorvald Stoltenberg við Sosialin. Hann sigur við blaðið, at talan er um eina misskiljing, sum hann harmast um. Ikki verður sagt í blaðgreinini, hvussu Thorvald Stoltenberg skilti orðið „sikkerhedspolitiske spørgsmål“ í brævinum frá Lars Emil Johansen. Útvarpið hevur roynt at fáa orð á Thorvald Stoltenberg, men tað er ikki eyðnast enn. Norðuratlantsbólkurin harmast um, at hvørki Thorvald Stoltenberg ella Preben Vilhjelm vildu verða við í bólkinum, tí teir skuldu tryggja, at kanningin gjørdist óheft og álítandi. Men kanningin um uttanríkis- og trygdarpolitisku viðurskiftini hjá Føroyum og Grønlandi, verður gjørd kortini, sigur Norðuratlantsbólkurin.

Thorvald Stoltenberg hevur verið verjumálaráðharri og uttanríkisráðharri í Norra. Nú er hann forseti í norska Reyðakrossi.“

**Partshoyringin**

Umboðsmaðurin sendi við skrivi, dagfest 1. mai 2002 klaguna til Útvarpið til kunningar. Biðið varð um at fáa avrit av øllum teimum tíðindum, sum Útvarpið hevið sent um hetta málið. Somuleiðis fekk Útvarpið høvi til at gera viðmerkingar til klaguna frá (A).

Við skrivi, dagfest 3. mai 2002 sendi Útvarpið umboðsmanninum avrit av teimum tíðindunum, sum høvdu verið borðin um hetta málið. Í skrivinum sigur Útvarpið m.a.:

„Vísandi til skriv tygara frá 1. mai 2002 senda vit hjálagt avrit av tíðindunum, sum hava verið í ÚF um luttøkuna hjá Thorvald

Stoltenberg í kanningararbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi.

Talan er um fylgjandi tíðindi:
1. Fríggjadagin 15. mars kl. 18.30
2. Leygardagin 16. mars kl. 08.00
3. Sunnudagin 7. apríl kl. 14.00
4. Mánadagin 8. apríl kl. 20.00

Ad 1)
Tíðindini eru tikin úr einum tíðindaskrivi, sum NA bólkurin á Fólkatingi sendi út.

Ad 2)
Tíðindini frá fríggjakvøldinum vóru tikin upp aftur leygarmorgun í eini styttri versión.

Ad 3)
Tíðindini eru endurgivin úr Sosialinum og Portalinum.fo, sum Sosialurin rekur.

Ad 4)
Tíðindini eru endurgivin úr einum tíðindaskrivi og skjølum, sum NA bólkurin á Fólkatingi sendi út.

Generelt:
Í hesum máli hevur ÚF endurgivið tíðindaskriv hjá einum tingbólki á Fólkatingi. Vanligt er ikki at eftirkanna sannleikavirði í tíðindaskrivum, sum ein tingbólkur ella persónar í álitisstørvum lata frá sær, uttan so, at ein frammanundan hevur royndir við, at viðkomandi er óálítandi, ella at annar illgruni er um, at innihaldið ikki er í lagi.

Frá mánamorgni 8. apríl royndi ÚF at fáa eina viðmerking frá Thorvald Stoltenberg. Hann var tá á veg til Bruxelles, men skrivari hansara skuldi fáa hann at ringja. Tað gjørdi hann tó ikki, og teir næstu dagarnar vóru fleiri royndir gjørdar at koma í samband við hann bæði um telefon og teldupost, men hann svaraði ikki aftur."
...

Við skrivinum vóru nøkur skjøl, m.a. avrit av tveimum teldubrøvum, ið vóru send frá Útvarpinum til Thorvald Stoltenberg, ávikavist á morgni 9. apríl og seinnapartin 10. apríl 2002. Í teldubrøvunum roynir Útvarpið at koma á tal við Thorvald Stoltenberg í sambandi við, at hann hevði tikið avgerð um ikki at luttaka í kanningararbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum.

Við skrivi, dagfest 10. mai hevur (A) m.a. sent umboðsmanninum fleiri viðmerkingar um tíðindaflutningin í Stoltenbergmálinum. Í skrivinum stendur m.a.:

...

**„Málið um Stoltenberg.**

Málið um „Halgafelli" er annars væl og virðiliga yvirhálað av tíðindunum um Thorvald Stoltenberg. Og serstakliga tíðindini mánadagin 8. apríl í útvarpinum geva høvi til nærri kanning. Umframt tað, sum er ført fram í brævi til umboðsmannin 23. apríl, og sum er sent útvarpinum, skal fylgjandi leggjast afturat:
Fyrst skal endurgevast, hvussu „Dagur og Vika" lýsti hetta mál tann 15. marts:

Fyrrverandi norski uttanríkisráðharrin Thorvald Stoltenberg hevur játtað at vera formaður í nevndini, sum skal kanna hvønn hermálsligan týdning Føroyar og Grønland hava havt síðan 1945, og hvørjar fyrimunir, Danmark hevur havt av NATO støðunum í Føroyum og Grønlandi.

Stoltenberg hevur ikki bert royndir sum verju- og uttanríkisráðharri. Hann hevur eisini verið ST kommiserur fyri flóttarfólk og ST semingsmaður í gamla Jugoslavia. Í dag er hann forseti í norska Reyða Krossi.

Fimm limir eru í nevndini sum skal kanna hvussu týðandi Føroyar og Grønland hava verið hermálsliga.

Somu tíðindi, men samb. heimasíðuni hjá útvarpinum minni útgreinað, hevði útvarpið tann 16. marts, meðan almenna tíðindaskrivið hjá NA-bólkinum er daterað 18. marts. Tað vóru fleiri sum undraðu seg yvir hesi tíðindi. Tað mátti roknast sum sera ósannlíkt, at ein fyrrverandi norskur ráðharri, sum enntá hevði verið norskur sendiharri í Danmark, fór at leggja seg út í so eym donsk innanríkisviðurskifti, sum her var talan um. Hetta verður ikki minni ósannlíkt, tá ein hevur lisið bøkurnar hjá Stoltenberg,

> ikki minst „De tusen dakene“, har hann greiðir frá síni tíð sum semingsmaður á Balkan.
>
> ...
>
> Tað er fyri tað fyrsta sera avdúkandi fyri almennu fjølmiðlarnar, at slík tíðindi yvirhøvur kunnu koma fram. Ikki minni er tað avdúkandi hvussu teir reagera, tá tað kemur undan kavi, hvussu lítið grundarlag var fyri hesum tíðindunum.“
>
> ...

Í einum skrivi, dagfest 15. mai 2002 ger (A) viðmerkingar til brævið frá Útvarpinum til umboðsmannin, dagfest 3. mai 2002. Í skrivinum stendur:

> **„Viðvíkjandi bræv frá útvarpinum dagfest 3. mai 2002.**
>
> Mítt bræv frá 13. mai „loftar“ fyri ein stóran part teimum viðmerkingum, sum eru í hesum brævi.
>
> Men tað ber til betur og betur at staðfesta tíðindapolitikkin hjá útvarpinum. Tað mest sigandi er váttanin um, at tíðindaskriv frá politiskum bólkum verða endurgivin uttan at eftirkanna sannleikavirðið á teimum. Tey fyrivarni fyri eini slíkari mannagongd, sum útvarpsstjórin nevnir í sínum brævi, vildu øll verið sera viðkomandi júst í hesum máli. Veruleikin man vera, at tað valdast hvør tú er, um tíðindaskriv verða endurgivin uttan „kanning av sannleikavirðinum“. Tað man annars vera sera ivingarsamt, um ein slíkur hugburður er í samsvar við ein óheftan tíðindaflutning, eisini soleiðis sum hesin er útgreinaður í t.d. grønlendsku reglunum.
>
> Tað verður eisini staðfest í brævinum, at tíðindini um Stoltenberg enda frá útvarpsins síðu 8. apríl kl. 12.20 við eini roynd at seta spurning við trúvirðið hjá Stoltenberg. Tíðindaskrivið er dagfest sama dag, so tað hevði opinbart skund at fáa boðskapin út. Tað kann tó staðfestast, at við teimum skjølum, sum fylgdu við tíðindaskrivinum, var ikki grundarlag fyri tí „boðskapi“, sum lá í hesum tíðindum. Tað er nevniliga ikki samsvar millum brævaskiftið og „boðskapin“.
>
> Viðvíkjandi teimum royndum, sum skulu hava verið gjørdar at fáa fatur á Stoltenberg kann sigast:

a. Eftir øllum at døma er einki gjørt fyri at kontakta Stoltenberg í samband við tíðindini 15/16. mars um hvørja uppgávu hann skuldi hava tikið uppá seg, og sum einki høvdu við veruleikan at gera. Tað var tá, tað var umráðandi at fáa tey kannað, júst út frá teimum fyrivarnum sum (B) sjálvur umrøður.
b. Tað hevur opinbart havt skund hjá útvarpinum at koma við tíðindunum tann 8. apríl á miðdegi, sum teir høvdu fingið sama morgun, sum setti iva við trúvirði hjá Stoltenberg, áðrenn tað í heila tikið hevði verið møguligt samb. útvarpinum at fáa fatur í honum.
c. Hinvegin hevði tað eftir øllum at døma ikki nakran skund at fáa rættað tey upprunaligu skeivu tíðindini um Stoltenberg. Tey kundu verið borin í útvarpið fríggjakvøldið 5. apríl, tá tey stóðu í Sosialinum. Men tey fingu ikki áhuga fyrr enn Lars Emil Johansen sunnudagin 7. apríl byrjaði at grugga málið, og tað var hetta sum útvarpið bar víðari sama dag.
d. At tað skal hava verið ringt at fáa fatur í honum passar ikki við mínar royndir. Eg veit um tríggjar føroyingar, sum hava fingið fatur í honum við fyrsta uppkall, tá tað kundi staðfestast, hvussu veruliga søgan var. M.a. tosaði eg við hann í telefon fleiri ferðir frá 3- 7. apríl. Síðan var eg burtur nakrar dagar, og eftir tað havi eg fleiri ferðir havt samband við hann bæði í telefon og telduposti. Annars greiðir Stoltenberg frá í sínum endurminningum, at hann enntá sum uttanríkisráðharri stóð í telefonbókini, og tað ger hann framvegis.
e. Hinvegin hevði Stoltenberg neyvan sagt útvarpinum annað, enn hann segði við Sosialin 6. apríl og í FF-blaðnum 11. apríl. Hetta eru frágreiðingar, sum í høvuðsheitum er í samsvar við brævaskiftið millum NA-bólkin og Stoltenberg, sum útvarpið hevði tøkt. Hóast hetta standa tíðindini hjá útvarpinum frá 8. apríl enn við sum síðsta orð, hóast útvarpið hevur havt ríkiligt av møguleikum fyri at fáa tey røttu tíðindi fram.

Í brævinum hjá (B) er ikki minsta ábending um, at hann ikki metir henda tíðindaflutning vera „óheftan“ samb. kringvarpslógini. Og tað má vera hetta, sum eigur at geva høvi til at fáa staðfest, um hetta veruliga er so. Tí her er jú talan um eitt øki sum kann vera avgerandi fyri um vit hava reelt fólkaræði ella ikki.“

Við skrivi, dagfest 17. mai vóru seinastu viðmerkingarnar frá (A) sendar Útvarpinum til kunningar. Samstundis vóru partarnir kunnaðir um, at umboðsmaðurin nú fór at taka støðu til, um grundarlag var fyri víðari kanningum í hesum málinum. Umboðsmaðurin metti, at málið nú var lýst á fullgóðan hátt, og hevur tí tikið hetta til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Útvarp Føroya er ein almennur stovnur, sum sambært § 1 í Fyrisitingarlógini er at rokna við til almennu fyrisitingina undir heimastýrinum. Hetta merkir, at Útvarp Føroya sambært § 4 í Umboðsmanslógini er fevnt av heimildarøki umboðsmansins.*

*Sambært § 5, stk. 1, 2. pkt. í Kringvarpslógini skal Útvarp Føroya í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsið, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.*

*Sambært § 6, stk. 2 í somu lóg kunnu avgerðir, sum Útvarpið tekur í spurningum um góðan fjølmiðlasið kærast til fjølmiðlanevndina eftir reglunum í fjølmiðlaábyrgdarlógini. Sum kunnugt finst eingin slík fjølmiðlaábyrgdarlóg í Føroyum, og harvið heldur eingin slík kærunevnd, sum Kringvarpslógin annars leggur upp til.*

*Hóast Útvarp Føroya sambært umboðsmanslógini er fevnt av heimildarøki umboðsmansins, er tað tó greitt, at klagur um tíðindaflutningin hjá almennu fjølmiðlunum ikki eru vælegnaðar til viðgerð hjá umboðsmanninum – serliga tá talan er um metingar av journalistiska grundarlagnum undir hesum sendingum. Slík mál hoyra náttúrliga heima í einari „fakliga“ samansettari kærunevnd, sum eitt nú einari fjølmiðlanevnd. Vit hava sum nevnt onga slíka nevnd í løtuni. Umboðsmaðurin eigur at viðgera slík mál við størsta varsemi og bert tala at, tá tað er heilt greitt, at viðkomandi almenni fjølmiðil ikki hevur hildið grundleggjandi reglurnar í kringvarpslógini, og hugsi eg tá, hvat Útvarpinum viðvíkur, serliga um § 5 í lógini.*

*Eg havi kannað klaguna um tíðindaflutningin hjá Útvarpi Føroya, viðvíkjandi leiklutinum hjá Thorvaldi Stoltenberg í ætlaða kanningararbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum, eins og tilfarið í málinum*

*annars. Út frá hesum dugi eg ikki at síggja, at talan hevur verið um politiskt stýrd tíðindi í hesum máli.*

*Tað má í hesum sambandi leggjast til grund, at Útvarpið til fánýtis hevur roynt at seta seg í samband við Thorvald Stoltenberg fyri at fáa hansara viðmerkingar. Hvørt Útvarpið átti at havt gjørt meira fyri at lýsa hetta málið, haldi eg vera eina journalistiska meting. Hesa meting haldi eg meg ikki hava førleika til at gera.*

*Eg haldi sostatt einki grundarlag vera fyri hesi klaguni.*

*Vísandi til trupulleikarnar av, at eingin kærunevnd er, sum kann viðgera slíkar klagur, hóast hetta er ásett í Kringvarpslógini, skal eg vísandi til § 12 í umboðsmanslógini, enn einaferð boða Løgtinginum, løgmanni og avvarandi landsstýrismanni frá, at lóggávan á hesum økinum ikki er fullfíggjað. Samsvar er ikki millum lóggávuna og veruleikan á økinum, tí hóast kærumøguleiki er ásettur í § 6, stk. 2 í Kringvarpslógini, so finst hesin sum kunnugt ikki. Eg fari tí at mæla til, at hesi viðurskiftini verða fingin í rættlag, soleiðis at samsvar verður millum lóggávuna og veruleikan.*

## 27.3. Klaga frá studentaskúlalærara um, at Mentamálaráðið hevði noktað at broyta givin ársmet – Uppafturtøka, grundgeving

Ein lærari, sum hevði givið næmingum sínum ársmet, uttan at hædd var tikin fyri seinastu innlatnu uppgávunum, søkti Mentamálaráðið um, at givnu ársmetini hjá 2 næmingum hansara blivu hækkaði við einum stigi. Rektarin hevði viðmælt umsóknini, men Mentamálaráðið noktaði at ganga umsóknini á møti vísandi til, at nevndu uppgávur ikki vóru latnar inn rættstundis. Soleiðis sum umsóknin var orðað, helt umboðsmaðurin ikki grundarlag vera fyri at finnast at upprunaligu avgerðini hjá Mentamálaráðnum, ið bygdi á upplýsingarnar í umsóknini. Undir viðgerðini hjá umboðsmanninum vísti tað seg tó, at uppgávurnar vóru latnar inn rættstundis. Umboðsmaðurin gav tí Mentamálaráðnum høvi til at umhugsa, hvørt ráðið grundað á hesi viðurskiftini ynskti at taka málið upp til nýggja viðgerð. Mentamálaráðið boðaði umboðsmanninum frá, at tað framvegis helt fast við upprunaligu avgerðina.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at ráðið átti at tikið málið til viðgerðar av nýggjum, tí at nýggju upplýsingarnir høvdu við sær, at upprunaliga avgerðin var beinleiðis í andsøgn við grundgevingarnar fyri hesari. Hann gav Mentamálaráðnum eina átalu fyri eina ikki-nøktandi málsviðgerð í hesum sambandi, og mælti ráðnum til at taka málið upp til viðgerðar av nýggjum, og at ganga umsóknini á møti. Hann bað somuleiðis ráðið lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum. Mentamálaráðið hevur síðani tikið áheitanina til eftirtektar og hevur broytt hesi ársmetini. (J.nr. 200200025)

**Klagan**

Við skrivi, dagfest 6. juni 2002 hevur (A) sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „Eg havi síðani skúlaársbyrjan í heyst undirvíst í ... á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum. M.a. havi eg undirvíst einum 3.s í ... . Næmingunum í hesum flokki havi eg givið endaligt ársmet.
>
> Tá ársmetið var givið, fekk eg seinastu skrivligu uppgávurnar

aftur frá næmingunum. Næmingarnir lótu uppgávurnar inn sambært eini ætlan frá mær, og seinasta uppgávan stóð í listanum at skula vera latin inn eftir at ársmeti var innlatið.

Tá eg rættaði hesar uppgávur varð mær greitt, at tveir av mínum næmingum við síni seinastu innlating høvdu víst, at áður givna ársmet var ov lágt. Eg skrivaði tí beinanvegin eina umsøkn til rektaran um, at ársmetini hjá hesum báðum næmingunum vóru hækkað. Hendan umsøkn er dagfest 12/05/02.

Eg eri kunnaður um, at rektarin í brævið dagfest 27/05/02 sendi umbøn mína víðari til Mentamálastýrið. Í brævi sínum viðmælir rektarin at ársmetini vera hækkað sambært umsøkn míni.

Eg eri í dag vorðin kunnaður um, at Mentamálastýrið í brævi dagfest 05/06/02 hevur svarað umsøkn míni noktandi. Grundgevingin er stutt, at *„skrivligu ársmetini í teimum lærugreinum, sum verða loknar avvarðandi ár, skulu vera skrivað í próvtøkubók í seinasta lagi 5 dagar fyri fyrsta próvtøkudag“* (sjá § 20, stk. 4 í Kunngerð nr. 102 frá 26. juni 2001 um studentaskúlar og stakgreinalestur á studentaskúlastigi).

Fyri mær at síggja verður umsøknin noktað við teirri grundgeving, at lærarin (eg) ikki hevur røkt sínar umsitingarligu uppgávur til fulnar. Atlit verður ikki tikið til, hvørt ársmetini, sum hvør einstakur næmingur fær, eru í samsvar við eina forsvarliga og ítøkiliga fakliga meting av, hvussu næmingurin er fyri. Í hesum sambandið haldi eg at atlitið í § 20, stk. 3 í Kunngerð nr. 102/2001 har tað stendur: *„Ársmetið er ein heildarmeting av fakligu støðu næmingsins við undirvísingarárslok“* átti at viga tyngri enn atlitið til, hvørt lærarin hevur hildið eina tíðarfreist ella ikki. Fyri mær er í øllum førum einki í avgerðini frá Mentamálastýrinum, sum talar fyri, at teir báðir næmingarnir, sum málið snýr seg um, eiga at vera fyri skaða. Eg havi gjørt ein feil, og hesum má eg taka møguligar avleiðingar av. Men tað, at eg havi gjørt ein umsitingarligan feil broytir ikki mína fakligu støðutakan um, at umrøddu 2 næmingar eru skrivaðir fyri ársmet, sum ikki samsvara við eina *„heildarmeting av fakligu støðu næmingsins við undirvísingarárslok“*.

Eg havi í dag sett meg í samband við Mentamálastýrið har eg

skifti orð við (B), fyri at fáa eina greiðari grundgeving fyri, hví Mentamálastýrið hevur valt at nokta umsøkn míni. Eg fekk tó onga neyvari grundgeving burtur úr samrøðuni. (B) vísti til skrivligu avgerðina, og hann vildi ikki geva mær nakra nærri vegleiðing um, hvussu eg møguliga kundi royna at fáa málið tikið upp av nýggjum.

Eg vendi mær tí til tygara í vón um, at tygum vilja kannað málið.“

...

**Málsgongdin**

Við skrivi, dagfest 12. mai 2002 sendi lærarin, (A) Føroya Studentaskúla og HF-skeiðið soljóðandi skriv:

„Viðvíkjandi broytan av áður fráboðaðum ársmetum

Undirritaði fari við hesum at biðja um, at skrivligu ársmetini í ... hjá næmingunum ... og ... vera broyttir í mun til tey ársmet eg áður havi boðað frá. Orsøkin til umbønina er, at næmingarnir í sambandi við seinastu uppgávuinnlating, sum var eftir at ársmetini vóru innlatin, hava víst, at áður fráboðaðu met fyri teirra viðkomandi eru ov lág. Eg fari tí at biðja um, at ársmetini vera hækkað...“

Við skrivi, dagfest 27. mai 2002 sendi rektarin umsóknina frá læraranum víðari til Mentamálaráðið. Skrivið er soljóðandi:

„Sambært Próvtøkukunngerðini, § 53 eru ársmetini endalig, tá rektarin hevur fingið teir undirskrivaðu ársmetslistarnar. Ársmetini kunnu síðan bert verða broytt av Mentamálastýrinum.

Hjálagt sendi eg eina umsókn frá (A) um at broyta skrivligu ársmetini í ... hjá næmingunum:

...

Eg viðmæli at ársmetini verða hækkaði sambært umsókníni.“

Við skrivi, dagfest 5. juni 2002 boðar Mentamálaráðið skúlanum frá avgerð sínari í hesum málinum. Skrivið er soljóðandi:

> „Vísandi til skriv skúlans, dagfest 27. mai 2002, viðvíkjandi broyting av ársmetinum í skrivligari ... hjá ... og ..., verður við hesum sagt frá, at Mentamálastýrið hevur viðgjørt frágreiðing lærarans m.a. við støði í § 20, stk. 4, har ásett er, at „skrivligu ársmetini í teimum lærugreinunum, sum verða loknar avvarðandi ár, skulu verða skrivað í próvtøkubók í seinasta lagi 5 dagar fyri fyrsta skrivliga próvtøkudag". Hetta merkir, at skrivliga ársmetið verður ásett við støði í teimum uppgávunum, ið eru latnar inn rættstundis. Uppgávur, ið eru latnar inn aftaná 5 dagar fyri fyrsta skrivliga próvtøkudag, kunnu tí ikki broyta eitt longu innskrivað ársmet.
>
> Av hesari orsøk verður við hesum sagt frá, at ársmetið ... í skrivligari ... hjá ... verður standandi, og at ársmetið ... í skrivligari ... hjá ... eisini verður standandi."

**Partshoyringin**

Við skrivi, dagfest 7. juni 2002 varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari fráboðan um, at umboðsmaðurin hevði gjørt av at kanna hesa klaguna nærri.

Við skrivi, dagfest 5. juli 2002 hevur Mentamálaráðið sent umboðsmanninum viðmerkingar sínar til klaguna. Skrivið er soljóðandi:

> „(A) viðmerkir í sínum skrivi til løgtingsins umboðsmann, at „ármetið er ein heildarmeting av fakligu støðu næmingsins við undirvísingarlok, sbr. § 20, stk 3 í kunngerð nr. 102 frá 26. juni 2001 um studentaskúlar og stakgreinalestur á studentaskúlastigi. Mentamálaráðið skal vísa á, at 1. pkt. í somu grein ásetur, „faklærararnir geva ármetið í tí einstøku lærugreinini á ármetsoyðiblaði, sum avvarðandi faklærari undirskrivar". Hetta er gjørt fyri at tryggja, at tað ársmetið, ið verður givið, er væl umhugsað av læraranum, samstundis sum lærarin við síni undirskrift váttar, at talið er løgfrøðiliga bindandi.
>
> Ásetingin um, at tey skrivligu ársmetini skulu vera inni hjá leiðslu skúlans í seinasta lagi 5 dagar undan fyrsta skrivliga próvtøkudegi er gjørt við tí í huganum, at tað er neyðugt fyri ein skúla, sum skal umsita tey nógvu ársmetini, at tað er eitt evsta mark fyri innlating. Um hetta markið ikki verður tikið í álvara,

> fáa vit próvtøkuviðurskifti, sum eingin stýring er á. Tað er eisini óheppið fyri próvtakarar, um møguleikar eru fyri at broyta ársmet eftir at próvtøkan er farin í gongd. Tað kann skapa ónøgd og ótryggleika hjá næmingum og lærarum.
>
> Lærarar og næmingar kenna hetta evsta mark, og tað er ein partur av lærarans uppgávu at ráðleggja soleiðis, at innlating av skrivligum avrikum fer fram við atliti at ymiskum eftirmetingum. Grundarlagið undir árspróvtalinum er alt arbeiði í skúlaárinum bæði skrivlig og munnlig avrik fram til evsta mark fyri innlating.
>
> Sambært § 30 í Studentaskúlakunngerðini nr. 102 frá 26. juni 2001 og § 67 í kunngerð nr. 65 frá 27. apríl 2001 um studentspróvtøku og hægri fyrireikingarpróvtøku er tilskilað, at tað er næmingurin, sum hevur kærurætt. Tað kann tykjast heldur løgi, at eitt starvsfólk, sum er sett til at røkja eina ásetta uppgávu, kann nýta síni egnu mistøk sum grundarlag undir eini kæru, og næmingarnir verða „nýttir“ sum jarnbrot í málinum uttan at hesir, eftir tí sum framgongur av málinum, vita av kæruni.
>
> Um so er, at kærarin fær viðhald, verður avleiðingin, at ásetingin av einum evsta markið fyri innlating av árspróvmetum er ein illusión. Ein og hvør lærari kann tá aftaná innlatingina revidera síni árspróvtøl við tí grundgeving, at hann tíverri hevði fingið onkra uppgávu ov seint.“

Við skrivi, dagfest 8. juli 2002 vórðu viðmerkingarnar frá Mentamálaráðnum sendar (A) til ummælis. Við skrivi, dagfest 30. juli 2002 hevur (A) gjørt hesar viðmerkingarnar til skrivið frá Mentamálaráðnum:

> ...
>
> (C): „Mentamálaráðið skal vísa á, at 1. pkt. í somu grein [§ 20 í kunngerð nr. 102 frá 26.06.2001] ásetur, „faklærararnir geva ársmetið í einstøku lærugreinini á ársmetsoyðiblaði, sum avvarandi faklærari undirskrivar“.“
>
> – Viðmerking: Eg noteri mær, at Mentamálaráðið her vísir til eina aðra heimild fyri avgerðini enn gjørt verður í brævinum til rektaran dagfest 05.06.02 har víst verður til § 20, stk 4.
>
> (C): “…tað er neyðugt fyri ein skúla, sum skal umsita tey nógvu

ársmetini, at tað er eitt evsta mark fyri innlating. Um hetta markið ikki verður tikið í álvara, fáa vit próvtøkuviðurskiftið, sum eingin stýring er á.“

– Viðmerking: Rektarin hevur ábyrgdina fyri umsitingini av skúlanum. Rektarin hevur viðmælt at umsóknin um at broyta árskarakterin verður gingin á møti. Rektarin kann tí neyvan hava hildið, at ein játtan av umsøknini fór at hava við sær ‘próvtøkuviðurskiftið, sum eingin stýring er á’.

(C): „Tað er eisini óheppið fyri próvtakarar, um møguleikar eru fyri at broyta ársmet eftir at próvtøkan er farin í gongd.“

– Viðmerking: Eg havi fingið upplýst frá rektaranum, at tað er praksis, at Mentamálaráðið broytir ársmet eftir tilmæli frá rektaranum. Eisini í ár eru ársmet broytt eftir umsøkn, og eg havi fingið upplýst frá rektaranum, at hann ongantíð áður hevur upplivað, at Mentamálaráðið hevur sýtt tílíkari umsøkn.

(C): „Tað kann tykjast heldur løgi, at eitt starvsfólk, sum er sett til at røkja eina ásetta uppgávu, kann nýta síni egnu mistøk sum grundarlag undir eini kæru, og næmingar verða ‘nýttir’ sum jarnbrot í málinum uttan at hesir, eftir tí sum framgongur av málinum, vita av kæruni.“

– Viðmerking: Eg skilji ikki heilt samanhangin í omanfyri endurgivna brotið. Tó fyrikemur tað mær, at spurnartekin verður sett við míni motiv fyri at reisa kærumálið. Eg vil enntá fara so langt, sum til at siga, at talan er um rættiliga óndsinnaðar illgitingar. Hvat er tað eg skal hava ‘nýtt’ næmingarnar til?

  Eg havi ikki roynt at káva útyvir at eg havi gjørt eitt mistak, við at seta evstamark fyri innlating av seinastu skrivligu uppgávu ov seint. Hetta mistak átti eg ikki at havt gjørt, og eg havi ikki og fari ikki, í hesum sambandi, at royna at bera í bøtuflaka fyri at eg havi gjørt hetta mistak. Hví mistakið er hent viðkemur eftir míni meting ikki *hesum* málinum. Skal mistakið hava avleiðingar, so eri eg til reiðar at taka tær, um tær annars eru rímiligar í mun til ‘brotsverkið’, sum eg havi framt. Tað sum eg havi víst á og havi kært um er, at eg haldi tað vera skeivt, at

tveir av mínum næmingum verða revsaðir fyri mítt mistak, meðan eg gangi fríður.

At næmingarnir ikki eru kunnaðir um málið áður enn eg fór víðari við tí er fyri mær púra náttúrligt og professionelt korrekt. Talan er um at broyta eina avgerð, sum suverænt liggur hjá læraranum. Eg haldi at tað hevði verið meira illgrunasamt, um málið vísti, at eg hevði lati meg trýsta av næmingunum at broyta ársmeti.

Samanumtikið vil eg siga, at eg eri skakaður, fyri ikki at siga skelkaður av, at fáa óheiðurlig motiv skotin í skógvarnar frá einum almennum stovni, bara tí at eg havi ditta mær til, at nýta mín sjálvsagda rætt, sum borgari í einum rættarsamfelag, at royna eina fyrisitingarliga avgerð við annan instans. Eg fari inniliga at heita á umboðsmannin at taka støðu til, hvat hann heldur um hetta orðalagið, og um hann heldur at subtilar illgitingar um karakterin hjá ávísum borgarum eigur at vera nýtt sum partur í grundarlagnum undir avgerðum hjá teirri føroysku fyrisitingini.

(C): „Um so er at kærarin fær viðhald, verður avleiðingin, at ásetingin av einum evsta markið fyri innlating av árspróvmetum er ein illusión. Ein og hvør lærari kann tá aftaná innlatingina revidera síni árspróvtøl við tí grundgeving, at hann tíverri hevði fingið onkra uppgávu ov seint inn.“

– Viðmerking: Lat meg fyrst sláa fast, at talan var ikki um uppgávur, sum vóru innlatnar ‘ov seint’ sambært teimum boðum eg hevði givið næmingunum. Míni boð til næmingarnar vóru skeiv, og tí komu uppgávurnar inn ‘ov seint’ í mun til ásettu freistina í kunngerð nr. 102 fra 26.06.2001. Næmingarnir gjørdu eftir mínum boðum, og eg dugi tí illa at síggja, hvussu teir kunnu lastast fyri, at freistin í kunngerðini ikki var hildin.

  Annars er at siga, at sum er fáa lærarar ‘revidera síni árspróvtøl’. Eg havi frá rektaranum fingið upplýst, at ein lærari í ár fekk játtandi svar frá Mentamálaráðnum uppá umsøkn um broytan av árspróvtali við teirri grundgeving, at lærarin hevði skriva skeivt! á ársmetsoyðublaðið. Tað er tí nógv sum tíðir

uppá, at Mentamálaráðið við sýtanini fyri umsóknini frá mær, hevur broytt praksis — í hvussu so er í hesum konkreta máli.“

Við skrivi, dagfest 1. aug. 2002 vórðu viðmerkingarnar frá (A) sendar Mentamálaráðnum til ummælis. Við skrivi, dagfest 2. sept. 2002 hevur Mentamálaráðið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

„Vísandi til seinasta skrivið frá Umboðsmanninum, dagfest 1. august 2002, har biðið verður um møguligar viðmerkingar til viðmerkingarnar hjá (A), skal fyrst verða sagt frá, at ein feilur er íkomin í seinastu postgongdini í sambandi við okkara viðmerkingar til kæruna hjá (A). Orsakað av óansni er eitt arbeiðspappír/kladda, sum (B) hevur skrivað, sent saman við rætta formliga svarinum, sum (C) hevur undirskrivað. Hetta er óheppið, og Mentamálaráðið biður um umbering fyri mistakið. Mentamálaráðið vil í viðmerkingum sínum til viðmerkingarnar hjá (A) loyva sær einans at viðgera viðmerkingarnar hjá (A) til rætta formliga skrivið, sum er dagfest 5. juli 2002.

Mentamálaráðið skal í fyrstu atløgu vísa á, at formliga grundarlagið undir ársmetunum er § 20, stk, 3 og 4 í kunngerð nr. 102 frá 2. juni 2001. Har er m.a. ásett, at ársmetið er ein heildarmeting av fakligu støðuni við undirvísingarárslok og at eitt evsta mark er ásett fyri innskrivingina. Í § 53 í kunngerð nr. 65 fra 27. april 2001 um studentspróvtøku og hægri fyrireikingarpróvtøku er m.a. ásett, at ársmetini verða undirskrivaði av hvørjum einstøkum lærara, sum tískil hevur ábyrgdina av innskrivingini og tí fakligu metingini av næminginum. Tá ið rektarin hevur fingið teir undirskrivaðu ársmetslistarnir, eru ársmetini endalig, og kunnu bert verða broytt av Mentamálaráðnum.

Í viðmerkingum sínum til viðmerkingarnar hjá Mentamálaráðnum vísir (A) á,

- at rektarin viðmælti umsókn hansara,
- at onnur ársmet eru broytt í ár,
- at praksis er, at fylgja tilráðingini frá rektaranum og
- at líknandi umsóknir ikki eru sýttar fyrr

Til hetta er at viðmerkja, at í ár komu umsóknir frá 4 lærarum um at broyta innskrivaðu ársmetini. Rektarin viðmælti allar umsóknirnar, men gav onga útgreining ella frágreiðing um, hví hann viðmælti. Í øllum umsóknninum var talan um at fáa ársmetini broytt við einum stigi uppeftir, t.v.s. at fáa broytt metini við minstu margin. Av hesum 4 umsóknunum var ein tikin til eftirtektar og ársmetið broytt við einum stigi. Eftir tí, sum gongur fram av málinum, er talan um beinleiðis feilskriving. Í hinum umsóknunum, sum ikki vóru gingnar á møti, var talan um broytingar orsakað av ov seint innkomnum uppgávumn í mun til dagfesta evstamarkið, ongar grundgevingar fyri umsóknini og skeiv meting av ársmetinum í mun til seinni framkomna prófmetið.

Mentamálaráðið hevur í viðmerkingum sínum m.a. víst á,

- at Mentamálaráðið bert vil nýta undantaksregluna, tá heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi. Tað er uppgáva lærarans at síggja til, at skrivligar uppgávur, ið telja við í áseting av ársmeti, verða latnar inn í so góðari tið at hetta ber til.
- at tað kann skapa ónøgd og ótryggleika millum aðrar næmingar og lærarar, um broytingar verða framdar eftir evsta mark m.a. orsakað av, at eitt ársmet kann gerast próvtal um so er, at lærugreinin ikki verður tikin út til próvtøku, sbr. § 52, stk. 3, í próvtøkukunngerðini.

Mentamálaráðið skal eisini vísa á, at reglurnar í nevndu kunngerðum lýsa neyvt rættarstøðuna í sambandi við innlating, og at lærarar hava skyldu at kenna tað regluverkið, teir virka eftir.

Mentamálaráðið ásannar, at tað er lærarin, sum hevur fakligu ekpertisuna og skal geva endaliga árskarakterin við grundarlagi í teimum royndum, skrivligu og munnligu avrikum o.a, sum eru til taks áðrenn evsta mark fyri innskrivingina. Reglurnar eru kunngjørdar og áseta neyvar freistir fyri virkseminum. Tann einstaki lærarin kann tí ikki annað, enn taka ábyrgdina fyri at hava kunngjørt skeivar freistir. (A) vísir á, at tað eru næmingarnir, sum svíða fyri feilir hansara, og tað er fyri so vítt rætt.

(A) vísir á orðingina, „Tað kann tykjast heldur løgi, at eitt

> starvsfólk, sum er sett til at røkja eina ásetta uppgávu, kann nýta síni egnu mistøk sum grundarlag undir eini kæru, og næmingar verða „nýttir“ sum jarnbrot í málinum, uttan at hesir, eftir tí sum framgongur av málinum, vita um kæruna.“ Tað hevur ikki verið ætlan Mentamálaráðsins at seta spurnartekin við motivini hjá (A) til at reisa málið fyri umboðsmanninum, og tað er als ongin ivi um, at tað er hansara sjálvsagdi rættur at reisa málið. Ætlanin við orðingini var at vísa á, at tað er óheppið, at ein umsitingarligur feilur, sum (A) vil taka avleiðingarnar av, er blandaður saman við einum kærumáli um næmingapróvtøl, sum bert kann skaða næmingarnar. Mentamálaráðið tekur til eftirtektar, at orðingin er óheppin og kann misskiljast.“

Vísandi til 1. reglubrotið í hesum skrivinum frá Mentamálaráðnum hevur umboðsmaðurin gjørt av ikki at endurgeva nakað úr notatinum / kladduni hjá (B) í álitinum. Tað skal tó viðmerkjast, at notatið / kladdan varð send klagaranum saman við skrivinum, dagfest 5. juli 2002 frá Mentamálaráðnum. Klagarin hevur gjørt viðmerkingar til notatið / kladduna, men umboðsmaðurin hevur gjørt av heldur ikki at endurgeva hesar viðmerkingarnar.

Við skrivi, dagfest 3. sept. 2002 vóru viðmerkingarnar frá Mentamálaráðnum sendar (A) til kunningar, eins og boðað varð pørtunum frá, at málið nú bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

**Umboðsmansviðgerðin**

Fyri at fáa greiðu á teimum faktisku umstøðunum í hesum málinum, ringdi umboðsmaðurin 10. sept. til rektaran á Føroya Studentaskúla. Rektarin greiddi frá, at fyrsti próvtøkudagur hjá 3. s var mánadagin 6. mai 2002, og at seinasti dagur fyri innlatan av ársmetum sostatt var mikudagin 1. mai, tvs. 5 dagar frammanundan. Rektarin visti tó ikki at siga, nær umrøddu uppgávurnar frá teimum báðum næmingunum vóru latnar læraranum, tí at hesum stýrdu lærararnir sjálvir.

Umboðsmaðurin ringdi tí sama dagin til læraran, (A) fyri at fáa eina nærri frágreiðing hesum viðvíkjandi. Lærarin greiddi frá, at talan var um eina generella freist, sum hann hevði ásett fyri allan flokkin, og at teir báðir næmingarnir høvdu hildið ásettu freistina. Í

einum teldubrævi, sent umboðsmanninum sama dagin, greiddi lærarin harumframt frá:

- at hann hevði ásett freistina fyri uppgávuinnlatingina til 24. apríl 2002,
- at hann ikki var liðugur við at rætta uppgávurnar fyrr enn 12. mai,
- at hann hevði latið ársmetini inn til ásettu freistina, uttan at seinastu innlatnu uppgávurnar vóru við í grundarlagnum,
- at hann hevði spurt seg fyri hjá rektaranum, sum hevði greitt honum frá, at um seinastu uppgávurnar broyttu ársmetini fyri onkrar nemingar, so bar til at fáa hetta broytt við umsókn til Mentamálaráðið, og
- at hann beinanvegin, tá uppgávurnar vóru rættaðar, hevði sent rektaranum umsókn um at fáa broytt ársmetini fyri teir báðar nemingarnar.

Av tí, at einki var í skjølunum, sum bendi á, at Mentamálaráðið hevði havt hesar upplýsingarnar undir viðgerðini av umsóknini frá læraranum / skúlanum, valdi umboðsmaðurin at senda Mentamálaráðnum soljóðandi skriv, dagfest 10. sept. 2002:

> „Umboðsmaðurin hevur vent sær til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Hoydølum og (A) fyri at fáa eina neyvari lýsing av teimum faktisku umstøðunum, sum vóru grundarlagið undir umsóknini frá (A) um at broyta umrøddu ársmetini. Í hesum sambandi eru upplýsingar framkomnir, ið Mentamálaráðið møguliga ikki hevur havt kunnleika til undir viðgerðini av málinum.
>
> Sambært avtalu við (B) verður málið tí sent Mentamálaráðnum aftur til ummælis. Møguligar viðmerkingar til hesar upplýsingarnar skulu verða umboðsmanninum í hendi innan 14 dagar.
>
> Um so er, at hesir upplýsingarnir (broyttu fortreytirnar) hava við sær, at Mentamálaráðið ætlar at taka málið upp til viðgerðar av nýggjum, verður Mentamálaráðið biðið um at boða umboðsmanninum frá hesum innan ásettu freistina. Umboðsmaðurin fer so at bíða við viðgerð sínari.“
>
> ...

Mentamálaráðið hevur við skrivi, dagfest 17. sept. 2002 svarað umboðsmanninum soleiðis:

> „Mentamálaráðið hevur viðgjørt spurningin, um teir nýggju upplýsingarnar í málinum hava við sær, at málið eigur at verða tikið upp til nýggja viðgerð/avgerð. Niðurstøðan er, at Mentamálaráðið heldur fast við upprunaligu avgerðina og ikki metir, at tørvur er á fleiri viðmerkingum hiðani.“
>
> ...

## *Niðurstøða*

*Klagan snýr seg um, hvørt avgerðin hjá Mentamálaráðnum um at nokta at broyta ársmetini hjá tveimum næmingum er í lagi ella ikki, eins og um Mentamálaráðið á nøktandi hátt hevur vegleitt læraran um, hvussu hann kundi royna at fáa málið tikið uppaftur til nýggja viðgerð.*

***Ársmetini***

*Reglurnar um latan av ársmetum fyri næmingar á studentaskúlunum eru at finna í Kunngerð nr. 102 frá 26. juni 2001 um studentaskúlar og stakgreinalestur á studentaskúlastigi og í Kunngerð nr. 65 frá 27. apríl 2001 um studentspróvtøku og hægri fyrireikingarpróvtøku.*

*Í § 20 í kunngerð nr. 102 frá 26. juni 2001 stendur m.a.:*

> „**§ 20.** Ársmet verður givin í øllum lærugreinunum hjá næminginum í øllum trimum studentaskúlaflokkum, smbr. tó § 16.
>
> *Stk. 2.* Í lærugreinum, sum hava skrivliga próvtøku til studentspróvtøkuna, verður givið eitt ársmet fyri skrivliga avrikið og eitt ársmet fyri munnliga avrikið. Í øðrum lærugreinum verður givið eitt ársmet.
>
> *Stk. 3.* Faklærararnir geva ársmetið í tí einstøku lærugreinini á ársmetsoyðiblaði, sum avvarðandi faklærari undirskrivar. Ársmetið er ein heildarmeting av fakligu støðu næmingsins við undirvísingarárslok.

> *Stk. 4.* Skrivligu ársmetini í teimum lærugreinum, sum verða loknar avvarðandi ár, skulu verða skrivað í próvtøkubók í seinasta lagi 5 dagar fyri fyrsta skrivliga próvtøkudag...“

*Í § 53, stk. 1 í kunngerð nr. 65 frá 27. apríl 2001 stendur m.a.:*

> „**§ 53.** Ársmetini verða skrivað á ársmetslistar, ið verða undirskrivaðir av hvørjum einstøkum lærara. Tá ið rektarin hevur fingið teir undirskrivaðu ársmetslistarnar, eru ársmetini endalig. Ársmet, sum kunnu telja við til eina studentspróvtøku, kunnu síðan bert verða broytt av Mentamálastýrinum...“

*Ársmetið er sostatt sambært § 20, stk. 3, 2. pkt., í kunngerð nr. 102 frá 26. juni 2001 ein heildarmeting av fakligu støðu næmingsins við undirvísingarárslok, og eiga tí øll avrik næmingsins at verða tikin við í hesi meting, um tey rættstundis eru sýnd í verki.*

*Ársmetini eru sambært § 53 í kunngerð nr. 65 frá 27. apríl 2001 endalig, tá rektarin hevur fingið teir undirskrivaðu ársmetslistarnar. Hetta merkir, at skúlin eftir hetta mund ikki hevur møguleika fyri at broyta ársmetini. Hinvegin hevur Mentamálaráðið heimild til tess.*

*At Mentamálaráðið krevur sera góðar grundir fyri at broyta givin ársmet, havi eg ikki nakað at siga til. Hinvegin hevur ráðið sum nevnt heimild til tess, og eg haldi ikki, at tað er grundarlag fyri eini so trongari tulking av hesi heimild, at ársmetini bert kunnu broytast, har talan er um feilskrift o.t. Hevði hetta verið ætlanin, átti tað at staðið í lógini, eins og tað ger eitt nú í § 221 í rættargangslógini um rætting av rættaravgerðum.*

*Sambært skrivinum, dagfest 12. mai 2002 frá læraranum til rektaran vóru seinastu uppgávurnar hjá teimum báðum næmingunum, sum talan er um, latnar inn aftaná, at ársmetini vóru innlatin; men eftir tí, sum lærarin hevur upplýst fyri mær undir viðgerðini av hesum málinum, er hetta beinleiðis skeivt. Avgerðin hjá Mentamálaráðnum hvílir tí á einum skeivum grundarlagi. Eg haldi tó ikki, at tað í hesum konkreta førinum er grundarlag fyri at lasta Mentamálaráðið fyri at hava lagt upplýsingarnar frá læraranum beinleiðis til grund fyri avgerðini, uttan at gera nærri kanningar.*

*Eftir at nýggju upplýsingarnar fyrilógu, sendi eg Mentamálaráðnum*

*málið aftur. Hetta varð gjørt við skrivinum frá 10. september 2002, har ráðið fekk høvi til at umhugsa, hvørt ráðið vildi taka málið upp til viðgerðar av nýggjum. Mentamálaráðið hevur, við einum stuttorðaðum skrivi frá 17. í s.m., boðað mær frá, at ráðið heldur fast við sína upprunaligu avgerð. Hetta er gjørt, hóast tað hvørki sær út til, at ráðið hevur tikið hædd fyri hesum upplýsingum ella hevur roynt at vísa teimum aftur. Nýggju upplýsingarnar gera, at upprunaliga avgerðin hjá ráðnum er beinleiðis í andsøgn við grundgevingina fyri hesari. Mentamálaráðið átti tí, tá nýggju upplýsingarnar fyrilógu, at havt viðgjørt málið av nýggjum frá grundini av. At hetta ikki er gjørt er átaluvert, og gevi eg tí Mentamálaráðnum eina átalu fyri eina ikki-nøktandi málsviðgerð í hesum sambandi.*

*Eftir tí, sum er komið fram undir umboðsmansviðgerðini, má tað leggjast til grund, at báðir næmingarnir, sum talan er um, hava latið uppgávurnar inn rættstundis, tvs. innan ta av læraranum ásettu freistina (24. apríl 2002), ið var eina viku fyri evstamark. Hesar uppgávurnar áttu tí at verið tiknar við í ársmetini hjá teimum. Orsøkin til, at hesar uppgávurnar ikki eru tiknar við, er sambært læraranum tann, at hann ikki hevði rættað hesar uppgávurnar rættstundis.*

*Niðurstøðan hjá Mentamálaráðnum hevur við sær, at næmingarnir, sum einki skeivt hava gjørt, verða revsaðir, tí at lærarin og harvið eisini skúlin ikki hevur røkt sínar skyldur.*

*Í skrivinum hjá Mentamálaráðnum frá 5. juli 2002 verður m.a. ført fram:*

> „Sambært § 30 í Studentaskúlakunngerðini nr. 102 frá 26. juni 2001 og § 67 í kunngerð nr. 65 frá 27. apríl 2001 um studentspróvtøku og hægri fyrireikingarpróvtøku er tilskilað, at tað er næmingurin, sum hevur kærurætt. Tað kann tykjast heldur løgi, at eitt starvsfólk, sum er sett til at røkja eina ásetta uppgávu, kann nýta síni egnu mistøk sum grundarlag undir eini kæru, og næmingarnir verða „nýttir“ sum jarnbrot í málinum uttan at hesir, eftir tí sum framgongur av málinum, vita av kæruni.“

*Til hetta er at siga, at heimildin hjá Mentamálaráðnum sambært § 53 í kunngerð nr. 65 frá 27. apríl 2001 til at broyta givin ársmet ikki er avmarkað til bert at galda, har ein klaga fyriliggur frá einum næmingi.*

*Í hesum føri er talan um ein lærara, sum kemur eftir, at hann hevur givið tveimum næmingum ov lág ársmet, og hetta roynir hann so at fáa rættað.*

*Hvat orðalagnum í hesum skrivinum viðvíkur, so hevur Mentamálaráðið ásannað, at orðalagið var óheppið, og at ætlanin ikki var at seta spurnartekin við motivini hjá klagaranum fyri at reisa hetta málið. Eg geri tí ikki meira við tann spurningin.*

*Tá serligu umstøðurnar í hesum máli verða havdar í huga, dugi eg ikki at síggja, at grundgevingin í skrivinum frá Mentamálaráðnum til mín frá 5. juli 2002 (um tey nógvu ársmetini, sum skúlin skal umsita, og um eina møguliga ónøgd og ótryggleika hjá næmingunum) eigur at forða fyri, at hendan umsóknin verður gingin á møti. Talan er ikki um at broyta ársmetini niðureftir, men uppeftir. Eg dugi tí ikki at síggja, hvussu hetta kann skapa ónøgd og ótryggleika hjá teimum næmingunum, sum fáa síni ársmet hækkað. Hetta kann heldur ikki á nakran hátt skapa nakra grundaða ónøgd og ótryggleika hjá øðrum næmingum.*

*Um tað í hesum førinum ikki er grundarlag fyri at ganga einari áheitan frá læraranum og rektaranum á møti, um at broyta givnu ársmetini, dugi eg illa at síggja, at hetta yvirhøvur er gjørligt, uttan kanska tá talan er um skrivifeilir o.t.*

*Eg fari tí at mæla Mentamálaráðnum til at taka hetta málið upp til nýggja viðgerð, og at ganga umsóknini á møti. Skuldi ráðið ikki verið samt við mær í hesum, eigur ráðið í øllum førum at koma við eini gjøllari og fullfíggjaðari grundgeving fyri, hví ráðið heldur fast við upprunaligu avgerðina.*

*Eg fari í hesum sambandi at biðja Mentamálaráðið lata meg frætta aftur, hvat víðari hendir í málinum.*

***Vegleiðing um uppafturtøku***

*Lærarin hevur í klaguni til umboðsmannin víst á, at tá hann umvegis telefonina vendi sær til Mentamálaráðið, (B), vildi hesin ikki geva honum nakra vegleiðing um, hvussu lærarin kundi royna at fáa málið tikið uppaftur til nýggja viðgerð í Mentamálaráðnum. Í innanhýsis notatinum, sum er nevnt frammanfyri, hevur (B) víst hesum uppáhaldinum aftur. Hann sigur seg hava greitt læraranum frá, at hesin kann senda Mentamálaráðnum eitt skriv um hetta.*

*Av tí, at tað sostatt ikki er semja um, hvat er fyrifarist millum*

*partarnar í hesum spurninginum, fari eg ikki at taka dagar ímillum, um ein nøktandi vegleiðing er givin ella ikki, eins og fyriskrivað er í § 7, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Eg geri tí ikki meira við hendan partin av klaguni.*

## 27.4. Klaga um, at FF-blaðið ikki var tikið við í morgunsendingum hjá Útvarpi Føroya og um óhøviskan málburð í aftursvari frá útvarpsvertinum – grundgeving

A klagaði um, at FF-blaðið ikki hevði verið umrøtt í morgunsendingunum hjá Útvarpinum eins og hini tíðindabløðini. Eisini klagaði hann um aftursvarið, sum hann hevði fingið frá avvarðandi útvarpsverti, tá A hevði sent Útvarpinum telefaks hesum viðvíkjandi. Undir partshoyringini skeyt Útvarpið seg undir, at tað ikki metti FF-blaðið sum eitt tíðindablað, men sum eitt verkamannablað, og at blaðið tí ikki átti at verið tikið við í sendingina yvirhøvur. Útvarpið upplýsti eisini, at hesin tátturin í morgunsendingunum nú var tikin av skránni. Viðvíkjandi atburðinum hjá útvarpsvertinum varð ásannað, at hesin hevði verið óhøviskur, og tí hevði útvarpsstjórin givið vertinum eina átalu. Undir partshoyringini førdi A fram, at felagið, sum hann var formaður fyri, eisini í aðrar mátar hevði verið fyri mismuni í tíðindaflutninginum hjá Útvarpinum, og brúkti hann orðið „svartlistað" í hesum sambandi.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at grundarlag hevði ikki verið fyri at útihýsa FF-blaðnum frá morgunsendingunum við nevndu grundgeving, og at atburðurin hjá útvarpsmanninum als ikki og undir ongum umstøðum kundi góðtakast. Tá nevndi táttur í morgunsendingunum var niðurlagdur, og útvarpsstjórin hevði givið viðkomandi útvarpsverti eina átalu, sum umboðsmaðurin bert kundi taka undir við, helt hann ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hesar spurningar. Viðvíkjandi uppáhaldinum hjá A, um at felagið hevði verið svartlistað, helt umboðsmaðurin, at talan var um so grovar skuldsetingar, at hesar ikki kundu fara aftur við borðinum. Út frá tí próvtilfari, sum umboðsmaðurin hevði fingið frá Útvarpinum, helt umboðsmaðurin tó einki grundarlag vera fyri at staðfesta, at A og felagið høvdu verið svartlistað. Um tey annars høvdu verið fyri vanbýti var ein spurningur, sum tað var ógjørligt at lýsa innan karmarnar á einari umboðsmanskanning. (J.nr. 200200020)

### Klagan

(A) hevur sent umboðsmanninum eina klagu mótvegis Útvarpi

Føroya. Klagan, ið var send umboðsmanninum við telefaksi 24. mai 2002 er soljóðandi:

„Í samband við málið, hvørt útvarpið lýkur lógásettu skyldina um at vera óheft, verður sent brævaskifti, sum talar fyri seg.

Málið snýr seg um, hvørt borgarin hevur krav uppá, at allir verða viðgjørdir eins. Í hesum førinum er tað í samband við dagligu lýsingini av bløðunum. Her mugu vit kunna krevja, at verður hetta gjørt, má tað vera eins fyri øll bløðini.

Her fyriliggur svar frá útvarpinum. Stílurin talan fyri seg sjálvan, men niðurstøðan kann greitt sigast, at útvarpið metir seg avgjørt ikki hava skyldu at viðgera øll eins. Hevði talan verið um eitt mistak hevði eg góðtikið tað sum eina frágreiðing. Men henda fráboðan reisir greitt spurningin um útvarpið lýkur sína skyldu at vera óheft.“

Við klaguni vóru løgd trý skriv. Tað fyrsta er eitt telefaks, sum (A) hevur sent Útvarpinum 23. mai 2002, kl. 8:20. Skrivið er soljóðandi:

„Útvarpið

**Viðvíkjandi lýsing av bløðum.**

Í morgun hevur útvarpið í síni dagligu endurgeving av høvuðstíðindum í bløðunum útihýst FF-blaðið, hóast vitan um at tað er útkomið í morgun.

Hetta finni eg meg ikki í. Tí krevji eg, at FF-blaðið fær somu umrøðu sum hini bløðini við fyrstkomandi høvi, t.v.s. uppundir tíðindasendingini kl. 9.“

Næsta skrivið er eitt aftursvar uppá skrivið omanfyri, sum (B), útvarpsvertur hevur sent (A) við telefaksi kl. 10:15 sama morgun. Aftursvarið er soljóðandi:

**„Góði (A)!**

Nakað eftir klokkan hálvgum níggju í morgun fekk eg eitt telefaks stungið upp í hondina, sum var komið, meðan Morgunrásin var í luftini. Í tí sambandi vil eg fegin senda tær nakrar reglur

persónliga og ikki vegna útvarpið, men altso bara vegna meg sjálvan!

Satt at siga gjørdist eg bæði kløkkur og vónsvikin, tá eg sá hetta „súra uppstødið“ frá tær, tí tú hevur helst ikki lurtað nóg væl eftir, hvat eg segði, tá eg hugdi gjøgnum bløðini í morgun. Og viljin til at lurta hevur kanska ikki verið tann størsti heldur!

Eg segði, at vit høvdu bara fingið tvey bløð, Sosialin og Dimmalætting, og soleiðis er tað eisini. FF-blaðið var ikki við postinum í morgun, men – bara tí tú/FF-blaðið so ofta hevur kverulerað um hetta – nevndi eg kortini, at tað var útkomið, men bara ikki komið í postinum. Seinni eri eg so blivin greiður yvir, at Trúboðin eisini er útkomin í dag, men at hann heldur ikki var við postinum í morgun.

At tú síðani í telefaksinum krevur, at FF-blaðið skal verða gjøgnumgingið við fyrstkomandi høvi, tað vil siga upp undir tíðindasendingina klokkan níggju, er høpisleyst, tá einki eintak av blaðnum í morgun er til taks í útvarpinum. Vit plaga ikki at senda fólk á posthúsið at leita ella í býin at keypa tey bløðini, sum ikki eru komin við postinum, tí so høgt meta vit ikki henda táttin við at hyggja at bløðunum á Morgunrásini.

Og nú, tá eg kortini sendi tær hesar reglur, vil eg gjarna frábiðja mær meira grenj um hetta. Hvørja ferð, eg eri vertur og standi við ábyrgdini av Morgunrásini, royni eg samvitskufult at fáa fatur á øllum teimum útkomnu bløðunum – stórum sum smáum – fyri ikki at nakar skal vera fyri mismuni. Hetta telafaksið hjá tær stinkar langan veg av innbillaðari forfylging, sum eg einki kenni til og ei heldur brýggi meg um at hoyra um.

Slík hugsan er tvætl og møsn úr enda í annan, tí eg geri ikki mun á bløðunum, tá eg eri vertur. Og annars skal eingin krevja nakað, tí hetta við bløðunum er ikki ein skylda, men ein tænasta, vit hava í sendingini. Vit kunnu saktans klára okkum fyriuttan, so um man ikki kann fáa vanligan arbeiðsfrið, er kanska líka so frægt at strika handa táttin úr sendingini.

...

E.S. Tá tú herfyri í FF-blaðnum skrivaði síðu upp og niður um avgerðina hjá løgtingsins umboðsmanni viðvíkjandi kæruni frá tær um útvarpsstjóran, helt eg meg síggja, at tú legði stjóran

> undir at geva starvsfólkunum „munnkurv“, at útvarpið ikki við einum einasta orði hevði tikið málið upp á tungu. Hetta er ikki rætt, tí tann eina morgunin, FF-blaðið kom út, las eg eitt trivaligt brot burtur úr tí, blaðið skrivaði um júst hetta málið. Og eg havi hvørki áðrenn ella aftaná fingið nøkur boð um at lata vera ella ikki.“

Triðja skrivið er ein reaktión frá (A) uppá svarið frá (B). Hetta skrivið er sent Útvarpinum við telefaksi seinni sama dagin, og er soljóðandi:

> „Víst verður til hjálagda brævaskifti. Fyrst vil eg siga, at eg vil frábiðja mær ein slíkan grovan og óforskammaðan tóna frá einum starvsmanni í útvarpinum. Men burtursæð frá hesum váttar hann hugburðin og støðið í útvarpinum, soleiðis sum ein annars kennir hann.
>
> Spurningurin í hesum máli er hvørt øll, borgarar ella bløð, skulu viðgerast líka. Tað er próvfast, at tað er ikki hent í hesum førinum.
>
> FF-blaðið var liðugt prentað kl. 15 í gjár og var í postboksunum í morgun. Tí skuldi FF-blaðið havt sama møguleika at komið á borðið hjá morgunvertinum sum hini bæði bløðini, sum vóru endurgivin.
>
> Tað kann ikki vera mín trupuleiki, at hetta kortini ikki er hent. Tí er so avgjørt einki grundarlag fyri frekleikanum í hjálagda brævi.
>
> Fyri at verða líkastillað við hini bløðini høvdu vit eina kunngerð á middegi um høvuðsinnihaldið í FF-blaðnum. Hetta máttu vit gera fyri at fáa somu umrøðu sum Dimmalætting og Sosialurin í morgunsendingini.
>
> Eg rokni bert við, at tað ikki kemur nøkur rokning fyri hesa kunngerð.“

**Partshoyringin**

Við skrivi, dagfest 29. mai 2002 sendi umboðsmaðurin Útvarpinum hesa klaguna til ummælis. Umboðsmaðurin boðaði í skrivinum

Útvarpinum frá, at hann skilti klaguna soleiðis, at hendan snúði seg um tvinni viðurskifti, nevniliga:

1. FF-blaðið verður útihýst í morgunsendingini í Útvarpi Føroya, og
2. Svarið frá útvarpsvertinum, (B) til (A) uppá skriv hansara til Útvarp Føroya.

Við skrivi, dagfest 30. mai 2002 hevur Útvarpið svarað umboðsmanninum soleiðis:

> „Vísandi til skriv tygara frá 29. mai 2002 viðvíkjandi kæru frá (A) skulu vit siga frá, at vit meta, at málið er fult upplýst við tí tilfari, ið er lagt við.
>
> Talan er um eina redaktionella avgerð, sum smb. grein 13, stk. 2 í lóg nr. 22 frá 20. februar 1998 um Kringvarp v.m. ikki er umfatað av lógini um almenna fyrisiting.
>
> Tí meta vit ikki, at umboðsmaðurin skal taka hetta málið til viðgerðar.“

Við skrivi, dagfest 4. juni 2002 hevur umboðsmaðurin boðað Útvarpinum frá, at Útvarpið uttan iva er ein stovnur, sum sambært Fyrisitingarlógini v.m. verður roknaður við til almennu fyrisitingina, og at Útvarpið av somu orsøk er fevnt av virksemi umboðsmansins – eisini í málum, sum ikki eru fevnd av Fyrisitingarlógini. Í skrivinum boðaði umboðsmaðurin eisini Útvarpinum frá, at hann hevði avgjørt at taka tann partin av klaguni upp til viðgerðar, sum snúði seg um aftursvarið til (A). Fyri at støða kundi takast til, um hin parturin av klaguni skuldi takast til viðgerðar, nevniliga um FF-blaðið av órøttum varð útihýst í morgunsendingini hjá Útvarpinum, bað umboðsmaðurin Útvarpið um at svara hesum spurningum:

...

- Hvørji bløð eru ávikavist nevnd ella endurgivin í morgunsendingini hjá Útvarpinum síðani 1. jan. 2002 ?
- Hvussu ofta er FF-blaðið nevnt ella endurgivið í morgunsendingini síðani 1. jan. 2002 ?
- Eru nakrar „retningslinjur“ fyri, hvørji bløð/tíðindi verða nevnd í sendingini ?

- Um FF-blaðið aldrin ella sjálvdan er nevnt ella endurgivið í morgunsendingini síðani 1. jan. 2002, hvør er so orsøkin til hetta ?

...

Við skrivinum varð eisini lagt avrit av skrivi frá (A) til umboðsmannin, dagfest 2. juni 2002, ið er soljóðandi:

„Sum framhald av brævaskiftinum um hetta mál skal eg viðmerkja og skoyta uppí:

Øll tey bløðini, sum verða lýst í morgunsendingini hjá útvarpinum, verða prentað á sama stað, og tey verða øll prentað dagin fyri. So tað finst so avgjørt eingin undanførsla fyri ikki at geva øllum bløðunum somu viðferð í morgunsendingini.

Tá sagt verður í brævinum hjá útvarpsmanninum, at summi bløð ikki vóru í postinum, so er hetta undanførsla, sum einki hald er í. Sjálvsagt kann tað henda, at eitt einstakt blað ikki er í postinum, men tað finst ráð fyri tí, nevniliga at útvega sær blaðið á annan hátt.

Sjálvt um tað ikki hevur prinsippiellan týdning skal sigast, at henda morgunin, sum talan er um í hesum málinum, vóru sovæl FF-blaðið sum Trúboðin í boksini hjá FF. Og at tvey bløð eru misfarin í postavgreiðsluni er heilt óhugsandi. Og tað er tá merkiligt, at tað ongantíð skal koma fyri, at Dimmalætting og Sosialurin ikki eru í postinum!

Eitt annað er, at tað kemur fyri, at summi bløð koma í boksina kvøldið fyri, og at onnur bløð fyrst liggja har tann morgunin tey koma út. Men tað kann so ikki vera okkara trupulleiki. Tað er bert ein spurningur um at heinta postin á morgni, sum vit onnur gera.

Tað, sum tó má sigast at hava størsta týdningin í júst hesum máli er, at tað júst styrkir um ivan, hvørt Útvarp Føroya lýkur ta skyldu, sum stovnurin hevur at vera „óheft“. Í hesum liggur væl eisini, at øll skulu hava somu viðferð.

Brævið frá útvarpsmanninum, sum annars er skrivað í arbeiðstíð og sent frá faxinum hjá útvarpinum, vísir heilt greitt, at hvørki

útvarpsmaðurin ella útvarpið sum so metir seg hava nakra skyldu at geva bløðunum eins viðferð.

Tað vísir eisini, at tað finst eingin føst mannagongd á hesum økinunum, eins lítið og hon eftir øllum at døma finst á øðrum økjum hjá útvarpinum.

Besta dømi um hetta er, tá sagt verður, at orsøkin til, at tað júst var nevnt, at FF-blaðið var komið út, men uttan sum við hinum bløðunum at umrøða innihaldið, var at eg fyrr skuldi „havt kverulerað" um hetta. Er tað rætt, so er bert ein orsøk fyri hesum at hetta er hent fyrr. Og tað er tað eisini! Og er hetta fyri so vítt prógv fyri at munur verður gjørdur á bløðunum, sum eg mangan havi pástaðið fyrr.

Men ein kann spyrja seg sjálvan, hvat ein skal halda um ein almennan stovn, har ein slík grundgeving kann verða nýtt. Hetta váttar tað, sum ein sanniliga hevur havt varhugan av, at øll gera sum tað hóvar teimum og viðgerðin valdast hvør tú er!

Brævið frá útvarpsmanninum má sigast at vera eitt eindømi hvat grovheit og skendskheit viðvíkir, og tað eigur at vera ein sera relevantur spurningur, um ein sakliga grundaður fyrispurningur til ein almennan stovn, brævið var jú stílað til útvarpið, skal kunna svarast á henda hátt av einum starvsfólki. Hetta reisir í hvussu er hesar spurningar:

a. Er nýtta mannagongdin og hugburðurin aftanfyri í samsvar við lógina um kringvarp.
b. Skal ein borgari, sum er tvungin at gjalda útvarpsgjald, kunna útsetast fyri eini slíkari viðferð, tá hann nýtir sín rætt at venda sær til stovnin. Tað er óneyðugt at siga, at tey flestu vildu halda seg aftur at venda sær til stovnin, tá hetta er tann viðferðin, sum tey kunnu vænta sær.
c. Er ikki grund til at halda, at ein slíkur hugburður móti einum, sum loyvir sær at venda sær til útvarpið, ávirkar ta viðferð sum hann annars fær í programmvirkseminum hjá útvarpinum?
d. Kann ein slíkur hugburður ikki hava ta ávirkan, at løgtingsmenn, hvørs uppgáva annars er at hava eftirlit við almennum stovnum, og tískil eisini útvarpinum, vilja halda seg aftur at røkja hesa teirra uppgávu?

e. Kann hetta ikki verða orsøkin til, at tann tíðindaflutningur, sum er umrøddur í brævaskiftinum við umboðsmannin, kann fara fram uttan at nakar tekur málið upp.

Nú er tað upp til umboðsmannin sjálvan um hann metir hetta mál at vera eina ella tvær kærur, men sigast kann at málið snýr seg um alt tað sum er greitt frá er í samsvar við lóggávu og „góðan umsitingarsið“.“

Við telefaksi hevur (A) 12. juni 2002 sent umboðsmanninum hetta ískoyti til klagu sína:

„**Viðvíkjandi spurninginum um útvarpið er „óheft“.**
Til brúk fyri metingina av um útvarpið lýkur sína skyldu at vera óheft verður gjørt vart við fylgjandi:

Í morgun vórðu avsagdir hjáløgdu tveir dómar, sum báðir viðvíkja manningarfeløgum og sum báðir eru sera prinsippiellir. Útvarpið var til staðar og fekk somu kunning um báðar dómarnar.

Meðan dómurin viðv. ALS hevur verið neyvt viðgjørdur hevur okkara dómur als ikki verið nevndur.

Okkara advokatur fann hetta so páfallandi, at tað var hann sum fyrst gjørdi okkum varar við hetta.

Hjálagt verður send heimasíðan hjá útvarpinum í dag sum váttar hetta, og sum vísir, at útvarpið eisini hevur havt onnur tíðindi úr landsrættinum.

Á miðdegi vóru annars onnur einkisigandi tíðindini viðvíkjandi samráðingar hjá almennum fakfeløgum, sum vórðu útsettar til aftaná summarfrítíðina, men hesi hava verið so lítið mett, at tey ikki eru komin við á heimasíðuna.

Hetta er enn ein greið ábending um ta svartlisting av FF, sum fer fram í útvarpinum.“

Hetta ískoyti varð sent Útvarpinum til ummælis við skrivi, dagfest 14. juni.

Við skrivi, dagfest 28. juni heitti útvarpsstjórin á umboðsmannin um at fáa longt svarfreistina uppá omanfyri nevndu skrivini til 15.

aug. 2002. Hetta varð játtað við skrivi, dagfest 1. juli 2002 og fráboðað (A) sama dagin.

Við skrivi, dagfest 13. aug. 2002 hevur Útvarpið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar til klaguna:

„Løgtingsins Umboðsmaður hevur í skrivum 4. og 14. juni biðið ÚF ummæla tvær nýggjar kærur frá (A). Sum heild mugu vit siga, at vit hava eitt sindur torført við at fyrihalda okkum til partar av formliga grundarlagnum undir hesum málum, men vit skulu niðanfyri royna at útgreina málini og gera okkara viðmerkingar.

**Skriv frá umboðsmanninum dagf. 4. juni 2002.**

Í skrivinum staðfestir umboðsmaðurin:

1) At ÚF er fevnt av virkseminum hjá umboðsmanninum smb. grein 4 í umboðsmannslógini.
2) At hann smb. grein 5 í umboðsmanslógini kann viðgera mál um programvirksemið hjá ÚF, hóast ásetingarnar í grein 13 í kringvarpslógini.
3) At hann hevur tikið kæruna frá (A) um aftursvarið hjá (B) tann 23. mai 2002 til viðgerðar.
4) At hann umhugsar at taka til viðgerðar kæruna hjá (A), um at FF-blaðið av órøttum verður útihýst í morgunsendingini hjá ÚF, og verður ÚF í hesum sambandi biðið um at svara nøkrum spurningum.

**AD 1)**

ÚF metir, at fyrisitingarligi parturin av virkseminum hjá ÚF er fevndur av hesi reglu, men at ítøkiliga programmvirksemið og journalistiska virksemið hjá stovninum ikki er fyrisiting og harvið ikki fevnt av lóggávuni um fyrisiting.

Spurningurin er so, í hvønn mun umsitingin av hesum virksemi skal roknast sum fyrisitingarlig mál og viðgerast sum slík.

Í tí aktuellu støðuni mettu vit ikki skrivið frá (A) tann 23. mai 2002 sum eitt fyrisitingarligt skriv, men sum eitt mótmæli móti eini redaktionellari handling. Tað kemur ofta fyri, at tílíkt samskifti

er millum programmedarbeiðarar, sum leggja sendingarnar til rættis, og fólk uttanfyri ÚF, og tað er vónleyst at fyriskriva, at hesi mál skulu viðgerast sum fyrisitingarlig mál.

Mannagongdin má vera, at fólk sum eru ónøgd, senda ÚF eina formliga kæru um tað, sum tey eru ónøgd við, og hon verður so viðgjørd sum eitt fyrisitingarligt mál.

**AD 2)**

Umboðsmaðurin staðfestir, at hann eftir grein 5 í umboðsmanslógini kann viðgera mál um programmvirksemið hjá ÚF. Vit undra okkum kortini yvir, at umboðsmaðurin á hesum grundarlagi umhugsar at taka hetta málið til viðgerðar. Vit meta, at tað er óheppið, at umboðsmansstovnurin yvirtekur tær kæruskipanir, sum eru ásettar í fjølmiðlalógini.

Í fyrsta lagi átti (A) fyrst at hava sent eina formliga kæru til ÚF. Í øðrum lagi er í kringvarpslógini ásett, at ein hægri fagligur myndugleiki skal taka støðu til brot á góðan fjølmiðlasið, um kærarar ikki fáa viðhald frá ÚF.

Annað mál er so, at hesin kærumyndugleiki ikki er farin at virka enn, og tað er atfinningarsamt. Vit meta, at umboðsmaðurin eigur at fylgja hesum málinum upp, og vilja viðgera hesi viðurskifti í serstakum skrivi til umboðsmannin.

**AD 3)**

Umboðsmaðurin hevur avgjørt at taka kæruna um svarskrivið hjá (B) upp til viðgerðar, og skulu vit niðanfyri útgreina hetta málið.

(A) sendir hósdagin 23. mai kl. 8.20 við faxi eitt skriv stílað til „Útvarpið“, har hann krevur, at FF-blaðið skal nevnast í útvarpinum innan kl. 9 sama morgun. Brævið verður borið í studio til (B), sum hevur ábyrgdina av morgunsendingini henda dagin. Seinni um morgunin sendir (B) persónliga eitt aftursvar til (A), sum svarar aftur í einum skrivið til „Útvarp Føroya“, har hann ger viðmerkingar til skrivi hjá (B), og setir fram krav um, at hann skal hava eina ókeypis handilslýsing.

Eg meti ikki, at tað er nakað atfinningarsamt í, at ÚF hevur

viðgjørt skrivið frá (A) sum um tað viðvíkti programmvirkseminum hjá ÚF, tvs. ikki sum eitt fyrisitingarskjal.

Tó er tann parturin av tí seinna brævinum frá (A), har hann krevur, at hann skal hava eina ókeypis lýsing í ÚF, eitt fyrisitingarmál, men hesi bæði málini hava onki við hvørt annað at gera, tí ÚF avgreiðir ikki viðmerkingar um redaktionell mál, við at viðkomandi fær ókeypis lýsingar. Tað málið er fyrisitingarliga fylgt upp.

Vit mugu ásanna, at vit hava trupult við at handfara skrivini hjá (A), tí vit hava ilt við at skilja ímillum, nær hann krevur, viðmerkir ella kærur. Sama trupulleika hevur umboðsmaðurin eftir øllum at døma eisini, tá hann í skrivi 29. mai sigur, at hann „skilir skrivið frá (A) sum eina sjálvstøðuga klagu móti ÚF".

Eg meti ikki, at ÚF kann lastast fyri ikki at hava viðgjørt hetta sum eina formlig kæru til stovnin. Í fyrsta skrivinum sigur hann, at hann finnur seg ikki í, at FF-blaðið ikki verður nevnt, og krevur at tað verður nevnt í somu sending. Tað er onki óvanligt í, at fólk venda sær til medarbeiðarar í ÚF, tí tey eru ónøgd við eina redaktionella avgerð ella hava eina meining um tað, sum er sent. Hetta verður ikki viðgjørt sum formligar kærur, men verið tikið við í viðgerðina av programmpolitikkinum. Á sama hátt er høvi hjá fólki í einum teigi á heimasíðuni hjá ÚF, at siga sína hugsan um arbeiðið hjá ÚF, og hetta tænir sama endamáli.

Redaktiónirnar og teir einstøku programmedarbeiðararnir fáa dagliga hundratals teldubrøv og fax, sum verða send til nógvar ymsar adressur, og í sínum arbeiði hava programmedarbeiðararnir eisini nógv munnligt samskifti við fólk uttan fyri ÚF. Tað ber ikki til at gera henda partin av virkseminum hjá ÚF til fyrisitingarmál.

Eg meti ikki, at ÚF hevur nakran trupulleika við at halda skil á, hvørji mál og skjøl snúgva seg um programmvirksemi og skulu viðgerast sum slík, og hvørji snúgva seg um fyrisiting og skulu viðgerast sum slík.

(A) hevur verið fakfelagsformaður í ein mansaldur, og er fyrrverandi løgtingsmaður og landsstýrismaður. Tí má leggjast til grund, at hann veit, hvussu hann skal bera seg at, og til hvønn hann skal venda sær, um hann ynskir at kæra um programmvirksemið hjá ÚF.

Fyri at fleiri trupulleikar ikki verða av hesum, hevur undirritaði í dag skrivað til (A), og biðið hann um í framtíðini at stíla kærur til ÚF í brævi til undirritaða persónliga.

Viðvíkjandi svarskrivinum hjá (B) er í fyrsta lagi óneyðugt at siga, at starvsfólk í ÚF ikki eiga at brúka tílíkan málburð, tá tey samskifta við onnur. (B) hevur fingið eina átalu fyri hetta, sum hann hevur tikið til eftirtektar. Í einum svarskrivi greiðir hann frá tí, sum hendi henda morgunin, bakgrundini fyri, at hann persónliga handlaði sum hann gjørdi í hesi støðuni.

Reglurnar fyri táttin í morgunsendingini við at lesa úr bløðunum vóru, at ÚF skuldi kunna lurtararnar um høvuðstíðindini í tíðinda- og dagbløðunum, t.v.s. Sosialinum, Dimmalætting, Norðlýsinum, Fregnum og Oyggjatíðindi. Hetta seinasta blaðið tó við tí avmarking, at ansast skuldi eftir, at tíðindini, sum vórðu endurgivin, vóru dokumenterað. Tað hevur ongantíð verið ætlanin at bløð hjá felagsskapum og fakfeløgum, herundir Føroya Fiskimannafelag, skuldu takast við í hesum tátti. Nógv fakfeløg og felagsskapir í Føroyum geva út bløð.

(B) hevur seinnu árini ein stóran part av tíðini havt ábyrgdina av morgunsendingini, og greiðir hann í svarskrivinum frá, at hann sum vertur í sendingini hevur tikið FF-blaðið og Trúboðan við í umrøðuna av bløðunum, tá hann hevur mett, at hesi bløð hava havt tíðindi av almennum áhuga, eitt nú tey tíðarskeið, tey hava havt redaktionellar medarbeiðarar í starvi.

(B) greiðir frá, at hann uppfataði fyrra skrivið frá (A), sum var tað til hansara persónliga, og hann vísir á, at hann í svarskrivinum legði dent á, at hann svaraði (A) persónliga, og at hann ikki svaraði vegna stovnin. Greitt er, at (B) hevur verið í eini strongdari støðu, at fáa hetta ultimativa kravið frá (A), samstundis sum hann skuldi savna seg um at avvikla seinnu helvt av morgunsendingini. Uttan at hetta á nakran hátt skal fatast sum nøkur verja av nevnda skrivi, so má ásannast, at (A) hevur brúkt eitt sera hvast orðalag um ÚF, og hevur hann í sínum skrivum sett fram eina røð av eftir okkara meting ógrundaðum álvarsligum skuldsetingum móti ÚF.

(B) førir fram, at hann kendi seg illa viðfarnan av (A), tí tað varð júst hann, sum hevði tikið FF-blaðið við í henda blaðtáttin,

og at (A) í FF-blaðnum hevur lagt hann undir at vera partur av einum gjøgnumførdum sensuri í ÚF, og at ein partur av hesum taktikkinum skuldi hava til endamáls at tiga í hel, at ÚF hevði fingið eina átalu frá umboðsmanninum. Hetta er púra burturvið, tí ÚF hevur mær kunnugt sum tann einasti fjølmiðilin umrøtt henda úrskurðin hjá umboðsmanninum, og tann morgunin FF-blaðið umrøddi úrskurðin, umrøddi (B) hesi tíðindi gjølla í blaðtáttinum.

Omanfyri hava vit greitt frá umstøðunum í sambandi við hetta mál. Samanumtikið hevur hetta mál fingið tær avleiðingar, sum tað eftir okkara tykki eigur at fáa innanhýsis í ÚF. Tað fær ikki aðrar avleiðingar fyri (B), líkamikið hvørja niðurstøðu umboðsmaðurin kemur til, tí hann hevur sagt seg úr starvinum í ÚF.

**AD 4)**

Umboðsmaðurin biður í skrivinum ÚF svara fylgjandi fýra spurningum:

1) Hvørji bløð eru ávikavist nevnd ella endurgivin í morgunsendingini hjá útvarpinum síðan 1. januar 2002?

   **Svar:** ÚF kann ikki svara hesum spurniningi, tí hesin tátturin verður avviklaður beinleiðis uttan handrit.

2) Hvussu ofta er FF-blaðið nevnt ella endurgivið í morgunsendingini síðan 1. januar 2002.

   **Svar:** ÚF kann ikki svara hesum spurningi, tí hesar upplýsingar eru ikki skrásettar.

3) Eru nakrar „rætningslinjur“ fyri, hvørji bløð/tíðindi verða nevnd í sendingini.

   **Svar:** Greitt er frá omanfyri, hvørjar reglur vórðu settar um henda táttin í sendingini.

4) Um FF-blaðið aldrin ella sjáldan er nevnt ella endurgivið í morgunsendingini síðan 1. januar 2002, hvør er so orsøkin til hetta.

   **Svar:** FF-blaðið átti eftir reglunum fyri henda táttin als ikki at verið nevnt.

Hesin lítli tátturin við at lesa høvuðstíðindini í tíðinda- og

dagbløðunum, er ein evarska lítil partur av samlaða tíðinda- og upplýsingarvirkseminum hjá ÚF, men hann hevur við hesum fingið eina sera stóra dimensión, nú umboðsmaðurin umhugsar at kanna, um ÚF við hesum fremur brot á grein 5 í kringvarpslógini.

ÚF metir ikki, at tað er rætt at brúka so stóra orku upp á henda lítisverda tátt, og hevur tí avgjørt at niðurleggja hann. Hann kemur sostatt ikki at geva (A) fleiri trupulleikar.

**Skriv frá umboðsmanninum dagf. 14. juni 2002.**

Í skrivinum biður umboðsmaðurin ÚF ummæla eitt skriv frá (A), har hesin ger vart við, at ein landsrættardómur millum ALS og Føroya Skipara- og Navigatørfelag er umrøddur í ÚF, meðan ein dómur millum Føroya Fiskimannafelag og (C) ikki er umrøddur.

Sum heild er at siga, at tíðindaredaktiónirnar og tey fólk, sum starvast har, altíð eru í tí støðu, at tey skulu velja, hvørji mál verða tikin upp, og hvussu tey verða viðgjørd. Førleikan til at gera hetta hava tey frá síni fagligu útbúgving og frá teimum siðvenjum og mannagongdum, sum redaktiónirnar hava bygt upp. Tær aktuellu umstøðurnar tann einstaka dagin hava eisini sína ávirkan. Her verður hugsað um, hvørji onnur mál eru á skránni, hvussu statt er við manning o.s.fr.

Valið, sum tíðindaredaktiónin hjá ÚF gjørdi henda dagin í sambandi við hesar báðar dómarnar, er grundað á, at málið millum ALS og Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur verið til viðgerðar í longri tíð, og ÚF hevur fylgt hesum máli. Málið er stórt og hevur stórar avleiðingar. Málið fevnir um allar fiskimenn, sum eru við føroyskum skipum og fer ivaleyst at hava við sær uppskot um broytingar í reglunum, sum ALS virkar eftir. Málið hevur stóran almennan áhuga, og tað hevur stóran samfelagsligan týdning. Okkum kunnugt skal málið eisini roynast í hægstarætti.

Málið millum FF og (C) er av persónligum slag og hevur ikki sama almenna áhuga. Málið er um einstakling, sum ikki viðurkennur eina skipan, sum er alment viðurkend. Men sambært dóminum skrivaði viðkomandi sjálvur undir, at skipanin eisini

umfataði hann. Dómurin í hesum málinum fær onga ávirkan á onnur enn partarnar í málinum.“

Við einum øðrum skrivi, somuleiðis dagfest 13. aug. 2002 hevur Útvarpið sent umboðsmanninum eitt generelt skriv um áskoðanina hjá Útvarpinum á viðgerðina hjá umboðsmanninum av klagum um programmvirksemi hjá stovninum. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðv. kærum um programmvirksemið hjá Útvarpi Føroya**
Løgtingsins Umboðsmaður gjørdi 12. juli 2002 úrskurð í eini kæru viðvíkjandi programmvirkseminum hjá ÚF, og umboðsmaðurin umhugsar í løtuni, um hann skal taka eitt líknandi mál til viðgerðar.

ÚF loyvir sær hervið vinarliga at gera nakrar generellar viðmerkingar viðvíkjandi kæruviðurskiftunum um programmvirksemið hjá ÚF.

ÚF metir, at tað er óheppið, at umboðsmansstovnurin yvirtekur ta kæruviðgerð, sum er fyriskrivað í kringvarpslógini, har lagt er upp til, at lurtarar í fyrsta umfari kunnu kæra til ÚF. Í teimum førum, har kærarin ikki fær viðhald, skal viðkomandi kunna kæra til eina fjølmiðlanevnd. Vit skilja endamálið við grein 6 í umboðsmanslógini soleiðis, at aðrir kærumøguleikar eiga verða troyttir, áðrenn umboðsmaðurin tekur málini til viðgerðar.

Hvørki í málinum um Thorvald Stoltenberg ella FF-blaðið er formliga kært til ÚF um hesi mál, áðrenn tey eru send umboðsmanninum.

Tá kringvarpslógin varð sett í gildi, var tað ein fyritreyt, at ein fjølmiðlaábyrgdarlóg eisini skuldi setast í gildi, og at tað eftir henni skuldi setast ein fjølmiðlanevnd at viðgera kærur um góðan fjølmiðlasið. Sum kunnugt er ein fjølmiðlaábyrgdarlóg ikki enn sett í verk, og ongin fjølmiðlanevnd tí sett. ÚF metir, at tað er sera óheppið, at ongin kærustovnur er, men hinvegin meta vit ikki, at rætta loysnin er, at umboðsmansstovnurin yvirtekur ætlaða virksemið hjá fjølmiðlanevndini, uttan so at stovnurin útvegar sær neyðugan fakligan førleika á økinum.

Málið um eina fjølmiðlanevnd hevur ligið á láni í 10 ár.

Fram til mars í 1998 virkaði útvarpsnevndin sum kærustovnur í tílíkum málum, og ætlanin var, at fjølmiðlanevndin eftir ásetingunum í kringvarpslógini skuldi taka við hesi uppgávuni.

Í 1991 varð ein fjølmiðlaábyrgdarlóg sett í gildi í Danmark, og í 1992 spurdi Løgmálaráðið, um føroyska heimastýrið vildi hava donsku lógina setta í gildi í Føroyum.

Í 1995 tók landsstýrið málið upp, og í 1997 varð uppskot til ríkislógartilmæli lagt fyri løgtingið. Landsstýrið mælti til fleiri broytingar í donsku lógini, og løgtingið gjørdi eisini aðrar broytingar, m.a. í samansetingini av fjølmiðlanevndini, áðrenn uppskotið varð samtykt.

Í mai 1997 sendi landsstýrið ríkislógartilmælið til løgmálaráðið, sum í november 1999 svaraði, at tað ikki var sinnað at seta lógina í gildi við øllum teimum broytingum, sum løgtingið hevði samtykt. Ein grundgeving hjá løgmálaráðnum var, at samansetingin av fjølmiðlanevndini var í andsøgn við prinsippini í donsku lógini, har dentur verður lagdur á, at javnvág er í nevndini millum umboð frá fjølmiðlunum og umboð fyri almenningin.

Í mai 2000 samtykti løgtingið uppskot frá landsstýrinum um at taka av ríkislógartilmælið um fjølmiðlaábyrgdarlógina og samtykti samstundis uppskot til samtyktar, har mælt varð landsstýrinum til at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um fjølmiðlaábyrgd.

Í mars 2001 legði landsstýrið fyri løgtingið uppskot um góðan fjølmiðlasið, men í mai varð uppskotið tikið aftur. Okkum kunnugt tí at føroyska heimastýrið ikki hevur yvirtikið málsøkið fjølmiðlaábyrgd.

ÚF metir, at tað er sera óheppið, at ongin kærustovnur er á økinum, og heitir á umboðsmannin um at fylgja málinum upp.

Til tygara kunnleika verður hjálagt ummælið, sum ÚF og SvF gjørdu av uppskotinum, ið varð lagt fyri tingið í mai 2001.“

Sama dag, Útvarpið sendi viðmerkingar sínar til umboðsmannin, boðaði tað (A) frá hesum, og bað hann um framyvir at senda møguligar kærur um Útvarpið til stjóran persónliga. Hetta elvdi til, at (A) sendi (D), útvarpsstjóra soljóðandi skriv, dagfest 28. august 2002, sum hann sendi umboðsmanninum avrit av:

„Víst verður til hjálagda bræv. Her til er bert at siga, at av royndum kann sigast við vissu, at kæra til útvarpsstjóran er nyttuleys.

Kærur verða nevniliga greiddar eftir einum leisti, ið sum útgangsstøði gevur útvarpinum viðhald.

Og tað er greitt, at kæra um tíðindaflutning bert førir til enn verri sømdir framyvir hjá kæraranum.“

Viðmerkingarnar frá Útvarpinum til klaguna vórðu sendar (A) til ummælis við skrivi, dagfest 2. sept. 2002. Við skrivi, dagfest 6. sept. 2002 hevur (A) svarað umboðsmanninum soleiðis:

**„Viðmerkingar til (D), útvarpsstjóra.**

Víst verður til bræv tykkara dagfest 2. september 2002 saman við viðmerkingum hjá (D), útvarpsstjóra. Í hesum máli vil eg fremst vísa til upprunamálið í hesi sak. Eg rokni við, at tað er óneyðugt at endurtaka nakað í hesum máli. Bert skal vísast til teir leysu endarnar, sum enn standa eftir, sum eisini er víst á í brævi til umboðsmannin.

Viðvíkjandi brævinum frá (D), útvarpsstjóra, havi eg fylgjandi viðmerkingar:

**Lýsing av landsrættarmálunum.**

Hesar viðmerkingar skulu byrja við seinasta partinum av skrivinum hjá (D), nevniliga viðvíkjandi teimum umrøddu landsrættardómunum. Júst hetta mál gevur eina sera góða mynd av, hvussu subjektiv tíðindatænastan hjá útvarpinum er, og grundgevingarnar hjá (D) vátta í veruleikanum ta fatan, sum eg sjálvur havi ført fram um tíðindaflutningin hjá útvarpinum.

Til sjónarmiðið hjá (D) um munin millum tey tvey landsrættarmálini, sum hóast tey eru sammetilig, hava fingið heilt ymiska lýsing í útvarpinum skulu hesar viðmerkingar gerast:

Fyri tað fyrsta skal sigast, at undanførslan fyri ikki at umrøða „okkara“ dóm er sera søkt. Her er júst talan um eina sera prinsippiella sak, ikki bert fyri okkum, men fyri flestu fakfeløg í Føroyum. Hetta snúði seg veruliga um „knald eller knald“ fyri teirri skipan við „tvungnum limaskapi“ í fakfeløgum, sum stórt sæð kann sigast at vera alment viðurkend í Føroyum.

Hetta er ein spurningur, sum kjakast verður dúgliga um í okkara parti av heiminum, og hann hevur eisini verið viðgjørdur av grundlógarnevndini, sum tað kom fram í einum av hennara tíðindafundum, har endamálið var at fáa alment kjak um m.a. henda spurning. Hetta er eitt mál sum er so prinsipielt, at tað eru fleiri sakarmál við mannarættindadómstólin í Strasbourg, um tað ber til at „noyða" fólk at gerast limir í fakfelag. Og júst mannarættindasáttmálin var fremsta próvførsla hjá okkara mótparti í sakarmálinum.

Tað sum gjørdi hetta mál serliga áhugavert var, at saksøkjarin, heilt óvæntað, hevði fingið viðhald í Føroya Rætti. Um hesin dómur varð staðfestur í landsrættinum, hevði hetta merkt, at limagjaldsskipanin hjá Føroya Fiskimannafelag hevði ligið í sori, tí tá kundu allir fiskimenn møtt upp á skrivstovu okkara og kravt sítt limagjald aftur. Tað er óneyðugt at siga, hvat hetta hevði merkt fyri felagið. Og tað sama kundi eisini hent hjá teimum flestu av teimum størru feløgunum í Føroyum, sum t.d. Føroya Arbeiðarafelag, sum eisini hevur eina skipan við at limagjaldið verður tikið automatiskt.

Tað, sum (D) sigur um tað prinsippiella í ALS dóminum, kann í eins stóran mun sigast um henda dómin. Tá (D) sigur, at hetta mál eisini skal roynast í hægstarætti, so vistu teir tað ikki tá. Men beint eftir dómin hjá FF boðaði saksøkjanin frá, at hann eisini fór at royna hægstarætt. At hetta so seinni eftir øllum at døma er slept er ein onnur søk.

Tá (D) nýtir sum undanførslu, at okkara mál bert var av persónligum slag, so kann fyrst sigast, at ALS málið eisini bert varð lagt fyri ein navngivnan persón, um tað er tað, sum hevur týdning. Men tað er óneyðugt at siga, at ein dómur fyri ein persón eisini verður galdandi fyri allar í somu støðu, og tí er dómurin fyri tað eins prinsippiellur.

Tí er tað ein sannleiki við modifikatiónum, at hesin dómur ikki fekk avleiðing fyri onnur enn hann sjálvan. Hetta var bert orsakað av, at upprunadómurin var settur til viks av landsrættinum. Og tað er fyri so vítt ikki øðrvísi enn við ALS-dóminum. Hann staðfestur jú eina upprunaavgerð, sum er tikin fyrst av ALS, og síðan av kærunevnduni fyri ALS, og tí broytir hann einki. Og

at hann skal geva høvi til nakrar broytingar í ALS skipanini er so einki komið fram um enn.

Tað sum annars eisini undirstrikar okkara meting av, at talan er um subjektivan tíðindaflutning er, at á miðdegi sama dag sum hesir dómar fullu, og har bert ALS-dómurin varð lýstur, metti útvarpið tað at hava almennan áhuga at bera tíðindi um samráðingar millum tað almenna og eitt fakfelag, sum tað annars er ein hópur av, sum ikki skuldi fara fram undan summarfrítíðina, sum tá var beint fyri framman.

**Skiftir prinsipp eftir endarmáli við teimum.**

Viðvíkjandi undanførsluni um, at her var talan um eina sak av „persónligum slag", og sum tí ikki kundi hava almennan áhuga, kann her verða víst til hjáløgdu útskrift av heimasíðuni hjá útvarpinum við umrøðu av landsrættarsakum, har tað ikki tykist at vera nakrar serligar rætningslinjur fyri hvørji mál ið eru verd at lýsa.

Men tað sum fullkomiliga ger til einkis hetta sjónarmið er, at millum málini, sum útvarpið hevur havt sum tíðindi, er eitt um eini „bóndahjún" og ein „hundalort". Her var talan um eitt sivilt mál, har bert tveir persónar vóru uppi í. Málið hevði als ongan týdning fyri onnur enn partarnar í málinum. Bóndahjúnini vóru fríkend. Tí broytti hesin dómur ikki nakað sum helst. Í veruleikanum hóskar hetta mál júst til grundgevingarnar fyri ikki at meta okkara mál hava almennan áhuga. Hóast hetta metir útvarpið hetta málið hava almennan áhuga. Tað skal sigast, at hetta mál hevur tað til felags við „okkara" mál, at her var talan um ein landsrættardóm, sum var ein broyting av einum undirrættardómi. Hetta skuldi júst verið ein grundgeving fyri at lýsa „okkara" dóm. Hetta váttar eisini mótsøgnirnar í grundgevingunum hjá (D).

Eftir øllum at døma verða prinsippini uppfunnin, soleiðis sum brúk er fyri teimum, og er hetta í stríð við alla rættarfatan í okkara parti av heiminum.

Eg kann skoyta uppí, at tað var júst ein advokatur, sum hevur inngangandi kunnleika til bæði hesi málini, sum gjørdi meg varan við tann mismun, sum útvarpið eftir hansara egna tykki gjørdi í lýsingini av hesum málum.

Tað skilst á brævinum hjá útvarpsstjóranum, at tíðindafólkini í útvarpinum, takkað verið teirra útbúgving og starvsroyndir, vita betri enn onnur, hvørji tíðindi ið eru relevant at bera lurtarum. Tí hava tey altíð rætt. Grundgevingarnar verða so tillagaðar eftir hesum. Men sum tað so greitt sæst í hesum máli, so hanga hesar grundgevingar ikki saman. Tær mótsagnirnar, sum kunnu ávísast, sigur nóg mikið um tað.

Sjálvur haldi eg ikki, at tað skal kunna síggjast burtur frá, at tað kunnu vera onnur, um tey ikki hava lærdómin hjá (D), sum eisini kunnu hava eina kvalifiseraða meting um hesi viðurskifti grundað á vanligt vit og skil.

Tað skal tilskilast, at umrødda framferðin er ikki tilvildarlig ella nakað eindømi. Í einum av mínum fyrru greinum til umboðsmannin greiddi eg frá, tá eg møtti upp til tíðindafund á Fiskirannsóknarstovuni í mai 2001 í samband við tilmæli frá ICES um fiskiskapin tá komandi fiskiár. Aftaná eina „officiella" byrjan við spurningum frá etableraðu fjølmiðlunum, fór eg at seta relevantar spurningar. Tá rýmdi tíðindamaðurin hjá útvarpinum út í gongina at bíða eftir, at fundurin var liðugur, so hann kundi koma á tal við Jørgen Niclasen, sum eisini hevði verið á fundinum. Tíðindamaðurin vildi sleppa sær undan at verða kunnaður um okkara sjónarmið og teimum ivamálum, sum hesir vildu lagt fyri dagin. Beint eftir sendu vit tíðindaskriv út um sama mál, har tað vóru settur reellir spurningar til framløguna hjá Fiskirannsóknarstovuni. Hetta tíðindaskriv varð ikki tikið uppá tungu í útvarpinum, hóast tey sum fylgja við vita, at tað skal ikki nógv til hjá øðrum at fáa innivist fyri tíðindum í útvarpinum. Ein stórur partur av tíðindaflutninginum hjá útvarpinum er nevniliga innsend tíðindaskriv.

Tað sum hevur áhuga her er, at tíðindamaðunin var tann sami í hesum báðum málum.

**Um definitión av „tíðindabløðum".**
Viðvíkjandi endurgeving av bløðunum í mongunsendingini sigur (D) reglurnar vera, at endurgevast skuldu høvuðstíðindini í **tíðinda-** og dagbløðunum, sum samb. hansara fatan bert eru

Sosialurin, Dimmalætting, Norðlýsið, Fregnir og Oyggjatíðindi. Tað skal tó sigast at Dagblaðið sleppur eisini við í henda bólkin. Síðan verður sagt, at tað ongatíð var ætlanin at endurgeva „fakfelagsbløð“ sum FF-blaðið. Og varð tað kortini gjørt, so var tað av berari góðvild!

Hertil er at siga:
Vit rokna so heilt avgjørt FF-blaðið fyri at vera eitt tíðindablað og fyri at lúka allar treytir fyri hesum, í hvussu er í mun til tey „góðkendu“ tíðindabløðini. Og her skuldi tað verið nóg mikið at víst til hjálagda yvirlit í Árbókini fyri Føroyar, har FF-blaðið verður bólkað saman við áður nevndu bløðum.

Tann sum kennir FF-blaðið veit, at her er talan um eitt blað við almennum tilfari, har viðgjørd verða sovæl fiskivinnuviðurskifti sum vanlig tíðindi, sum vit meta lesaran hava áhuga fyri. Munurin er tann, at vit taka mál upp sum aðrir fjølmiðlar ikki viðgera, og hesum er eisini brúk fyri í einum og hvørjum samfelag. Tískil breiðka vit munandi um tíðindaflutningin í Føroyum, ikki minst har hinir miðlarnir hava sjálvsensur mótvegis almennu myndugleikunum. Hetta er ikki bert galdandi fyri innanlands tíðindini, men ikki minni við tíðindum uttan úr heimi, sum vit hava sum fastan tátt. Her hava vit enntá okkara egnu keldur, og ger hetta avgjørt ikki tíðindini verri.

Tískil verður blaðið eisini lisið av einum breiðum lesaraskara. Og skuldi nakar verið í iva, so er neyvan dagur, at vit ikki fáa at vita hvussu gott blaðið er. Fleiri meta tað at vera Føroya besta blað, og onnur eru, sum bert halda FF-blaðið, tá tey meta at almennu miðlarnir og tey stóru dagbløðini í stóran mun yvirlappa hvørt annað, og tí halda tey tað vera nóg mikið við einum miðli.

Víst er FF-blaðið eisini eitt fakfelagsblað og fyllir hetta ein part av blaðnum. Men at tað skal útilokað FF-blaðið, meðan Fregnir, sum opinlýst, um enn óformelt, er eitt partapolitiskt blað skal vera „góðkent“, kunnu tað ikki vera sakligar grundir fyri.

Her kann verða skoytt uppí, at tað er neyvan mánadagur, tá Vinnuhúsið, sum leggur síni tíðindini út á netið mánamorgun, ikki verður endurgivið í útvarpinum. T.d. seinasta mánadag á

miðdegi var høvuðssøgan + eini onnur tíðindi tikin beinleiðis av heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, sum fakfelagsliga má kunna líkastillast við Føroya Fiskimannafelag og FF-blaðið.

At sammeta FF-blaðið við onnur fakfelagsbløð ber ikki til. Neyvan nakað av teimum kemur út meira enn eina ferð um ársfjórðingin, og hesi er greitt limabløð stórt sæð bert við felagstíðindum sum fyrst og fremst verða send limunum og serliga áhugaðum sum t.d. bókasøvnum. FF-blaðið verður víst sent skipum og álitismonnum, men vanligir limir mugu gjalda fyri tað sum aðrir haldarar og keyparar í leysasølu.

FF-blaðið er ein „avís", sum er eins alment atgongilig sum hini bløðini, og sum hevur sovæl haldarar eins og blaðið kann fáast í leysasølu um alt landið.

Tað skal eisini verða nevnt her, at vit eru á listanum hjá teimum flestu, sum senda tíðindaskriv út og/ella sum bjóða til tíðindafund. Hjálagt senda vit eitt tilvildarligt dømi, sum beint er komið inn um dyrnar, og sum vísir at vit standa lið um lið við teir miðlar, sum (D) metir vera tíðindabløð.

Tað er tískil púra greitt, at tað finst eingin saklig orsøk fyri at útihýsa FF-blaðið, soleiðis sum tað prinsipielt verður gjørt.

Annars vísa grundgevingarnar bert í hesum málum, at eitthvørt veruligt ella upphugsað ivamál verður miðvíst tulkað til skaða fyri tann, sum ikki er í krithúsinum hjá útvarpinum. Eftir hesum leisti kunnu í hvørjum einstøkum føri finnast grundgevingar fyri at hýsa/útilokað eini og hvørji tíðindi alt eftir tí mótvild/samhuga, sum útvarpsfólkið hevur fyri málinum ella kelduni.

Annars er tað merkisvert, at (D) skal siga, at Oyggjatíðindi verður kannað fyri trúvirðið, áðrenn tað verður endurgivið, samstundis sum hann í einum øðrum máli hevur ført fram, at politisk tíðindaskriv prinsipielt verða endurgivin uttan at sannleikavirðið verður kannað. Og tað kann prógvast, at politisk tíðindaskriv við beinleiðis skeivum upplýsingum verða endurgivin uttan nakað himpr í miðlunum yvirhøvur.

Hinvegin er ikki neyðugt at kanna FF-blaðið fyri sítt trúvirði. Tað er neyvan nakar miðil, sum arbeiðir so djúptgangandi við tíðindum sum vit, ikki minst á tí samfelagskritiska økinum. Greinir

á hesum økinum byggja á fremstu løgfrøði sum Peter Blume, og m.a. ein av mest virdu donsku politikkarum nakrantíð.

**Málið loyst?**

Nú heldur (D) seg hava „loyst" henda „trupulleikan" við at strika táttin í morgunsendingini við lýsing av bløðunum. Hetta skal verða gjørt fyri at spara umboðsmannin fyri tað stríð, sum tað vil taka honum at viðgera henda spurning.

Men her avdúkar stjórin, at hann kennir ikki tær mest grundleggjandi rættarreglur í einum rættarsamfelag.

Her skal bert verða víst til tað sum profesarin, dr.jur. Peter Blume sigur um hetta prinsipp í samband við eitt mál, sum hevur verið til viðgerðar í landsstýrismálanevndini. Hetta verður gjørt í samband við at landsstýrismálanevndin metti at tað ongan áhuga kann hava at taka støðu til eitt møguligt brot á eina lóg, sum seinni er avtikin.

Til hetta segði Blume:

> *Set under en dansk synsvinkel er denne argumentation ikke bæredygtig, idet det principielt må betragtes som uden betydning for bedømmelsen efter ministeransvarlighedslovens § 5 stk 1 om en ministers beslutninger vedrører en lovbestemmelse, der på et senere tidspunkt er blevet ophævet. Der er i hvert fald ikke tvivl om, at der kan ifaldes ansvar i relation til historiske forhold. Det må tilføjes, at den omstændighed at reglen er ophævet, ikke som udgangspunkt mindsker den faktuelle og retlige interesse i en undersøgelse. For den parlamentariske kontrol med regeringen er det afgørende, at det altid kan vurderes, om der er sket en lovmæssig forvaltning. Denne mulighed kan ikke fjernes, fordi en lovbestemmelse ophæves f.eks. på regeringens initiativ. I modsat fald ville en regering i mange tilfælde have mulighed for at gøre ministeransvaret illusorisk.*

Hetta sjónarmið má væl eisini vera galdandi í einum máli sum hesum.

**Er prinsippið tað sama?**

Spurningurin er eisini, um ikki (D) júst her hevur avdúkað eitt sera avgerandi prinsipp í tíðindaflutninginum hjá útvarpinum í hesum uppá seg lítla máli um morgunsendingina. Tá er tað so avgjørt týdningarmikið at fáa eina støðutakan í hesum prinsippi, hóast nevndi táttur í morgunsendingini er avtikin.

Tað er nevniliga nógv, sum bendir á, at sama prinsipp verður brúkt í samband við keldunýstlu í vanligu tíðindasendingunum hjá útvarpinum. Tað er greitt, at bløðini eru ein tíðandi kelda til tíðindini hjá útvarpinum. Vanliga koma hesi í kvøldsendingina grundað á bløðini, sum koma út dagin eftir. Víst verður tá til hvat blað, ið tíðindini koma úr. Tað sigur seg sjálvt, at tey endurgivnu bløðini her fáa eina ókeypis reklamu, sum eggjar lurtaran at útvega sær sjálvt blaðið, og sum skapar eina tilvitan hjá lurtarum um hvørji bløð ið eru tíðindabløð og hvørji ikki eru tað. Tí hevur hetta minst líka stóran týdning fyri bløðini, sum umrøddi táttur í útvarpinum. Men verður gjørdur munur millum bløðini, so er talan um eina kappingaravlaging, har summi bløð verða favoriserað, meðan onnur eru fyri vanbýti. Hetta hevur fíggjarligan týdning fyri tann sum er fyri vanbýti. Tað eru so sínar sakir. Verri er, at hetta fremur einsrætting í tíðindaflutninginum.

Okkara royndir eru, at „Sosialurin", „Dimmalætting" og ikki minst „Fregnir" eiga ein sera stóran part í hesum tátti í útvarpstíðindum, meðan FF-blaðið stórt sæð ikki verður tikið uppá tungu uttan mun til, um talan er um „rein" tíðindi, ella um talan er um sjónarmið, og tað uttan mun til um hesi eru um samfelagsviðurskifti sum heild ella um fiskivinnuviðurskifti. Vit hava soleiðis skrivað nógvar viðkomandi greinir um ICES og Fiskirannsóknarstovuni. Ikki eitt av hesum sjónarmiðum er endurgivið, hóast sjónarmiðini hjá Fiskirannsóknarstovuni verða væl og virðiliga lýst.

Vit hava ein hóp av dømum um, at sammetilig tíðindini verða endurgivin, tá talan er um aðrar keldur, men ikki verða tikin uppá tungina, tá talan er um FF-blaðið.

Eitt sera gott dømi um hetta er, tá útvarpið úr norska blaðnum „Fiskaren" kundi greiða frá eini kanning við sammeting av fiskaprísunum í nøkrum av norðanlondunum. Júst sama kanning, har

Føroya Fiskimannafelag annars hevði latið føroysku tølini, hevði nakrar vikur frammanundan staðið í FF-blaðnum. Tá høvdu tíðindini ongan áhuga. Tey fingu samb. útvarpið ikki almennan áhuga í Føroyum fyrr enn tey høvdu staðið í einum øðrum fjølmiðli.

Annars kann vísast á eitt annað áhugavert dømi um, hvussu lætt tað er hjá summum at „bíleggja" tíðindi í fjølmiðlunum, meðan onnur verða svartlistað.

Beint undan Ólavsøku, mitt í politiska rokinum sum tá var, tutlar Torbjørn Jacobsen tíðindafólki í oyra, at hann beint eftir Ólavsøku, tá tingið fór til arbeiðis aftur, ætlar at seta landstýrismanninum í vinnumálum ein skrivligan fyrispurning um vali av nevndarlimum í Framtaksgrunnin, og tað verður róð uppundir, at tað ruggar ikki alt rætt her. Hetta verður blást upp sum stórtíðindi, hóast vanlig mannagongd annars er, at ein fyrispurningur verður lýstur í fjølmiðlunum, tá hann er settur í tinginum, og at svarið við viðmerkingum verður lýst, tá tað er komið.

Nú hevur tingið verið saman í meira enn ein mánaða, og sum tað sæst í yvirlitinum yvir skrivligar fyrispurningar hjá tinginum, so er hesin spurningur als ikki settur. Og eingin spyr eftir hvar spurningurin bleiv av. Hetta vóru opinbart tíðindini sum viðkomandi politikkari hevði brúk fyri júst í teirri støðu, sum hann var í, og bert við at „trýsta á ein knøtt" kundi fáa tey tíðindi hann ynskti sær.

So sjálvt um tátturin við at endurgeva forsíðurnar á bløðunum í morgunsendinini er strikaður, so er nógv sum bendir á, at prinsippið, sum lá aftanfyri framvegis er galdandi.

Og spurningurin er so, um hetta er í samsvar við lógásettu skylduna at hava „óheftan tíðindaflutning".

Viðvíkjandi tí, sum verður ført fram um (B), so havi eg ikki nakrantíð „lagt eftir" nøkrum útvarpsmanni persónliga. At hetta kann hava verið fatað øðrvísi, kann ikki vera mín trupulleiki. Her er talan um prinsipiel mál, og tí hava øll míni viðurskifti verið við útvarpið sum slíkt. Og tí havi eg heldur ikki lagt eftir nøkrum útvarpsmanni í samband við lýsing av átaluni, sum útvarpsstjórin fekk frá umboðsmanninum. Og tá tað er (D), sum er stjóri, er tað

eisini hann, sum leggur leistin og skapar hugburðin hjá teimum sum arbeiða har, og tí er tað hann sum hevur ábyrgdina.

Tá (D) leggur meg undir at hava ført fram ógrundaðar ákærur móti útvarpinum, so kann eg bert vísa til hesa frágreiðing. Her er ikki talan um ákærur, men um reinar staðfestingar, sum eru í lagi samb. útvarpsstjóranum sjálvum.

Men eg vil halda fast um, at tað er ikki í lagi, at ein almennur fjølmiðil virkar á hendan hátt, og hesa hugsan eigi eg samb. grundlógina rætt til at hava uttan, at hetta skal fáa nakran sum helst avleiðingar fyri meg sjálvan, tað felag, har eg eri formaður ella tað blað, har eg eri blaðstjóri.

Tað skal nú sigast, at sjónvarpið er einki petti mætari, men her er talið á tíðindum so mikið lítið, at her er tað verri at finna sammetingar.

Niðurstøðan í hesum máli má sigast, at tað ikki á nakran hátt er afturvíst at útvarpið er subjektivt í sínum tíðindaflutningi. Men tað nýggja er, at tað kann staðfestast út frá seinastu frágreiðingini hjá (D), at hesin subjektivitetur er úrslit av einum miðvísum politikki á stovninum.

Hetta er eitt øki, har tað er mestsum ógjørligt hjá „meinigmanni“ at koma ígjøgnum við nøkrum sum helst. Samstundis er hetta kanska ikki eitt upplagt mál hjá umboðsmanninum. Men hann er einasti møguleiki sum er.“

Hesar viðmerkingarnar vóru sama dagin sendar Útvarpinum til ummælis. Við telefaksi 7. sept. 2002 hevur (A) sent umboðsmanninum hetta ískoyti til viðmerkingar sínar:

„Hetta skal vera eitt lítið ískoyti til bræv okkara dagfest 6. september viðvíkjandi spurninginum, um FF-blaðið skal roknast sum eitt tíðindablað.

Ein grundgeving sum lá eftir var hjálagda uppskot, sum í vár varð lagt fyri tingið av landsstýrinum um stuðul til blaðútbering. At tað seinni varð tikið aftur hevur ongan týdning í hesum sambandi.

Í hesum uppskoti var ein definitión av einum tíðindablað og var hon henda:

*Eftir ætlan skulu tíðindabløð hava møguleika at søkja um stuðul til blaðútbering. Talan skal verða um bløð við almennum tíðindatilfari, sum koma út í minsta lagi seks ferðir í hvørjum ársfjórðingi, og hava í minsta lagi 200 haldarar, eins og ásett er í kunngerð nr. 134 frá 11. oktober 2001 um postgjøld. Lógarheimild skal fáast til vega fyri stuðlinum.*

Fyri tað fyrsta er eingin ivi um, at FF-blaðið vildi lúkað hesar treytir fyri at verða roknað fyri at vera eitt tíðindablað. Fyri tað annað hava vit fingið váttað, at lógin júst er skorin soleiðis til, at hon eisini skuldi umfata FF-blaðið.

Her kann so eisini verða lagt afturat, at tað vildi verið fullkomiliga ósakligt, at útgevarin skuldi verið avgerandi fyri um eitt blað er tíðindablað ella ikki. Hóast danska fakfelagsrørslan gav út „Aktuelt", so var eingin ivi um, at hetta blað var eitt tíðindablað.

Fyri at útvarpið skal fáa okkara viðmerkingar í senn verður hetta bræv eisini faxað útvarpinum."

Hetta ískoyti varð sent Útvarpinum til ummælis við skrivi, dagfest 9. sept. 2002.

Í sambandi við, at Útvarpið hevur ført fram, at umboðsmaðurin ikki átti at viðgera slíkar klagur um tíðindaflutningin hjá Útvarpinum, eins og Útvarpið tyktist ivast í heimildini hjá umboðsmanninum til at gera hetta, boðsendi umboðsmaðurin útvarpsstjóranum at koma á ein fund at umrøða hendan spurningin. Johnhard Klettheyggj, løgfrøðingur gjørdi hesa frágreiðingina frá fundinum, sum varð hildin 2. okt. 2002:

„Umboðsmaðurin hevði boðið Útvarpi Føroya at koma á ein fund í sambandi við skrivið, dagfest 13. aug. í ár, sum ÚF hevði sent umboðsmanninum um virksemi hansara í fjølmiðlamálum. Fundurin var avtalaður at vera her á stovninum týsdagin 1. okt., kl. 14.

Til fundin vóru møttir:

| | |
|---|---|
| - vegna umboðsmannin | Joen H. Andreassen (JHA) |
| | Johnhard Klettheyggj (JK) |
| - vegna Útvarp Føroya | (D), útvarpsstjóri |
| | (E), advokatur |

JHA legði fyri og beyð hinum vælkomnum; hann greiddi frá, at orsøkin til hendan fundin var skrivið, dagf. 13. aug. í ár, sum ÚF hevði sent umboðsmanninum. JHA vísti á, at hetta skrivið bar brá av, at ÚF hevði misskilt lóggávuna (bæði § 6 í Kringvarpslógini og § 6 í umboðsmanslógini), og at tað var tí, at hann hevði boðsent ÚF til hendan fundin.

JHA vísti á, at í omanfyri nevnda skrivinum tyktist ÚF at hava ta fatan, at útvarpsstjórin var kærumyndugleiki í mun til tað, sum starvsfólk í ÚF annars gjørdu v.m. JHA vísti á, at stjórin sum leiðari av stovninum eisini er ein partur av stovninum, og at hann tí ikki er at rokna sum ein kærumyndugleiki sæð í mun til § 6, stk. 3 í umboðsmanslógini. Hinvegin er tað náttúrligt at stjórin tekur mál upp til viðgerðar, um onkur klagar til hansara um eitthvørt viðvíkjandi stovninum. Hetta forðar tó ikki umboðsmanninum í at viðgera slíkar klagur, hóast viðkomandi ikki hevur klagað til stjóran frammanundan.

(D) vísti á orðingina í § 6, stk. 1 í kringvarpslógini, har tað m.a. stendur, at stjórin hevur programmábyrgdina og er evsti myndugleiki í programmspurningum. JK vísti á, at hendan greinin einans ásetir, at tá talan er um programmspurningar o.l., so er stjórin evsti myndugleiki, og at tað harvið ikki er gjørligt at kæra til landsstýrismannin, ið er yvirornaði myndugleikin. JK vísti í hesum sambandi á ta vanligu fyrisitingarligu regluna um, at tað altíð er møguligt at kæra eina fyrisitingarliga avgerð til ein yvirornaðan myndugleika, um annað ikki er ásett í lóg.

JHA vísti síðani á, at ÚF í skrivinum hevði ført fram, at tað var óheppið, um umboðsmaðurin fór at átaka sær ta kæruuppgávuna, sum annars var ætlað fjølmiðlanevndini. JHA vísti í hesum sambandi á, at uttan mun til, um ein slík fjølmiðlanevnd fanst ella ikki, so kundi umboðsmaðurin kortini viðgera slík mál. JHA vísti í hesum sambandi til niðurstøðuna í Stoltenbergmálinum, har hann hevði staðfest, at hóast heimild var at viðgera slík mál, so var hetta nakað, sum umboðmaðurin fór at gera við størsta varsemi. Hann segði, at hann tó ikki fór at avskera seg heilt frá slíkum málum, tí at tað kundi hugsast, at talan kundi vera um so grov brot á lóggávuna, at umboðsmaðurin átti at tala at.

Viðv. § 6, stk. 3 í umboðsmanslógini vísti JHA á, at umboðs-

maðurin einans var avmarkaður í virksemi sínum, tá talan var um eina avgerð, sum kundi kærast til ein annan hægri fyrisitingarmyndugleika. Hvørt fólk høvdu klagað til stjóran um einhvønn stovn, hevur ongan týdning í hesum sambandi. JHA nevndi eisini munin á føroysku og eitt nú donsku umboðsmanslógini á hesum øki. Føroyska lógin tosar um avgerðir, sum kunnu kærast, meðan danska lógin tosar um viðurskifti (forhold).

(E) vísti á, at (D) hevði havt ilt við at skilja, hvat tað var, sum klagan frá (A) til umboðsmannin snúði seg um. (D) greiddi frá, at skrivini frá (A) vóru so fløkt, at tað ikki altíð var lætt at síggja, hvat tey viðvíktu. (D) helt seg duga at síggja, at umboðsmaðurin eisini hevði havt trupult við at lesa hesi skrivini, tí at hann í skrivi til ÚF hevði málborið seg á tann hátt, at „sum umboðsmaðurin skilti skrivið frá (A), klagaði hesin um...“. (D) vísti eisini á, at (A) framvegis nevndi fyrru málini, t.d. viðv. Stoltenberg.

JK greiddi (D) frá, at málini viðv. tíðindaflutninginum um Halgafelli og í Stoltenbergmálinum vóru endaliga avgreidd frá umboðsmanninum, og at tey tí ikki blivu partur av hesari klaguviðgerðini.

JHA og JK vístu á, at hendan klagan, sum nú var til viðgerðar, snúði seg í høvuðsheitum um tvinni viðurskifti. Annað var spurningurin um aftursvarið, sum (B) hevði givið (A) uppá telefaksi, ið hesin hevði sent ÚF. Hitt var spurningurin um hvørt FF/(A) av órøttum var útihýstur í ÚF. (E) segði seg skilja hendan partin av klaguni soleiðis, at spurningurin var, hvørt ÚF hevði framt brot á § 5 í kringvarpslógini við av órøttum at útihýsa FF/(A) úr ÚF. Hann segði seg skilja málið soleiðis, at dømini um, at FF-blaðið ikki var nevnt í morgunsendingini, og at dómurin viðv. FF ikki var endurgivin, skuldu nýtast sum dokumentatión fyri útihýsingini, og at tað var hetta, sum umboðsmaðurin ynskti at fáa lýst. JHA og JK váttaðu at so var.

JHA vísti til § 15 í kringvarpslógini og spurdi (D), um tað ikki bar til hjá ÚF at dokumentera, hvat var sent í morgunsendingini. (D) greiddi frá, at tá talan var um beinleiðis sendingar eins og í hesum føri, so vóru eingi handrit. Hinvegin goymdi ÚF allar sendingar á einari teldu í 3 mðr., eins og ásett er í § 15 í kring-

varpslógini. Um ÚF skuldi kunna dokumetera, hvat var sent í hesum sendingunum, so var neyðugt at lurta eftir teimum einstøku sendingunum.

JHA vísti á, at hann fegin vildi hava dokumentatión fyri, um FF-blaðið var nevnt í morgunsendingini ella ikki, og hví, um so var, at blaðið ikki var nevnt. (D) vísti á, at sambært reglunum/boðunum til starvsfólkini, so skuldu einans tíðindabløðini nevnast. Hetta merkti, at FF-blaðið og Trúboðin ongantíð skuldu havt verið nevnd. (D) segði, at (B), hóast hesi boðini, við hvørt av sínum eintingum kortini hevði nevnt tey bæði bløðini.

(D) vísti á, at sæð í mun til spurningin um brot á § 5 í kringvarpslógini, so var hesin fyrrverandi tátturin at nevna bløðini í morgunsendingini sera sera lítil.

Uppá fyrispurningin frá JHA um dokumentatión fyri tí, sum sent var í morgunsendingunum, segði (D) seg vilja kanna, um og í hvønn mun tað bar til at fáa hesa dokumentatiónina nú. JHA segði seg vilja ganga við til at broyta tíðarskeiðið, sum biðið var um dokumentatión fyri, soleiðis at hetta svaraði til seinastu 3 mðr. frammanundan umbønini. (D) segði, at hann skuldi kanna møguleikarnar, og at um hetta var gjørligt, so bleiv neyðugt við einari longri svarfreist, fyri at hendan dokumentatiónin kundi fáast til vega. JK spurdi, hvussu langa freist ÚF hevði tørv á. (D) segði vilja kanna hetta og síðani venda aftur til umboðsmannin við hesum.

Fundurin var lokin kl. 15.10."

Fundarfrágreiðingin varð send Útvarpinum sama dagin við soljóðandi skrivi:

„Í framhaldi av skrivi Útvarpsins til umboðsmannin, dagfest 13. aug. í ár, bað umboðsmaðurin Útvarpið um at koma á ein fund at umrøða hetta skrivið.

Hjáløgd er ein frágreiðing frá fundinum okkara millum, sum varð hildin í gjár. Um Útvarpið hevur onkrar viðmerkingar til fundarfrágreiðingina, ella um okkurt framvegis er, sum Útvarpið

ivast í hesum viðvíkjandi, er Útvarpið vælkomið at venda sær aftur til umboðsmannin hesum viðvíkjandi.

Sum tað framgongur av fundarfrásøgnini, heldur umboðsmaðurin seg á fundinum hava svarað teimum ivamálum / spurningum, sum Útvarp Føroya hevði reist í skrivinum.

Í skrivinum heitir Útvarp Føroya á umboðsmannin um at fylgja málinum um ófullfíggjaðu løggávuna upp. Umboðsmaðurin hevur sum kunnugt boðað avvarandi landsstýrismonnunum frá hesum trupulleikanum. Umboðsmaðurin fer eisini at fylgja við í, hvat hendir á hesum økinum framyvir.

Viðv. klaguni frá (A), sum er til viðgerðar hjá umboðsmanninum í løtuni, skal vera gjørt vart við, at klagan verður viðgjørd sum ein klaga í tveimum punktum:

1. Svarið frá (B), tíðindamanni uppá skrivið (telefaksi) frá (A) til Útvarpið, og
2. Hevur ÚF brotið ásetingina í § 5 í Kringvarpslógini við av órøttum at útihýsa FF ella (A) úr Útvarpinum.

Sum umrøtt á fundinum, hevur (A), sum grundarlag undir pástandinum um, at hann / FF er útihýst úr Útvarpinum, m.a. víst á, at FF-blaðið ikki er nevnt í eins stóran mun og hini bløðini í morgunsendingini hjá Útvarpinum. Umboðsmaðurin fer tí at biðja Útvarp Føroya um at kanna og boða honum frá, hvørt tað letur seg gera at dokumentera, um ella í hvønn mun FF-blaðið er umrøtt í morgunsendingunum hjá Útvarpinum í vár / summar.

Tá Útvarpið hevur svarað umboðsmanninum verður støða tikin til, hvat síðani fer at henda í hesum málinum.“

Við skrivi, dagfest 30. okt. 2002 hevur Útvarpið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar til málið:

„Vísandi til skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni frá 2. oktober og fund við umboðsmannin 1. oktober skulu vit gera fylgjandi viðmerkingar til málið:

**1) Notat frá fundi 1. oktober 2002.**

ÚF er greitt, at ÚF ikki er kærustovnur hjá sær sjálvum, og at ÚF

ikki er annar hægri fyrisitingarmyndugleiki við atliti til umboðsmannin.

Útvarpsstjórin „hevur programmábyrgdina og er evsti myndugleiki í programmspurningum“, men hann tekur ikki dagliga lut í teimum einstøku redaktionella avgerðunum. Tí hava vit hildið, at tað er eitt gott hugskot, at lurtarar, ið eru ónøgdir, fyrst kæra til leiðsluna í ÚF, sum hevur møguleika fyri at kanna og viðgera málið.

Tey allar flestu málini um ónøgd ella kærur kunnu greiðast á henda hátt. Fram til mars 1998 virkaði Útvarpsnevndin sum kærustovnur viðv. kærum um programmvirksemið, og sambært gerðabókini hjá nevndini viðgjørdi hon fimm tílík mál árini frá 1990-98.

Vit vísa bara á hetta, tí hetta tænir tí endamáli, at flestu málini kunnu greiðast uttan at neyðugt er at fara víðari til ein kærustovn, og teimum førum, har hetta verður gjørt, hevur viðkomandi kærustovnur eitt betri lýst mál at taka støðu til. Annað er ikki í tí, sum vit føra fram.

**2) Upplýsingar um blaðtáttin**

ÚF má ásanna, at vit ikki kunnu útvega umboðsmanninum tær umbidnu upplýsingarnar um blaðtáttin í morgunsendingini í vár/summar, tí handrit eru ikki skrivað til henda táttin, og tað finnast ikki upptøkur frá kl. 7.35 til 8.00. Tað harmast vit um.

ÚF er greitt, at vit smb. 15 í kringvarpslógini hava skyldu til at goyma upptøkur av øllum sendingum í 3 mánaðir. Við atliti til kostnað og arbeiðsorku hava sendingar bert við tónleiki ikki verið goymdar. Veturin 2000/01 varð tónleikur sendir út í eitt frá kl. 7.35 til 8.00, men hetta varð broytt aftur veturin 2001/02, tá eisini annað tilfar varð sent. Tíverri varð arkiveringsskipanin ikki broytt samsvarandi hesum.

ÚF hevur leitað eftir eini skipan, sum kann loysa hesa uppgávu, nú so at siga allar sendingar verða framleiddar digitalt. Á heysti 2001 tóku vit í nýtslu eina sonevnda „loggingskipan“, ið goymdi alt tað, ið varð sent, men tað vísti seg, at skipanin ikki virkaði eftir ætlan, og upptøkurnar fóru fyri skeyti.

Á sumri 2002 hava vit útvegað okkum eina telduskipan at

røkja hesa uppgávu, og síðan 20. juli 2002 verður alt, ið ÚF sendir, goymt í eini telduskipan. Sostatt eru hesi viðurskifti fingin upp á pláss.

**3. Kærurnar frá (A)**

Í skrivinum frá umboðsmanninum 2. oktober 2002 er kæran víðkað.

Í skrivinum frá 4. juni boðar umboðsmaðurin frá, at skrivið frá (B) er tikið til viðgerðar sum ein kæra, og at hann „umhugsar um ella í hvønn mun hann fer at taka hin partin av klaguni, tvs. hvørt FF-blaðið av órøttum verður útihýst úr morgunsendingini hjá Útvarpinum til viðgerðar".

Í skrivinum frá 2. oktober boðar umboðsmaðurin frá, at klagan verður viðgjørd sum ein klaga í tveimum punktum.

1. Svarið frá (B), tíðindamanni, upp á skrivið frá (A) til Útvarpið, og
2. Hevur ÚF brotið ásetingina í § 5 í Kringvarpslógini við av órøttum at útihýsa FF ella (A) úr *Útvarpinum.*

Vit vilja gera okkara endaligu viðmerkingar út frá hesum.

**Viðv. 1)**

Í skrivi okkara frá 13. august 2002 hava vit greitt frá umstøðunum í sambandi við hetta mál.

Umboðsmaðurin hevur munnliga upplýst fyri ÚF, at hetta mál verður ikki viðgjørt við atliti til brot á ávísa lóg ella reglur.

Út frá hesum hava vit ikki fleiri viðmerkingar til hetta málið.

**Viðv. 2)**

Í grein 5 í Kringvarpslógini er ásett, at „ÚF er ein sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. ÚF skal í sínum programmvirksemi leggja dent á upplýsingar- og talufrælsið, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltátta tilboð…".

Greitt er, at ein kæra um at stovnurin hevur brotið sína endamálsorðing er sera álvarslig, og eftir okkara tykki eigur ein tílík kæra at verða greið og væl dokumenterað. Tað kann ikki vera rætt, at tað í stóran mun skal vera tann kærdi, ið skal mótprógva uppáhald, og í hesum málinum hevur kærarin í stóran mun eftir okkara meting latið tað vera upp til umboðsmannin at orða tær ítøkiligu kærurnar.

Sum grundgevingar fyri, at FF og (A) av órøttum eru útihýst úr ÚF, er í málinum ført fram, at FF-blaðið ikki altíð hevur verið nevnt í blaðtáttinum í morgunsendingini. Reglunum fyri henda tátt, og hvussu gongdin hevur verið, hava vit greitt frá í skrivi okkara 13. august 2002.

Í sama skrivi hava vit greitt frá, hvør journalistisk meting lá til grund fyri viðgerðini av teimum báðum landsrættardómunum.

Nú kæran er víðkað til at fevna um, at FF ella (A) av órøttum er útihýst úr útvarpinum, er at siga, at tað hevði bert latið seg gjørt, um ÚF miðvíst tók eina tílíka avgerð. Tí er kæran sera álvarslig fyri okkum.

Til tess at fáa eina mynd av, hvussu viðurskiftini hava verið millum FF/(A) og útvarpið, havi eg kannað tilfarið í søvnum útvarpsins frá ársskiftinum 2001.

Hjálagt er eitt yvirlit yvir tær sendingar, har (A), Føroya Fiskimannafelag ella FF-blaðið eru umrødd ella luttaka. Talan er um tíðindasendingar, aktuellar sendingar, morgunsendingina og orðaskiftissendingar. Hjálagt eru samsvarandi handrit. Sannlíkt er, at eg ikki eri komin fram á allar sendingar.

Somuleiðis verður lagt við eitt avrit av logginum hjá tíðindadeildini í sama tíðarskeiði. Tíðindaloggurin er eitt arbeiðsskjal, sum tíðindavaktirnar ávikavist fyrrapart og seinnapart skriva til næstu vakt. Í logginum er m.a. yvirlit yvir tey mál, sum arbeitt verður við. Í hjálagda úrdrátti eru tikin tey brot, har kærarin er umrøddur.

Vit meta, at hetta tilfarið talar fyri seg.“

Viðlagt skrivinum varð m.a. eitt yvirlit yvir tær sendingarnar hjá Útvarpinum, sum (A), Fiskimannafelagið ella FF-blaðið høvdu lut-

tikið ella verið umrødd í frá ársskiftinum 2000/2001 og fram til sept. 2002:

**„Yvirlit yvir sendingar har (A), FF og FF-blaðið luttaka ella eru umrødd.**

29.12.2000: Tíðindini: Umrøða í smb. við landsfundin hjá FF.
30.01.2001: Aktuelt: (A) luttekur í sendingini „Føroyar í dag“ við heitinum „Tað loysir seg at eiga skip“.
19.03.2001: Tíðindini: (A) hevur skrivað bræv til íslendska reiðarafelagið og íslendska forsætisráðharran í smb. við verkfall í Íslandi.
25.03.2001: Tíðindini: Formennirnir í skipara- og navigatørfelagnum og fiskimannafelagnum eru samdir um, at ALS-dómurin er kollveltandi.
05.04.2001: Morgunsendingin: Tema-innslag í Morgunrásini um FF-blaðið.
06.05.2001: Tíðindini: (A) ónøgdur við, at FF ikki hevur møguleika at fáa umboð í fiskidaganevndina.
06.05.2001: Tíðindini: Endurgeving úr FF-blaðnum av samrøðu við Hans Marius Joensen, form. í felagnum Trolbátar.
18.05.2001: Tíðindini: Í smb. við trætuna í íslendsku fiskivinnuni hevur (A) form. í FF og ITF boðið sær til at kæra til alheims arbeiðsmálastovnin.
23.05.2001: Orðaskifti: (A) luttekur í „Kjaktorginum“ um „Hvussu loysa vit arbeiðsósemjur í framtíðini“.
26.06.2001: Tíðindini: Uppskotið hjá FF/(A) til fiskidagatilmæli.
27.06.2001: Tíðindini: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, ger viðmerkingar til uppskotið hjá FF/(A).
28.06.2001: Tíðindini: Endurgivið verður úr FF-blaðum, at skúli nú aftur verður á Trøllanesi.
02.10.2001: Aktuelt: (A) luttekur í sendingini „Føroyar í dag“, sum er um pensjónsviðurskifti.

06.10.2001: Tíðindini: FF-blaðið verður endurgivið fyri, at FF hevur longt sáttmálan.
19.11.2001: Tíðindini: Umboðsmaðurin gjørt niðurstøðu í kæru hjá (A) um ÚF.
30.11.2001: Tíðindini: FF hevur sagt sáttmálan upp. FF-blaðið verður endurgivið.
04.12.2001: Aktuelt: (A) luttekur í sendingini „Føroyar í dag", sum er um arbeiðsumhvørvið hjá sjómonnum.
27.12.2001: Tíðindini: Umrøða í smb. við ársfundin hjá FF.
28.12.2001: Tíðindini: Umrøða í smb. við ársfundin hjá FF, herundir ársfrágreiðingin hjá (A).
31.12.2001: Aktuelt: Samrøða í nýggjárssending við (A) um ávirkanina hjá oljuvinnuni.
01.01.2002: Aktuelt: (A) luttekur í nýggjárssending um støðuna hjá fiskivinnuni.
03.01.2002: Tíðindini: Samrøða við (A) um arbeiðsumstøðurnar hjá sjómonnum.
23.01.2002: Tíðindini: Sáttmálasamráðingarnar hjá FF
31.01.2002: Tíðindini: Samráðingarnar útsettar. FF-blaðið verður endurgivið.
20.02.2002: Tíðindini: Samrøða við (A) um støðuna, nú landsstýrið ikki kemur við nøkrum uppskoti um eftirløn.
12.03.2003: Tíðindini: Samráðingarnar hjá FF
21.03.2002: Tíðindini: Samráðingarnar hjá FF
26.03.2002: Aktuelt: (A) luttekur í orðaskifti um lækkaðu fiskaprísirnar í sendingini „Føroyar í dag".
08.04.2002: Tíðindini: (A) sigur, at nú halda samráðingarnar fram.
09.04.2002: Tíðindini: Sáttmálasamráðingarnar
15.06.2002: Tíðindini: (A) ger viðmerkingar til ALS-dómin.
17.06.2002: Tíðindini: Meira verður gjørt burtur úr ALS-dóminum.
19.07.2002: Tíðindini: Niðurstøðan hjá umboðsmanninum viðvíkjandi kæruni hjá (A) í málinum um Thorvald Stoltenberg.
28.09.2002: Tíðindini: Samrøða við (A) um at fiskimenn eru settir uttanfyri dagpeningaskipanina.

29.09.2002: Tíðindini: Samrøða við (A) um dagpeningaskipanina. FF-blaðið verður eisini endurgivið í hesum sambandi."

Viðmerkingarnar og yvirlitið frá Útvarpinum vóru send (A) til ummælis við skrivi, dagfest 6. nov. 2002. Við skrivi, dagfest 18. nov. 2002 hevur (A) svarað umboðsmanninum soleiðis:

„Víst verður til bræv frá umboðsmanninum dagfest 6. november saman við útgreining frá útvarpinum.

Fyrst vil eg siga, at sum málið nú liggur ann, er tað kanska vorðið meira umfatandi enn upprunaliga ætlað. Fyri at tað skal kunna bera til at gera eina greiða niðurstøðu, eigur málið at verða avmarkað til tað ítøkiliga, sum kann staðfestast í málinum.

Viðvíkjandi pkt. 2, so havi eg ikki gjørt galdandi, at eg ella FF hava verið **útilokað** frá útvarpinum sum heild.

Spurningurin er heldur, um vit hava verið fyri vanbýti í tíðindaflutninginum. Men hetta ber sjálvsagt illa til at prógva reint generelt, og als ikki út frá tí listanum hjá útvarpinum, sum er viðlagdur. Hvat ið verður tikið sum tíðindi kemur eisini ann uppá, hvør ið hevur tíðindavakt, og sigur hetta eisini nakað um manglandi mannagongdir.

Hesin listin kann nevniliga ikki brúkast uttan eitt sammetingargrundarlag, sum kann vísa hvussu tíðindini frá øðrum feløgum ella tíðindakeldum í somu støðu verða lýst.

Eisini kemur tað ann uppá, **hvussu** tíðindini hava verið endurgivin, hvussu ofta tey hava verið endurtikin, um nøkur uppfylging hevur verið o.s.fr.

Tað valdast eisini í hvussu stóran mun onnur feløg ella stovnar hava fingið **síni** tíðindini við í útvarpinum. Tað kann sigast við rættuligari vissu, at summi feløg fáa øll ella nærum øll síni tíðindaskriv við sum tíðindi. Sum eg greiddi frá í seinasta brævinum fingu vit ikki somu sømdir við tíðindaskrivum, og vit eru tí givin at senda tíðindaskriv. Hinvegin hava vit tíðindi frá FF aðru hvørja viku í FF-blaðnum, og parturin av hesum tíðindum, sum verða tikin við sum útvarpstíðindini er evarska lítil. Sum dømi kann nevnast, at arbeiðarafeløgini hava fingið lýst síni sjónarmið

um uppskotið at broyta barsilsskipanina. Tað hava vit ikki. Hetta er eisini høvuðsreglan. Tó skal sigast, at vit, eins og hini feløgini, hava fingið lýst okkara sjónarmið viðvikjandi ætlanini hjá løgmanni at byrjað arbeiðið við at fyrireika eftirlønarskipan við „blonkum pappíri".

Her skal eisini verða nevnt, at FF-blaðið hevur havt ein hóp av greinum um dokumenterað rættarloysi í almennu fyrisitingini, og rakar hetta eisini fiskimenn. Hetta er ikki tikið uppá tungu av nøkrum fjølmiðli, tískil heldur ikki av útvarpinum.

Men at dokumentera alt hetta ber ikki til, ikki minst tá hugsað verður um hugburðin hjá útvarpinum at lata tilfar frá sær. Hetta sást greitt í Halgafelli málinum.

Tí er neyðugt, at kæran um útvarpið verður avmarkað til tað, sum heilt ítøkiliga kann staðfestast á verandi grundarlagi.

Málið byrjaði við spurninginum, hvørt FF-blaðið var fyri vanbýti í morgunsendingini hjá útvarpinum, tá dagsins bløð vóru lýst. Í brævaskiftinum um hetta mál hevur útvarpið fyri so vítt ásannað hetta. Men tað sum er avgerandi er, at hetta var gjørt út frá tí sjónarmiði, at FF-blaðið kundi ikki krevja nakað sum helst, sum tað varð sagt í brævinum hjá (B), og seinni váttað av (D). Hann váttaði, at FF-blaðið varð ikki av útvarpinum klassifiserað sum eitt tíðindablað á jøvnum føti við so sum Dimmalætting, Sosialin og Fregnir.

Hetta er eitt sjónarmið, sum vit als ikki kunnu góðtaka. Ein slíkur munur í viðgerðini av bløðunum vil greitt seta FF-blaðið í aðru røð í hugaheiminum hjá lurtarunum, sum miðvíst verða „indoktrineraðir" til at halda, at „tíðindi" eru tey, sum tey av útvarpinum góðkendu tíðindabløð bera fram. Hetta má heilt greitt geva tíðindunum eina slagsíðu, tá alternativur tíðindaflutningur á henda hátt verður svartlistaður.

Eg haldi meg hava prógvað í brævi mínum 6. september, at tað er als ikki nakað grundarlag fyri hesum sjónarmiði. FF-blaðið lúkar allar treytir fyri at verða roknað fyri at vera eitt tíðindablað, og hetta hevur eisini verið viðurkent av landsins myndugleikum í teirra uppskoti um stuðul til blaðútberig, sum nevnt í seinasta brævi mínum. Útvarpið hevur einki sjónarmið ført fram, sum stuðlar teirra støðu.

Spurningurin er so, um útvarpið er komið fram til sína niðurstøðu við sakligum metingum, ella talan er um eina ósakliga illvild, sum er í stríð við lógásettu skyldina hjá útvarpinum at vera óheft.

Og eina greiða ábending um hetta sæst við málinum um teir tveir landsrættardómarnar, sum tíðindamaður fekk í hondina tann 12. juni. Dómurin sum viðvíkti fiskimannafelagnum var hvørki umrøddur, tá hann fall, ella tá hann var nærri lýstur í FF-blaðnum.

Tað sum er avgerandi her er, at í eisini í hesum spurninginum hevur útvarpsstjórin nágreiniligar grundgevingar. Og í hesum førinum grundgevur hann ítøkiliga fyri orsøkina til, at útvarpið ikki metti tíðindini um „okkara“ dóm hava tíðindavirði. Hesar kann ein so hava eina meingin um. Men mín meting er, at hesar grundgevingar eru milt sakt sera søktar. Her má greitt liggja okkurt annað aftanfyri. Men tað sum má vera heilt avgerandi er, at tað kann prógvast, at grundgevingarnar hanga ikki saman og kunnu lættliga afturvísast bert við at hyggja at, hvussu útvarpið hevur lýst onnur tíðindi av sama slag. Og grundgevingin um prinsippini hjá útvarpinum at lýsa rættartíðindini fellur fullkomiliga til jarðar, tí tað samstundis kann staðfestast, at tíðindi um eitt sakarmál um ein hundalort millum privatar borgarar skal raðfestast hægri enn eitt mál av so stórum týdningi fyri eitt tað størsta felag í landinum, sum her er talan um. Hetta skuldi í sær sjálvum givið svarið uppá, um her er talan um objektiva viðgerð. Útvarpið kundi eins væl sagt hetta vera eitt mistak. Men tá tað verður alment viðurkent, at her er talan um um miðvísan tíðindapolitikk, so má tað vera nóg mikið at taka støðu út frá.

Í samband við rættarreferat kann skoytast uppí, at útvarpið lýsir sera gjølla heilt nógv rættarmál av øllum møguligum sløgum og í øllum instansum. M.a. verða sakarmál, sum hava verið móti fiskimálastýrinum væl lýst. Sjálvir hava vit trý rættarmál móti sama stýri, og eru tey fleiri ferðir lýst í FF-blaðnum. Men tey hava ikki verið tikin uppá tungu í útvarpinum.

Listin í brævinum hjá útvarpinum gevur eisini eina ábending um manglandi objektivitet. Her eru roknað upp 35 dømi, har eg

ella FF, íroknað blaðið, hava verið umrødd seinastu tvey árini. 18 dømi eru frá 2001 og 17 dømi frá 2002.

Serstakliga fyri 2002 kann sigast, at ein stórur partur av hesum tíðindum snúgva seg um landsfund við ársfrágreiðing, og so tíðindi um sáttmálasamráðingar. Fleiri av hesum er „hissini“ tíðindu um útseting av samráðingum. Men júst slík tíðindi mugu sigast at vera eitt slag av basistíðindum, har útvarpið væl saktans ikki sleppur undan at geva okkum somu viðgerð sum øðrum feløgum.

Men av restini skal eg taka í fylgjandi dømi í listanum, sum eisini gevur ábending um hvønn veg skútan hellir:

**5.04.2001.**
Temaið var um tey smáu bløðini generelt og ikki bert um FF-blaðið.

**19.11.2001.**
Útvarpið hevði tíðindini um átaluna, sum útvarpsstjórin fekk frá umboðsmanninum í eini tíðindasending, uttan at stjórin gjørdi viðmerkingar til átaluna, eins og teir vanliga verða bidnir um í øðrum málum av sama slag. Hesi tíðindini vóru við í **eini** tíðindasending í útvarpinum, meðan onnur umboðsmannamál hava verið endurtikin í upp til sjey tíðindasendingum, sum eg havi kunnað talt.

**04.12.2001.**
Hetta er eitt gott dømi um hvussu FF-blaðið verður viðgjørt. Eg fekk at vita, at orsøkin fyri hesi sending var ein umrøða í tí danska Fiskeritidende av eini kanning, sum var gjørt av liviumstøðum umborð á einum flakatrolara av føroyskari sjúkrasystir við arbeiðsmedisin sum sergrein. Men frammanundan hevði ein stórur partur av FF-blaðið júst verið brúktur at lýsa júst hesi kanning. Men hetta mál fekk ikki áhuga hjá útvarpinum, fyrr enn tað hevði verið umrøtt í einum donskum fiskivinnublað.

Í seinasta brævi kundi eg nevna annað dømi um júst tað sama. Og tað dømið er ikki einsamalt.

**28. og 29.9.2002.**
Hetta er eisini eitt dømi um tað sama. Eg varð uppringdur av útvarpinum í samband við, at Jørgen Niclasen hevði úttalað seg um sjúkraviðbótina hjá fiskimonnum, og var hetta eisini regulert nokk.

Eg greiddi útvarpsmanninum frá í hesum sambandi um málið, har fiskimenn vóru settir uttanfyri dagpengaskipanina, sum er ein onnur lóg, vegna eina avgerð í kærunevndini. Hetta hevði staðið í undanfarna FF-blað, uttan at útvarpið hevði mett hetta at hava tíðindavirði. Tað skuldi hóast alt verið rættulig tíðindi, at ein kærunevnd setur stóran part av eini almannalóg úr gildi. Hetta var orsøkin til, at tíðindini kortini komu við. Hevði málið hjá Jørgen ikki stungið seg upp, so høvdu hesi tíðindi ikki verið tikin við. Tað skal sigast, at tað er ikki avvarðandi útvarpsmanni fyri at lasta, at hetta kom soleiðis fyri.

Men at hesi tíðindini, tá farið verður aftur umaftir, kortini verða roknað fyri at hava tíðindavirði, er eisini ein váttan um meginregluna í umrøðuni av FF-blaðnum sum er, at FF-blaðið ikki verður roknað sum tíðindablað, og tí kemur blaðið opinbart als ikki á tíðindadeildina hjá útvarpinum.

Tann sum fylgir við veit, at vanligt er hjá útvarpinum at endurgeva tey, sum teir rokna sum tíðindabløð, sama dag, sum tey eru prentað ella dagin fyri sjálvan útgávudagin. Ofta verða hesi tíðindi endurgivin fleiri ferðir eisini sjálvan útkomudagin.

Eg meti so avgjørt FF-blaðið fyri at vera tíðindablað, sum umframt felagstíðindi ber ein hóp av almennum tíðindum í hvørji útgávu.

Verður sæð burtur frá vanligum felagstíðindum um sáttmálar og landsfund, sum samb. mannagongdini hjá útvarpinum skuldu verið borin uttan mun til blað ella ei, so kann staðfestast út frá listanum hjá útvarpinum, at tey seinastu rættuligu tíðindi, sum hava verið endurgivin í útvarpinum úr FF-blaðnum, eru tíðindini 28.6.2001 um skúlan á Trøllanesi, og óneyðugt at siga er hetta nærum hálvtannað ár síðan. Seinni er endurgivið tíðindini úr FF-blaðnum um, at ALS dómunin er farin til hægstarætt. Tað sigur nakað um hvussu langt er ímillum.

Hetta er heilt við tráð við fráboðaða politikkin í samband við morgunsendingarnar, og tað at tann tátturin er tikin burtur broytir ikki nakað um sjálvan tann prinsippiella spurningin í málinum.

Nú er so nógv skrivað um útvarpið og fjølmiðlarnar annars, at tað er ikki nógv ið kann leggjast afturat. Men tað er greitt, at hugburðurin hjá útvarpinum er, at har ger eingin nakað mistak, og øll argumentatión hevur sum útgangsstøði, at er nakað galið, so er tað konsekvent hjá tí, sum kann loyva sær at finnast at útvarpinum. Og avleiðingin er hareftir.

Umboðsmaðurin hevur upp til fleiri ferðir víst á, at tørvur er á eini kærunevnd fyri fjølmiðlarnar. Hesum er stórt sæð eingin áhugi fyri, og tað hendir tilsýnilátandi millum lítið og einki í málinum. Skylda hevur verið uppá danskar myndugleikar. Men tað er merkiligt, at danir skulu hava skuldina í Føroyum, tá tað hevur borið til at fáa eitt pressuetiskt ráð í Grønlandi. Tá málið var uppi herfyri helt útvarpsstjórin, at fjølmiðlarnir skuldu hava sjálvjustits. Men hesum kann ikki vera nøkur nytta í við umrødda hugburði hjá fjølmiðlunum, har meginreglan er, at teir ongantíð mistaka seg.

Tað skal leggjast dentur á, at útvarpið ikki á nakran hátt hevur bestrítt nakað av tí, sum eg havi ført fram í hesum máli, og tað kunnu teir sjálvsagt heldur ikki, tá hetta eru væl undirbygd sjónarmið.

Sjálvur haldi eg, at við hesi avmarking skuldi málið verið lætt at taka støðu til.

Men tað er óneyðugt at siga, at henda støða kemur at hava týdning fyri tíðindaflutningin framyvir. Útvarpsstjórin hevur heilt rætt í tí, at sjálvt við avmarking í málinum er talan um álvarsligar ákærur. Objektivur tíðindaflutningur hjá almennum tíðindamiðli er jú grundarlagið fyri sjálvum fólkaræðinum. Verður útvarpið „fríkent“, so er, óneyðugt at siga, sloppið hjá útvarpinum, og teir kunnu rokna sín tíðindaflutning at hava fingið bláa stemplið frá hægsta myndugleika.

Stórt meira er ikki at siga um hetta!“

Við skrivi, dagfest 18. nov. vóru viðmerkingarnar frá (A) sendar

Útvarpinum til ummælis, eins og boðað varð bæði Útvarpinum og (A) frá, at umboðsmaðurin nú fór at taka hetta málið upp til endaliga viðgerð.

Við skrivi, dagfest 20. nov. 2002 hevur Útvarpið boðað umboðsmanninum frá, at tað ikki hevur meira at leggja afturat hesum málinum.

## *Niðurstøða*

***Heimild umboðsmansins til at viðgera klagur um tíðindaflutning***

*Útvarpsstjórin hevur undir viðgerðini av hesari klaguni m.a. í teimum báðum skrivunum frá 13. august 2002 ført fram, at hann heldur tað vera óheppið, at umboðsmaðurin skal átaka sær at viðgera klagur um tíðindaflutningin hjá Útvarpinum. Hann hevur í hesum sambandi víst á, at Kringvarpslógin leggur upp til, at ein fjølmiðlanevnd eigur at finnast, sum kann viðgera slík mál. M.a. verður ført fram í øðrum av hesum skrivum:*

> ...
>
> „Annað mál er so, at hesin kærumøguleikin ikki er farin at virka enn, og tað er atfinningarsamt. Vit meta, at umboðsmaðurin eigur at fylgja hesum málinum upp, ...“

*Til hetta seinasta er at siga, at eg, vísandi til § 12 í umboðsmanslógini í tveimum álitum frá 15. november 2001 og 12. juli 2002 viðvíkjandi klagum frá (A) ávikavist mótvegis SVF/ÚF og ÚF, júst havi mælt Løgtingi, løgmanni og avvarandi landsstýrismanni at bera so í bandi, at hesi viðurskifti verða fingin í rættlag. Eg dugi ikki at síggja, at eg kann gera meira hesum viðvíkjandi.*

*Annars er at siga, soleiðis sum eg eisini havi staðfest í teimum nevndu álitunum, at Útvarp Føroya er ein almennur stovnur, sum sambært § 1 í Fyrisitingarlógini er at rokna við til almennu fyrisitingina undir heimastýrinum. Hetta merkir, at Útvarp Føroya og alt virksemi tess sambært § 4 í Umboðsmanslógini er fevnt av heimildarøki umboðsmansins, eisini tá talan er um mál, sum sambært § 13 í Kringvarpslógini ikki eru fevnd av Lógini um alment innlit og Fyrisitingarlógini.*

*Eingin ivi er tí um, at umboðsmaðurin kann viðgera mál um*

*tíðindaflutningin hjá Útvarpinum. Sum eg havi staðfest í nevnda áliti frá 12. juli 2002, eru mál av hesum slagnum tó ikki vælegnað til eina umboðsmansviðgerð – serliga tá talan er um metingar av journalistiska grundarlagnum undir hesum sendingum. Slík mál áttu heldur at verið viðgjørd í einari fakliga samansettari kærunevnd, eitt nú einari fjølmiðlanevnd.*

*Hóast ein slík nevnd hevði verið til, kundi umboðsmaðurin sambært umboðsmanslógini kortini tikið hetta málið til viðgerðar.*

*Tað er tó greitt, at umboðsmaðurin, soleiðis sum eg havi víst á í nevnda áliti frá 12. juli 2002, eigur at viðgera mál viðvíkjandi tíðindaflutninginum við størsta varsemi og bert tala at, tá tað er greitt, at viðkomandi almenni fjølmiðil ikki hevur hildið grundleggjandi reglur í Kringvarpslógini, heruppií serstakliga § 5 um m.a. sakliga og óhefta upplýsing og fjøltáttað tilboð. Tað er m.a. júst hetta, sum hendan klagan snýr seg um; nevniliga at Útvarpið skal hava hava svartlistað FF í Útvarpinum, og at FF-blaðið skal hava verið útihýst úr morgunsendingini hjá Útvarpinum.*

*Talan er um so álvarsligar skuldsetingarnar frá klagaranum mótvegis Útvarpinum, at umboðsmaðurin illa kann lata eitt slíkt mál fara aftur við borðinum uttan at taka tað til viðgerðar.*

*Klagan frá (A) snýr seg um, at hann, metir seg hava verið fyri mismuni í Útvarpinum, og at hann metir seg hava fingið ósømiliga viðferð frá einum starvsfólki í Útvarpinum. Fyrri partur av klaguni byggir á,*

- *at FF-blaðið ikki er tikið við í morgunsendingunum hjá Útvarpinum á jøvnum føti við onnur bløð,*
- *at Útvarpið ikki hevur endurgivið ein landsrættardóm í einum máli, sum Føroya Fiskimannafelag var partur í, og sum klagarin metir sera prinsippiellan, og*
- *at klagarin eisini í aðrar mátar metir FF at vera útihýst í Útvarpinum.*

*Eg skal viðgera hesi viðurskiftini hvørt sær.*

***FF-blaðið og morgunsendingarnar***

*(A) hevur klagað um, at FF-blaðið hevur verið fyri mismuni í mun til hini tíðindabløðini, tá Útvarpið í morgunsending sínari hevur endur-*

*givið, hvat hevur staðið á forsíðunum á teimum ymsu bløðunum, sum eru útkomin tann dagin.*

*Útvarpið hevur í hesum sambandi ført fram, at orsøkin til, at FF-blaðið bara hevur verið nevnt viðhvørt, er tann, at FF-blaðið ikki er at rokna fyri eitt tíðindablað, men heldur eitt fakfelagsblað. Útvarpið hevur greitt frá, at FF-blaðið tí sambært reglunum fyri henda tátt í morgunsendingunum als ikki átti at havt verið nevnt í hesum táttinum, men at tíðindamaðurin við hvørt kortini hevur gjørt hetta av sínum eintingum.*

*Eg havi biðið Útvarpið um at dokumentera, um og í hvønn mun FF-blaðið hevur verið umrøtt í morgunsendingini í vár. Hetta hevur Útvarpið ikki kunnað gjørt, tí at hesar sendingarnar ikki hava verið bandaðar, og eingi tíðindahandrit hava verið nýtt sum grundarlag undir teimum. Sambært § 15 í Kringvarpslógini hevur Útvarpið skyldu til at goyma upptøkur av øllum sendingum sínum í minsta lagi í 3 mánaðir. Ætlanin við hesari ásetingini er, at Útvarpið skal kunnað dokumenterað, hvat er farið „út í luftina“.*

*Eg haldi tað vera sera óheppið, at Útvarpið ikki hevur fingið slíka dokumentatión til vega. Sambært skrivinum, dagfest 30. oktober 2002 sær tað tó út til, at hesi viðurskifti eru fingin í rættlag soleiðis, at alt tilfar, sum verður sent, nú verður goymt. Eg haldi tí ikki nakra grund vera til at gera meira við henda spurningin.*

*Viðvíkjandi nevnda tátti í morgunsendingunum havi eg annars at siga, at eg eri ikki samdur við Útvarpinum í, at FF-blaðið ikki kann roknast fyri at vera eitt tíðindablað við teirri grundgeving, at útgevarin er eitt fakfelag. Hóast talan kanska er um eitt heldur øðrvísi tíðindablað enn hini tíðindabløðini, haldi eg tað ikki vera nakran iva um, at FF-blaðið má metast sum eitt tíðindablað eins og onnur tíðindabløð.*

*Tá kriteriið hjá Útvarpinum fyri at nevna bløðini í morgunsendingini var, hvørt talan var um eitt tíðindablað ella ikki, so átti FF-blaðið eisini at havt verið tikið við í hendan táttin.*

*Av tí, at Útvarpið hevur niðurlagt hendan táttin í morgunsendingini, haldi eg ikki grundarlag vera fyri at gera meira við henda spurning heldur.*

***Endurgeving af rættaravgerðum***

*(A) hevur ført fram, at Útvarpið eisini ger mismun, tá talan er um*

*endurgeving av rættarúrskurðum. Hann hevur í hesum sambandi víst til tveir landsrættardómar frá 12. juni 2002, ið báðir broyttu dómarnar hjá Føroya rætti. Annað málið var millum Føroya Fiskimannafelag og ein persón, ið mótmælti, at hann var trektur fyri limagjald til felagið. Hitt málið var millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag (sum mandatarur fyri ein lim) og ALS. Útvarpið endurgav bert seinna dómin í einari tíðindasending.*

*Í fyrra dóminum hevði viðkomandi ikki meldað seg sum lim í Føroya Fiskimannafelag, men var kortini trektur fyri limagjald av frítíðarløn hansara í sambandi við ein túr við rækjutrolara. Í grundgevingini hjá landsrættinum verður ført fram, at fiskimenn ikki hava rætt til frítíðarløn sambært løgtingslógini um frítíð við løn, og at viðkomandi tí bert hevði rætt til frítíðarløn, um hetta var heimilað í sáttmála. Sáttmálin millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag hevði reglur um, at limir Fiskimannafelagsins høvdu rætt til frítíðarløn. Viðkomandi hevði gjøgnum Føroya Fiskimannafelag: „ladet sig udbetale feriegodtgørelse“ og hevði ikki ynskt at rinda frítíðarlønina aftur. Undir hesum umstøðum hevði felagið havt rætt til at trekkja viðkomandi fyri limagjald.*

*Í seinna dóminum var talan um ein persón, sum hevði verið við fiskifari, og sum í sambandi við, at skipið skuldi umvælast, varð sagdur úr starvi í umleið 2 1/2 mánað. Seinni varð hetta rættað til, at uppsagnarbrævið bert skuldi skiljast soleiðis, at einki arbeiði var til manningina ta tíðina, skipið var til umvælingar. Í grundgevingini hjá landsrættinum fyri at frídøma ALS stendur m.a.:*

> ...
>
> „Rederens skrivelser må forstås således, at de gensidige forpligtelser i ansættelsesforholdet blev suspenderet i en periode af 1 1/2 til 3 måneders varighed, men at ansættelsesforholdet ikke blev bragt til ophør.
>
> Under disse omstændigheder har … ikke været arbejdsløs i arbejdsløshedsforsikringslovens forstand. Af de samme grunde har han heller ikke reelt stået til rådighed for arbejdsmarkedet.“
>
> ...

*Tað kunnu vera ymiskar meiningar um, hvør av hesum dómum er meira prinsippiellur í løgfrøðisligari meting; men uttan mun til um (A)*

*hevur rætt í tí sjónarmiði, at dómurin viðvíkjandi limagjaldinum til Føroya Fiskimannafelag út frá eini slíkari meting er minst líka prinsippiellur sum hin dómurin, sum varð endurgivin í Útvarpinum, so haldi eg ikki, at hetta í sjálvum sær er nakað prógv um mismun.*

*Tað er nú einaferð soleiðis, at Útvarpið eins og aðrir fjølmiðlar venda sær til sínar lurtarar/hyggjarar/lesarar, og tað er ikki vist, at tey løgfrøðisligu sjónarmiðini telja so nógv hjá vanliga lurtaranum sum hjá løgfrøðingunum. Hesir hava eisini aðrar keldur at oysa av. Frá egnum royndum sum dómari eitt drúgt tíðarskeið havi eg ferð eftir ferð sannað, at mál, sum løgfrøðisliga kanska høvdu lítið uppá seg, hava drigið fullan rættarsal av áskoðarum til sín, meðan rættarsalurin hevur verið nærum tómur, tá løgfrøðisliga sera týdningarmikil mál hava verið á skránni. Fjølmiðlarnir vilja náttúrliga leggja seg eftir at koma við eini „góðari søgu“, og hetta er einki at siga til. Mær tykir, at dømið hjá (A) um dómin viðvíkjandi kvinnuni, sum meiddi seg eftir at hava traðkað í ein hundalort, er eitt gott dømi um hetta.*

***Útihýsing av (A) og FF í Útvarpinum***

*Undir partshoyringini í hesum málinum hevur (A) ført fram, at FF hevur verið svartlistað í Útvarpinum. Hetta er m.a. gjørt í skrivi hansara, dagfest 12. juni 2002. Í seinasta skrivinum, dagfest 18. nov. 2002 sigur (A) seg kortini ikki hava ført hetta sjónarmið fram, men at talan heldur hevur verið um, at hann og FF hava verið fyri mismuni í mun til onnur, tá ræður um at sleppa til orðanna í Útvarpinum.*

*Sambært tí yvirlitinum, sum Útvarpið hevur latið umboðsmanninum um, hvørjar sendingar (A) og FF hava luttikið ella verið umrødd í, so er als einki grundarlag fyri uppáhaldinum hjá (A) um, at FF hevur verið útihýst í Útvarpinum. Yvirlitið, sum er nevnt frammanfyri, vísir tvørturímóti, at (A) og FF eru nevnd og endurgivin í nógvum sendingum.*

*Viðvíkjandi spurninginum um, hvørt (A) / FF í tíðindaflutninginum hava verið fyri vanbýti í mun til aðrar persónar og onnur fakfeløg, so er tað fullkomuliga ógjørligt at eftirkanna eitt slíkt ikki útgreinað uppáhald innan karmarnar á einari umboðsmanskanning. Sum nevnt frammanfyri eigur umboðsmaðurin eisini at vísa størsta varsemi í sambandi við journalistiskar metingar.*

*Tað vil altíð vera ein journalistisk meting, hvørji tíðindi eru áhugaverd at bera. Sum ein avleiðing av § 5 í Kringvarpslógini, má Útvarpið ikki*

*reka ein miðvíst subjektivan tíðindaflutning, sum er stýrdur av óviðkomandi fyrilitum. Hetta merkir harafturímóti ikki, at ein ávísur persónur ella samfelagsbólkur, felag v.m. hevur krav uppá at fáa eina ávísa mongd av umrøðu í almennu fjølmiðlunum, ella at sleppa til orðanna so og so ofta.*

***Aftursvarið frá (B)***

*(B) hevur ført fram, at aftursvarið frá honum skal skiljast sum eitt persónligt svar frá honum og ikki sum eitt svar frá Útvarpinum. Hetta sjónarmið kann ikki góðtakast. Skriv hansara var eitt svar uppá eina klagu frá (A) til Útvarpið. Tað er sum útvarpsvertur, at hann hevur fingið hesa klaguna latna upp í hendi og svarað henni. Skrivið má tí metast sum eitt svar frá Útvarpinum.*

*Hóast verturin møguliga hevur verið undir strongd, eins og útvarpsstjórin hevur víst á í skrivi sínum, dagfest 13. aug. 2002, og uttan mun til, um hesin hevur kent seg at hava verið illa viðfarnan av (A) ella ikki, so kann eitt slíkt orðalag, sum tað, ið (B) nýtti í svari sínum til (A), als ikki og undir ongum umstøðum góðtakast.*

*Útvarpsstjórin hevur boðað mær frá, at útvarpsverturin hevur fingið eina átalu fyri hetta, og hesum kann eg bert taka undir við.*

*Eg geri ikki meira við klaguna.*

# 28. Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál v.m.

## 28.1. Klaga um uppsøgn av og vantandi endursetan av landsverkfrøðingi – Grundgeving

A, varð í 1988 settur sum landsverkfrøðingur. Í 1998 varð hann loystur úr starvinum við teirri grundgeving, at Landsverkfrøðingurin skuldi leggjast saman við Strandferðsluni til ein felags stovn við leiðaranum av Strandferðsluni sum stjóra. Hendan ætlan varð ongantíð sett í verk, og varð starvið sum stjóri á Landsverkfrøðingsstovninum lýst leyst í apríl 2000. Millum umsøkjararnar var A. Umsóknirnar vórðu viðgjørdar av einari setanarnevnd við tveimum umboðum fyri Landsverkfrøðingsstovnin og tveimum fyri Vinnumálastýrið (nú Vinnumálaráðið). Tey fyrru umboðini vístu bæði á A sum best skikkaðan til starvið, meðan hini umboðini vístu á tveir aðrar umsøkjarar, R og S, sum betri skikkaðar enn A. Landsstýrismaðurin í vinnumálum gjørdi síðani av at seta R sum stjóra fyri stovnin, og varð boðað frá hesum við einum tíðindaskrivi tann 22. mai 2000.

Uppsøgnin av A fór fram, áðrenn umboðsmanslógin fekk gildi, og var umboðsmaðurin tí avskorin frá at viðgera hana. Viðvíkjandi endursetanini helt umboðsmaðurin seg ikki til at meta um, hvørt tað høvdu verið slíkar umstøður millum A og Vinnumálastýrið, at A ikki var tann rætti maðurin til starvið. Hann hevði tí ikki grundarlag fyri at finnast at sjálvari avgerðini um at seta R í starvið heldur enn A. Viðvíkjandi mannagondini við setanini var tað ikki samsvarandi góðum fyrisitingarsiði, at teir vrakaðu umsøkjarnir ikki fyrr enn við skrivi frá 6. juni 2000 fingu fráboðan um, at starvið varð sett við øðrum umsøkjara. Sambært § 21 í fyrisitingarlógini áttu teir í skrivinum at havt fingið eina grundgeving, samsvarandi § 23 í lógini, fyri at teir vóru vrakaðir. Serliga átti A at havt fingið eina sera gjølliga frágreiðing og neyva grundgeving fyri, at hann ikki skuldi setast aftur í tað starv, sum hann var sagdur úr við teirri grundgeving, at starvið skuldi leggjast niður. Vantandi grundgevingin kundi tó ikki hava við sær, at tilnevningin av R í starvið var at meta sum ógildug. Burtursæð frá at geva Vinnumálastýrinum eina álvarsliga átalu fyri vantandi grundgevingina gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið. (J.nr. 200100003)

**Klagan**

Umboðsmaðurin hevur við brævi, dagfest 21. jan. 2001, fingið eina klagu frá B, fyrrv. starvsfelaga A's um ta viðferð, ið hesin hevur fingið frá Vinnumálastýrinum. Klagan frá B er soljóðandi:

> „Í hesum føri kenni eg helst ikki røttu kærumannagongdina; men tað snýr seg um eitt mál, sum eg eftir bestu sannføring ikki haldi vera „fyri mark“.
>
> Av tí, at eg kenni meg sannførdan um gjørdan órætt, havi eg nú í tvey ár haft tílíkt fortreð av tí, at eg onkursvegna noyðist fáa tað av herðunum.
>
> Tað var á sumri 1950, eg á fyrsta sinni kom í hóslag við Landsverkfrøðingin, og havi eg, frásæð útbúgving og arbeiði burturi í londum, starvast har síðani. Hóast pensionistur á fjórða ári, eri eg har lutvíst enn til ávísar uppgávur.
>
> Landsverkfrøðingsembætið var eins og hini embætini eftir Heimastýrislógini ungt tá; men fekk eins og hini ein góðan og dugnaligan leiðara – fullur av ætlanum og vónum landinum til bata.
>
> C sat í 40 ár, 5 mánaðir og 12 dagar (01.04.1948 – 12.09.1988).
>
> Síðani tók A við í eini sera truplari kreppitíð og royndist eins góður og dugnaligur sum undanmaður hansara.
> Hann hevði tá frammanundan starvast innan flest øll øki stovnsins í 13 ár.
>
> Ein penan dag – tann 18. des. 1998 – fekk A uttan ávaring at vita frá Ð, landsstýrismanni – ein fríggjadag kl. 11 – at 50 ára gamla embætið og starv hansara varð niðurlagt. Hetta tí at tveir stovnar, Landsverkfrøðingurin og Strandfaraskip Landsins, skuldu leggjast saman, og tí varð ikki brúk fyri honum.
>
> Øll vita, at so varð ikki. Tað eru og verða framvegis tveir stovnar.
> Hetta hevur løgmaður váttað.
>
> Henda løgna hending voldi alstóra undran, øsing og ørgrynnu av mótmælum kring alt landið.
>
> Til forsvar fyri atburð landsstýrismansins er eittans skriv, ið er hjálagt, dagfest 21.04.1999, undirskrivað av deildarleiðara og løgmansskrivstovustjóranum.
>
> Eitt eru tær persónligu avleiðingar, henda uppsøgn saman við

einum tilíkum skrivi kundu gjørst atvoldin til, um ikki óvanligur stirðil var í manninum; annað er, um Føroya fólk hevur ráð til at lata 23 ára akkumulerað tilfeingi av royndari tekniskari vitan eins og fíggjarligum kunnleika á høgum støði soleiðis við einum pennastroki fara fyri skeyti, hetta serliga nú ætlanin eftir øllum at døma er at seta føtir undir egi borð.

Nú gerst kanska ikki so nógv við ta ítøkiligu hendingina; men høvdu tygum vilja gjørt mær og helst øllum Føroya fólki tann beina at kanna hetta mál – við teim drúgvu medmenniskjansligu og juridisku royndum, tygum hava – soleiðis at komandi ættarlið og skúlaði ungdómur okkara burturi og heima kann fáa at vita, hvat tey kunnu vænta sær á hesum øki bæði nú og framyvir.

Um hin annars lívlangi illgrunaskuggi, sum A nú hevur hangandi yvir sær, samstundis lætti, hevði tað ikki verið verri; men mest umráðandi er, at tílíkt ikki kemur fyri aftur."

Í einum brævi, dagfest 25. jan. 2001 hevur B sent mær hetta ískoyti til klaguna:

...

„Tað kann kanska tykjast løgi, at eg sendi tær hetta skriv, fráfarin sum eg eri fyri aldur og havandi mítt so nøkulunda á tí turra; men eg kenni tað satt at siga, sum um arbeiðið gjøgnum hálva øld hjá ótalligum føroyingum í landsins tænastu verður vanvirt og tileinkisgjørt við hesi óneyðugu markeringstrongdini hjá Ð. Ikki kann eg koma í tankar um í míni starvstíð burturi og heima, at ein dugnaligur og rættskaffin maður sum A nakrastaðni hevur fingið eina tílíka viðferð, og er orsøkin til hesar reglur tann einfalda, at eg ikki orki ganga við tankanum um, at kanska okkurt meira kundi verið gjørt fyri at bøtt um skaðagerðina og rætta mistakið – um ikki fyri annað, so ið hvussu er, fyri at onkur av okkara virkisfýsna ungfólki aftur kann fáa hug at brúka tað, tey duga, hjá tí almenna. Av manningini eru, mær vitandi, fýra ung framtíðarálit longu horvin.

Í hjálagda skrivi er nevnt okkurt um samstarvstrupuleikar; men haldi eg, eftir 23 ára samstarv við mannin, hetta vera heilt burturvið. Væl segði hann ikki bara ja og amen; men eg haldi eina hina mest umráðandi uppgávuna hjá einum embætismanni júst

vera at gera vart við tað, hann metir fara at verða óheppið fyri samfelagið sum heild.

Um okkurt tílíkt kann vera komið fyri, veit eg ikki; men at blaka so nógv fyri bakka orsakað av bersøgni millum menn haldi eg vera ov erkvisi og ómansligt og kann neyvan gagna Føroya fólki.

Eisini undrar tað meg, at hvørki tænastumannafelagið ella fakfelag A.s á nakran hátt mótmæltu ella onkursvegna lótu við seg koma.

Tá nevnda samanlegging varð av ongum og søkt varð eftir stjóra til Landsverkfrøðingin, heitti gamla starvsfólkið á A um at søkja starvið aftur. Hetta hildu tey vera tað mest natúrliga, tí gamla grundgevingin fyri uppsøgnini var jú tá dottin burtur, og onnur eftirfarandi orsøk er ikki síðan komin undan kavi.

At hann ikki fekk sessin aftur, sannførir meg bara meira og meira um, at her er nakað rívandi galið farið fram, tí við mínum arbeiðisárum á baki haldi eg meg duga á at skyna, hvør dugur er í manni.

Eg kann at enda leggja aftrat, at eg ikki skrivi hetta sum vinmaður A.s, tí vit vóru einans vanligir starvsfelagar fyrstu 13 árini, og seinastu 10 árini arbeiddi eg beinleiðis undir hansara leiðslu; men eg dugi ikki bara sita hendur í hupp, tá tílíkar heilt órímiligar og óforstáiligar hendingar koma fyri.

Tað er harmuligt; men fyri mær sær tað út, sum nýggja stýrisskipanin ávirkar skeiva vegin, soleiðis at nýggja ábyrgdin hjá hinum einstaka landsstýrismanninum gevur honum tað fatan, at alt ber til. Hóast hon ivaleyst hevði síni brek, hevði tílíkt neyvan komið fyri undir gomlu skipanini, tá neyðugt var at tosa saman – hinvegin haldi eg tað mátti borið til at ráðført seg hvør við annan, uttan at tað var ásett við lóg.

Um orsøkin til ta langt út um landoddarnar tiltiknu uppsøgnina kanska er politisk, so er hetta sum kunnugt vælkend mannagongd í USA, men neyvan nakað, sum føroyingar eru samdir um, skal verða galdandi her á landi.“

...

Við klaguni hevur B lagt eitt upprit, dagfest 21. apríl 1999, frá

Løgmansskrivstovuni, sum er gjørt í sambandi við, at løgmaður hevði biðið um eina kanning av málinum um uppsøgnina av A. Í uppritinum frá Løgmansskrivstovuni stendur m.a.:

...

**Meting av málinum**

## Reglubinding

Sambært løgtingslóg nr. 31 frá 1971 um tænastumenn landsins, fekk A 28. desember 1998 skriv frá Vinnumálastýrinum, har boðað varð frá, at starvið sum landsverkfrøðingur ikki var til longur. Hetta bræv varð sent A til hoyringar, og hevur henda mannagongd verið sambært galdandi lóg.

Fakfeløgini vístu á, at viðgerðin av hesum málinum, ið tey m.a. mettu at vera eitt mál um bygnaðarbroytingar, var brot á § 2 í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Vinnumálastýrið vendi sær tí til lønardeildina í Fíggjarmálastýrinum fyri at fáa greiði á, um sáttmálin var brotin. Í skrivi 7. januar 1999 svarar Fíggjarmálastýrið, at tað metti ikki, at Vinnumálastýrið hevði brotið sáttmálan.

Løgmansskrivstovan heldur seg til metingina hjá Fíggjarmálastýrinum um, at sáttmálin millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið varð ikki brotin, tá starvið sum landsverkfrøðingur varð niðurlagt.

Sostatt kann staðfestast, at niðurleggingin av starvinum sum landsverkfrøðingur fór fram eftir galdandi reglum.

## Starvsfólkapolitisk viðurskifti

Longu í mai 1998 førdi A fram mótvegis landsstýrismanninum í vinnumálum, at upprunaliga innihaldið í starvið hansara var burtur. Hetta var áðrenn tosið um møguligar bygnaðarbroytingar á Landsverkfrøðingsstovninum var byrjað. Áðrenn starvið sum landsverkfrøðingur varð niðurlagt, varð A kunnaður um, at broytingar møguliga fóru at verða framdar á stovninum, og at tað kanska kundi hugsast, at Landsverkfrøðingsstovnurin og Strandfaraskip landsins vórðu løgd saman í ein stovn.

Hóast uppsøgnin ella niðurleggingin av starvinum sostatt ikki kann sigast at vera heilt óvæntað fyri A, so er ein slík avgerð

ongantíð tespilig. Miðað eigur tí altíð at vera ímóti, at framferðin verður so virðilig sum til ber.

A fekk hin 18. desember 1998 at vita, at starv hansara fór at verða niðurlagt. Hetta má sigast at vera eitt óheppi tíðspunkt, tí talan var um fáar dagar undan jólum, og at 18. desember eisini var ein fríggjadagur, tvs. beint undan einum vikuskifti.

Hin 21. desember 1998 boðaði A starvsfólkunum á Landsverkfrøðingsstovninum frá ætlanum landsstýrismansins, og longu undan jólum var málið viðgjørt í fjølmiðlunum. Men ikki fyrr enn 28. desember, fóru starvsfólk úr Vinnumálastýrinum, nýggi stjórin, D saman við landsstýrismanninum á fund við starvsfólkini á stovninum til tess at kunna tey um støðuna og at boða frá, at nýggjur stjóri var settur, og at A var farin úr starvi.

Best hevði verið, um Vinnumálastýrið ella landsstýrismaðurin í vinnumálum beinanvegin høvdu tikið stig til ein kunnandi fund við starvsfólkini, so at tey fingu greiðar upplýsingar um málið sum skjótast. Tað skerst ikki burtur, at nógv varð tosað um hetta mál, ikki bara um sjálva niðurleggingina av starvinum sum landsverkfrøðingur, men eisini um møguligar bygnaðarbroytingar og *rationaliseringar.* Og hetta hevur ivaleyst gjørt tey mongu starvsfólkini ótrygg. Harafturat er tað altíð óheppi, um orðini hjá tí stjóra, sum ófrívilliga skal fara úr starvi, standa so at siga einsamøll í ov langa tíð (í hesum føri frá 21. til 28. desember).

Annars hevur tað týdning, at ein uppsøgn ella niðurlegging av einum starvi hevur eina greiða grundgeving. Hóast niðurleggingin av starvinum sum landsverkfrøðingur formliga hevði eina greiða grundgeving, nevniliga at møguleikin at samskipa Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins skuldi kannast við seinni bygnaðarbroytingum fyri eyga, so vísir fyrisitingarliga gongdin í málinum (sí niðanfyri), at orsøkin heldur hevur verið samstarvstrupuleikar millum Landsverkfrøðingin og Vinnumálastýrið. Hetta er eisini ein starvsfólkapolitiskur veikleiki í málinum.

### Niðurstøða

Samanumtikið kann staðfestast, at løgfrøðiliga er málið farið fram á rættan hátt, meðan mangt bendir á, at málið starvsfólkapolitiskt er handfarið óheppi. Viðmerkjast skal, at almenna fyri-

sitingin enn ikki hevur orðaðan starvsfólkapolitikk fyri uppsagnir. Tó er uppskot til uppsagnarpolitikk júst latin stovnum og feløgum til hoyringar. Endamálið við einum slíkum politikki er m.a. at tryggja, at uppsagnir av starvsfólkum verða framdar á ein virðiligan hátt.

FYRISITINGARLIGA GONGDIN SETT UPP Í TÍDARRØÐ:

**1) fundur hin 20. mai 1998 (Ð og A)*)**
Fundur ímillum Ð og A, har A handar Ð eitt bræv, harí m.a. stendur, at A metir at við bygnaðarbroytingunum kann innihaldið í upprunastarvinum sum landsverkfrøðingur metast at vera burtur, og vísir til § 29 í tænastumannalógini, ið fevnir um rættindi hjá tænastumanni, um starv hansara verður niðurlagt. A biður í brævinum m.a. um at frætta, hvussu leikur verður førdur at enda.

Hetta var fyrsti fundur hjá Ð sum landsstýrismaður við stovnsleiðaran, og hann gjørdist ikki sørt bilsin av at uppliva, at A eftir øllum at døma hvørki góðtók ella hevði hug til at laga Landsverkfrøðingsstovnin til tær bygnaðarbroytingar, ið vóru farnar fram í miðfyrisitingini.

Hugburðurin var heldur tann, at miðfyrisitingin skuldi laga seg til tær *traditiónir,* sum vóru á samferðsluøkinum. Ð metti, at ein tættari dialogur millum partarnar ivaleyst kundi rætta uppá viðurskiftini millum Landsverkfrøðingsstovnin og Vinnumálastýrið og segði, at hann fór at arbeiða fyri hesum.

**2) fundur fyrst í juni 1998 (Ð, E, F, G og A)**
Á hesum fundi kemur tað eftir Ð'sa fatan fram, at viðurskiftini millum Vinnumálastýrið og A er sera kalt. Ð metti, at A var sera óhøviskur við sínum ógvuliga týðuligu *signalum* um, at hann ikki hevði nógv til yvirs fyri embætisfólkunum í Vinnumálastýrinum. Mótvegis A legði Ð tí dent á, at tey ikki kundu koma við nakrari nýskipan og møguligum *rationaliseringum,* um hugburðurin hjá A var so *negativur* og afturhaldandi.

**3) fundur seinni í juni 1998 (Ð, E, H,I, F, D, J og A)**
Fundurin snúði seg um samferðsluviðurskifti, Ð fekk á hesum

fundi ta fatan, at tað eisini var okkurt embætisfólk í Vinnumálastýrinum, ið ikki heilt hevði funnið rætta stevið í mun til útgangsstøðið og tær royndir, ið landsverkfrøðingurin hóast alt hevði á økinum. Ð royndi tí undir fundinum at geva viðmerkingunum hjá A serligan ans, so at betri javnvág kom í. Hetta vísti seg at eydnast, tí fundurin, sambært embætismonnum í Vinnumálastýrinum, hevði verið tann fyrsti fundurin millum partarnar, sum hevði gingið væl.

**4) fundur ultimo september (Ð og A)**

Á fundinum greiddi Ð frá, at hann arbeiddi við tankanum um at skilja partar av virkseminum burturúr Landsverkfrøðingsstovninum og at gera (í fyrstu syftu) eitt alment entreprenørfelag, ið kundi taka sær av framtíðar tunnilsgerð. Ð metti, at her var møguleiki at menna føroyska vinnu samstundis sum almenni sektorurin gjørdist minni. Ð spurdi, um A hevði hug at standa fyri einum almennum borifelag, men tað hevði A ikki, hann trúði als ikki uppá at slíkt felag hevði nakra framtíð í Føroyum, av tí at politiskur vilji fór neyvan at verða til regluliga játtan til tunnilsgerð í Føroyum.

**5) fundur ultimo september/primo oktober 1998 (Ð, H og A)**

Tosað varð um møguleikar fyri framtíðar sparingum á samferðsluøkinum og um, at gerast mátti ætlanir bæði „upp á styttri“ og „upp á longri sikt“. Í hesum sambandi nevndi Ð, at hann hevði fingið innblástur av skipanini í Íslandi, har økini hjá Landsverkfrøðinginum og Strandferðsluni verða fyrisitin á einum og sama stovni, og at hetta helst eisini var ein gongd leið í Føroyum. A ógvaðist stórliga av hesum hugsanum landsstýrismansins og mælti harðliga frá eini slíkari loysn. Hann var týðuliga skakaður av hesum hugsanum.

**6) fundur hin 6 oktober 1998 (Ð og A)**

Fundurin var um partafelag í samband við undirsjóartunnilin og leiklutin hjá Landsverkfrøðinginum í hesum sambandi.

**7) fundur 2. desember 1998 (Ð, E og H)**
Á hesum fundi verður avgjørt, at Vinnumálastýrið skal arbeiða víðari við hugskotinum um at leggja Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins saman í ein stovn.

Í hesum sambandi hevði Ð D í huganum sum stjóra fyri einum samanløgdum stovni, tí landsstýrismaðurin hevði sæð, hvussu virki og væl „rudda varð upp" á Strandfaraskipum Landsins, síðani hann var settur stjóri. Um somu tíð verður tað Ð alt meira greitt, at tað verður trupult at „treingja ígjøgnum" við A sum stjóra fyri Landsverkfrøðingsstovnin, til tess at kanna í hvønn mun alt samferðsluøkið kann skipast og samskipast. Embætisfólkini í Vinnumálastýrinum stuðla honum í hesi fatan, tí tey halda, at viðurskiftini við Landsverkfrøðingin eru vónleys.

**Ikki tíðarfest**
Um hetta mundi ger Vinnumálastýrið Ð vart við, at hann helst skal hava skrivara við á fundir, fyri at kunna skjalprógva tað, ið fer fram.

**7) fundur hin 16. desember 1998 (Ð, H og D)**
Á hesum fundi var m.a. umrøtt, hvørt D kann stjórna báðum stovnunum ella einum samanløgdum framtíðar stovni.

**8) hin 17. desember 1998**
Henda dagin kemur Ð til endaliga niðurstøðuna um, at starvið sum landsverkfrøðingur má niðurleggjast. Ð hevði longu í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2000 lagt upp til broytingar, sum fevndu um stovnarnar, ið varaðu av samferðslukervinum t.v.s. Strandfaraskip Landsins og Landsverkfrøðingsstovnin, men hann hevði nú eina greiða fatan av, at tað komst ikki longur við málinum, so leingi sum stjórin á Landsverkfrøðingastovninum ikki vildi vera við til at fremja broytingar. Ð tók tá ta avgerð, at hann fór ikki inn í nýggja árið uttan at hava loyst málið.

**9) hin 18. desember 1998**
Ð sær, at bæði A og D eru á sama fundi í Portugálinum. Hann fer inn í fundarhølið og biður D og A møta hjá sær ávíkavist kl. 13.00

og 14.00 sama dag. Orsakað av tíðarætlanunum hjá A og D, verður tað A, ið møtir kl. 13.00. Tá fær hann frá Ð at vita, at starv hansara verður niðurlagt, og at felags stjóri verður settur — tó ikki A. A verður biðin um at halda hetta fyri seg sjálvan fyribils. D kemur kl. 14.00 og verður biðin um at gerast stjóri fyri báðar stovnarnar (ella samanlagda stovnin). Seinnapartin sama dag fara Ð, E og H í Fíggjarmálastýrið og samráðast um nýggjan lønarkarm fyri D.

**10) hin 21. desember 1998**
A boðar sínum starvsfólki frá ætlanini hjá landsstýrismanninum.

**11) hin 22. desember 1998**
Ð ringir til A og biður um fund 28.12.1998. Ð endurtók at starvið fór at vera niðurlagt, men at A stóð í boðið at fáa starv í Vinnumálastýrinum sum ráðgevi.

**12) fundur hin 28. desember 1998 (Ð, E, H og A)**
Á hesum fundi greiðir Ð enn eina ferð frá støðuni og sigur, at rættindi A´s fara at verða vird. A boðar frá, at hann ikki tekur av tilboðnum um at gerast ráðgevi í Vinnumálastýrinum.
Sama dag fær A bræv um hoyring í málinum um at niðurleggja starvið sum landsverkfrøðingur. Sama dag seinnapart fara Ð, E, H og D niðan á Landsverkfrøðingsstovnin at greiða starvsfólkunum frá, at A var farin úr starvi, og at D er settur sum stjóri fyri bæði Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins.

Sambært § 18, stk. 2 í umboðsmanslógini kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um viðurskifti, sum stava frá tíðini frammanundan 1. jan. 2000. Av hesi orsøk, er umboðsmaðurin avskorin frá at viðgera spurningin um sjálva uppsøgnina, og havi eg við skrivi, dagfest 18. juni 2001 tí avvíst hendan partin av klaguni. Hinvegin kann umboðsmaðurin viðgera spurningin um vantandi endursetan av A í starvið, tí hendan starvssetanin fór ikki fram fyrr enn 22. mai 2000.

Av tí, at klagan er send umboðsmanninum frá einum uttanfyristandandi triðjamanni, varð A spurdur, um hann hevði nakað ímóti, at klagan varð tikin upp til viðgerðar. Eftir at hava fingið góðkenning

frá A fyri, at hann einki hevði ímóti hesum, var klagan tann 22. juni 2001 send Vinnumálastýrinum til ummælis, eins og biðið varð um skjølini í bæði uppsagnar- og setanarmálinum.

**Partshoyringin**
Vinnumálastýrið hevur við brævi, dagfest 9. juli 2001 svarað mær soleiðis:

> ...
> Í samband við bygnaðarbroytingar varð settur felags stjóri, D, fyri Landsverkfrøðinginsstovnin og Strandfaraskip Landsins, og var starvið sum landsverkfrøðingur ikki til longur. Ætlanin var at samskipa Landsverkfrøðingingsstovnin og Strandfaraskip Landsins.
>
> Av ymiskum orsøkum varð D stutt eftir loystur aftur úr starvinum, og K varð konstitueraður sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin.
>
> Aftaná at landsstýrismaðurin í vinnumálum, Đ, á landsstýrisfundi 06.03.2000 hevði boðað frá, at hann fór at lýsa starvið sum stjóri á Landsverkfrøðingsstovninum leyst, varð farið undir at orða lýsingina.
>
> Nýggja starvið sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin varð ikki flokkað sum gamla starvið sum landsverkfrøðingur, nevniliga sum tænastumannastarv og lønt í 38. lønarflokki umframt eina ikki eftirlønargevandi viðbót, sum er munurin millum lønina í 38. og 39. lønarflokki, men sum eitt starv, ið verður sett eftir serligari avtalu eins og t.d. størvini sum stjóri fyri Strandfaraskip Landsins og Postverk Føroya.
>
> Vinnumálastýrið hevur síðan samskifti við setta stjóran á Landsverkfrøðingsstovninum, K, við formannin í Felag tænastumannafelag landsins, L, og við formannin í Føroya Verkfrøðingafelag, M, um innihaldið í lýsingini eftir stjóra fyri stovnin.
>
> Tann 28.03.2000 verður lýsingin send føroysku bløðunum. Freistin at søkja varð sett til innan 28.04.2000.
>
> Settur varð setanarbólkur við hesum limunum:
> N, umboð fyri leiðsluna á Landsverkfrøðingsstovninum
> O, umboð fyri starvsfólkið á Landsverkfrøðingsstovninum
> P, fulltrúi á samskiftisdeildini í Vinnumálastýrinum

H, deildarstjóri á samskiftisdeildini í Vinnumálastýrinum

> Landsverkfrøðingsstovnurin hevði valt N og O, meðan Vinnumálastýrið hevði valt P og Q.
>
> Setanarbólkurin varð samdur um at innkalla fýra persónar til setanarsamrøður. Tann 13. mai 2000 skrivaði bólkurin „Tilmæli til Landsstýrismannin í s.v. setan av stjóra til Landsverkfrøðingsstovnin".
>
> Setanarbólkurin var samdur um orðingar um teir ymsu umsøkjarnir, og at allir fýra hvør á sín hátt vóru væl skikkaðir til starvið.
>
> Setanarbólkurin var hinvegin ikki samdur um eitt felags tilmæli um at seta ein ávísan av umsøkjarunum. Umboðini fyri Landsverkfrøðingsstovnin vístu á tann eina sum best skikkaða umsøkjaran og mæltu til, at hann varð settur, meðan umboðini fyri Vinnumálastýrið vístu bæði á tveir aðrar sum betri egnaðar, sí „Tilmæli til Landsstýrismannin í s.v. setan av stjóra til Landsverkfrøðingsstovnin".
>
> Setanarbólkurin mælti til, at landsstýrismaðurin við støði í tí samlaða tilmælinum setti nýggjan stjóra fyri Landsverkfrøðingsstovnin."
>
> Tann 22. mai 2000 tók landsstýrismaðurin í vinnumálum, Ð, avgerð um at seta R í starv sum stjóra fyri Landsverkfrøðingsstovnin."

Við brævi, dagfest 18. juli 2001 havi eg biðið Løgmansskrivstovuna um at lata mær øll skjøl hennara í málunum um niðurleggingina av starvinum sum landsverkfrøðingur og ætlaðu samanleggingarnar av Landsverkfrøðinginum og Strandfaraskipum Landsins. Eg havi síðani kannað hesi skjølini.

Eftir at hava kannað svarskrivið og skjølini frá Vinnumálastýrinum, havi eg við brævi, dagfest 23. juli 2001 biðið Vinnumálastýrið geva mær eina grundgeving fyri setanini av R heldur enn hinum umsøkjarunum, eina frágreiðing um ætlaðu samanleggingarnar av stovnunum og hví hesar vóru sleptar, og eina frágreiðing um setanirnar av fyribilsstjórunum. Somuleiðis varð biðið um øll skjøl hesum viðvíkjandi.

Við brævi, dagfest 20. aug. 2001 hevur Vinnumálastýrið svarað mær soleiðis:

...

**1. Grundgeving fyri hví R var settur í starvið heldur enn A ella S.** Sum víst á í skrivi Vinnumálastýrisins dagf. 09. juli 2001 var setanarbólkurin samdur um orðingarnar um teir ymsu umsøkjarnir, og at allir fýra, sum høvdu verið til setanarsamrøðu, hvør á sín hátt vóru skikkaðir til starvið, hóast setanarbólkurin ikki kundi semjast um eitt felags tilmæli um at seta ein ávísan av umsøkjarunum.

Hinvegin mælti Setanarbólkurin til, at landsstýrismaðurin við støði í tí samlaða tilmælinum setti nýggjan stjóra fyri Landsverkfrøðingsstovnin, og vístu umboðini fyri Landsverkfrøðingsstovnin á A, meðan umboðini fyri Vinnumálastýrið vístu bæði á S og R.

Tað, sum landsstýrismaðurin serliga legði til grund fyri støðutakan síni at seta starvið sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin, var

- lýsingin eftir stjóra fyri Landsverkfrøðingingsstovnin,
- at stovnurin kom at kenna sín leiklut í almenna bygnaðinum og sambært lógarverkinum sum heild,
- tilmæli setanarbólksins,
- at viðkomandi skuldi vera fúsur at fremja innihaldsligar og bygnaðarligar broytingar av Landsverkfrøðingsstovninum,
- at viðkomandi skuldi vera væl skikkaður mótvegis medarbeiðarunum á stovninum at fáa undirtøku fyri ætlanum landsstýrisins viðvíkjandi broytingunum av stovninum,
- at viðkomandi skuldi vera væl skikkaður í eini broytingartíð at samstarva við Vinnumálastýrið og aðrar myndugleikar.

Landsstýrismaðurin metti, at av umsøkjarunum sum vóru í uppskoti, og sum sambært setanarbólkinum á hvør sín hátt vóru skikkaðir til starvið, var R við sínum hugsanum um, hvussu byggiharrafunktiónin á Landsverkfrøðingsstovninum kundi mennast, og hvussu framtíðar bygnaðurin kundi skipast, best skikkaður at leiða stovnin í eini broytingar tíð.

Landsstýrismaðurin tók síðan avgerð um at seta R í starv sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin.

Nýggja starvið sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin hevur ikki upprunaligu eyðkennini hjá landsverkfrøðinginum, sum hevði ein sjálvstøðugan status beinleiðis undir landsstýrismanninum, men skal stjórin nú vísa til leiðsluna í Vinnumálastýrinum.

Niðurlagda starvið sum landsverkfrøðingur var tænastumannastarv og lønt í 38. lønarflokki, umframt lønina varð veitt ein ikki eftirlønargevandi viðbót í 39. lønarflokki. Nýggja starvið sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin er ikki tænastumannastarv men lønt samsvarandi 38. lønarflokk sambært avtalu millum Føroya Landsstýri og Felag tænastumanna landsins umframt 15% í eftirløn av eftirlønargevandi lønini í 38. lønarflokki.

**2. Frágreiðing um ætlaðu samanleggingarnar av teimum báðum stovnunum, Strandfaraskipum Landsins og Landsverkfrøðinginum, og hví hesar vóru sleptar.**

Frá tí at Ð tók við sum landsstýrismaður í mai 1998 og til avgerð varð tikin um at niðurleggja starvið sum landsverkfrøðingur, vóru fundir millum A, landsverkfrøðingur, og Ð, landsstýrismann, um viðurskiftini hjá A og møguligar broytingar á Landsverkfrøðingsstovninum. M.a. hevði A longu fund við Ð í mai 1998, har A vísti Ð hjálagda skriv dagf. 20. mai 1998, sum tó ongantíð varð sent, sí skjal nr. 1.

Á seinni fundum millum A og Ð hava ymsir møguleikar í samband við umlegging av Landsverkfrøðingsstovninum verið viðgjørdir, so sum at gera partar av Landsverkfrøðingsstovninum til eitt borifelag (entreprenørfelag), herundir møguleikan fyri at A skuldi gerast stjóri fyri hesum felag, sum A tó ikki var áhugaður í, og at Landsverkfrøðingsstovnurin skal vera ein stovnur, sum bert bjóðar arbeiði út, og at Landsverkfrøðingsstovnurin og Strandfaraskip Landsins skuldu leggjast saman.

Um mánaðarskiftið sept./okt. 1998 varð avgjørt at farast skuldi undir at gera uppskot til partafelag at standa fyri tunnilsgerðini undir Vestmannasundi og partafelag, sum skuldi gera sjálvt arbeiðið. Seinni vísti tað seg bert at vera endalig politisk undirtøka fyri at gera partafelag, sum skuldi standa fyri tunnilsgerðini.

Tíðliga í desember 1998 varð farið undir at gera eitt „Uppskot til Rationalisering á samferðsluøkinum“ fyri at fáa eina yvirskipaða

mynd av møguleikanum og møguligum fyrimunum at leggja Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins saman, sí hjálagda arbeiðsskjal, skjal nr. 2 stavandi frá desember 1998. Á vikufundi 17. desember 1998 í Vinnumálastýrinum boðaði Ð frá, at hann nú metti seg hava politiska undirtøku fyri ætlanini, eftir at hann hevði havt málið frammi á trimum landsstýrisfundum.

Í tilgongdini hevði Ð eisini samband við D um ætlanina og hevði ætlanir um, at D skuldi vera stjóri fyri báðar stovnarnar.

Landsstýrismaðurin tók síðan avgerð um, at ein samskipan og møguliga seinni samanlegging av stovnunum best kundi fremjast, um sami stjóri var á báðum stovnunum, men at ætlanin annars skuldi fremjast í neyvum samstarvi við starvsfólkið á báðum stovnunum. A fekk á fundi millum hann og landsstýrismannin 18. desember 1998 at vita, at starv hansara fór at vera niðurlagt.

Í skrivi til A dagf. 28.12.98 verður sagt frá, at í samband við bygnaðarbroytingar verður farið undir at samskipa Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins, at felags stjóri verður settur fyri Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins, og við hesum er starvið sum landsverkfrøðingur ikki til longur.

Sama dag, t.v.s. 28.12.98 varð D settur sum fyribilsstjóri fyri bæði Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins. Sagt varð eisini frá í setanarskrivinum at starvið sum landsverkfrøðingur ikki er til longur frá sama degi at rokna. Eisini varð tíðindaskriv sent fjølmiðlunum sama dag um avgerð landsstýrismansins.

Setanin av D sum stjóra elvdi til nógv stríð á Landsverkfrøðingsstovninum og skriving í fjølmiðlunum um stovnin, og hevði hetta við sær, at D metti, at tað var ógjørligt at útinna starvið sum stjóri fyri báðar stovnarnar, sí skjal nr. 3.

Sum støðan var, heitti Vinnumálastýrið á D um at steðga á við leiðsluarbeiðinum á Landsverkfrøðingsstovninum.

Órógvin á stovninum hevði við sær, at starvsfólkið legði arbeiðið niður. Avvarandi fakfeløg komu uppí málið og mettu, at Vinnumálastýrið hevði brotið § 2 í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Málið varð eisini viðgjørt í samgonguni og á fundum millum fakfeløgini og løgmann og varaløgmann.

Fíggjarmálastýrið metti ikki, at Vinnumálastýrið hevði brotið

sáttmálan. Eisini staðfesti løgmaður, at umrøddu stovnar ikki vórðu lagdir saman, men at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevði skapt nakrar fortreytir, sum hann helt hava týdning til tess at fara undir eina bygnaðartillagingartilgongd.

Á fundi 6. januar 1999 við fakfeløgini staðfesti løgmaður

- at landsverkfrøðingsembætið er lagt niður,
- at landsstýrismaðurin í vinnumálum skal kanna møguleikan fyri samskipan av samferðslustovnunum Landsverkfrøðingsstovninum og Strandferðsluni,
- at ongin sáttmáli er brotin,
- at settur verður fyribils stjóri á Landsverkfrøðingsstovninum,
- fyribils setti stjórin verður ikki ein, sum hevur verið partur í fyrireikingunum higartil.

Niðurstøðan á fundinum var

- at stovnarnir hava hvør sín stjóra, tá tilgongdin byrjar,
- konstitueraði stjórin á Landsverkfrøðingsstovninum skal ikki vera ein, sum hevur verið partur í fyrireikingunum higartil,
- finnast skal fram til eina skipan fyri, hvussu leiðsla og starvsfólk kunnu samstarva og fáa kunnleika um tær kanningar og ta bygnaðartillagingartilgongd, sum standa fyri framman.

Seinni hevur Løgmansskrivstovan í uppriti dagf. 21.04.99 staðfest, at niðurleggingin av starvinum sum landsverkfrøðingur fór fram eftir galdandi reglum.

Vinnumálastýrið fór nú undir at gera sær tankar um, hvør kundi setast sum fyribils stjóri á Landsverkfrøðingsstovninum, og tá deildarleiðarnir á stovninum peikaðu á K sum fyribils stjóra, tók landsstýrismaðurin avgerð um at seta K, tók hann av tilboðnum.

Aftaná fund á Landsverkfrøðingsstovninum 12. januar 1999, har til staðar vóru , løgmaður, Ð, landsstýrismaður, E og H, Vinnumálastýrið, K,T, U ,W, X, Y og N, allir frá Landsverkfrøðingsstovninum, varð K konstitueraður sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin.

Í samband við at landsverkfrøðingsembætið er lagt niður varð álagt konstitueraða stjóranum

- at lýsa virksemi hjá stovninum,
- at lýsa stovnin fíggjarliga og bygnaðarliga, við rationaliseringsmøguleikum fyri eyga,
- at lýsa møguligar bygnaðartillagingar á stovninum,
- saman við Vinnumálastýrinum, og øðrum, at lýsa fyrimunir og vansar við eini møguligari samskipan av stovnunum, sum vara av samferðslukervinum,
- og annars virka eftir stevnumiðum sum Vinnumálastýrið ásetur.

Á regluligum fundunum við stjóran varð m.a. tosað um arbeiðssetningarnar hjá konstitueraða stjóranum. Í „Status fyri frágreiðingina um Landsverkfrøðingin, várið 1999" dagf. 12. apríl 1999, sí skjal nr. 4, varð greitt frá, hvørji arbeiða við frágreiðingini, hvat frágreiðingin fór at fevna um, og nær hon væntaðist at verða liðug. Eisini varð sagt frá, at roynt var at fáa hjálp frá Landsbankanum, men at Landsbankin hevði knappa tíð. Vinnumálastýrið bjóðaði sær til at veita skrivarahjálp, bæði fyri at veita ekspertisu og arbeiðsmegi og fyri at fremja samstarv millum Vinnumálastýrið og Landsverkfrøðingsstovnin. Men hetta varð avvíst, sí skjal nr. 5.

Úrslitið av hesum arbeiði vóru tvær bøkur. Onnur bókin var ein lýsing av stovninum við rationaliseringarmøguleikum fyri eyga, sum stjórin saman við medarbeiðarum sínum hevði gjørt. Hina bókina hevði deildarleiðarnir gjørt til løgmann, og var hon eitt tilmæli um, hvussu stovnurin kann virka frameftir sum eitt gott amboð í politiskum hondum.

Arbeiðið, sum var álagt konstitueraða stjóranum, hevði ikki við sær, at arbeiðsfriður fekst á stovninum, og sum fráleið gjørdist alt meira greitt, at neyvan fekst nakað gott burtur úr at samskipa ella samanleggja stovnarnar Strandfaraskip Landsins og Landsverkfrøðingsstovnin. Heldur átti Landsverkfrøðingsstovnurin fyrst at fáast at sampakka og samvirka við almenna bygnaðin.

Tað varð hildin fundur 5. nov 1999 millum løgmann, landsstýrismannin í vinnumálum, stjóran og deildarleiðarnar á Landsverkfrøðingsstovninum og embætisfólk úr Vinnumálastýrinum.

Eftir hendan fundin fall so endaliga avgerðin um at sleppa

ætlanini í hesum umfarinum um at leggja umrøddu stovnar saman, men heldur í fyrstu atløgu at tillaga Landsverkfrøðingsstovnin og fáa hann at samvirka við almenna bygnaðin og at fáa sett nýggjan stjóra fyri stovnin við nýggjum starvsheiti og øðrum setanarviðurskiftum enn hjá fyrrverandi landsverkfrøðinginum.

**3. Frágreiðing um setanina og uppsøgnina av fyribilsstjóranum fyri Landsverkfrøðingsstovnin, D.**

Í skrivi dagf. 28.12.98 til D verður sagt frá at vegna bygnaðarbroytingar, sum fara fram í løtuni, verður farið undir at leggja Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins saman, at starvið sum landsverkfrøðingur er í samband við hesar bygnaðarbroytingar ikki til longur frá 28.12.98 at rokna, og at D er settur fyribilsstjóri bæði fyri Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins frá 28.12.98 at rokna.

Í skrivi dagf. 12.01.99 verður sagt frá, at sambært niðurstøðu í semju millum løgmann og fakfeløgini, umboðandi verkabólkarnar á Landsverkfrøðingsstovninum, er ætlan Vinnumálastýrisins at hava felags stjóra fyri Strandfaraskip Landsins og Landsverkfrøðingsstovnin fyribils steðgað, at D verður loystur úr starvinum sum fyribilssettur stjóri fyri báðar stovnarnar, og at hann fer aftur í starvið sum stjóri fyri Strandfaraskip Landsins.

Viðvíkjandi gongdini annars í hesum sambandi verður víst til „2. Frágreiðing um ætlaðu samanleggingarnar av teimum báðum stovnunum, Strandfaraskip Landsins og Landsverkfrøðinginum, og hví hesar vóru sleptar“.

**4. Frágreiðing um setanina av fyribilsstjóranum K.**

Í skrivi dagf. 12.01.99 til K verður sagt frá, at í samband við at landsverkfrøðingsembætið er lagt niður, verður K konstitueraður sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin við ávísum uppgávum.

Í skrivi dagf. 30.06.2000 til K verður sagt frá, at R tekur við starvinum sum stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin 1. august, og at K tá fer aftur í gamla starv sítt.

Viðvíkjandi gongdini annars í hesum sambandi verður víst til „2. frágreiðing um ætlaðu samanleggingarnar av teimum báðum

stovnunum, Strandfaraskip Landsins og Landsverkfrøðinginum, og hví hesar vóru sleptar.
...“

Viðløgd skrivinum vóru sum nevnt fimm skjøl (nr. 1-5), harav bert nr. 1 og nr. 3 skulu verða endurgivin her. Skjal nr. 1 er eitt skriv frá A til Ð, dagfest 20. mai 1998. A vísti/gav Ð skrivið á fundi teirra millum 22. mai 1998. Skjal nr. 3 er ein frágreiðing frá D, strandferðslustjóra.

Skrivið frá A, dagfest 20. mai 1998, er soljóðandi:

„Undirritaði, sum var settur í starv sum Landsverkfrøðingur hin 13. sept. 1988 – sí hjálagda setanarskriv – hevur sjálvsagt haft eina fatan av, hvat lá í hesum starvinum, eisini langt áðrenn ta tíð, nú árini eru vorðin fleiri og tjúgu á sama arbeiðsplássi.

Hóast stovnurin er farin um tey fimmti árini, finst einki formligt undirskrivað skjal, sum greiðir frá ábyrgd og skyldum, hóast nakrar royndir eru gjørdar. Seinasta í 1990, sum var gjørd eftir áheitan frá táverandi løgmanni og samferðslumálaráðharra, í samstarvi millum undirritaða, tá fyrrverandi landsverkfrøðing C og ábyrgdarfólk annars her á stovninum, og lýsti henda støðuna, sum hon hevði verið fram til tá (sí hjálagt).

Hóast trupul ár eftir hetta á so mangan hátt, tóktist friður valda á tí skipanarliga økinum.

So kom Z til landið og við honum eitt bygnaðaruppskot, sum øll við spenningi og nógvari umtalu hava fylgt við í, í implementeringini av.

Vinnumálastjóri varð eisini settur fyri u.l. 1 1/2 ári síðani og lovaðu vit hvørjum øðrum gott samstarv uttan at koma inn á, hvat hvør í sínum lagi legði í hetta. Hóast ivaleyst góðan vilja í byrjanini tóktist sera trupult at halda fast við tað, ið verið hevði, og gliðu mál og mannagongdir eftirhondini okkum av hondum, og tykist endalig støða at verða tikin nú í vár. Fyrst tá E, vinnumálastjóri, á fundi saman við løgmanni hin 21/1-98 boðar frá, at H er settur sum stjóri á samskiftisdeildini og seinni í apríl mánaða, tá tað hóast fleiri royndir ikki eydnaðist okkum so mikið sum at fáa eina veruliga viðgerð av nøkrum so týdningarmiklum sum eini reglugerð fyri stovnin.

Henda er undirskrivað av løgmanni hin 22. apríl 1998 og verður her eisini viðløgd saman við brævaskifti um somu. Væl vitandi at hesar broytingar ikki kunnu føra til annað enn eina rúgvu av óneyðugum arbeiði, sera truplum samskifti við landsstýrismannin, ið ikki eigur at tosa við tey, sum hava tað dagliga stríði um hendi, kann undirritaði ikki annað enn harmast, um at tað skuldi enda soleiðis, og hevði tað kanska verið eitt hugskot, at tygum mettu um møguleikan fyri at rógva afturá aftur.

Er onki at gera í so máta, kann ikki komast uttan um, at hóast navnið landsverkfrøðingurin sleppur at standa, so er starvið við sínum upprunaligu eyðkennum í veruleikanum burtur.

Frá at hava sjálvstøðugan status beinleiðis undir landsstýrismanninum, skal nú samskiftast gjøgnum bæði stjóra fyri Samskiftisdeildina og aðalstjóra fyri Vinnumálastýrið og kunnu hesir báðir til eina og hvørja tíð gera, sum teir meta rættast, bæði hvat viðvíkur innihaldi og mannagongdum, og var eisini greitt boðað frá hesum á seinasta fundi, vit hildu saman á skrivstovuni her 13. í hesum. Teir mettu, at teir møguliga í hvørjum einstøkum føri fóru at biðja um at fáa tær ymisku uppgávurnar loystar av okkum ella møguliga onkrum øðrum.

§ 29 í tænastumannalógini sigur, hvussu farast skal fram í slíkum førum sum hesum, tá ið størv verða niðurløgd, og heitir undirritaði hervið virðiliga á tygum, um skjótast til ber at lata meg frætta, hvussu hesin leikur verður førdur at enda. Sjálvsagt eri eg altíð tøkur, um tygum ynskja okkurt nærri greitt frá."

Frágreiðingin frá D er soljóðandi:

„Vísandi til fyrispurning í telefon frá Vinnumálastýrinum, tann 14. august 2001, hevur undirritaði fingið henda fyrispurning – hetta í sambandi við samanleggingina av SL og LV í desember 1998:

*„Hvørjar vóru forðingarnar fyri, at tú ikki kundi útinna starvið sum stjóri á samanlagda stovninum – SL og LV?*

Undirritaði varð nakað frammanundan avgerðini, at leggja stovn-

arnar SL og LV saman, kunnaður um ætlanirnar hjá Vinnumálastýrinum at rationalisera innan samferðsluøkið og varð spurdur um mín áhuga at taka við avbjóðingini, at gerast stjóri á einum samanlagdum stovni.

Undirritaði gjørdi sær greitt, at tað fór at verða stór mótstøða frá leiðsluni á LV at leggja hesar stovnar saman. Hetta er grundað á, at LV søguliga sæð, hevur havt sera tætt tilknýtið til politisku skipanina, góðtók ikki at referera til landsstýrið, men beinleiðis til løgtingið og stovnurin er gjøgnum tíðirnar brúktur ella misbrúktur av politikarum til at vinna sær undirtøku frá veljaranum, serliga í lokalu økjunum í Føroyum. Harafturat hevði eg eina fatan av, at leiðslan á LV í nógvar mátar var útbrend og avbyrgdi seg sjálvan frá at lurta eftir ynskjum og krøvum frá umverðini – tí var trupult at gera neyðugar lýsingar av eksistensgrundarlagnum hjá LV í framtíðini sum almennur stovnur.

Tann 28. desember 1998 møtti undirritaði upp á LV til starvsfólkafund saman við landsstýrismanninum, aðalstjóranum og einum deildarstjóra í Vinnumálastýrinum. Eg skuldi m.a. heilsa uppá starvsfólkini og siga nakað um, hvussu eg ætlaði at innleiða í arbeiðinum, eitt nú við at seta meg inn í uppgávurnar, bygnaðin o.a. á LV og eisini, at eg ætlaði at tosa við deildarleiðararnar fyri at fáa skjótt innlit.

Eina løtu frammanundan starvsfólkafundinum møtti eg og umboðini úr Vinnumálastýrinum í fundarhølinum inn til stjóraskrivstovuna á LV og skuldu har hitta partar av leiðsluni hjá LV. Tað eg serliga minnist er, at leiðarin á Havnadeildini, att. X, kom við „longum fetum“ upp gjøgnum trappurnar og úttalaði nakað soleiðis:.....*hvat gera hesir amatørarnir her á stovninum.* Landsstýrismaðurin greiddi síðan frá ørindunum og bað um at fáa fyriskipa fund fyri starvsfólkunum.

Fundurin varð serliga eyðkendur við, at ein av deildarleiðarunum, att. T, deildarleiðari, á ein sera aggresivan og hóttandi máta í heilum breyt landsstýrismannin av, meðan hann greiddi frá ætlanunum. Viðmerkingarnar frá T vóru eftir mínari meting persónligar og ærumeiðandi og áttu at fingi avleiðingar fyri viðkomandi.

Upplýsast kann, at eg fyrireikaði eina samanleggingarætlan,

sum skulu tryggja, at tað varð borið rætt at fakliga og at samanleggingin varð gjørd undir skipaðum viðurskiftum.

Eftir fundin 28. desember gjørdi eg avtalu við umsitingarleiðaran, att. N, um at lata mær lyklarnar til bygningin og stjóraskrivstovuna. Tá ongir lyklar komu rykti eg eftir teimum, men mær varð greitt frá, at skrivstovan hjá fyrrv. stjóranum skuldi ruddast og at hann skuldi koma framvið sjálvur og gera tað. Drúgva tíðin tað tók at avgreiða hetta frá deildarleiðaranum, fataði eg heilt greitt sum eitt tekin um, at samstarvsviljin ikki var til staðar og málið skuldi dragast út til leiðslan á stovninum hevði mobiliserað seg til mótstøðu.

Tá undirritaði ikki fekk lyklar og starvsfólkini niðurløgdu arbeiði at viðgera støðuna, royndi eg umvegis telefonina at fáa fatur á einum av deildarleiðaranum fyri at tryggja kavarudding – viðkomandi var ikki at hitta og ongin ringdi aftur.

Tað eydnaðist deildarleiðarunum á LV og starvsfólkunum, at fáa fakfeløgini og løgmann inn í málið, og at venda tí til ein spurning um mannagongdir, sambært sáttmálanum við Starvsmannafelagið. Síðan verður heitt á meg, um at steðga á við leiðsluarbeiðinum á LV og fáar dagar eftir, verður ætlanin um samanlegging slept. Tað er mín fatan, at málið varð „grumsa til" av deildarleiðarunum á LV, hetta í gjøgnum politiskt lobbyarbeiðið og fjølmiðlarnar.

Vísandi til omanfyri nevndu hendingar og atburð hjá deildarleiðarunum á LV, er mín niðurstøða m.a. tann, at leiðslan á LV royndi við allari orku at sabotera avgerðina hjá landsstýrismanninum og alment at mobilisera øll relevant fólk til hetta endamál. Fataði hetta eisini sum vantandi virðing fyri tí samfelagsskipan, sum LV eisini er ein partur av. Harafturat varð eg sjálvur alment niðurgjørdur í bløðunum sum persónur og fakliga av einum av deildarleiðaranum á LV – umhugsaði at stevna viðkomandi, fyri ærumeiðing.

Vónandi er innihaldið í hesari stuttu frágreiðing nóg mikið til at vísa, hví tað varð ógjørligt at útinna mítt starv sum stjóri á LV."

Skrivini frá Vinnumálastýrinum við skjølum vórðu tann 28. aug.

2001 send A til ummælis. Við skrivi, dagfest 20. sept. kom A við hesum viðmerkingum:

...

Tað er ikki sørt, at tað rørir ein at síggja á prenti, at setanarbólkurin hóast alt metir undirritaða saman við trimum øðrum at verða egnaðan til starvið sum Landsverkfrøðingur.

At landsstýrismaðurin í heila tikið fer inn í málið viðvíkjandi setan av einum stjóra undir Vinnumálastýrinum, kemst helst av teimum serligu umstøðunum hesin varð frásettur undir.

Mær kemur í huga „herðaklappið“ á gáttini úti í Tinganesið, mína seinastu ferð har úti millum jólanna í 1998, við orðunum: „Tú hevur ikki ánilsi av, hvat hetta gongur út uppá“.

Uttan mun til hvat landsstýrismaðurin meinti við hesum setningi, so er tað ikki at finna undir grundgevingunum fyri setaninni. Heldur ikki hjálagda skriv – skjal 1 – frá landsverkfrøðinginum til Vinnumálastýrið dagf. 7. apr. 2000, er við. Hetta varð í síni tíð eisini latið mær, og hevði avgerandi týdning fyri, at eg søkti starvið.

Høvuðsdenturin fyri setaninni verður lagdur á hugsanir um menning av byggiharrafunktiónini hjá landsverkfrøðinginum og framtíðar bygnaðin inni á stovninum.

Tað kann undra ein at so er, tí eg kann einki minnast til at setanarbólkurin „fiskaði“ eftir slíkum hugsanum.

Sum øll vita, er innanhýsis bygnaður nakað, sum broytist alla tíðina: bæði av tíðarráki, tekniskum møguleikum, hvørjar uppgávur skulu loysast og hvussu, og ikki minst av hvørji fólk eru tøk til ymiskar tíðir. Vóni ikki, at hetta hevur nakað at gera við møguleikarnar at sleppa av við óynsktar persónar á stovninum, víst verður til skjal 3 frá Vinnumálastýrinum – skjalið sum so talar best fyri seg, men vert er at leggja til merkis vendingarnar um avleiðingar og stevning. Sum skilst hava nógvir stungið í sekkin, tí har er ikki verandi.

Hjá uttanfyri standandi, stórt sæð óroyndum fólki, at tosa um at menna byggiharrafunktiónina hjá landsverkfrøðinginum, er eftir mínum tykki nakað tað sama sum at læra dómarin at lesa úr lógbókini. Royndirnar hjá stovninum tey seinastu hálvt hundrað

árini siga, at her er ikki ein, men nærum ótaldir møguleikar. Kunsturin er at kenna klaviaturið og merkja stemningin áðrenn trýst verður á tangentin. Tað skurrar í oyrunum, tá tað almenna velur at taka av næstlægsta boði uttan at tosa við lægstbjóðandi. Hetta kundi seinni lata seg gera, hóast talan var um innbodna lisitatión í sambandi við fast samband til Vágarnar.

Undirskjal 1 til omanfyri nevnda skriv frá Vinnumálastýrinum er skrivað av undirritaða. Hetta talar nøkurlunda fyri seg, hóast nógv kundi verið lagt afturat, fyri at undirbyggja, hví orðini fella, sum tey gera. Hetta varð eisini gjørt tveir dagar seinni á fundi við landsstýrismannin, hin 22. mai 1998 – sí hjálagda skjal 2. Eisini verður víst til frásøgn frá telefonsamrøðu við landsstýrismannin dagin eftir, hin 23. mai – sí hjálagda skjal 3. Maðurin hvørki kundi ella vildi lata meg fara, hóast eg metti meg at verða til fortreð. Hendan sakin skuldi verið goymd og gloymd, men so skuldi ikki verða. Undirskjølini til hetta óundirskrivaða, óskrásetta skjal hava tygum vælsagtans eisini fingið frá Vinnumálastýrinum, annars kann eg finna tey fram.

Hví Vinnumálastýrið hálar projektið um Vágatunnilin inn her, skilji eg ikki rættuliga. Rætt er, at eg ikki vísti áhuga fyri stjórasessinum í P/f Bor, hinvegin var áhugin stórur fyri at síggja uppskotini um Vágatunnilin, sum vóru á veg niðan í Tingið, men tað lat seg ikki gera.

Minnist meg rætt, so var fíggjarnevndin samd um at mæla frá at stovna P/f Bor, so tann spurningurin vísti seg at vera hypotetiskur.

Hinvegin hildu vit áfram at viðgera málið um Vágatunnilin, sí frásøgn frá fundum 29.9 og 6.10.1998 – skjal 4. Henda viðgerð steðgaði – av mær tá ókendum grundum – men vit hjá LV settu so hol á uppgávuna nevnd undir pkt. 2 í frásøgnini. Nakað seinni ringdi Ð til mín, og spurdi um eg vildi verða nevndarlimur í P/f Vágatunnlinum saman við øðrum navngivnum persónum, og játtaði eg hesum. Hoyrdi síðan onki aftur til málið.

Undirskjal 2 til skrivið frá Vinnumálastýrinum, sum hvørki ber navn ella dagfesting, byrjar við einum arbeiðssetningi til eina verkætlan um at gera eina heildarætlan fyri samferðsluna í Føroyum. Undirritaði hevur helst luttikið á øllum teim formligu fund-

unum um hesa verkætlan, og havt nógvar viðmerkingar, serstakliga til arbeiðssetningin, eisini á fundum saman við landsstýrismonnunum Ú, Ð og løgmanni Ý, sum umsat samferðslumál eitt skifti.

Tann so positivt umtalaði fundurin, nevndur undir pkt. 3 í Uppriti frá løgmansstjóranum Æ til løgmann, dagf. 22/4-99, j. nr. 211-74/99, var júst um hesa verkætlan, har landsstýrismaðurin Ð var við. Annars løgin kanning, sum bert lýsir málið úr einari ætt og kemur til, at alt fór regluliga fram, hóast lønardeildin í fíggjarmálastýrinum í mai mánaða árið fyri greiddi landsstýrismanninum frá, at soleiðis kundi ein ikki gera.

Sama ger, hendan so positiva uppfatan landsstýrismannsins broytti onki hvørki arbeiðssetning ella arbeiðsgongd. Alt helt fram sum áður, tað tyktist, sum ongin hoyrdi, hvat ið sagt varð. Málið fór sína skeivu gongd út á eitt síðuspor, og endaði við einum aðalorðaskifti í Tinginum í heilar tveir dagar um cost-benefit av samferðsluíløgum og rakstur av somu.

Alt gott at siga um hesar cost-benefit metingar, tær kunnu vera hentar, tá ið metast skal millum samberiligar íløgur, men áttu bert at verið eitt av fleiri undirskjølum til frágreiðing til Tingið at kjakast út frá.

Hvør ið er leiddur á tankar um bygnaðarbroytingar undir hesum arbeiðinum fæst heldur ikki at vita av skjalinum, tí sum longu sagt ber skjalið onki navn, men á teimum formligu fundunum er spurningurin mær vitandi hvørki nevndur ella viðgjørdur. Annars ber skjalið brá av at vera ein byrjan til eina kladdu við óundirbygdum pástandum og feilum.

1. Hvussu kann ein koma til at gjøgnumskygni gerst betri av at leggja 11 játtanir á fíggjarlógini til LV saman við onkrari til SL. At LV-stovnurin leingi hevði havt ynski frammi um at minka um talið av játtanum komst av ynskinum um heldur fleiri leiðslumøguleikar. Gjøgnumskygni hjá løgtingi og landsstýri gerst sjálvsagt betur, jú meira útgreina fíggjarlógin er.
2. LV-stovnurin virkaði øll míni 24 ár har sum ein stovnur. Hinvegin var brúk fyri fakfólki av ymiskum slagi, sum meira og minni fluttu í millum alt eftir hvørjar uppgávurnar vóru. Tað sær so snøgt út á pappírinum – symetriskt – at seta allan LV-stovnin inn í bygnaðin á Strandferðsluni í ein kassa nevnd-

ur: Vegir og Havnir. Á henda hátt bar sjálvsagt til at sleppa av við alla leiðsluna hjá LV. Men til ber eisini at hugsa sær úrslitið við einum stjóra, sum hevur høvdið fult av ferðaætlanum og neyvan dugir at lesa eitt kort, ráðleggja um framtíðar vegakervi saman við einum serfrøðingi í, ja hvørjum. Eingin veit, hvør ið kom at verða leiðari fyri Vegir og Havnir.

Tað ber als ikki til at ein landsstýrismaður tekur so avgerandi stig og enntá hevur havt tað fyri á trimum landsstýrisfundum bara við hesum. Her má finnast meira?

Annars er øll henda skriving meiningsleys, tí vit fáa ongantíð at vita, hví alt endaði, sum tað nú einaferð gjørdi. Í omanfyri nevnda uppriti frá løgmansstjóranum verður sagt: „so vísir fyrisitingarliga gongdin í málinum, at orsøkin heldur hevur verið samstarvstrupulleikar millum Landsverkfrøðingin og Vinnumálastýrið“.

Ja hvør hevur rætt?

E sigur bygnaðarbroytingar.

Æ sigur samstarvstrupulleikar.

Ð sigur:„Tú hevur ikki ánilsi av, hvat hetta gongur út uppá“.

A gitir í sínum lagi, men má bert ásanna, at onki kom á borið til viðgerðar og/ella til støðutakan og at hansara fatan av at liva í einum demokratiskum rættarsamfelag hevur fingið álvarslig høgg.

Til alt, sum er greitt frá um gongdina eftir árslok í 1998, er neyvan rætt av mær at gera nakra viðmerking, har eru/vóru fleiri á stovninum, sum vóru partur í hesi, og tí hava neyvari fatan og vitan um tað, sum fór fram.

Kann álíkavæl ikki lata vera við at leggja til merkis:

1. Ásannað verður at neyvan fæst nakað gott burtur úr at samskipa ella samanleggja stovnarnar Strandfaraskip Landsins og Landsverkfrøðingin. Tað átti Vinnumálastýrið í minsta lagi at gjørt eina roynd at funnið út av, áðrenn avgerð varð tikin út frá – ja hvørjum?
2. Væl vitandi um, at mín góði gamli samstarvsfelagið K fór um tey 67 á heysti í 1999 og tí skuldi frá fyri aldur, settu vit í bestu

semju avloysara hansara longu í 1998. Tí ber tað ikki til hjá Vinnumálastýrinum, hin 30.06.2000, at biðja hann um at fara í gamla starv sítt?

Sum ein ið hevur nýtt stórt sæð alt sítt virkna lív í landsins tænastu, kenni eg tíbetur ikki til annað enn at fólk hava nýtt allan sín førleika og bestu sannføring, áðrenn komið varð fram til niðurstøður við orðum sum: vit duga ikki at fáa tað betur, tað kann ikki verða annarleiðis.

Tí má tað verða mín vón, at søgan um hetta málið er undantakið. Hvar endamálið var ógreitt, heimaarbeiðið ikki vert at seta navn undir og atgerðirnar tilvildarligar.

Minnist eina av mínum fyrstu ferðum út í Tinganes um Landsverkfrøðingur tíðliga í 1989. Fíggjarmálaráðharrin hevði kallað til fundar og segði nakað soleiðis: „Tit kunnu spara 100 mió.“. Orðini vóru søgd, arbeiðið var eftir at gera. Minnist meg rætt so varð nýtslan í 1989 heilt nær við 100 mió. kr lægri enn í 1988. Soleiðis komu tað tíverri at vera fleiri líknandi ferðir út í Tinganes har boðini vóru tey somu: Tit mugu royna at spara so og so nógv. Onkuntíð tyktist háttalagið heldur spent og orðavalið møguliga heldur bersøgi. Men tá ið avgerðin varð tikin, kom ikki uppá tal at kasta bóltin frá sær. Tey fyrstu 6 árini í starvinum sum Landsverkfrøðingur lækkaði umsetningurin úr góðum 500 mió. kr niður í góðar 100 mió. kr og starvsfólkatalið úr 540 niður í gott 200.

Tungar tíðir, men varhugin av, at tað kundi ikki verða annarleiðis gjørdi, at arbeiðið varð gjørt, uttan at nakar, uttan sjálvsagt tey sum tað rakti, merkti nakað stórvegis til tað.

Kann ikki minnast, at nakar royndi at seta falskt vørumerki á tað, sum gerast mátti.

Havi einaferð í sambandi við Vágatunnilin roynt at finna út av, hvat ið verður lagt í orðið rationalisering.

Landsvegakervið er 463 km til longdar herí 14 tunnlar (27km). Raksturin kostar einar 46 mió. kr um árið og verða her koyrdir umleið 140 mió. km hvørt ár. Kostnaðurin er sostatt 100.000 kr/km veg og 33 oyru fyri hvønn koyrdan km.

Fyri Vágatunnilin verður roknað við einum rakstrarkostnaði uppá 7 mió. kr um árið og tá longdin er 7 km gevur hetta 1 mió. kr/km.

Við bummpengum er tað helst áleið at meta ferðsluna tey fyrstu árini til einar 600 bilar um døgnið. Tað vil siga at her verða koyrdir um 1,5 mió. km um árið, og er tá lætt at koma til at hetta gevur ein rakstrarkostnað uppá 4,67 kr fyri hvønn koyrdan km.

Á henda hátt verður eitt alment „vesin" skift út við eitt annað av sama slagi og vit fáa møguliga fleiri, munurin er bara at hetta kostar 10 ferðir so nógv.

Grundgevingarnar kunnu verða so mangar, men at kalla tað rationalisering ber illa til.

Kanska bleiv hetta í so langt og fløkjasligt, men tygum eru sjálvsagt altíð vælkomin at venda aftur, um okkurt treingir til neyvari frágreiðing."

Viðlagt skrivinum var m.a. eitt bræv til Vinnumálastýrið frá starvsfólkaleiðaranum á Landsverkfrøðingsstovninum, dagfest 7. apr. 2000. Talan var um eina samtykt á starvsfólkafundi sama dagin:

**„Viðv. setan av stjóra til Landsverkfrøðingin**

Tá ið A í desember 1998 var sagdur úr starvi sum landsverkfrøðingur, var orsøkin politisk, av tí at stovnarnir, Landsverkfrøðingurin og Strandfaraskip landsins, skuldu leggjast saman.

Við lýsingini eftir nýggjum stjóra til Landsverkfrøðingin seinast í mars mánaða, er nevnda grundgevingin fyri uppsøgnini sostatt fallin burtur, og fyri at akkumuleraði førleiki stovnsins á natúrligan hátt kann verða varðveittur undir politiskum tillagingum í framtíðini, vónar starvsfólkið á stovninum, at fyrrverandi landsverkfrøðingur, A – við sínum hegni og 23 ára kunnleika til stovnin og øll aktuell mál – vil søkja lýsta stjórastarvið, ein umsókn sum starvsfólkið við fullum huga vil stuðla.

Tá ið bæði uppsøgn og setan av nýggjum stjóra eru stórhendingar á arbeiðsplássinum, verður í hesum føri víst til avtaluna millum avvarðandi yrkisfelag og politiska myndugleikan í januar 1999, umframt galdandi starvsfólkapolitikk, har avgerandi broytingar verða framdar í samráð við starvsfólkið."

Viðløgd vóru eisini 2 hondskrivaði notat, sum A hevði gjørt ávikavist viðvíkjandi samrøðu/fundi, sum hann hevði havt við Ð tann 22. mai 1998, og frá telefonsamrøðu teirra millum tann 23. mai 1998. Notatini eru soljóðandi:

„Í dag 22. mai 1998 kl ca. 14.00 ringdi eg til Ð landsstýrismann og bað um at koma á tal við hann og møttust vit longu ein tíma seinni kl 15.00 á skrivstovu hansara í Tinganesi.
Eg gav honum hjálagda skriv frá 20. mai fyri at geva honum ein møguleika at seta seg inn í støðuna og møguliga koma til niðurstøðu áðrenn hetta skriv var sent — tí tá vóru helst fleiri hindringar. Eg royndi at siga so tíðuliga sum til ber at sum støðan er vorin nú millum LV og aðalstýri metti eg ikki at nøkur grund var til at hava meg sitandi — helst var eg meira til fortreð enn gagn, so um hann valgdi loysnina við at lata meg fara samb. gr. 29, var eg farin dagin eftir, vildi hann hinvegin royna at fáa nakað annaleiðis og betri burtur úr lat eg verða við at senda umrødda skriv teir fyrstu mánaðarnar, men tíðin var avgjørt ikki í mínum parti.

Vit tosaðu annars væl saman í 1 1/2 tíman mest um organisatión og LV-stovnin sum so. Skiltust við at Ð lovaði at ringja til mín dagin eftir.“

„Ð ringdi aftur í dag 23. mai hann hevði hugsa seg um og spurgt seg fyri í ymiskum umhvørvum:

1. Polittiskt var ikki undirtøka fyri at fáa eitt serstakt aðalstýri fyri (við) Landsverkfrøðingin.
2. Lønardeildin ( Ø ) metti ikki at eg hevði rætt til at skjóta meg undir § 29. Eg helt fyri at tað kom ikki óvart á, men so var mítt besta boð at Føroya Rættur tók støðu. Annars vóru nógv fordømir nú tey seinastu 2 árini.
3. E hevði sagt fyri honum at LV-stovnurin virkaði væl, men var ómøguligur at samskifta við. Eg metti at tað skuldu tveir partar til samskifti — og hevði eg rúgvuvís av skjølum frá Vinnumálastýrinum, sum ikki vístu serstakt hegni í so máta. Ð segði eisini at hann metti aðalstýri sum sítt sekretariat tá tað snúði seg um mál LV-viðvíkjandi og vildi hann gjarna hava

meg at halda fram í starvinum hann vildi lata mær sítt persónliga telefonnummar fyri at tryggja beinleiðis samskifti tá tað var mett neyðugt. Eg lovaði honum at halda fram út á heystið fyri at síggja um tað ber til at finna fram til skilagóðar mannagongdir. Gjørdi aftur vart við at tíðin ikki arbeiddi fyri mær og hetta als ikki átti at skiljast sum accept av verandi háttalagi."

Við teldubrævi, sent 15. okt. 2001 boðaði Vinnumálastýrið mær frá, at stýrið ikki hevði fleiri viðmerkingar, men fór at halda seg til tað áður framførda.

### Mannagongdin viðvíkjandi setanarmálinum

Lýsingin, ið er nevnd í skrivinum, dagfest 9. juli 2001, frá Vinnumálastýrinum, er soljóðandi:

...

**Stjóri fyri Landsverkfrøðingsstovnin**

Søkt verður við hesum eftir stjóra til Landsverkfrøðingsstovnin.

**Starvið**

Stjórin hevur ábyrgdina av at leiða, reka og menna Landsverkfrøðingsstovnin.

Arbeitt hevur verið við at gera tillagingar á Landsverkfrøðingsstovninum. Hetta arbeiðið er ikki liðugt, og ein av høvuðsuppgávunum hjá stjóranum verður tí at tryggja, at arbeitt verður framhaldandi við tí, ið fyribils setti stjórin á Landsverkfrøðingsstovninum hevur sett skjøtil á.

**Førleikakrøv**

Vit vænta okkum av umsøkjarunum, at teir m.a. hava:

- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, eitt nú verkfrøði ella líknandi útbúgving
- Leiðsluroyndir frá almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð samstarvsevnir, umframt mennandi leiðslustíl
- Arbeiðsroyndir innan byggivinnu og ráðgeving er ein fyrimunur

...

**Um stovnin**

Landsverkfrøðingsstovnurin er stovnur undir Vinnumálastýrinum, og hevur m.a. hesi starvsøki: vega- og havnamál, bygningar landsins, umsiting av flogvølli og tyrlupallum og Brunaumsjón Landsins

Á landsverkfrøðingsstovninum starvast tilsamans uml. 200 starvsfólk, harav eru uml. 130 tímalønt“

Sum nevnt í skrivinum, dagfest 9. juli 2001, frá Vinnumálastýrinum varð ein setanarbólkur settur við tveimum umboðum fyri Vinnumálastýrið og tveimum umboðum fyri Landsverkfrøðingsstovnin at viðgera innkomnu umsóknirnar og at koma við einum tilmæli um setan. Í tilmælinum frá setanarbólkinum, sum er dagfest 13. mai 2000 stendur m.a.:

„Eftir at hava gjøgnumgingið tær 7 innkomnu umsóknirnar, avgjørdi ein samdur setanarbólkur at innkalla 4 persónar til samrøðu. Hesir vóru:

1. A
2. R
3. ...
4. S

Avgjørt var at avgreiða allar samrøðurnar fríggjadagin tann 12. mai 2000 á Panorama á Hotel Hafnia, og eftir tí leisti, sum Løgmansskrivstovan vegleiðir um í setanarpolitikki sínum.

Raðfylgjan var tann sama, sum mennirnir eru nevndir í omanfyri.

Bólkurin hevur avgjørt av orða metingarnar av umsøkjarunum soleiðis:

**<u>A</u>:**

A er 51 ára gamal sivilverkfrøðingur og er í sínum núverandi starvi deildarleiðari hjá SEV. Hann hevur sum fyrrverandi landsverkfrøðingur ógvuliga drúgvar royndir at leiða stovnin.

Bólkurin er samdur um, at A reint fakliga er væl skikkaður til starvið. Hann hevur í verki víst, at hann er førur fyri at stýra

stovninum undir ógvuliga skiftandi umstøðum. Við tað at hann hevur verið stjóri har í uml. 10 ár, er tað kanska einamest honum fyri at takka, at stovnurin hevur tann leiklut og tann bygnað, sum hann hevur í dag. Hetta merkir kanska eisini at A ikki er hann, sum tekur stig til størri bygnaðarbroytingar.

**R:**

R er 36 ár. Eisini hann er sivilverkfrøðingur og arbeiðir í løtuni hjá Tórshavnar Havn, har hann m.a. hevur ábyrgdina av byggingini av nýggja havnalagnum hjá kommununi. Hann hevur royndir frá størri almennari fyritøku í Grønlandi, har hann hevði ávirkan á og ábyrgd av fyrisitingarligum arbeiði, og vísti hann undir samrøðuni, at hann hevði gjørt sær nakrar heildarmetingar av, hvussu stovnurin kann mennast og tillagast í framtíðini. Hann hevði áhugaverdar hugsanir um, hvussu byggiharrafunktiónin á LV kundi mennast og somuleiðis, hvussu framtíðar bygnaðurin á stovninum kundi skipast.

Bólkurin er samdur um, at eisini R er væl skikkaður til starvið, hóast limur í bólkinum vísti á unga aldur hansara.

...

**S:**

S er 56 ár. Hann hevur útbúgving sum byggiverkfrøðingur – ein útbúgving sum S hevur supplerað við hópin av leiðslu- og øðrum skeiðum. Hann hevur ógvuliga drúgvar royndir frá t.d. ráðgevandi virki, entreprenør virki, kommunalt virki og almennum stovni (har hann hevur arbeitt frá primo 1998). Hann starvast í løtuni sum tekniskur stjóri í Almanna- og Heilsumálastýrinum.

S hevði greiðar og áhugaverdar hugsanir um virkisøki stovnsins, bygnað og tillagingar. Bólkurin er samdur um, at hann er væl skikkaður til starvið, men at aldurin ikki er honum til fyrimunar.

**Tilmæli**

Setanarbólkurin er samdur um omanfyristandandi orðingar, men ikki um eitt felags tilmæli um ein umsøkjara. Umboðini fyri LV vísa á A sum best skikkaða umsøkjara og mæla til at hann verður

settur, meðan umboðini fyri VMS vísa bæði á S og R, sum betri egnaðar.

Setanarbólkurin mælir landsstýrismanninum til, at hann við støði í omanfyristandandi, setir nýggja stjóran fyri Landsverkfrøðingsstovnin.“

Landsstýrismaðurin tók avgerð um at seta R í starv, og var hetta kunngjørt við soljóðandi tíðindaskrivi, dagfest 22. mai 2000:

...

**Nýggjur stjóri fyri landsverksfrøðingsstovnin**

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Ð, hevur í dag gjørt av at seta R í starv sum stjóra fyri Landsverksfrøðingsstovnin, nú fyribils setti stjórin, K fer frá fyri aldur.

R er 36 ára gamal og útbúgvin sum sivilverkfrøðingur. Hann hevur arbeiðsroyndir úr Føroyum og Grønlandi, bæði viðv. fyrisitingarligum og praktiskum arbeiði, og starvast í løtuni hjá Tórshavnar Havn, har hann stendur fyri útbyggingum og viðlíkahaldi.

R tekur við starvinum tann 1. august í ár.

...

Við brævi, dagfest 6. juni 2000 sendi Vinnumálastýrið A og hinum umsøkjarunum soljóðandi fráboðan:

**Viðv. umsókn um starv sum stjóri fyri Landsverkfrøðingin**

Vísandi til umsókn tygara um starv sum stjóri fyri Landsverkfrøðingin, fer stýrið við hesum at takka fyri áhuga tygara og boða frá, at Vinnumálastýrið hevur sett R í starv sum stjóra.

Vinarliga

Å
skrivari

## Niðurstøða

*Sum nevnt frammanfyri eri eg avskorin frá at viðgera spurningin um uppsøgnina av A ella at gera metingar av hesum partinum av málinum. Tilfarið viðvíkjandi uppsøgnini og um samanlegging av Landsverkfrøðinginum og Strandferðsluni er tí bert tikið við fyri at lýsa spurningin, hví A ikki varð settur í stjórastarvið fyri landsverkfrøðingsstovnin.*

*Tað er soleiðis, at tá almennir myndugleikar skulu seta størv, hava teir skyldu til at seta best kvalifiseraðu umsøkjararnar, og til at meta um hetta eiga teir at nýta øll viðkomandi, saklig og lóglig kriteriir. Tað er eingin grund til at ivast í, at setanarbólkurin hevur gjørt sítt tilmæli eftir bestu sannføring. Bólkurin er samdur um, at bæði A og R eru væl skikkaðir til at verða settir sum stjóri fyri landsverkfrøðingsstovnin. Bólkurin er eisini samdur um, at A í verki hevur víst, at hann er førur fyri at stýra stovninum undir skiftandi umstøðum, og at tað kanska einamest er honum fyri at takka, at stovnurin hevur tann leiklut og tann bygnað, sum hann hevur í dag; men at hetta kanska eisini merkir, at A ikki er hann, sum tekur stig til størri bygnaðarbroytingar. Niðurstøðan hjá setanarbólkinum gjørdist, at tveir limir (umboðini fyri landsverkfrøðingsstovnin) vístu á A sum best kvalifiseraða umsøkjaran, meðan hinir báðir limirnir (umboðini fyri Vinnumálastýrið) vístu á tveir aðrar umsøkjarar sum betri kvalifiseraðar enn A.*

*Sambært skrivi frá Vinnumálastýrinum til umboðsmannin, dagfest 20. august 2001 hevur landsstýrismaðurin í sambandi við tilnevningina av stjóra fyri landsverkfrøðingsstovnin lagt dent á hesi viðurskifti: lýsingina, at stovnurin kom at kenna sín leiklut í almenna bygnaðinum og sambært lógarverkinum sum heild, tilmæli setanarbólksins, at viðkomandi skal vera fúsur at fremja innihaldsligar og bygnaðarligar broytingar av Landsverkfrøðingsstovninum, at viðkomandi skuldi vera væl skikkaður mótvegis medarbeiðarunum á stovninum at fáa undirtøku fyri ætlan landsstýrisins viðvíkjandi broytingum av stovninum, og at viðkomandi skuldi vera væl skikkaður í eini broytingartíð at samstarva við Vinnumálastýrið og aðrar myndugleikar.*

*Her eru sostatt nevnd 6 ymisk punkt, sum landsstýrismaðurin hevur lagt serligan dent á. Av teimum bera tey 4 brá av, at serligur dentur hevur verið lagdur á samstarvsevnini við Vinnumálastýrið hjá einum komandi stjóra fyri stovnin. Tað tilfar, sum er nevnt frammanfyri,*

*tykist at vísa, at samstarvið millum táverandi landsverkfrøðingin, A og Vinnumálastýrið / landsstýrismannin hevði verið so sum so. Tað tykist eisini, sum um A ikki var serliga heitur fyri tí nýggja leiklutinum hjá landsverkfrøðingsstovninum, sum var ein fylgja av nýggju stýrisskipanini, og sum hann hevði skyldu til at laga seg eftir. Tá havdur verður í huga tann leiklutur, sum landsverkfrøðingurin áður hevði havt, m.a. við beinleiðis referati til landsstýrið, er tað menniskjaliga forstáiligt, at A ikki var heitur fyri broytingini. Hinvegin var nýggja stýrisskipanin ein politiskur veruleiki, sum hann eins og aðrir embætismenn máttu geva seg undir. Tað er tó ikki ført nakað prógv fyri, at hann aktivt hevur roynt at leggja nýggju skipanini forðingar í vegin.*

*Sum nevnt hevur ein almennur myndugleiki skyldu til at seta tann best kvalifiseraða umsøkjaran í eitt starv. Í hesari meting inngangа ikki bert fakligir, men eisini menniskjasligir eginleikar sum t.d. evni at samstarva, ikki bert á viðkomandi stovni, men eisini við aðrar myndugleikar og stovnar.*

*Umboðsmaðurin heldur seg ikki til at meta um, hvørt tað hava verið slíkar umstøður millum A og Vinnumálastýrið/landsstýrismannin, sum hava gjørt, at A ikki var rætti maðurin til starvið. Tí havi eg heldur ikki grundarlag fyri at finnast at sjálvari avgerðini um at seta R í starvið heldur enn A. Eg geri tí ikki meira við tann spurningin.*

*Eg skal tó gera nakrar viðmerkingar um mannagongdina viðvíkjandi setanini.*

*Eins og tað at seta ein persón í starv er ein avgerð, soleiðis sum fyrisitingarlógin skilir hetta hugtak, so er tað eisini ein avgerð ikki at seta ein persón í starv.*

*Sambært § 21 í fyrisitingarlógini skal ein avgerð, ið verður fráboðað skrivliga, hava grundgeving uttanso, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti. Sambært § 23, stk. 1, skal avgerðin hava tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Avgerðin skal í tann mun, hon hvílir á eini fyrisitingarligari meting, eisini tilskilað tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningini av metingini. Hon skal sambært § 23, stk. 2 um neyðugt hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum.*

*Tað skal ásannast, at tað serliga í setanarmálum kann vera trupult at grundgeva fyri, hví tann og tann umsøkjarin ikki hevur fingið starv, og eigur at verða víst serligt fyrilit í slíkum førum. Ein óheppi orðað*

*grundgeving kann gerast steinur oman á byrðu. Hinvegin krevur lógin, at ein grundgeving verður givin teimum umsøkjarum, sum fáa skrivliga fráboðan um, at teir ikki hava fingið starvið.*

*Allir teir vrakaðu umsøkjararnir áttu tí at fingið eina grundgeving samsvarandi § 23 í fyrisitingarlógini. Serliga ger hetta seg galdandi viðvíkjandi A, sum hevði virkað á stovninum í 23 ár, harav 10 ár sum leiðari, og sum søkti starvið eftir áheitan frá starvsfólkunum á stovninum. Undir hesum umstøðum hevði Vinnumálastýrið skyldu til at geva honum eina sera gjølliga frágreiðing, og eina neyva grundgeving fyri, at hann ikki skuldi setast í tað starv, sum hann var sagdur úr við teirri grundgeving, at starvið skuldi leggjast niður.*

*A og hinir vrakaðu umsøkjararnir fingu ikki fyrr enn við skrivi, dagfest 6. juni 2000 fráboðan um, at starvið var sett við øðrum umsøkjara, hóast avgerðin um setan av R longu varð kunngjørd við tíðindaskrivi tann 22. mai 2000, ella meira enn 14 dagar seinni. Hetta má í sjálvum sær vera roknað sum brot á góðan fyrisitingarsið.*

*Tað, sum verri er, er at skrivið til vrakaðu umsøkjararnar als onga grundgeving hevur, hóast teir høvdu krav uppá eina slíka, og hvat A viðvíkur eina sera gjølliga grundgeving. Eg haldi hetta vera sera átaluvert.*

*Hóast vantandi grundgeving fyri ein fyrisitingarligari avgerð er eitt álvarsligt brek, sum í ávísum førum kann føra við sær, at avgerðin er ógyldug, so haldi eg ikki, at hetta ger seg galdandi í einum føri sum hesum. Sjálv avgerðin um at seta R í starvið krevur ikki nakra grundgeving mótvegis honum sjálvum. Sum nevnt frammanfyri er ikki grundarlag fyri at halda, at hann ikki var tann besti maðurin til starvið. Avgerðin um at seta hann í starvið kann tí ikki metast at hava verið ógyldug.*

*Burtursæð frá, at eg gevi Vinnumálastýrinum eina álvarsliga átalu fyri vantandi grundgeving í skrivinum til teir umsøkjararnar, sum ikki vórðu settir í starvið, geri eg ikki meira við málið.*

## 28.2. Klaga um, at A í tveimum umførum ikki varð settur í starv – Grundgeving, notatskylda

A klagaði um, at hann ikki varð settur í starv sum lærari við Studentaskúlan og HF-skeiðið í Hoydølum á sumri 2000 og 2001. Sambært lóggávuni er tað landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum, sum setir lærararnar í starv eftir tilmæli frá rektaranum. Burtursæð frá setanarskrivunum, harav 2 vóru undirskrivaði um ársskiftið 2000/2001, var einki í málinum, sum bendi á, at Mentamálastýrið yvirhøvur hevði viðgjørt málið á sumri 2000. Bæði í 2000 og í 2001 hevði stýrið bert havt umsóknirnar frá teimum innstillaðu umsøkjarunum til viðgerðar. Rektarin boðaði ávikavist teimum settu og teimum vrakaðu umsøkjarunum frá avgerðini. Í 2000 hevði rektarin sent vrakaðu umsøkjarunum, herímillum A, eina fráboðan um hetta 2. juni. Samstundis vórðu umsóknirnar aftursendar teimum. Tilmælið um, hvør skuldi setast í starv, er dagfest 28. juni. A kærdi 13. juni til Mentamálastýrið, sum 20. juni 2000 svaraði honum, at setanin var farin fram, sambært galdandi reglum. Í 2001 fingu teir ikki-innstillaðu umsøkjararnir somuleiðis fráboðan frá rektaranum um, at einki starv var til teirra, og umsóknirnar vóru aftursendar teimum. Hetta var gjørt við skrivum, dagfest 1. og 2. juni, meðan tilmælið um setan er dagfest 6. juni 2001.

Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at fýlast á, at teir settu lærararnir vóru tiknir framum A. Harafturímóti gav hann Mentamálastýrinum eina sera álvarsliga átalu fyri handfaringina av setanunum á sumri 2000 og eina álvarsliga átalu fyri handfaringina í 2001. (J.nr. 200100038)

**Klagan**

(A) hevur 3. juli 2001 latið skrivstovu mínari eina klagu, har hann m.a. skrivar soleiðis:

> „Í sambandi við at undirritaði enn einaferð hevur fingið ógrundað avslag upp á umsóknir mínar sum lærari við studentaskúlar í Føroyum, skal eg koma við niðan fyri frágreiðing frá framferðini frá fyrstu umsókn.
>
> Hon kann tykjast persónlig, men eftir sum viðgerðin jú ikki

> hevur verið saklig og enn minni faklig, eri eg sjálvandi merktur av at vera viðgjørdur persónligt og ikki fakligt, sakligt við teir stovnar, eg havi søkt.“
>
> ...

Klagan var sera víðtøkin og fevndi um, at klagarin í sambandi við starvssetanir á ymsum miðnámsskúlum frá fyrru helvt av nítiárunum og fram til dagin í dag hevur søkt hesi størv til fánýtis. Eftir eitt ávíst samskifti við (A) er greiða fingin á, at tey viðurskiftini í klaguni, sum umboðsmaðurin kann taka støðu til, snúgva seg um starvssetanirnar á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Hoydølum á sumri 2000 og 2001. Hinir partarnir av klaguni snúgva seg um viðurskifti, sum liggja frammanundan 1. januar 2000, og eru tí sambært § 18, stk. 2 í umboðsmanslógini avvístir við skrivi umboðsmansins, dagfest 4. juli 2001.

Í einum teldubrævi, sent umboðsmanninum 3. sept. 2001 hevur (A) útgreinað klaguna soleiðis:

> ...
>
> „Eg kæri og klagi um
>
> 1. diskriminatión av toppkandidati, generelt (eftir øllum konventiónum)
> 2. noktandi starvssetan uttan grundgeving
> 3. noktandi viðgerð av umsóknum eftir sakligum og fakligum kriterium.
> 4. at rektarin argumenterar og grundgevur kombinatoriskt og ikki kvalifikatoriskt.
>
> Umsóknir mínar verða als ikki viðgjørdar, men lagdar niður til vinstru.
>
> Eg eri ‘persona non grata’ –“
>
> ...

**Gongdin í málinum**

Sambært skjølunum, sum umboðsmaðurin hevur fingið frá pørtunum, hevur gongdin í málinum verið hendan:

**Setanin á sumri 2000:**
Á vári 2000 var soljóðandi lýsing at finna í bløðunum:

„Frá 1. aug. 2000 eru 4-6 størv leys sum ársvikarar í hesum lærugreinum:
**alisfrøði, donskum, enskum, føroyskum, ítrótti, religión, støddfrøði, søgu og týskum** og 3-5 føst størv, treytað av lærugreinasamansetingum, leys at søkja í hesum lærugreinum: **alisfrøði, heimspeki, lívfrøði, religión, sponskum, sálarfrøði**, **støddfrøði, teldufrøði og tónleiki.**

Størvini verða sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðublaði frá YF verður stílað til Undirvísingar- og Mentamálstýrið, Tórshavn, men verður sent rektaranum: ... **Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar, FO-188 Hoyvík.** Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast. Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 1. mai 2000."

Millum umsøkjararnar til starvið var (A). Av tí, at hann einki frætti frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, vendi hann sær til advokat sín. Advokaturin sendi 31. mai 2000 stýrinum soljóðandi skriv:

**„Viðv. umsókníni hjá (A) cand. mag. um starv á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.**
(A) hevur vent sær til skrivstovu okkara í sambandi við nevndu umsókn.

Sum (A) greiður frá, so hevur hann einki svar fingið yvirhøvur, og tí hevur hann heitt á undirritaða um at kanna um málsviðgerðin er farin fram sakliga og samsvarandi ásetingunum í Fyrisitingarlógini.

Sum tykkum kunnugt, so hevur partur í málinum rætt til:
- at verða hoyrdur áðrenn avgerð verður tikin (§§ 18-20),
- at verða kunnaður um veruligar umstøður sum kunnu hava týdning fyri mál hansara (§§ 18-20),
- at fáa eina avgerð í málinum (vanligar fyrisitingarligar grundreglur),

- at fáa eina grundgeving fyri avgerðini (§§ 21-23) og
- at fáa upplýsingar um møguligar kærumøguleikar (§§ 24-25).

Eg fari tí við hesum at heita á stýrið um skjótast til ber og áðrenn 10 dagar, at senda mær eina skrivliga frágreiðing um hvat hent er í málinum.

Somuleiðis krevur (A) sum partur í málinum, samsvarandi § 9 í Fyrisitingarlógini, innlit í øll skjøl, sum hava við nevndu umsókn at gera.

(A) hevur greitt frá, at hann ikki vil gera meira hóvasták burtur úr málinum enn neyðugt, tí tað sum hann ynskir er at verða settur í starv, tí fakligi førleiki hansara er sum kunnugt í lagi. Hinvegin ynskir hann at fáa greiðu á um viðgerðin av málinum er samsvarandi fyrisitingarlógini og almennum fyrisitingarreglum annars og er hon ikki tað, so ætlar hann sær víðari við málinum.“

Við skrivi, dagfest 2. juni 2000 fekk (A) soljóðandi fráboðan frá Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Hoydølum:

**„Viðv.: Umsókn um starv.**

Vísandi til umsókn tína skal eg siga frá, at vit tíverri ikki hava tímar til tín, og at tú tískil ikki kanst fáa arbeiði hjá okkum. Vit takka fyri áhugan tú sýndi við at søkja starv.

Hjálagt umsóknarskjøl tíni.

Skúlans vegna“
...

Við skrivi, dagfest 13. juni 2000 sendi advokaturin vegna (A) eina soljóðandi kæru til Undirvísingar- og Mentamálastýrið:

**„Viðv. umsóknini hjá (A), cand. mag. um starv á Føroya Studentaskúla og HF-Skeiði.**

Í framhaldi av skrivi mínum dagfest 31.05.00 sendi eg hjálagt avrit av skrivi dagfest 02.06.00 frá Føroya Studentaskúla og HF-

Skeiði, har boðað verður frá, at teir ikki hava tímar til (A), og at hann tí ikki fær starv á Føroya Studentaskúlanum og HF-Skeiði.

Hesa avgerð loyvi eg mær sum advokatur fyri (A) at kæra inn fyri Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Eg loyvi mær í hesum sambandi at vísa á:

- At (A) ikki hevur fingið nakað hoyringsskriv, áðrenn avgerð var tikin um umsókn hansara,
- at eingin verulig grundgeving er fyri avgerðini hjá Føroya Studentaskúla og HF-Skeiði.

(A) ger galdandi, at avgerðin tí ikki er í tráð við galdandi fyrisitingarlóg, og tí verður kravt, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið tekur upp hetta mál.

(A) ger vart við, at hann sambært skjølunum sum viðløgd vóru umsókníni hevur fullan førleika at røkja uppgávuna sum lærari á Føroya Studentaskúla og HF-Skeiði og tí verður kravt skjalainnlit samsvarandi fyrisitingarlógini, soleiðis at klientur mín fær allar upplýsingar sum eru í málinum, m.a. hvønn førleika hinir umsøkjararnir hava havt og serliga tann ella teir sum hava fingið tað starv sum (A) søkti.“

Við skrivi, dagfest 20. juni 2000 svarar Undirvísingar- og Mentamálastýrið advokatinum soleiðis:

„**Viðvíkjandi skrivum tygara, dagfest ávikavist 31. mai 2000 og 13. juni 2000, um (A)**

Vísandi til § 10, stk. 4 í Løgtingslóg nr. 106 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. frá 29. juni 1995 og § 16. stk. 4 í løgtingslóg nr 107 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku v.m. frá 29. juni 1995 er tað rektarin, ið leiðir og býtir arbeiðið millum lærarar og starvsfólk á skúlanum, og vísandi til § 13, stk. 1 í Løgtingslóg nr. 106 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. frá 29. juni 1995 við seinni broytingum og § 20, stk. 1 í løgtingslóg nr. 107 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku v.m. frá 29. juni 1995 við seinnu broytingum er tað landsstýrismaðurin, sum setur og loysir úr starvi lærarar, og setan og uppsøgn fer fram eftir tilmæli hjá rektaranum.

Tilmæli rektarans um setan av lærarum í fast starv fer fram sambært § 7, stk. 2 g, har tilskilað verður, at áðrenn avgerð verður tikin um innstilling til størv, skal lærararáðið geva sítt ummæli. Mannagongdin viðvíkjandi setan av lærarum í starv fyri komandi skúlaár er farin fram sambært hesum ásetingunum.

Av øllum 72 umsøkjarum til størv á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði komandi skúlaár, fingu tey, sum ikki vóru innstillað til starv, einsljóðandi skriv, sum tygum hava sent Undirvísingar- og Mentamálastýrinum avrit av.

Avgerð um innstilling til starv verður tikin av rektaranum eftir ummæli lærararáðsins, og Undirvísingar- og Mentamálastýrið er ikki við í hesi tilgongdini. Einasta tilfarið, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur viðvíkjandi umsókn hjá (A) um setan í starv á Føroya Studentaskúla og HF-skeiðið á sumri 2000, er tilfar, ið Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur móttikið 28. mai 2000, og sum er hjálagt í avriti.“

Advokaturin svaraði Undirvísingar- og Mentamálastýrinum aftur við skrivi, dagfest 22. juni 2000:

...

„Tit greiða frá, at sambært lógini er tað landsstýrismaðurin sum setur og loysir úr starvi lærarar, og at hetta verður gjørt eftir tilmæli frá rektaranum.

Í endanum av skrivi tykkara viðmerkja tit, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið viðvíkjandi umsókn frá (A) bert hevur avrit av skrivi hansara móttikið 28.05.00 sum tit leggja við í avriti.

Um tit ikki hava onnur skjøl í máli tykkara enn nevnda skriv, so kann landsstýrismaðurin ikki hava viðgjørt og tikið avgerð í sambandi við umsóknina hjá (A), og longu av hesari orsøk er avgerðin <u>ógildug</u>, tí rætti myndugleiki ikki hevur tikið hesa avgerð.

Skrivið dagfest 02.06.00 frá Føroya Studentaskúla og HF-Skeiði bendir eisini á, at tað er leiðslan á skúlanum sjálv, sum hevur tikið avgerðina um setan í starv, og hetta er sambært frágreiðing tykkara í stríð við galdandi lóggávu.

Ikki tykkum at siga, men ein høvuðsregla í øllum fyrisitingar-rætti er, at rætti myndugleikin tekur avgerð í einum máli, og tí er

longu av hesari orsøk givið, at avgerðin í samband við umsóknina hjá (A) er ógildug.

Harumframt loyvi eg mær at vísa á, at avgerðin ikki er sakliga grundað, tí (A) lúkar sum kunnugt øll faklig krøv í sambandi við slíka starvssetan og við einari sakligari viðgerð av umsóknini er tí givið, at myndugleikarnar ikki kunnu skúgva sær undan at seta tann best skikkaða umsøkjaran í starv.

Eg loyvi mær eisini at vísa til skriv mítt dagfest 31.05.00, har eg vísi á nakrar av teimum grundleggjandi reglunum í fyrisitingarlógini, sum fyri meginpartin ikki eru hildnar í sambandi við viðgerð av hesum máli.

Eg fari tí við hesum at heita á landsstýrismannin um at taka upp hetta mál, soleiðis at hann sum rætti myndugleiki tekur avgerð í málinum og eg skal gera vart við, at ein slík avgerð skal vera grundgivin.

Eg skal longu nú gera vart við, at fyrivarni verður tikið um at seta fram krav um endurgjald um so er, at tað sum væntað verður staðfest, at málsviðgerðin ikki en farin fram samsvarandi galdandi reglum og at avgerðin tí er ógildug."

...

Við skrivi, dagfest 28. juni 2000 sendi rektarin Undirvísingar- og Mentamálastýrinum soljóðandi innstilling viðvíkjandi starvssetanum í Hoydølum á sumri 2000:

**„Viðv.: Størvum skúlaárið 00/01.**

Lýsing var í føroyskum bløðum, og í „Gymnasieskolen", og freistin var úti 1. maj. 73 umsóknir komu inn, men tvey tóku seinni umsóknina aftur. Á fundi varð lærararáðið hoyrt, og fekk á uppvørpu framvíst hjálagda yvirlit, men kortini vóru nøvnini tikin burtur. Eisini varð hjálagda yvirlit yvir tímarestir framlagt. Lærararáðið viðmælti fakkombinatiónum:

Fast starv: Spanskt og Religión/enskt.
Ársvikarur: Søga/sálarfrøði, Danskt/søga, Týkskt/danskt, Enskt/týskt og Lívfrøði.

Seinni er umsóknin Enskt/týskt tikin aftur.
Kvotasettur ársvikarur: Tónleikur, Lívfrøði, Føroyskt, Heimspeki og Teldufrøði.
2-ára sáttmáli: Støddfrøði/Alisfrøði.

Út frá teimum tímarestum sum eru eftir, tá teir føstu lærararnir hava fingið sítt, vil eg mæla til, at hesir liðugt útbúnu umsøkjarar verða settir í starv (við atliti til, at umleið 10 farloyvir eru givin):

| | | |
|---|---|---|
| (L1) | Spanskt | Fult starv |
| (L2) | Religión/enskt | 2-ára sáttmála. |
| (L3) | Søga/sálarfrøði | Fult starv |

Umsóknirnar hjá teimum, og oyðibløð, eru hjálagdar.

Hjálagt yvirlit yvir umsøkjarar og tímarestir."

4. juli 2000 sendi advokaturin vegna (A) skriv til (C), virkandi landsstýrismann í undirvísingarmálum, har m.a. stendur:

...

„Eg fari við hesum at heita á tygum sum landsstýrismann í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum at taka upp nevnda mál samsvarandi tí kæru, sum eg vegna (A) havi latið Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Eg vísi til tær grundgevingar sum eg nevni í skrivi míni, og fyri at taka saman um aftur, so er eingin ivi um, at rætti myndugleiki ikki hevur tikið støðu í sambandi við nevndu umsókn, og heldur ikki eru grundleggjandi ásetingarnar í fyrisitingarlógini hildnar í sambandi við málsviðgerðina. M.a. er ikki víst á nakra grundgeving fyri avgerðini, hóast ásett er í fyrisitingarlógini, at avgerðir hjá fyrisitingini skulu grundgevast.

Tað er sjálvsagt sera álvarsligt, at rætti mynduleiki ikki hevur tikið avgerð í málinum.

Klientur mín ger tí galdandi, at talan er um ógilduga avgerð, og neyðugt er í hesum sambandi at taka fyrivarni um endurgjald.

At enda skal eg vísa á, at klientur mín hevur fullan fakligan

førleika at røkja tað starv sum hann hevur søkt, og tí skuldi tað verið eyðsæð, at hann fekk hetta starv."

Landsstýrismaðurin hevur gjørt hesa hondskrivaðu viðmerkingina á eitt avrit av brævinum, sum lá í málinum:

„10/7-2000.
Henda kæran má viðgerast og svarast sambært fyrisitingarlógini.
Uppskot til svar og ein málsfrágreiðing má latast lstm.
(C)"

Á einum eintaki av sjálvum brævinum, sum er skrásett í Mentamálastýrinum 5. juli 2000, hevur undirvísingarleiðarin gjørt hesa hondskrivaðu viðmerking:

„10/7-
Málið er lagt inn til (F) at svara.
(D)"

15. aug. 2000 sendi advokaturin vegna (A) soljóðandi skriv til (E), landsstýrismann í undirvísingarmálum:

**„Viðv. starvsumsóknini hjá (A), cand.mag.**

Hjálagt sendi eg til tygara kunnleika avrit av skrivi mínum dagfest 04.07.00 til (C), táverandi landsstýrismann í undirvísingar- og mentamálum.

Hvørki (A) ella undirritaði hava frætt aftur, og tá málið hevur skund, fari eg við hesum eftir áheitan frá (A) at heita á tygum um vinaliga at taka upp hetta mál, soleiðis at málið verður avgreitt samsvarandi galdandi lógarásetingum og vanligum fyrisitingarreglum annars."

...

Eftir at hava rykt landsstýrismannin eftir svari við skrivi, dagfest 4. september 2000, sendi advokaturin, tann 21. september 2000 landsstýrismanninum soljóðandi skriv:

„Viðv. starvsumsóknini hjá (A), cand.mag.

Við skrivi dagfest 31.05.00 havi eg samsvarandi fyrisitingarlógini vegna (A) heitt á Stýrið um at geva honum innlit í øll skjøl, sum hava við umsókn hansara at gera.

Eg havi einki frætt aftur frá Stýrinum, hóast ásett er í lógini, at almennir myndugleikar innan 10 dagar frá tí at slík umsókn er komin inn skulu svara áheitanini og eg fari at heita á tygum um vinaliga skjótast til ber at svara nevndu umsókn mínari umframt at gera viðmerkingar til tey brøv, sum eg seinni havi sent tygum.

Eg skilji, at tygum hava tosað við (A), og at hann eisini hevur tosað við embætisfólk sum váttaðu at málið skuldi vera viðgjørt í hesari vikuni, og tí vænti eg at frætta aftur innan vikuskiftið.

Sum (A) óivað hevur greitt tygum frá, so hevur hann avgjørt at stevna um ikki greiða fæst á viðurskiftunum í samband við umsókn hansara, men vónandi fáa vit loyst hetta mál, uttan at neyðugt verður at taka slíkt stig.“

Við skrivi, dagfest 26. sept. 2000 og undirskrivað av landsstýrismanninum og aðalstjóranum, svarar stýrið advokatinum soleiðis:

**„Viðv. starvumsóknini hjá (A), cand. mag.**

Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur sett lærarnar í starv eftir innstilling frá rektaranum. Henda mannagongd er samsvarandi § 20, stk. 1 í LL nr. 107 frá 29. juni 1995 um skeið til hægri fyrireikingarprógvtøku v.m. og § 7, stk. 2, g í kunngerð nr. 46 frá 9. mai 1997 um lærararáð á studentaskúlum og HF-skeiðum.

Grundarlagið undir innstillingini, til omanfyrinevnda starv, framgongur av skrivi rektarans dagfest 28. juni 2000 (avrit er viðlagt).

Undirvísingar- og Mentamálastýrið viðgongur, at (A) skuldi havt fingið svar frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum um, at hann ikki fekk hetta starv, og at rektarin bert skuldi havt boðað frá, at hann ikki var innstillaður til starvið.

Avgerðin um hvør skal setast í starv, er tikin út frá teimum upplýsingum, sum umsøkjarin sjálvur hevur givið og tí hevur ikki verið nakað at leggja fyri (A) sambært § 18 í fyrisitingarlógini.

Viðv. skjalainnliti er at viðmerkja, at sambært § 10, stk. 2 í

fyrisitingarlógini hevur viðkomandi bert rætt til innlit í tey skjøl, ið viðvíkja honum sjálvum. Eingi onnur skjøl eru í málinum uttan tey, sum umsøkjarin sjálvur hevur sent inn í sambandi við umsóknina.

Viðv. kærumøguleika er tað at siga, at setanarmyndugleikin er landstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum, sum samstundis er hægsti fyrisitingarmyndugleiki. Sostatt er ongin møguleiki at kæra hesa avgerð.“

Tann 13. desember 2000 sendi advokaturin, (E), landsstýrismanni, soljóðandi skriv:

**„Viðv. máli nr. 000603/12/SE: Starvsumsóknin hjá (A), cand.mag.**

(A) hevur nú gjørt viðmerkingar til skriv tygara dagfest 26.09.00.

Tygum siga í skrivi tygara at Undirvísingar- og Mentamálastýrið hava sett lærara í starv eftir innstilling frá rektaranum, og tá hetta mál snýr seg um viðurskiftini hjá (A), kann hendan orðing ikki skiljast øðrvísi enn, at tygum greiða frá, at tað er stýrið, sum eisini hevur tikið støðu til, at (A) ikki skal fáa tað starv hann søkti.

Sum advokatur fyri (A) loyvi eg mær við hesum at heita á tygum um vinaliga at geva honum skjalainnlit í øll tey skjøl, sum hava við málsviðgerðina hjá stýrinum at gera, tá tað snýr seg um umsóknina hjá (A).

Eg vænti sostatt at fáa sendandi øll skjøl sum hava við hesa málsviðgerð at gera.

Bæði (A) og undirritaði er fullgreiðir yvir, at (A) bert hevur innlit í tey skjøl, sum hava við hansara umsókn at gera, men tað eru júst tey skjøl, sum klientur mín ynskir innlit í.

Eg skal viðmerkja, at (A) hevur fingið ta fatan, at tað var rektarin sum hevur tikið støðu til umsókn hansara, og tí tykjast tykkara upplýsingar ikki at svara til tað, sum (A) áður hevur fingið upplýst.

Eg vóni at frætta aftur áðrenn 10 daga freistin sum ásett er í fyrisitingarlógini er farin.“

Í einum innanhýsisnotati, dagfest 8. mars 2001, sum (F) hevur gjørt til (D), stendur:

> „**Viðvíkjandi (A1)** (eftirnavnið er við hondskrivt rættað til (A))
> Í málinum, sum eg havi fingið nú og fyrr havi haft til ummælis, liggur einki notat ella skjal, sum sigur mær, hvussu málið viðvíkjandi setan/ikki setan er viðgjørt í UMMS.
>
> Tað einasta, sum fyriliggur viðvíkjandi setan er frágreiðing frá rektaranum og innstilling dagfest 28/6-2000.
>
> Tað framgongur av hesi innstilling, at rektarin gongur út frá, at tað er landsstýrismaðurin, sum er setanarmyndugleikin.
>
> Hvussu er málið avgreitt her frá, nær hava teir settu fingið boð og hvussu?
>
> Spurningurin er, hevur UMMS viðgjørt setanarspurningin og avgreitt hann og hvussu.
>
> Hesar upplýsingar má eg hava, áðrenn eg geri meira við málið. Og soleiðis sum málið nú liggur fyri, má eg hava eina tílíka frágreiðing skrivliga.“

Í einum notati, dagfest 27. juni 2001 frá (D) stendur :

> **„Viðmerkingar til málið um kæru hjá (A) viðvíkjandi setan**
> Í innanhýsis uppriti, sum (F) hevur skrivað, og sum av misgávum verður kallað „Viðvíkjandi (A1)“ verður sagt, at (F) ikki hevur allar upplýsingar í málinum.
>
> Hetta er ikki heilt greitt, tí setan av øllum lærarum á sumri 2000, bæði í fast starv og annað, er farin fram sambært § 7, stk. 2, e og f, í kunngerð nr. 46 frá 9. mai 1997 Kunngerð um lærararáð á studentaskúlum og HF-skeiðum. Við støði í viðgerðini í lærararáðnum er tilmælið hjá rektaranum síðan sent Mentamálastýrinum (táverandi Undirvísingar- og Mentamálastýrinum), ið er endaligur setanarmyndugleiki sambært § 13 í løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 1995 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m.
>
> Tað er ikki soleiðis, og tað hevur aldrin verið soleiðis, at tað er landsstýrismaðurin, sum setur einstaka læraran á studentaskúlunum og HF-skeiðunum.
>
> Øll setan av lærarum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði á

> sumri 2000 er soleiðis farin fram eftir teimum reglunum, sum eru tilskilaðar í føroysku lóggávuni.“

Sambært skrivi stýrisins til umboðsmannin, dagfest 15. okt. 2001 hevur umboðsmaðurin fingið sendandi øll skjølini fram til 8. okt. 2001 viðvíkjandi starvssetanunum í Hoydølum á sumri 2000 og 2001. Av skjølunum í málinum sæst ikki, um nakað síðani er hent hesum viðvíkjandi.

Umboðsmaðurin hevur eisini havt sjálvt málið til láns. Harumframt hevur hann fingið avrit av setanarbrøvunum hjá (L3), (L1), og (L2). Setanarbrævið hjá (L3) er undirskrivað av Undirvísingar- og Mentamálastýrinum tann 16. august og av (L3) tann 20. august 2000. Setanarbrævið hjá (L1) er undirskrivað av stýrinum tann 18. desember 2000 og av (L1) tann 29. januar 2001. Setanarbrævið hjá (L2) er undirskrivað av stýrinum tann 18. desember 2000 og av (L2) tann 4. januar 2001.

**Setanin á sumri 2001:**
Á vári 2001 varð somuleiðs lýst eftir lærarum til skúlan í Hoydølum. Millum umsøkjararnar til hesi størv var eisini (A).

Eins og í 2000, sendi rektarin teimum ikki-innstillaðu umsøkjarunum eina fráboðan um, at einki starv var til teirra. Hetta varð gjørt við skrivum dagfest, 1. og 2. juni 2001. Sambært skrivunum vórðu umsóknarskjølini samstundis aftursend hesum umsøkjarum.

6. juni 2001 sendi rektarin Mentamálastýrinum soljóðandi innstilling í sambandi við starvssetanirnar í Hoydølum á sumri 2001:

> **„<u>Viðv.: Størvum skúlaárið 2001/02.</u>**
> Lýsing var í føroyskum bløðum, og í „Gymnasieskolen“, og freistin var úti 1. mai. 90 umsóknir komu inn. Á fundi 21-05-2001 varð lærararáðið hoyrt, og fekk á uppvørpu framvíst hjálagda yvirlit, men kortini vóru nøvnini tikin burtur. Eisini varð hjálagda yvirlit yvir tímarestir framlagt. Lærararáðið viðmælti hesum fakkombinatiónum:
> Fast starv: danskt/søga, føroyskt, søga/føroyskt, tónleikur, alisfrøði/støddfrøði, støddfrøði/ítróttur, geografi/ítróttur og lívfrøði/ítróttur.

Út frá teimum tímarestum sum eru eftir, tá teir føstu lærararnir hava fingið sítt, vil eg mæla til, at hesir liðugt útbúnu umsøkjarar verða settir í starv:

...

| | | |
|---|---|---|
| (L4) | føroyskt | Fast starv |
| (L5) | søga/føroyskt | Fast starv |

...

Umsóknirnar hjá teimum, og oyðibløð, eru hjálagdar.

Hjálagt yvirlit yvir umsøkjarar og tímarestir.“

Hetta tilmæli er viðgjørt í Mentamálastýrinum, og við skrivum á ávikavist donskum og føroyskum, dagfest 20. juni 2001 sendi stýrið teimum settu umsøkjarunum fráboðan um hetta. Niðanfyri er dømi um eitt av hesum skrivum endurgivið:

„Við hesum váttar Mentamálastýrið, at tú eftir tilmæli frá rektaranum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, er settur sum lektari í ... og ... við Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Setanartreytirnar eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara.

Tú verður biðin um at fylla hjálagda oyðublað út „Umbøn um persónstal“ og senda tað aftur til Mentamálastýrið skjótast gjørligt.

Endaliga setanarbrævið verður sent tær í næstum.“

**Partshoyringin**

Av tí, at tað er landsstýrismaðurin í mentamálum, sum sambært lógini er setanarmyndugleikin, varð klagan send Mentamálastýrinum til ummælis við skrivi, dagfest 29. aug. 2001, har biðið varð um øll skjølini viðvíkjandi málinum um lærarasetanirnar í Hoydølum á sumri 2000.

Tann 29. august 2001 sendi eg klagaranum skriv har m.a. varð ført fram:

...

„Fyri at eg kann taka støðu til, um eg kann viðgera klagu tygara, havi eg biðið Mentamálastýrið um eina frágreiðing í málinum

> eins og øll skjølini. Avrit av skrivinum til Mentamálastýrið er viðlagt hesum brævi.
>
> Støðan er tann, at klaga tygara var latin mær 3. juli 2001, men einki sæst í skjølunum um, nær landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um, hvør skuldi setast í starv við skúlan í Hoydølum. Tilmæli frá rektaranum hesum viðvíkjandi er dagfest 28. juni 2000.“
>
> ...

Klagarin svaraði mær við teldubrævi 3. september 2001, har m.a. varð ført fram:

> „Avrit av skrivi tygara havi eg nú fingið og lisið. Her man vera onkur misskiljing íkomin. Talan í skrivi tygara er bert um umsókn og avvísing á sumri 2000. Men undirritaði hevur søkt starv bæði í 2000 og í 2001 (nú í summar). Tað málið vit, advokatur og eg drógust við, var málið frá sumri 2000. Men tá tað aftur var lýst við tímum í Hoydølum (religión, føroyskt – míni fak) tá søkti eg aftur eftir øllum reglum. Tí nú hevði eg eisini viðmæli frá rektaranum á Læraraskúlanum (sum ikki luttekur í blokaduni) har eg undirvísti heysthálvuna 2000, og hevði viðmæli frá fakkollega, sum undirvísir í tilfari úr míni ritgerð. Advokaturin og eg legði málið kyrt alla hesa tíð og trúðu nú, at nú mátti tað borið til at fingið kjans í Hoydølum. Men svarið frá rektaranum var identiskt við øll hini svørini, eg hevði fingið: noktandi svar uttan grundgeving.“
>
> ...

Við skrivi dagfest sama dagin, 3. sept. varð Mentamálastýrið kunnað um, at klagan eisini snúði seg um starvssetanirnar á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Hoydølum á sumri 2001. Biðið varð tí eisini um øll skjølini viðvíkjandi hesum setanum.

Við skrivi, dagfest 20. sept. 2001 sendi Mentamálstýrið mær hesar viðmerkingarnar:

**„Viðvíkjandi máli um starvssetan hjá (A)**

Vísandi til skriv, dagfest 20. august 2001 og skriv dagfest 5. september 2001, frá Løgtingsins umboðmanni verður við hesum tann mannagongdin lýst, ið sambært lóggávu og mannagongdum verður nýtt, tá ið lærarar verða settir í starv við studentaskúlarnar og HF-skeiðini, og sostatt eisini í sambandi við setan av lærarum í starv á Føroya Studentaskúla og HF-skeið á sumri 2000 og 2001.

Sambært § 10 í løgtingslóg nr. 106 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. frá 29. juni 1995 við seinni broytingum og § 15 í løgtingslóg nr 107 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprótøku v.m. frá 29. juni 1995 við seinni broytingum er rektarin „dagligi leiðari skúlans og hevur ábyrgdina av virksemi skúlans mótvegis landsstýrinum".

Viðvíkjandi setan av lærarum fer hetta fram sambært § 13, stk. 1 í løgtingslóg nr. 106 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. frá 29. juni 1995 við seinni broytingum og § 20, stk. 1 í løgtingslóg nr. 107 Løgtingslóg um skeið, til hægri fyrireikingarprótøku v.m. frá 29. juni 1995 við seinni broytingum. „Landsskúlaráðið setir í starv og loysir úr starvi lærarar. Setan og uppsøgn fer fram eftir tilmæli frá rektaranum".

Viðvíkjandi upptøku av flokkum, tíma- og lærugreinabýti, uppsløgum av størvum og innstilling til størv er hetta tilskilað í § 7, stk. 2, d), e), f og g) í kunngerð nr. 46 Kunngerð um lærararáð á studentaskúlunum og HF-skeiðunum frá 9. mai 1997. Tilskilað verður, at „Áðrenn avgerð verður tikin, skal lærararáðið geva tilmæli í hesum málum:", t.e. d) upptøka av flokkum, e) tíma og lærugreinabýti, f) uppsløg av størvum og g) innstilling til størv.

Hvussu mannagongdin ítøkiliga fer fram í sambandi við lýsing eftir og setan av lærara í starv við studentaskúla/HF-skeið verður lýst niðanfyri:

1. Fyrst í apríl mánaða hevur skúlin yvirlit yvir, hvørjir valbólkarnir verða komandi skúlaár við støði í valinum hjá næmingunum í 1. og 2. studentaskúlaflokki og í 1. HF, umframt at skúlin veit um talið á 1. flokkum við støði í upptøku av nýggjum næmingum.
2. Hesar upplýsingar verða lagdar fyri lærararáðið, har tosað verður um tíma- og lærugreinabýtið millum lærarar í føstum

starvi. Lærararáðið gevur síðan sítt ummæli viðvíkjandi uppslagi av størvum.

3. Skúlin fer síðani at lýsa í bløðunum eftir lærarum í ávísum lærugreinum.
4. Við støði í innkomnum umsóknum – umsóknarfreistin er vanliga úti fyrst í mai mánaða — ger leiðsla skúlans uppskot um setan av lærarum fyri komandi skúlaár, og verður hetta uppskotið lagt fyri lærararáðið, ið skal geva sítt ummæli í málinum.
5. Við støði í ummæli lærararáðsins sendir rektarin sum skjótast teimum læranum, ið ikki eru innstillaðir til starv, bræv um hetta. Hetta orsaka av, at fólk flest søkja fleiri størv, og tí muga tey, sum ikki eru innstillað til starv, sum skjótast hava boð um hetta, so tey ikki siga annað starv frá sær, ið møguliga stendur teimum í boði.
6. Rektarin sendir síðan Mentamálastýrinum bræv um, hvør sum við støði í viðgerðini í lærararáðnum er innstillaður til fast starv á skúlanum.
7. Við støði í brævinum frá rektaranum sendir Mentamálastýrið síðani teimum, sum hava fingið fast starv, fráboðan um hetta, samstundis sum sagt verður frá, at setanarbræv at skriva undir verður sent teimum seinni.
8. Undirvísingarleiðarin fyri studentaskúlarnar og HF-skeiðini skrivar út brøvini við fyribilsfráboðan um setan í fast starv, samstundis sum hann fyrireikar setanarbrøvini.
9. Tá setanarbrøvini endaliga eru skrivað, verða tey send avvarðandi lærarunum í 2 eintøkum, sum bæði eru undirskrivað av aðalstjóranum, við boð um at senda Mentamálastýrinum annað eintakið aftur, undirskrivað.

Omanfyri nevnda mannagongd er nýtt við setan av lærarum í fast starv á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði bæði í 2000 og 2001 eins og í árunum frammanundan, og henda mannagongdin hevur verið nýtt, eisini áðrenn vit fingu føroyska lóggávu á økinum í 1997. Alt er sostatt farið fram sambært lógarásettari mannagongd.

Niðanfyri er listi yvir skjøl, ið eru til í málinum „Lærarastørv – FS/HF – 2000/2001“, skrátal 45101/1-1, máltal 010136, umframt

avrit av øllum skjølunum í málinum, ið viðvíkja (A). Somuleiðis er listi yvir skjøl, ið eru í málinum „Lærarastørv – FS/HF 2001/2002“, skrátal 45101/1-1, máltal 011710, umframt avrit av øllum skjølunum í málinum, ið viðvíkja (A).“

...

Svarskrivið frá Mentamálastýrinum varð sent (A) til ummælis. Við skrivi, móttiknum 8. okt. 2001 hevur (A) gjørt m.a. hesar viðmerkingarnar til skriv Mentamálastýrisins:

**„Viðmerkingar til skriv, dagfest 20. september 2001, frá mentamálastýrinum til Løgtingsins umboðsmann.**

Eg, undirritaði, *(A)*, skal gera vart við, at eg framvegis haldi fast við:

- at umsøknir mínar ikki eru sakliga – og enn minni fakliga – viðgjørdar,
- at tað er rektarin og ikki Landsskúlaráðið (Mentamálastýrið), ið hevur sett lærarar í starv, og harvið avgjørt at eg ikki skuldi hava tað starv, sum eg søkti,
- at eg ikki havi fingið innlit í tey skjøl, sum eg sambært lógini havi rætt at fáa innlit í,
- at eg einki hoyringsskriv havi fingið áðrenn støða er tikin til ikki at seta meg í starv,
- at eg ikki havi fingið nøktandi grundgeving fyri avgerðini um ikki at seta meg í starv,
- at Undirvísingar- og mentamálstýrið ikki rættstundis hava svarað teimum skrivum, sum advokatur mín hevur sent teimum.“

...

**Viðv. spurninginum um hvør avgjørt hevur, hvørjir umsøkjarar skulu setast í starv.**

Sum nevnt í skrivinum frá Mentamálastýrinum, so er ásett í lógini, at tað er *„Landsskúlaráðið“* (í dag Mentamálastýrið), ið setir í starv og loysir úr starvi lærarar.

Sambært somu lóg hevur rektarin bert rætt at *„tilmæla“.*

Vert er at leggja til merkis, at landsstýrismaðurin hevur ikki

delegerað heimildina at seta fólk í starv til rektaran, og helst er heldur ikki heimild fyri slíkari delegatión.

At tað er rektarin – og ikki Mentamálastýrið, sum hevur sett lærarar í starv og harvið eisini avgjørt, at eg ikki skuldi setast í starv, og sæst hetta niðast í skrivinum, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið 20. juni 2000 sendi advokatinum, har viðmerkt verður:

*Avgerð um innstilling til starv verður tikin av rektaranum eftir tilmæli lærararáðsins, og Undirvísingar- og Mentamálastýrið er ikki við í hesi tilgongdini. Einasta tilfarið, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur viðvíkjandi umsókn hjá (A) um setan í starv á Føroya Stundentaskúla og HF-skeiðið á sumri 2000, er tilfar, ið Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur móttikið 28. mai 2000, og sum er hjálagt í avriti."*

Eg skal eisini vísa á, at tað ikki er Undirvísingar- og Mentamálastýrið, ið boðar mær frá, at eg ikki fái tað starv, sum eg havi søkt um, men hinvegin er tað rektarin, sum sendir mær hetta skriv.

Hetta skriv, samanborið við restina av skrivunum í málunum, vísa greitt, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur ikki fingið m.a. umsókn mína, áðrenn ella samstundis sum rektarin boðar frá, hvørjir umsøkjarar eru innstillaðir til leysu størvini.

Skrivið dagfest 28.06.2000 frá rektaranum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiðið nevnir bert, at hjálagt er *„yvirlit yvir umsøkjarar og tímarestir".*

Undirvísingar- og mentamálastýrið sigur eisini, sum nevnt frammanfyri í skrivi sínum til advokatin, at *„einasta tilfarið, sum U&M hevur er tilfarið, ið U&M hevur móttikið 28. mai 2000... „.*

Leggjast má tí til grund, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið:

- ikki hevur havt umsókn og fylgiskjøl míni og,
- stýrið tí ikki kann hava viðgjørt umsókn mína.

Tað er sjálvsagt ein fyritreyt fyri at viðgera eina starvsumsókn, at myndugleikin sum skal taka støðu til umsóknina hevur hesa umsókn og tey fylgiskjøl, sum annars kunnu hava týdning í sambandi við, at avgerðin verður tikin.

Fyri rættartrygdina er tað sera umráðandi, at almenna um-

sitingin, bæði Landsstýrismenn, embætisfólk í aðalstýrunum og rektarar á hægri lærustovnum, fylgja galdandi lóg, og tá rektarin sambært lógini bert hevur heimild at tilmæla, so eigur hann bert at tilmæla, soleiðis at hann letur tann myndugleika, sum skal viðgera og taka avger, nevniliga aðalstýrið ikki bert formliga staðfesta innstillingina, men eisini viðgera og taka støðu til starvssetaninar.

Tað er átaluvert, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið ikki hevur so frægt av virðing fyri galdandi lóg, at teir sjálvir ikki viðgera og taka avgerð í málum, har Løgtingið hevur ásett at teir skulu taka avgerð.

**Viðv. rætti mínum til skjalainnlit**

Advokatur mín hevur m.a. við skrivi dagfest 31.05.2000 heitt á Undirvísingar- og Mentamálastýrið um at veita mær skjalainnlit.

Hóast hetta, so vísir stýrið í skrivi sínum dagfest 26.09.2000 bert til, at:

*„Eingi onnur skjøl eru í málinum uttan tey sum umsøkjarin sjálvur hevur sent inn í sambandi við umsóknina.“*

Við skrivi dagfest 13.12.2000 hevur advokaturin heitt á landsstýrismannin um at veita mær innlit í skjølini, sum hava við málsviðgerðina hjá stýrinum at gera, men nakað veruligt svar er framvegis ikki komið.

Eg haldi meg hava rætt til innlit í øll skjøl, sum hava við málsviðgerðina av umsókn mínari at gera, og tá eg einki skjalainnlit havi fingið, meti eg at stýrið hevur brotið reglurnar í Fyrisitingarlógini og lógini um alment innlit í fyrisitingina.

**Viðv. spurninginum um hoyringsskriv.**

Sambært Fyrisitingarlógini havi eg rætt til at fáa hoyringsskriv áðrenn avgerð møguliga verður tikin um ikki at seta meg í starv.

Slíkt hoyringsskriv havi eg ikki fingið og tí hevur Undirvísingar- og Mentamálastýrið brotið ásetingarnar í lógini.

**Viðv. spurninginum um grundgeving.**
Heldur ikki hevur Undirvisingar- og Mentamálastýrið ella rektarin givið mær nakra veruliga grundgeving fyri avgerðini.

Almennir myndugleikar hava sambært lógini skyldu at geva eina grundgeving, tá avgerð verður tikin, og tí hevur stýrið og rektarin eisini her brotið galdandi lóg.

**Viðv. Vantandi svari frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum**
Sum skjølini vísa, so hevur advokatur mín ferð eftir ferð skrivað stýrinum brøv, men meginparturin av hesum brøvum er ongantíð, og enn tann dag í dag, ikki svaraði.

Eg havi skilt, at tað er ikki í tráð við góðan fyrisitingarsið, at almennir stovnar ikki svara skrivum frá borgarum, og tí meti eg at umboðsmaðurin eigur at taka henda spurning upp eisini.“

Við skrivi, dagfest 25. okt. 2001 bað eg Studentaskúlan og HF-skeiðið í Hoydølum um at lata mær øll skjølini viðvíkjandi lærararsetanunum í Hoydølum á sumri 2000 og 2001. Eisini fekk skúlin høvi til at gera viðmerkingar til málið. Við skrivi, dagfest 16. nov. 2001 hevur skúlin sent mær skjølini, og er annars komin við hesum viðmerkingum:

„Umboðsmaðurin hevur í brævi dagfest 25. oktober 2001, j nr. 200100038/24, biðið um skjøl viðvíkjandi lærarasetanum 2000 og 2001, og viðmerkingar frá skúlanum hesum viðvíkjandi. Tað verður við hesum gjørt.

**Heimildir:**
Rektarin er settur sambært Løgtingslóg um Studentaskúlar, nr. 106, frá 29. juni 1995, § 9 og § 10, og Løgtingslóg um Hægri Fyrireikingarpróvtøku, nr. 107, frá 29. juni 1995, § 15 og § 16.

Lærarar verða settir sambært somu lógir, ávikavist § 13 (broytt við LL nr. 68 frá 20. mai 1996) og § 20 (broytt við LL nr. 69 frá 20. mai 1996). Hesar broytingar vórðu gjørdar, tá Landsskúlaráðið varð avtikið. Henda praksis er fylgd øll árini, at rektarin ger tilmæli um setan, og Landsskúlaráðið/Landsstýrismaðurin setir fólk í starv.

Sambært kunngerð nr. 46 frá 9. mai 1997, § 7, stk. 2 g), skal lærararáðið geva ummæli um innstilling til størv, áðrenn avgerð verður tikin.

**Mannagongd:**
Aftaná at umsóknarfreistin til 1. flokk er úti 15. mars, og verandi næmingar í 1. og 2. flokki pr. 1. mars hava valt vallærugreinir, boðar Mentamálastýrið skúlanum frá, hvussu nógvar 1.-flokkar skúlin sleppur at taka inn komandi skúlaár. Við hesum er samlaða tímanýtslan á skúlanum fastløgd (sí Studentaskúlakunngerðina, nr. 102 frá 17. juli 1996, § 12, og HF- kunngerðina, nr. 103 frá 17. juli 1996, § 20, stk. 2. Kunngerð nr. 102/96 er broytt við kunngerð nr. 102 frá 26. juni 2001, galdandi fyri skúlaárið 2001/2002, men tað hevur ikki relevans fyri hetta mál, ið gongur fyri seg áðrenn hetta).

Við støði í føstu lærarum skúlans ger umsitingin á skúlanum eitt yvirlit yvir, um tímar eru til avlops í teimum einstøku lærugreinunum, og síðani verður ein lýsing eftir lærarum sett í føroysku bløðini og í danska fakblaðið „Gymnasieskolen“.

Tá umsóknarfreistin er úti, gevur lærararáðið eitt ummæli. Á lærararáðsfundi verður eitt rokniarksyvirlit lagt fram, har nøvnini eru tikin burtur (sí skjal nr. 1, 2, 3 og 4). Lærararáðið innstillar síðani, sí frágreiðingar frá Lærararáðsfundi (skjøl. nr. 5 og nr. 6).

Eftir hetta geri eg mína innstilling til Mentamálastýrið. Henda innstilling fylgir vanliga ummælinum frá lærararáðnum, um umsøkjarin t.d. ikki hevur tikið umsóknina aftur, sum onkuntíð er hent (skjal nr. 7 og 8).

Sum oftast søkja umsøkjararnir leys størv á nógvum ymsum skúlum. Fyri at tryggja at innstillaðir umsøkjarar ikki taka við starvi aðrastaðni, skrivi eg teimum vanliga eitt bræv har eg greiði frá, at eg havi innstillað til skúlamynduleikarnar at seta teir í fast starv ella 2-ára sáttmála. Hetta er serliga galdandi fyri teir útlendsku umsøkjararnar.

Teir umsøkjarar, ið ikki verða innstillaðir, fáa bræv, antin á donskum ella føroyskum, um at tað ikki eru tímar til teirra (sí skjøl nr, 9, 10, 11 og 12).“

Av tí, at skjølini í málinum ikki góvu nakað greitt bílæt av, um og nær ein møgulig setan var farin fram í 2000, vórðu Mentamálastýrið og rektarin á skúlanum biðin um at koma á fund við umboðsmannin. Fundurin var hildin 18. des. 2001. Johnhard Klettheyggj, fulltrúi gjørdi hesa frágreiðingina frá fundinum:

„Í sambandi við viðgerðina av klaguni frá (A) mótvegis Mentamálastýrinum (MMS) um, at hann hvørki var settur í starv á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Hoydølum á sumri 2000 ella í 2001, hevði umboðsmaðurin biðið MMS og rektaran fyri skúlan um at koma á fund at greiða nærri frá teimum faktisku viðurskiftunum viðvíkjandi hesum setanum.

Til fundin vóru møtt:

| | |
|---|---|
| -vegna MMS: | (G), (H), (F) og (D) |
| -vegna skúlan: | (B) |
| -vegna umboðsmannin: | Joen H. Andreassen og Johnhard Klettheyggj |

Umboðsmaðurin beyð vælkomin og greiddi frá orsøkini til, at innkallað var til hendan fundin. Greitt varð frá, at tað sambært latnu skjølunum frá MMS ikki sá út til, at nøkur reel setan var farin fram í MMS á sumri 2000. Seinasta skjalið í málinum frá MMS var eitt tilmæli frá rektaranum til MMS um, hvønn hesin mælti til at seta.

(D) greiddi frá viðgerðini av tilmælinum frá rektaranum. Hann vísti eisini á, at avgerð um setan var tikin í MMS, men at hendan var skrásett í persónsmálinum hjá tí einstaka starvssetta.

Umboðsmaðurin vísti á, at tá hann hevði biðið um øll skjølini viðv. setanunum, var tað ikki nøktandi, at hesi fráboðanarskrivini ikki vóru latin honum beinanvegin.

Tosað varð aftur og fram um nýttu mannagongdirnar, har skúlin kemur við einum tilmæli, men longu frammanundan hevur boðað hinum umsøkjarunum frá, at eingir tímar eru til teirra og samstundis sendir teimum umsóknirnar aftur. Somuleiðis varð spurningurin um uppgávubýtið millum skúlan og MMS umrøddur, sæð í mun til lóggávuna um hesar starvssetanir.

Uppá fyrispurning frá undirritaða greiddu bæði (G) og (D) frá, at teir umsøkjararnir, sum ikki vóru innstillaðir til at fáa starv, ikki fingu nakra fráboðan frá MMS um sjálva setanina. Harvið fáa hesir heldur onga grundgeving fyri, hví teir ikki eru settir, men einans eina fráboðan frá skúlanum um, at teir ikki eru „innstillaðir“.

Greitt varð MMS frá, at av tí, at tað er MMS, sum setir lærararnar í starv, so er tað eisini skyldan hjá MMS at grundgeva mótvegis hinum umsøkjarunum, um hví hesir ikki eru settir í starv.

(B) greiddi annars frá mannagongdunum í sambandi við viðgerðina av umsóknunum, eins og fráboðanunum til teir ikki-innstillaðu umsøkjararnar v.m.

Umboðsmaðurin vísti á, at tað var óheppið, at tað ikki var greitt frá hesum í skrivinum frá rektaranum, heldur enn at greitt var frá lóggávuni.

Niðurstøðan frá fundinum var:

- at MMS sum skjótast skal lata umboðsmanninum øll skjølini viðv. viðgerðini av setanarmálunum, tvs. viðgerðini frá tí, at tilmæli um setan er latið MMS. Talan er bæði um viðgerðina í 2000 og 2001.
- at Studentaskúlin sum skjótast skal lata umboðsmanninum eina frágreiðing um gerð av hesum tilmælunum, herundir hvørjar mannagongdirnar eru, eins og hvørjir trupulleikar standast av at fáa ymsu fakkombinatiónirnar at passa saman, t.d. viðv. spurninginum um høvuðsgrein contra hjágrein.“

Við skrivi, dagfest 20. des. 2001 hevur skúlin í Hoydølum latið mær hesa frágreiðingina um innstillingina til starvssetanirnar:

**„Viðvíkjandi: Ískoytisupplýsingum til kæru frá (A).**

Á fundi 18-12-2001 bað Løgtingsins Umboðsmaður um meira útgreinaðar upplýsingar um innstilling til starvssetan. Tað verður hervið gjørt.

Aftaná 15. mars gevur Mentamálastýrið skúlanum boð um, hvussu nógvar nýggjar flokkar vit fáa komandi skúlaár. Samstundis

hava verandi næmingar skúlans, ið skulu halda áfram í 2. og 3. flokki valt vallærugreinar, og innanfyri fíggjarkarmar skúlans verða valhold gjørd. Tá hesir karmar eru fastlagdir, fer umsiting skúlans í gongd við at gera fak- og tímabýti fyri lærararnar í føstum starvi. Av fak- og tímabýtinum sæst, í hvørjum lærugreinum tørvur er á nýggjum lærarum, bæði føstum og vikarum. Grundað á hetta verður uppskot til eina starvslýsing gjørd, har tað stendur hvørjar lærugreinir tað snýr seg um. Fak- og tímabýtið, og uppskotið til starvslýsing verður løgd fyri lærararáðið, ið gevur eitt ummæli sbr. kunngerð nr. 46/1997, § 7 stk. 2. Síðani verður lýsing sett í bløðini, við umsóknarfreist mánaðarskiftið apríl/mai.

Lærarastørv verða sett sambært LL nr. 106/95, § 13, og LL nr. 107/95, § 20. Í stk. 2 verður tilskilað, at fakligi førleikin skal vera frá universiteti, og í stk. 3 verður námsfrøðiligi krøvini umrødd.

Tá starvsumsóknirnar koma inn, verða tær skrásettar kronologiskt í eitt rokniark, har høvuðspunktini verða uppskrivaði. Hetta rokniark hava tit avrit av. Eg lesi allar umsóknir nágreiniliga ígjøgnum, við fylgiskjølum so sum: avrit av prógvum, viðmælir, og skrivligu metingina í námsfrøðiliga skjalinum. Hugt verður fyrst eftir fakkombinatiónunum hjá umsøkjarunum í mun til lýsingina. Í hvørjari setan eru tað altíð onkrar lærugreinir, sum vit fyrst mugu fáa settar, tí so fáar umsóknir eru við teimum lærugreinunum, t.v.s. heilt fáar loysnir. Tá tað er komið uppá pláss, halda vit áfram uppá sama máta, og tá minka loysningsmøguleikarnir so hvørt. Tá eg geri innstillingina til starvssetan, er tað ein avviging av nógvum faktorum. Tí mugu allar lærugreinir síggjast sum ein heild, og endaúrslitið skal vera, at allir flokkar hava ein lærara tá skúlaárið byrjar. Tað er av stórum týdningi at fakkombinatiónin hjá innstillaðu lærarunum kemur at passa saman við lærugreinunum hjá verandi lærarum, so tíma- og fakbýtið gongur upp. Dentur verður annars lagdur á:

- at tey formellu krøvini eru uppfylt,
- dygd í prógvi,
- høvuðsgrein og hjágrein,
- námsfrøðiligur førleiki,
- aldur,

- kyn,
- tal av lærarum í lærugreinunum í mun til samlaða vikutímatalið,
- lærugreinir hjá lærarum í farloyvi,
- at verandi føstu lærarar í mest møguligan mun halda áfram við flokkunum yvir fleiri skúlaár,
- at verandi lærarar í mest møguligan mun hava flokkar á ymiskum floksstigi, og
- at lærarar fáa tað tímatal, teir sambært Yrkisfelagssáttmálanum § 27 skulu hava, treytað av starvsaldri.

Løgtingsins umboðsmaður ynskti á fundinum 18-12-2001 at fáa eina frágreiðing um: „hvørjir trupulleikar standast av at fáa ymiskar fakkombinatiónir at passa saman, t.d. viðv. spurninginum um høvuðsgrein kontra hjágrein.“ Her vil eg sum dømi taka lærugreinina føroyskt fram. Lærugreinin føroyskt er størsta lærugreinin á skúlanum, og er felagslærugrein hjá øllum næmingum. Flestallir lærararnir eru útbúnir frá Fróðskaparsetri Føroya, har teir hava tikið hjágrein í føroyskum, sum hevur verið hægsta støðið. Eftir gomlu studentaskúlaskipanini vóru lærugreinirnar føroyskt og danskt javnsettar, hvat tímatali viðvíkti. Við nýggju studentaskúlaskipanini varð lærugreinin føroyskt upprioriterað, meðan danskt fekk færri tímar, og ongar tímar í 1.s. Øll byrjanarundirvísing í 1.s er løgd til føroyskt. Størri uppgávur sum støðisritgerðin og serritgerðin vórðu eisini lagdar til føroyskt. Hetta setur størri krøv til lærararnar í lærugreinini, og føroysktlærararnir hava ofta ført fram, at teir stundum kundu hugsað sær meira enn hjágrein í føroyskum, tá harðast leikar á. Fróðskaparsetur Føroya er nú farið at bjóða frálæru til høvuðsgrein í føroyskum, ið er ein lestur ið byggir víðari uppá hjágreinina, og teir fyrstu kandidatarnir eru klaktir. Tí er tað so upplagt at royna at fáa tílík fólk við í lærarabólkin.

Alt annað líka verður ein kandidatur við føroyskari bakgrund innstillaður til starv, samstundis sum tað sjálvandi er eitt aðalkrav at tað fakliga støðið er tryggjað. Um fremmandmálsligur lærari verður innstillaður til starv, er tað eftir 2-árasáttmála.

Av tí at kæran er frá ávísum umsøkjara, kann eg sum ískoyti

upplýsa, at eingin annar umsøkjari við lærugreinasetingini religión/føroyskt er innstillaður til starv hesi bæði árini. Fýra av lærarunum í farloyvi 2001/2002 hava føroyskt sum lærugrein, og ein hevur religión.“

Við teldubrævi, sent 9. jan. 2002 hevur (A) gjørt m.a. hesar viðmerkingar til frágreiðing skúlans frá 20. des. 2001:

„Tað noktandi svarið í 2000 og aftur í 2001 frá rektaranum í Hoydølum, (B), er fimta og sætta noktandi svar rektarans til mín. Ella har um- ongin orkar at telja slík noktandi svar uttan grundgeving og enn minni at goyma slík avvísandi skjøl.

Kortini kom hann sjálvur við grundgeving í 94, tá eg sum censor í Hoydølum spurdi, hví eg ikki kundi fáa 12 t í religión, sum tá vóru leysir (+nógvir leysir føroyskt tímar) – svarið var, at hon, ið kom, hevði somu kombinatión, sum tann íð fór. Men at henda bert var stud mag og ikki cand mag. tað segði harra (B) onki um. Sama grundgeving var í telefon á heysti 2000, um hví ein danskari var settur fram um ein føroying til religiónstímarnar í Hoydølum: „Kanst tú kanska undirvísa í enskum?!“

Hetta, sum vit kunnu kalla eina kombinatoriska argumentatión.

...

Tá vit í hesum føri tó ikki kunnu fara aftur um ár 2000, kunnu vit kanna málið frá sumri 2000, har ein dani heilt úr Danmark verður tikin fram um føroying, sum søkir úr útoyggj (har hann er staddur í útlegd í egna heimlandi).

Eftir vanligum ella normalum procedurum skuldi man trúð at hugsað varð sum so: vit hava ein føroyskan religiónshistórikara, ein sum hevur verið hjá okkum bæði sum lærari og sum censor. Og tað er altíð ovmikið av føroyskt tímum. So hava vit loyst tímarnar í religón og føroyskum. Men so er ikki.

Eg kann ikki setast við hasum monnunum við róðrið, tað veit eg og eg kenni svarið, áðrenn umsóknin er send. Alt var til fánýtis.

Metingin av kandidatunum má grundleggjandi vera út frá embætispróvnum frá Universiteti.“

...

Við skrivi, dagfest 14. jan. 2002 hevur Mentamálastýrið sent mær hesa frágreiðing í sambandi við tilfarið, sum varð umbiðið á fundinum 18. des. 2001:

**„Viðvíkjandi kæruni frá (A)**

Í brævi, dagfest 18. desember 2001 og minningarskrivi frá 10. januar 2002, frá Løgtingsins Umboðsmanni til Mentamálastýrið er avrit av frágreiðing frá fundi, tann 18. desember 2001, millum Løgtingsins Umboðsmann og Mentamálastýrið. Sambært niðurstøðuni í fundarfrágreiðingini skal Mentamálastýrið lata Løgtingsins Umboðsmanni „skjølini viðvíkjandi viðgerðini av setanarmálunum, tvs. viðgerðini frá tí, at tilmæli um setan er latið MMS. Talan er bæði um viðgerðina í 2000 og 2001“.

Sum kunnugt hevur Løgtingsins Umboðsmaður longu fingið øll skjøl, sum vóru til taks í málinum „lærarastørv — FS/HF — Hoydalar 2000/2001“ (skrátal 50101/101-1) í sambandi við setan í 2000. Á fundinum sóknaðist Løgtingsins Umboðsmaður tó eftir einum skrivi til tey, ið sett vóru í fast starv í 2000, har sagt varð frá hesum:

> Við hesum verður sagt frá, at tú, sambært tilmæli rektarans, verður settur í starv sum „...“ á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði frá 1. august 2000. Setanarbræv verður sent tær í næstum.“

Á fundinum varð sagt frá, at tílíkt fráboðanarskriv varð sent øllum í 2000, og at hetta skrivið lá í persónsmálinum hjá teimum, sum høvdu fingið starv. Tílík setanarfráboðan verður send teimum umsøkjarum, sum verða sett í starv, eftir at Mentamálastýrið hevur eftirkannað fakligar og námsfrøðiligar fortreytir hjá teimum, sum rektarin hevur innstillað til setan. Eftirkanningin av fortreytunum fer fram á tann hátt, at farið verður ígjøgnum próvskjølini hjá viðkomandi umsøkjara, bæði viðvíkjandi fakligum og námsfrøðiligum førleika. Sambært § 13, stk. 2 í løgtingslóg nr. 106 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. frá 29. juni 1995 er treytin fyri at verða settur í fast starv, at viðkomandi umsøkjari „hevur lokið kandidatprógv ella magistarakonferens á einum universiteti ella universitetssentri“. Um tann fakligi førleikin er í lagi, verður síðani hugt eftir námsfrøðiliga førleikanum. Um

viðkomandi umsøkjari ikki hevur lokið kravdu námsfrøðiligu útbúgvingina, sambært § 13, stk 3 í omanfyri nevndu lóg, verður í setanarbrævinum tilskilað, at tann, ið verður settur í fast starv, „innan 2 ár frá setanardegi tekur verkliga-námsfrøðiliga útbúgvingin sambært reglum hjá Mentamálastýrinum“. Einki skjal er til taks í málinum viðvíkjandi hesari viðgerð. Mentamálastýrið hevur ongantíð gjørt viðmerkingar til førleikan hjá umsøkjarum, sum eru innstillaðir, tá ið førleikin er í lagi.

Á fundinum varð greitt frá, at orsøkin til at skrivið til umsøkjarar á sumri 2000 um, at teir sambært tilmæli rektarans eru settir í starv, ikki var at finna í málinum „Lærarastørv— FS/HF — Hoydalar 2000/2001“ var, at hesi skriv vóru farin í persónsmálið hjá teimum, sum settir vóru. Eftir at hava eftirkannað persónsmálini hjá teimum, sum vóru settir í starv á sumri 2000, má Mentamálastýrið tíverri ásanna, at tílíkt fyribils fráboðanarskriv ongantíð er sent teimum, sum á sumri 2000 fingu starv. Orsøkin til hetta er helst tann, at fulltrúin, sum viðger setanarviðurskifti á Studentaskúlanum og HF-skeiðunum, orskað av, at innstillingarnar til setan í starv á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði ikki vóru Mentamálastýrinum í hendi fyrr enn síðst í juni 2000, og at viðkomandi fulltrúi aftaná hendan dag var upptikin av øðrum virksemi og síðan fór í summarfrítíð, av misgáum ikki hevur sent hesi skriv út. Hetta er at harmast um.

Mannagongdin í Mentamálastýrinum hevur altíð verið, at Mentamálastýrið hevur eftirkannað fakligan og námsfrøðiligan førleika hjá teimum, sum rektorarnir á studentaskúlunum og HF-skeiðunum innstilla til setan í starv, og hjálagt í avriti er fyribils-setanarfráboðan til tey, sum á sumri 1999 vóru innstillað til setan í fast starv sambært tilmæli rektara skúlans. At einki skriv á sumri 2000 av misgáum er sent teimum, sum vóru innstillað til starv, er sera harmiligt.

Løgtingsins Umboðsmaður hevur fyrr fingið avrit av fyribils-fráboðan til umsøkjarar, sum á sumri 2001 vóru settir í starv eftir tilmæli rektarans. Á fundinum 18. desember 2001 varð sagt, at tílíkt fyribils fráboðanarskriv var nøktandi, tí tað vísti á, at viðgerð var farin fram í Mentamálastýrinum.

Niðurstøðan hjá Mentamálastýrinum av fundinum við Løg-

tingsins Umboðsmann er, at innanhýsis viðgerð av tilmæli rektarans um setan í starv á studentaskúlunum og HF-skeiðunum verður lýst í eini skrivligari mannagongd, og verður hetta partur av dygdarmenningini, sum Mentamálastýrið á vári 2002 fer at seta í verk."

Við teldubrævi, sent 5. febr. 2002 vísti (A) á, at tað á sumri 2001 hevði verið lýst eftir lærarum til skúlan í Hoydølum í tveimum umførum. Hann greiddi frá, at hann hevði søkt í báðum førum, men hevði einki svar fingið.

Teldubrævið varð sent Mentamálastýrinum og skúlanum til ummælis. Við skrivi, dagfest 11. febr. 2002 hevur skúlin greitt soleiðis frá:

„Løgtingsins Umboðsmaður hevur í brævi dagfest 05-02-2002, j. nr. 200100038/55 og 56, givið mær høvi at gera viðmerkingar til skriv til mentamálastýrið, og til skriv frá (A).

Skrivið til mentamálastýrið er ein fyrispumingur, um lærarasetanin hevur verið í tveimum umførum summarið 2001. Eg kann vátta, at tað bert var ein samlað innstilling til størv, ið varð gjørd í innstillingarbrævinum, dagfest 06-06-2001.

Orsøkin til at tað vóru tvær lýsingar, er henda: Í fyrru lýsingini varð lýst eftir nøkrum ársvikariatum í ymiskum lærugreinasamansetingum, m.a. føroyskum, og nøkrum føstum størvum í ymiskum lærugreinasamansetingum. Í hesum seinna var føroyskt ikki nevnt. Henda fyrra lýsingin varð send avstað í góðari tíð, tí okkurt av bløðunum, sum vit lýsa í, hevur 14 daga framleiðslufreist. Tá henda lýsingin kom í bløðini, vórðu vit varug við, at tað ikki bar til at seta fólk í fast starv í føroyskum eftir hesari lýsingini. Lærararáðið hevur sum almennan politikk at fáa so nógv fólk sum møguligt sett í fast starv, og við at eftirkanna tímatølini komu vit eftir, at tað í føroyskum var møguleiki at fast starv kundi setast. Lærararáðið mælti tí til, at fólk eisini skuldi kunna setast í fast starv í føroyskum. Seinna lýsingin fór avstað, hesaferð bert í føroysku bløðini."

Við skrivi, dagfest 18. febr. 2002 hevur Mentamálastýrið gjørt hesar viðmerkingar til frammanfyri nevnda teldubræv frá 5. febr. 2002:

> **„Viðvíkjandi máli um starvssetan hjá (A)**
> Vísandi til skriv, dagfest 5. februar 2002, frá Løgtingsins umboðsmanni viðvíkjandi telduposti frá (A) um lærarasetan á Føroya Studentaskúla- og HF-skeiði á sumri 2001 fer Mentamálastýrið við hesum lýsa teir spurningarnar, sum settir eru.
>
> Spurt verður í brævinum, um talan er um eitt ella fleiri setanarumfør á vári 2001 á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði. Mentamálastýrið hevur verið í samband við Føroya Studentaskúla og HF-skeið fyri at kanna málið nærri.
>
> Sambært upplýsingum um telefonina, 6. februar 2002, frá (B), rektara á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, var talan bert um eitt setanarumfar. Orsøkin til at lýst var tvær reisir, og at lýsingin í bløðunum tann 4. og 5. mai 2001 var broytt í mun til lýsingina 10. og 11. apríl 2002 var, at tann 10. og 11. apríl 2001 var í lærugreinini føroyskum lýst eftir ársvikari. Aftaná at lýsingin hevði staðið í bløðunum 10. og 11. apríl 2001, gjørdi lærararáðið við Føroya Studentaskúla og HF-skeið vart við, at lýst átti at verið eftir lærara at seta í fast starv í lærugreinini føroyskum sum høvuðsgrein. Hetta millum annað orsakað av aldurssamansetingini í lærarabólkinum, og at fleiri lærarar vóru í farloyvi. Leiðsla skúlans tók undir við hesum m.a. av námsfrøðiligum orsøkum.
>
> Sum skilst av omanfyri standandi er talan ikki um eitt annað setanarumfar, og øll, sum søktu sambært lýsingini 10. og 11. apríl 2001 og øll, sum søktu sambært lýsingini 4. og 5. mai 2002, vóru viðgjørd á sama lærarafundi, sambært § 7, stk. 2, g. Av hesari orsøk eru skjøl ikki til taks viðvíkjandi einum setanarumfari nr. 2.
>
> Annars ger Mentamálastýrið vart við, at skúlarnir sjálvir lýsa eftir lærarum við støði í ítøkiliga tørvinum, og at Mentamálastýrið sostatt ikki er við í hesi tilgongdini.
>
> Viðvíkjandi pástandinum hjá (A) um, at hann ikki hevur fingið svar upp á umsókn sína, er at siga, at Mentamálastýrið seinnu helvt av juni mánaða skrivar teimum, ið verða sett í fast starv, soljóðandi setanarfráboðanarbræv:
>
> „Við hesum váttar Mentamálastýrið, at tú frá 1. august 2001 er

settur sum lektari í støddfrøði og ítrótti við Føroya Studentaskúli og HF-skeið.

Setanartreytirnar eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara.

Tú verður biðin um at fylla hjálagda oyðublað út „Umbøn um persóntal“og senda tað aftur til Mentamálastýrið skjótast gjørligt.

Endaliga setanarbrævið verður sent tær í næstum.“

Viðvíkjandi fráboðan til lærarar, ið á várið 2001 ikki fingu starv á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, verður víst til áður framsend skjøl frá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði. Sum fyrr greitt frá, eru tað skúlarnir sjálvir, ið boða teimum frá, sum ikki eru innstillað til starv, frá hesum.“

Umboðsmaðurin eftirkannaði alt skjalatilfarið í málinum. Av tí:

- at einki fanst í setanarmálinum, sum vísti, hvørt Mentamálastýrið yvirhøvur hevði viðgjørt tilmæli rektarans frá 28. juni 2000, og harvið framt setanina av lærarunum á sumri 2000,
- at (A) hevði víst á, at tað var rektarin og ikki Mentamálastýrið, sum hevði framt setanina, eins og
- at hann var betri kvalifiseraður enn settu lærararnir,

varð stýrið biðið um at lata umboðsmanninum persónsmálini hjá teimum lærarunum, sum settir vóru á sumri 2000 og 2001 til gjøgnumgongd. Í hesum sambandi var Johnhard Klettheyggj, fulltrúi, eftir avtalu við aðalstjóran, 8. mars í ár á vitjan í Mentamálastýrinum og kannaði hesi málini. Við grundarlagi í hesari kanningini, var soljóðandi skriv, dagfest 11. mars sent Mentamálastýrinum:

**„Viðvíkjandi klaguni frá (A) um vantandi starvssetan í Hoydølum á sumri 2000 og 2001**

Umboðsmaðurin er nú farin undir realitetsviðgerðina av klaguni frá (A). Málið er gjølla lýst, viðvíkjandi setanunum á sumri 2001, men onkur ivamál eru enn viðvíkjandi setanunum á sumri 2000. Umboðsmaðurin fer tí, vísandi til § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini at biðja Mentamálastýrið um **innan 14 dagar** at svara teimum niðanfyri settu spurningunum.

Á fundi millum umboðsmannin og Mentamálastýrið 18. des. 2001 varð víst á, at tað sambært skjølunum ikki bar til at síggja, um stýrið hevði viðgjørt tilmælið frá rektaranum um setan av lærarum í Hoydølum á sumri 2000. (D), undirvísingarleiðari í Mentamálastýrinum greiddi frá, at stýrið hevði sett lærararnar á sumri 2000, og at fráboðanarskrivini til settu lærararnar vóru at finna í teimum einstøku persónsmálunum.

Í skrivi til umboðsmannin, dagfest 14. jan. 2002 boðar stýrið frá, at stýrið tíverri má ásanna, at eingi slík skriv eru send hesum lærarunum, og at einki skjal er til taks, sum vísir, at stýrið hevur eftirkannað fakliga ella námsfrøðiliga førleikan hjá umsøkjarunum. Hinvegin verður einki sagt um, um ella hvussu hetta setanarmálið konkret er viðgjørt í stýrinum.

Í hesum sambandi fari eg at spyrja stýrið:

- Hevur Mentamálastýrið/landsstýrismaðurin yvirhøvur viðgjørt tilmælið frá rektaranum, dagfest 28.06.00, og harvið tikið avgerð um, hvør skuldi setast í leysu størvini ?
- Um stýrið/landsstýrismaðurin hava viðgjørt innstillingina frá 28.06.00, hvussu er hendan viðgerðin so farin fram ?
- Hvør hevur leikluturin hjá stýrinum/landsstýrismanninum annars verið í sambandi við hesar setanirnar á sumri 2000 ?

Johnhard Klettheyggj, fulltrúi var 8. mars í ár í Mentamálastýrinum og hugdi ígjøgnum m.a. persónsmálini hjá teimum trimum lærarunum, sum settir vóru á sumri 2000. Í hesum sambandi varð lagt til merkis, at tað einasta í hesum skjølunum, sum hevur samband við sjálva setanina, er, at lærararnir hava fingið eitt setanarskriv, sum er undirskrivað av aðalstjóranum í Mentamálastýrinum. Tveir av hesum trimum lærarunum hava tó ikki fingið setanarskrivini fyrr enn í des. 2000. Annar teirra, (L1) hevur í teldubrævi, sent 14. sept. 2000 rykt stýrið eftir einum setanarbrævi, og varð hetta sent henni 20. des. 2000.

Eg fari tí at seta stýrinum hesar spurningar:

- Um Mentamálastýrið, sum fráboðað í skrivinum til umboðsmannin, dagf. 14. jan. 2002, ikki hevur boðað settu lærarunum

frá, at teir eru settir í starv í Hoydølum í 2000, hvør hevur so gjørt hetta ?

- Við hvørjari heimild er hendan fráboðan so gjørd ?
- Hvussu eru lønarviðurskiftini hjá (L1) og (L2) avgreidd í tíðarskeiðinium frá aug. til des. 2000, um hesi onga setanarfráboðan hava fingið, og setanarskrivini ikki eru avgreidd fyrr enn í des. 2000.

Í skrivi til (A), dagf. 26. sept. 2000 og undirskrivað av landsstýrismanninum og aðalstjóranum, sigur stýrið, at tað er stýrið, sum hevur sett lærararnar í Hoydølum á sumri 2000 eftir innstilling frá rektaranum, og at hendan avgerðin um setan er tikin út frá upplýsingum, sum umsøkjararnir sjálvir hava givið.

Umsóknirnar vórðu tó sum kunnugt aftursendar teimum ikki-innstillaðu umsøkjarunum við skrivi rektarans, dagfest 2. juni 2000 við einari fráboðan um, at einki starv var til teirra. Tilmælið rektarans um, hvør skuldi setast í hesi størvini, varð sent stýrinum 28. juni 2000. Sambært lýsingini skuldu umsóknirnar stílast til stýrið, men sendast rektaranum.

Eg fari tí at biðja stýrið svara mær hesum spurningi:

- Hvussu kann stýrið/landsstýrismaðurin hava viðgjørt tær umsóknirnar, sum vóru aftursendar umsøkjarunum, innan tilmæli frá rektaranum um setan varð latið stýrinum ?

Avrit av hesum skrivinum er sent (A) og skúlanum/rektaranum til kunningar.“

Við skrivi, dagfest 26. mars í ár hevur Mentamálastýrið svarað umboðsmanninum soleiðis:

„Vísandi til skriv umboðsmansins, dagfest 11. mars 2002, fer Mentamálastýrið við hesum at svara teimum settu spurningunum.

**ad** „Hevur Mentamálastýrið/landsstýrismaðurin yvirhøvur viðgjørt tilmælið frá rektaranum, dagfest 28.06.00, og har við tikið avgerð um, hvør skuldi setast í leysu størvini?“

Til hetta er at svara, at Mentamálastýrið eftirkannar pappírini hjá øllum, sum rektararnir á studentaskúlunum og HF-skeiðunum innstilla til setan í starv, við atliti at um teir innstillaðu lúka fakligu og námsfrøðiligu krøvini sambært § 13, stk. 2-3, í løgtingslóg nr. 106 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. frá 29. juni 1995 og sambært § 20, stk. 2-3, í løgtingslóg nr. 107 Løgtingslóg um skeið til høgri fyrireikingarpróvtøku v.m. frá 29. juni 1995.

**ad** „Um stýrið/landsstýrismaðurin hava viðgjørt innstillingina frá 28.06.00, hvussu er henda viðgerð farin fram?"

Mentamálastýrið hevur í sambandi við innstilling frá rektaranum á sumri 2000 eftirkannað pappírini hjá øllum, sum vóru innstillað. Farið varð ígjøgnum prógvini hjá teimum innstillaðu, og einki var at finnast at. Tá ið einki er at viðmerkja, verður fyribils setanarfráboðan skrivað umsøkjarunum sambært mannagongdini í Mentamálastýrinum. Mannagongdin hesum viðvíkjandi hevur ikki verið niðurskrivað, men sama mannagongdin hevur verið nýtt tey seinastu 10 árini viðvíkjandi fyribils setanarfráboðan eins og endaligari setanarfráboðan. Orsøkin til, at eingin fyribils setanarfráboðan varð skrivað teimum, sum skuldu setast, var, at viðkomandi fulltrúi, sum í Mentamálastýrinum viðger setanarviðurskifti á studentaskúlunum og HF-skeiðunum frá síðst í juni 2000 varð upptikin av evropeisku endakappingini í European Business Game, sum tað árið var í Føroyum, síðan fór viðkomandi í summarfrí og síðan í norðurlendskt embætismannaumbýti. Viðkomandi var ikki til arbeiðis í Mentamálastýrinum aftur fyrr enn síðst í oktober mánaða.

**ad** „Hvør hevur leikluturin hjá stýrinum/landsstýrismanninum annars verið í sambandi við hesar setanirnar á sumri 2000?"

Tað er altíð viðkomandi fulltrúi, sum varðar av einari útbúgving, ið avgreiðir øll mál, sum hevur við viðkomandi útbúgving at gera. Landsstýrismaðurin ella stýrið annars taka ikki lut í einari gjøllari viðgerð av einstøkum umsøkjarum, eftirsum rektararnir innstilla teir umsøkjarar, sum skúlin við støði í einari gjøllari viðgerð hevur gjørt av, at tørvur er á, til setan í starv. Henda viðgerðin er fyrr eitt nú í skrivi frá rektaranum til Løgtingsins

Umboðsmann, dagfest 16. november 2001, og í skrivi frá Mentamálastýrinum, dagfest 14. januar 2002, lýst gjølla.

**ad** „Um Mentamálastýrið, sum fráboðað í skrivinum til umboðsmannin, dagfest 14. jan. 2002, ikki hevur boðað settu lærarunum frá, at teir eru settir í starv í Hoydølum (Eigur helst at standa: á Føroya Studantaskúla og HF-skeiði – viðmerking hjá MMS), hvør hevur so gjørt hetta?"

Ein skúli er ein livandi vera, og rektarin hevur tí eitt neyvt samskifti við teir lærararnar, sum komandi skúlaár verða settir-annaðhvørt í fast starv ella sum ársvikarar/tímalærarar. Rektarin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði hevur tí munnliga boðað teimum frá, sum rektarin innstillaði til Mentamálastýrið um at seta í fast starv, um at hetta var farið fram.

**ad** „Við hvørjari heimild er hendan fráboðan so gjørd?"

Sum kunnugt er rektarin dagligi leiðari av sínum skúla, sambært § 10, stk. 1 í løgtingslóg nr. 106 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. frá 29. juni 1995 og sambært § 16, stk. 1 í løgtingslóg nr. 107 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku v.m. frá 29. juni 1995. Rektarin hevur sum ein náttúrligur partur av hesum munnliga kunnað teir lærarar, sum hann hevur innstillað til fast starv, um hetta.

**ad** „Hvussu eru lønarviðurskiftini hjá (L1) og (L2) avgreidd í tíðarskeiðnum frá aug. til des. 2000, um hesi onga setanarfráboðan hava fingið, og setanarskrivini ikki eru avgreidd fyrr enn í des. 2000."

Á studentaskúlanum og HF-skeiðunum verða lønin roknað út av umsitingarleiðarin við støði í tí tímatalinum, sum viðkomandi lærari hevur, og í YF-sáttmálanum. Løn verður síðan ávíst við støði í hesum. Sjálvt um setanarbræv av og á ikki hevur verið til staðar í sambandi við fyrsta lønarútgjaldið, hevur hetta aldrin elvt til trupulleikar.

**ad** „Hvussu kann stýrið/landsstýrismaðurin hava viðgjørt tær

umsóknirnar, sum vóru aftursendar umsøkjarunum, áðrenn tilmælið frá rektaranum um setan varð latið stýrinum?“

Sum rektarin eisini greiddi frá á fundinum millum Løgtingsins Umboðsmann, Mentamálastýrið og rektaran á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði týsdagin 18. desember 2001, kl. 13.00 á skrivstovuni hjá Løgtingsins Umboðsmanni gera nógv praktisk viðurskifti seg galdandi, sum hugsað verður lítið um, um ein ikki hevur við skúla at gera. Umsøkjaratalið til tey fáu størvini á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði vóru á sumri 2000 nógv, nevniliga 66. Umsøkjarar, sum rektarin ger av ikki at innstilla til setan í fast starv – eftir at tilgongdin hevur verið, soleiðis sum tilskilað er í lóggávuni – hava krav uppá at fáa fráboðan sum skjótast um hetta, soleiðis at teir hava møguleika fyri at taka av møguligum tilboði úr øðrum skúla. Óvanligt er ikki, at umsøkjari sendir umsókn til einar 20 – 30 skúlar. Somuleiðis noyðist rektarin alt fyri eitt at seta seg í samband við teir umsøkjarar, sum hava søkt, fyri munnliga at siga teimum frá, at teir eru innstillaðir til starv. Hetta ger seg serliga galdandi fyri umsøkjarar úr Danmark. At taka avgerð um at fara í starv í Føroyum er ein avgerð, ið er størri enn at fara í starv í grannabýi í Danmark.

Annars er at siga, at Mentamálastýrið viðger ikki allar umsøkjarar til starv á studentaskúlunum og HF-skeiðunum, men bert teir umsøkjarar, sum rektararnir innstillar til starv. Skuldi Mentamálastýrið viðgjørt hvønn umsøkjara við atliti at møguleikum hansara fyri starvssetan, hevði hetta kravt eitt innlit í lokal viðurskifti á skúlunum viðvíkjandi eitt nú flokkum, valbólkum, niðurskurði fyri ymsar funktiónir, og hetta innlitið hevur Mentamálastýrið ikki. Hinvegin er rektarin dagligi leiðari skúlans, og hann hevur ábyrgd av skúlanum mótvegis Mentamálstýrinum. Skoytt kann verða uppí, at eingin rektari hevur verið orsøk til tvørrandi álit frá Mentamálastýrisins síðu.

Sum fyrr sagt frá, er tað harmiligt, at tann mannagongdin, sum annars hevur verið fylgd viðvíkjandi fyribils fráboðan um setan í starv, ikki varð fylgt á sumri 2000, men sum eisini er boðað frá fyrr, verður ein skrivlig mannagongd gjørd í sambandi við dygdarmenning, ið Mentamálastýrið er farið í holt við.“

## *Niðurstøða*

*§ 13, stk. 1, í løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 1995 um studentaskúlar v.m. við seinni broytingum er soljóðandi:*
*„Landsstýrismaðurin setir og loysir úr starvi lærarar. Setan og uppsøgn fer fram eftir tilmæli frá rektaranum.“*

*§ 20, stk. 1, í løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 1995 um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku v.m. við seinni broytingum er soljóðandi:*
*„Landsstýrismaðurin setir í starv og loysir úr starvi lærarar. Setan og uppsøgn fer fram eftir tilmæli frá rektaranum/skeiðleiðaranum.“*

*Heimildin til at seta í og loysa úr starvi lærarar við studentaskúlar og HF-skeið liggur sostatt sambært nevndu lógum hjá landsstýrismanninum í undirvísingarmálum. Hóast tilmæli hjá rektara/skeiðleiðara í slíkum málum sjálvsagt eiga at vera sera tungtvigandi, tó at tey ikki eru bindandi, so vikar hetta ikki við tann veruleika, at heimildin til at seta í og loysa úr starvi hesar lærarar er hjá landsstýrismanninum og ikki hjá viðkomandi rektara ella skeiðleiðara.*

*Viðvíkjandi setanini av lærarum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum í 2000 má tað leggjast til grund, at rektarin eftir, at fakkombinatiónirnar vóru viðgjørdar á lærararáðsfundi tann 8. mai 2000, hevur gjørt av, at 3 av umsøkjarunum áttu at verða settir í leysu størvini. Við skrivi, dagfest 2. juni 2000 boðaði hann hinum umsøkjarunum frá, teirra millum klagaranum, at eingir tímar vóru til teirra, og sendi teimum samstundis umsóknarskjølini aftur.*

*Í skrivinum, dagfest 16. november 2001 hevur rektarin upplýst, at hann vanliga skrivar til innstillaðu umsøkjarunum, og greiðir teimum frá, at teir eru innstillaðir til starvið. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at innstillaðu lærararnir ikki taka við øðrum starvi.*

*Mentamálastýrið hevur í skrivinum frá 20. september 2001 ført fram, at fráboðanin frá rektaranum til ikki-innstillaðu umsøkjararnar m.a. verður gjørd, fyri at hesir ikki skulu siga annað starv frá sær, sum møguliga stendur teimum í boði.*

*Alt gott er at siga um hetta; men skrivið frá 2. juni 2000 er ikki orðað sum ein kunning um, at viðkomandi ikki er innstillaður, men sum ein avgerð um, at viðkomandi ikki hevur fingið starvið. Hetta verður eisini undirstrikað av, at umsóknarskjølini vórðu send teimum aftur, áðrenn myndugleikin, sum hevur heimildina til at seta størvini, hevði sæð tey,*

*og tíansheldur hevði tikið støðu. Um so er, at meiningin bert hevur verið at kunna um innstillingina, sum í sjálvum sær tykist mær skilagott, so haldi eg, at orðingin av nevnda skrivi hevur verið óheppin.*

*Tann 28. juni 2000 ella næstan 4 vikur aftaná fráboðanina til umsøkjararnar sendir rektarin sítt tilmæli um setanir til Mentamálastýrið saman við umsóknarskjølunum hjá teimum innstillaðu lærarunum. Viðlagt er eisini eitt yvirlit yvir allar umsøkjararnar, men eingi umsóknarskjøl frá teimum ikki-innstillaðu umsøkjarunum.*

*Henda mannagongd kann als ikki góðtakast. Sum nevnt er tað landsstýrismaðurin, ið er setanarmyndugleikin. Fyri at tryggja sær, at røttu persónarnir verða settir, má stýrið tí sjálvandi hava allar umsóknirnar og øll relevant skjøl viðvíkjandi øllum umsøkjarunum. Hóast tilmælið frá rektaranum sum nevnt eigur at vera sera tungtvigandi, so er tað sambært nevndu lógum ikki bindandi. Ein kann tí ikki frammanundan útiloka teir umsøkjararnar, sum ikki eru innstillaðir til starv.*

*Umboðsmaðurin heldur seg ikki hava førleika til at meta um tilmælini frá lærararáðsfundinum um fakkombinatiónirnar, ið skuldu nýtast sum grundarlag undir setanum av lærarunum.*

*Sum nevnt eru øll skjølini viðvíkjandi teimum ikki-innstillaðu umsøkjarunum aftursend teimum, og hevur umboðsmaðurin tí ongan møguleika fyri at taka dagar ímillum umsóknirnar. Heldur ikki metir hann seg hava nóg góðan fakligan førleika til at meta um tilmælið frá rektaranum. Umboðsmaðurin hevur tó havt høvi til at gjøgnumganga persónsmappurnar hjá teimum innstillaðu lærarunum, og so vítt hann dugir at meta, er í øllum trimum førum talan um væl skikkaðar umsøkjarar, ið eru innstillaðir á sumri 2000. Eg havi tí ikki grundarlag fyri at siga, at talan ikki er um eitt sakligt tilmæli hjá rektaranum.*

*Eftir at hava fingið tilmælið og tikið støðu eigur Mentamálastýrið at geva teimum settu umsøkjarum eina fráboðan um hetta. Eisini eigur stýrið at boða hinum umsøkjarunum frá avgerðini um ikki at seta teir í starv. Eru hesar seinnu fráboðanirnar skrivligar, skulu tær hava eina grundgeving, ið lýkur treytirnar í § 23 í fyrisitingarlógini, um hví teir ikki fingu starvið. Er fráboðanin munnlig, hava umsøkjararnir rætt til, um teir ynskja tað, eftirfylgjandi at fáa eina skrivliga grundgeving hesum viðvíkjandi, jbr. § 22, stk. 1, í fyrisitingarlógini.*

*Eg havi gjøgnumgingið málið hjá Mentamálastýrinum viðvíkjandi setan av lærarastørvum í Hoydølum í 2000. Í málinum liggur tilmælið*

*frá rektaranum, dagfest 28. juni 2000 og eitt yvirlit yvir umsøkjararnar. Í málinum er tó einki grett um, hvørja lagnu tilmælið hevur fingið í stýrinum. Tað sæst soleiðis ikki, um nøkur viðgerð er farin fram yvirhøvur. Eg skal í hesum viðfangi eisini vísa til innanhýsisnotatið hjá (F) frá 8. mars 2001, sum er endurgivið frammanfyri. Tá (D) í innanhýsisnotati frá 27. juni 2001 ger galdandi, at øll setan av lærarum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði á sumri 2000 er farin fram eftir teimum reglum, sum eru tilskilaðar í føroyskari lóggávu, so er hetta eitt uppáhald, sum ikki á nakran hátt er skjalprógvað í tí tilfari, sum eg havi havt til láns, ella á annan hátt.*

*Skyldan til at gera notat um viðurskifti, sum hava týdning fyri avgerðina í einum máli, sambært § 6 í lógini um alment innlit, stendur bert við, til ein avgerð fyriliggur í málinum. Hóast hetta, so er tað ikki bert góður fyrisitingarsiður, men eisini ein sjálvfylgja, at eitt notat eigur at verða gjørt um so avgerandi spurningar sum tað, at ein avgerð er tikin í einum máli, um avgerðin ikki er fráboðað skrivliga. Eg skal í hesum sambandi vísa til kommenteraðu donsku fyrisitingarlógina v/ John Vogter 3. útg., bls. 255-56, har tað m.a. stendur:*

> „Offentlighedslovens § 6, stk. 1 (er einsljóðandi og tann føroyska – mín viðmerking) må anses som udslag af en almindelig retsgrundsætning om, at offentlige myndigheder har pligt til at gøre notat om alle væsentlige ekspeditioner i en sag – herunder telefonsamtaler, som ikke fremgår af brevvekslingen i sagen eller af sagens øvrige dokumenter. Se f.eks. FOB 1992 side 40 ff. om notatpligt med hensyn til en telefonsamtale, hvorunder parten mente at have fået en bindende afgørelse vedrørende feriepenge. Kerneområdet for den ulovbestemte notatpligt er noteringen af selve afgørelsen for så vidt den meddeles mundtligt.“

*Tá havt verður í huga skrivið hjá advokatinum, dagfest 22. juni 2000, sum er endurgivið frammanfyri, har advokaturin vil vera við, at tað ikki er stýrið, men skúlin sjálvur, sum hevur sett lærararnar, átti stýrið at lagt sær serliga nær at tryggja sær skjalprógv fyri, at tann í lógini fyriskrivaða mannagongdin var fylgd.*

*Mentamálastýrið harmast í skrivum frá 14. januar og 26. mars 2002 um, at fyribils fráboðanarskriv ongantíð eru send teimum, sum vóru settir í starv í 2000. Ført verður fram, at orsøkin til hetta var, at*

*viðkomandi fulltrúi, sum hevði viðgerðina um hendi, var upptikin av øðrum virksemi um hetta mundi. Henda undanførslan kann als ikki góðtakast, tí um so er, at viðkomandi málsviðgeri er burturstaddur í styttri ella longri tíð, hevur stýrisleiðslan skyldu til at syrgja fyri, at onkur annar røkir arbeiði hansara undir fráveruni.*

*Sum nevnt frammanfyri havi eg fingið avrit av setanarbrøvunum hjá teimum 3 innstillaðu lærarunum. Tað eina setanarbrævið er undirskrivað av báðum pørtum í august 2000, meðan hini bæði ikki eru undirskrivaði fyrr enn í desember 2000 / januar 2001. Hesi setanarbrøvini eru tað einasta skrivliga tilfarið, sum ber boð um, at stýrið yvirhøvur hevur sett lærarnar í starv. Tað er tí sera átaluvert, at stýrið í skrivinum, dagfest 26. september 2000 til advokatin førir fram, at stýrið longu tá hevði sett lærararnar í starv uttan at koma við skjalprógvan av nøkrum slagi um hetta.*

*Viðvíkjandi rættindum klagarans til skjalainnlit er at siga, at tað er rætt, sum ført er fram av Mentamálastýrinum í skrivinum, dagfest 26. september 2000, at klagarin sambært § 10, stk. 2, í fyrisitingarlógini bert hevði rætt til innlit í skjøl viðvíkjandi honum sjálvum. Einastu skjølini, sum stýrið hevði, vóru eitt bræv frá klagaranum og yvirlitið yvir umsøkjararnar. Av tí, at eg ikki fati skrivið frá stýrinum til klagaran, dagfest 26. september 2000 sum eina sýtan av innliti í hansara egnu skjøl, havi eg ikki nakað at fýlast á viðvíkjandi støðuni hjá stýrinum til rættin til skjalainnlit.*

*Av tí, at tað ikki fyrilá annað tilfar í málinum viðvíkjandi klagaranum enn tað, sum hann kendi frammanundan, hevði stýrið ikki skyldu til at partshoyra hann, áðrenn avgerð varð tikin. Eg havi tí heldur einki grundarlag fyri at finnast at stýrinum hesum viðvíkjandi. Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at stýrið ikki hevði nakra skyldu til at partshoyra klagaran um, hvørja avgerð tað ætlaði at taka í málinum.*

*Eg haldi heldur ikki, at stýrið kann lastast fyri ikki at hava svarað skrivunum frá advokati klagarans innan eina rímuliga tíð. Hinvegin hava skrivini hjá stýrinum í stóran mun borið brá av undanførslum. Hetta hevur eisini, og kanska í serligan mun, gjørt seg galdandi fyri frágreiðingarnar til umboðsmannin viðvíkjandi spurninginum, um tað veruliga fyrilá nøkur avgerð frá stýrinum á sumri 2000 viðvíkjandi umrøddu lærarasetanunum.*

*Viðvíkjandi lærarasetanunum í 2001 er at siga, at tað eisini her má*

*leggjast til grund, at rektarin við skrivi, dagfest 6. juni 2001, sendir Mentamálastýrinum eitt tilmæli grundað á tilmæli frá lærararráðsfundi. Rektarin hevði tá, við einsljóðandi skrivum sum í 2000, dagfest 1. og 2. juni 2001 boðað teimum ikki-instillaðu umsøkjarunum frá, at einki starv var til teirra. Samstundis sendi hann teimum umsóknarskjølini aftur. Stýrið hevur síðani, sum tað sæst av tilnevningarskrivunum, dagfest 20. juni 2001 til 6 umsøkjarar, viðgjørt hesar 6 umsóknirnar og valt at fylgja tilmælinum frá rektaranum. Stýrið hevur sostatt, hvat setanunum á sumri 2001 viðvíkur, tikið avgerð um at seta tilmæltu umsøkjararnar í starv í Hoydølum.*

*Viðvíkjandi mannagondini annars:*

- *at ikki allar umsóknirnar vórðu sendar Mentamálastýrinum,*
- *fráboðanunum frá rektaranunum til teir tilsíðusettu umsøkjararnar, og*
- *at stýrið ikki gav teimum grundgivnar fráboðanir*

*havi eg somu atfinningarnar, sum eg áður havi ført fram viðvíkjandi lærarasetanunum í 2000.*

*Eftir at hava kannað persónsmálini hjá teimum lærarunum, sum vóru settir í starv í føroyskum hetta árið, haldi eg ikki grundarlag vera fyri at finnast at avgerðini um at seta hesar lærararnar í starv heldur enn (A). Tað skal her viðmerkjast, at einki starv var í religión hetta árið.*

*Talan var um kvalifiseraðar umsøkjarar, sum blivu settir. Av hesum vóru tveir lærarar, sum blivu tiknir fram um (A), og hvørs starvsinnihald kann sammetast soleiðis, at talan kundi gerast um antin at seta hesar ella (A). Talan var um hesar lærararnar:*

- *(L5), sum var sett í starv í søgu og føroyskum, og*
- *(L4), ið var sett í starv í føroyskum.*

*Bæði (L5) og (A) hava føroyskt sum hjágrein, og sambært prógvum teirra eru bæði væl kvalifiseraði. Men tá tørvur er á einum lærara við kombinatiónini søga og føroyskt, kann eg ikki fýlast á, at stýrið setir (L5) í hetta starv heldur enn (A). Av tí at hon hevur báðar hesar greinarnar, má hon metast at hava havt ein fyrimun fram um (A).*

*(L4) hevur føroyskt sum høvuðsgrein. At stýrið tekur avgerð um at seta ein kvalifiseraðan umsøkjara, sum hevur føroyskt sum høvuðsgrein,*

*í fast starv í føroyskum heldur enn ein umsøkjara, sum hevur føroyskt sum hjágrein, kann eg heldur ikki fýlast á.*

*Eg haldi tí samanumtikið ikki nakað grundarlag vera fyri pástandinum hjá (A) um, at hann hevur verið fyri mismuni, tá hesar lærarasetanir fóru fram í 2000 og 2001.*

*Burtursæð frá at geva Mentamálastýrinum eina sera álvarsliga átalu fyri handfaringina av lærarasetanunum í 2000 og eina álvarsliga átalu fyri setanirnar í 2001 geri eg ikki meira við málið.*

## 28.3. Klaga frá A mótvegis Fíggjarmálastýrinum og Mentamálastýrinum um setanar- og lønarviðurskifti hansara – Viðgerðartíð

A klagaði í aug. 2001 um, at lønarviðurskifti hansara framvegis ikki vóru komin í rættlag, hóast hann eftir at hava verið fulltrúi varð settur sum fyrisitingarleiðari í Mentamálastýrinum 1. aug. 1999. Mentamálastýrið hevði søkt Fíggjarmálastýrið um, at starvið bleiv flokkað sum deildarleiðari II eftir BLF-sáttmálanum, men Fíggjarmálastýrið helt ikki, at talan kundi gerast um meira enn deildarleiðara I.

Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at fýlast á avgerðina hjá Fíggjarmálastýrinum um at flokka starvið sum deildarleiðari I, men hann gav báðum stýrunum eina átalu fyri ta órímiliga drúgvu viðgerðartíðina av hesum málinum. (J.nr. 200100047 – Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina)

# *V. Eftirlitsvitjanir*

## 32.1. Eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum

24. okt. 2002 var umboðsmaðurin á einari eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum. Hendan vitjanin fevndi um allar deildirnar, sum liggja á Eirargarði. Í frágreiðing sínari, hevur umboðsmaðurin mælt til, at ymsar ábøtur verða gjørdar á hølisumstøðurnar, eins og hann hevur biðið Landssjúkrahúsið um at svara nøkrum spurningum. Umboðsmaðurin tók annars undir við teimum ætlanunum um bøtt viðurskifti, sum eru umrødd í álitunum: Heildarpsykiatri í Føroyum (2002). Somuleiðis mælti umboðsmaðurin til, at lóggávan á sálarsjúkuøkinum verður gjørd meira tíðarhóskandi, serliga við atliti at rættindunum hjá teimum sjúklingunum, sum onkursvegna eru undir tvingsli, antin í viðgerðini ella tí tey vera afturhildin á sálarsjúkrahúsi.

## 1. Inngangur

Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann kom í gildi 1. jan. 2001. Sambært § 4, stk. 1 í hesari lógini fevna virksemi og heimildir umboðsmansins um alla fyrisiting heimastýrisins, tvs. bæði lands- og kommunalu fyrisitingina.

Sambært § 5 í lógini hevur umboðsmaðurin eftirlit við, at hesar umsitingareindirnar ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Sambært § 8, stk. 1 hava hesar umsitingareindirnar skyldu til at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Harumframt hevur umboðsmaðurin sambært § 8, stk. 3 í lógini rætt til at vitja øll støð, ið verða kannað, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Sum ein liður í virksemi sínum, gjørdi umboðsmaðurin av at fara á eina eftirlitsvitjan á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum. Hendan vitjanin varð í samráð við Landssjúkrahúsið ásett at vera 24.

okt. 2002. Frammanundan vitjanini var ein fyrireikandi fundur við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum og Psykiatriska deplinum. Hesin fundurin varð hildin mánadagin 30. sept. 2002.

Til staðar undir vitjanini vóru m.o. Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri, Sofus Joensen, leiðandi yvirlækni og Bergit Weihe, yvirsjúkrarøktarfrøðingur. Frá umboðsmanninum luttóku umframt hann sjálvan, tvey starvsfólk.

Eftirlitsvitjanin fevndi um ein byrjandi fund við sjúkrahús- og deildarleiðsluna og starvsfólkaumboð frá Psykiatriska deplinum, eina rundgongd á deplinum, eina samrøðu við nakrar sjúklingar á D 1, sum høvdu biðið um fund við umboðsmannin, og ein endaligan fund við leiðsluna.

Í sambandi við vitjanina eru gjørd notat frá teimum fundunum, sum nevndir eru omanfyri.

Í sambandi við hesa eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin eisini lisið frágreiðingarnar:

- Heildarpsykiatri í Føroyum (2002), og
- Landssjúkrahúsið, Støðufrágreiðing II, febr. 2000 (tann partin, sum viðvíkur Psykiatriska deplinum).

## 2. Bygnaðurin á Psykiatriska deplinum

Psykiatriski depilin er ein partur av Landssjúkrahúsinum. Hesin fevnir umframt ambulatoriið, fysioterapiina, ergoterapiina og ítrív, eisini um deildirnar D 1 - D 7 og ein bústovn, sum liggur á Bóndaheygi. Vitjanin hendan dagin fevndi um Psykiatriska depilin í sínari heild, men tó við undantaki av bústovninum á Bóndaheygi.

Psykiatriski depilin hevur uml. 70 seingjarpláss, sum eru býtt út á deildirnar D 1 - D3 og D 5 - D 7, harav D 2 er ein stongd deild. D 4 er ein dagdeild og hevur sostatt ikki seingjarpláss.

Psykiatriski depilin er umframt røktarstarvsfólk og skrivstovufólk mannaður við 4 yvirlæknum (harav 2 størv í løtuni eru ósett), einum 1. hjálparlækna, sum er serlækni í psykiatri, og trimum øðrum læknum. Harumframt eru 3 psykologar og 1 sosialráðgevi á deplinum.

# 3. Hølisviðurskiftini v.m.

### 3.1. Generelt

Psykiatriski Depilin á Landssjúkrahúsinum heldur til úti á Eirargarði. Bygningarnir stava frá seksti- og sjeytiárunum, og nakrir teirra hava gjøgnum tíðina verið nýttir til onnur endamál, eitt nú til starvsfólkabústaðir. Eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði er gjørt hesi seinnu árini.

### 3.2. Rundgongd

**Fyrisitingarbygningurin**

Í Fyrisitingarbygninginum er eitt bíðirúm til ambulantu sjúklingarnar. Hølið, har sitipláss eru til eini 10 - 15 fólk, er í hampuligum standi, men møblarnir eru heldur gamlir og slitnir. Sjúklingarnir roykja í hesum hølinum, og tí stendst viðhvørt ampi av hesum roykinum. Mikudag er ambulant virksemi, og tá er rættiliga trongt í hølinum, tá 20 - 30 sjúklingar koma nakað samstundis.

Hølið til NCE-viðgerð er í hesum bygninginum. Yvirlæknin sigur, at arbeiðsumstøðurnar í hesum rúminum eru nøktandi, men at trupult kann vera at fáa sengurnar inn gjøgnum tær smølu hurðarnar. Yvirsjúkrarøktarfrøðingurin vísir tó á, at tað er ein trupulleiki, at skrivstovur eisini eru á ganginum, tí at tað kemur meira enn so fyri, at sjúklingar liggja í einari song úti á ganginum og bíða eftir at sleppa framat.

*Umboðsmaðurin fer í hesum sambandi at biðja Landssjúkrahúsið umhugsa, hvat kann gerast fyri, at hesir sjúklingarnir ikki skulu kenna seg „útstillaðar“, meðan teir bíða eftir viðgerðini.*

Eitt felagshølið er í neðra til allar sjúklingarnar, tvs. bæði ambulantar og innlagdar sjúklingar. Eisini sjúklingar frá D 2 kunnu nýta hetta høli, um teir annars eru førir fyri at kunna fara út. Pláss er fyri uml. 30 fólkum, veggirnir eru prýddir við myndum, eins og sjónvarp og útvarp við band-/fløguspælara er í hølinum. Eisini er møguligt hjá sjúklingunum at spæla Dart. Í hølunum er eisini ein lítil tekøkur, sum sjúklingarnir kunnu nýta.

Uttanfyri hava tey eina lítla trøð, har sjúklingarnir m.a. kunna vera við til at fóðra gæs, velta epli o.l. Ein trøð er somuleiðis úti í

Havnardali. Psykiatriski depilin hevur eisini ein lítlan buss, sum er keyptur fyri pening, sum sjúklingar og starvsfólk hava savnað inn. Bussurin verður nýttur til at koyra sjúklingarnar til ymiskt virksemi aðrastaðni enn á sjúkrahúsøkinum.

**D 1 Opin seingjardeild**

Gangurin frá Fyrisitingarbygninginum inn á D 1 er mest úr glasi, hann er sera hugnaligur, væl hildin og prýddur við nógvum grønum plantum. Útsýnið er gott. Tað sær tó út til, at trupulleikar eru við leka í loftinum uppat Fyrisitingarbygninginum.

Vitjunarrúmið á deildini er lítið, uml. 2 x 3 metrar. Í rúminum eru ein 2-manssofa, eitt stráborð og 2 strástólar. Hesar vitjanarumstøðurnar eru ikki av teimum bestu, í hvussu er ikki, tá tað ræður um vitjan av intimum slagi. Til vitjunarrúmið hoyrir eitt lítið WC við hondvaski. WC sær nossligt út.

Umstøðurnar í Matarhølinum og í køkinum, har maturin verður gjørdur klárur at seta á borðið, eru hampuligar.

Í uppihaldsstovuni eru sofur, sofaborð, vanlig borð, leysir stólar og ein bókareol. Sitipláss er fyri 15 - 20 fólkum. Loftið og veggirnir eru hvítir, og grátt linoleum er á gólvinum. Nakrar plantur eru inni, eins og myndir eru á vegginum. Í uppihaldsstovuni eru eisini sjónvarp, stereo, ein gittari og eitt talv. Hølið er rættuliga hugnaligt og væl hildið við máling.

Á deildini er ein skrivstova, har starvsfólkið heldur til. Hendan skrivstovan verður eisini nýtt til samrøður við sjúklingarnar. Tað kann í hesum sambandi verða eitt sindur órógvandi, at kaffiborðið hjá starvsfólkunum er í somu hølum.

Á deildini eru umframt 6 tveymansstovur 4 einastovur, tvær í hvørjum enda.

Umboðsmaðurin fekk høvi at síggja onkra einastovu. Stova 2 er útgjørd við einari gamlari sjúkrahússong, einum djúpum stóli, einum lítlum borði við lesilampu, tveimum vanligum stólum, einum seingjarborði, hondvaski og klæðiskápi. Nakrar myndir eru á vegginum og nakrar grønar plantur eru inni. Einki WC hoyrir til stovuna.

Stova 1 líkist nógv stovu 2. Har eru ein gomul sjúkrahússong, eitt borð, ein stólur, hondvask og klæðiskáp. Ongar hurðar eru á klæðiskápinum. Durastavirnir inn til stovuna eru meiðslaðir, helst tí at

sengurnar eru breiðar í mun til hurðarnar. Hendan stovan er als ikki prýdd á nakran hátt.

*Umboðsmaðurin fer at heita á Landssjúkrahúsið um at fáa sett hurðar á hetta klæðiskápið.*

Umboðsmaðurin hevur eisini sæð eina 2-songsstovu. Stovan hevur sera gott útsýni oman yvir Sandágerð, men er sera lítil til 2 sjúklingar. Stovan er útgjørd við tveimum sengrum við lesilampum og einum millumstandandi borði, eitt seingjarborð er við hvørja songina. Harumframt eru klæðiskáp og eitt hondvask inni á stovuni. Einki WC hoyrir til stovuna, sum er sera lítið fríðkað.

Á deildini eru tvinni felagsbaðirúm til sjúklingarnar, eitt til menn og eitt til kvinnur. Rúmini eru mestsum eins. Umboðsmaðurin hevur sæð mannfólkarúmið. Í rúminum, sum er hvítt málað í erva, eru hvítir flísar á vegginum og gráir flísar á gólvinum, ein brúsa við stóli, 3 hondvask, spegl, ein vognur við reinum undirklæðum v.m. og eitt stativ / posi til skitnu klæðini. Hóast hølið er rættuliga „bert“, og talan er um eitt felagsbaðirúm, so eru umstøðurnar hampuliga góðar.

Á ganginum er ein lítil nissja við einum tekøki og einari bókareol við nøkrum bókum.

Roykistovan er í hampuligum standi, við gulum veggum og orangulittum lofti. Á gólvinum er grátt linoleum, sum er eitt sindur slitið. Møblarnir eru gamlir, og kanska ikki vælegnaðir, um fólk skulu sita her í longri tíð. Einki sjónvarp er í roykistovuni.

**D 2 Stongd seingjardeild**

Dyrnar eru læstar við vanligum lásum (Ruko), og eftirlit er við, hvørji hava lyklar til deildina. Somuleiðis eru øll vindeyguni á deildini læst, soleiðis at ikki ber til hjá sjúklingunum at rýma.

Á deildini eru 2 eitt-songsstovur og 5 tveysongsstovur. Sambært starvsfólkunum eru sjáldan 12 sjúklingar á deildini. Hetta merkir tó ikki, at pláss kortini er fyri fleiri sjúklingum, tí at mangan er neyðugt, at sjúklingar eru einsamallir á einari tvísongsstovu, tí at teir eru so mikið illa fyri sálarliga. Møguligt er sostatt ikki at nýta øll tey seingjarplássini, sum deildin er normerað til, orsakað av at tað eru ov

fáar einastovur. Umboðsmaðurin hevur fingið høvi til at síggja onkrar av stovunum.

Stova 2, sum er ein eitt-songsstova er lítil. Her stendur ein gomul niðurslitin sjúkrahússong, ein djúpur stólur og eitt klæðiskáp. Veggirnir eru ráhvítir, og grønar gardinur eru fyri vindeygunum. Stovan er als ikki prýdd. Til stovuna hoyrir eitt WC, har ein brúsa, eitt hondvask og spegl eru inni. WC er málað, men sprungur eru um samankomingarnar á vegginum, sum av somu orsøk er farin at mulna sundur.

Vindeyguni á stovu 2 eru læst. Niðari partur av vindeygunum er skiftur út fyri stuttum, og er soleiðis innrættaður, at onnur helvtin bert kann latast upp á glopp, meðan hin helvtin kann opnast heilt, soleiðis at vindeygað kann nýtast til at koma út í gjøgnum í einari møguligari neyðstøðu. Í báðum førum krevst tó lykil fyri at opna vindeyguni.

Stova 4 er ein 2-songsstova, men har bert ein sjúklingur liggur inni. Stovan er lítil, veggirnir eru ráhvítir og grátt linoleum er á gólvinum. Stovan er nosslig, men er als ikki prýdd á nakran hátt. Stovan er útgjørd við tveimum sengrum, einum hondvaski og klæðiskápum til sjúklingarnar.

Í Matarhølinum er dekkað upp til døgurðan, og pláss er fyri uml. 15 fólkum. Umstøðurnar í hesum hølinum síggja heilt góðar út. Hølið er prýtt við myndum á vegginum og stórum grønum plantum á gólvinum. Beint uttanfyri Matarhølið er ein lítil køkur, har maturin verður gjørdur klárur at seta á borðið. Køkurin er lítil og gamal, men annars nossligur og hampuliga væl hildin. Knívar og aðrir hvassir / spískir lutir eru niðurlæstir, soleiðis at hesir ikki verða nýttir til annað enn ætlaða endamálið.

Vitjunarrúmið minnir um vitjunarrúmið á D 1. Til vitjunarrúmið hoyrir eitt lítið men nossligt WC við hondvaski. Veggirnir eru gulir, myndir eru á vegginum, og gardinur eru í vindeyganum. Í rúminum er ein 3-manssofa, 2 djúpir stólar og eitt útvarpstól við bandspælara. Hølið kundi avgjørt verið gjørt hugnaligari. Hóast umstøðurnar fyri intimar vitjanir frá hjúnafelaga / samlivara ikki eru verri enn á D 1, so eru tær als ikki nøktandi á D 2, tá hugsað verður um, at talan sum útgangspunkt er um sjúklingar, sum ikki hava loyvi til at fara út í býin.

*Eg fari tí at mæla Landssjúkrahúsinum til at bøta um umstøðurnar hesum viðvíkjandi.*

Á ganginum er ein nissja, har sjúklingarnir kunnu sita. Har eru 4 djúpir stólar, ein 3-manssofa og ein bandspælari. Loyvt er at roykja í hesari nissjuni, og hevur hetta við sær, at roykur er úti á ganginum.

Frá hesari nissjuni er ein gongd út í garðin uttanfyri. Talan er um ein grønan felagsgarð millum deildirnar D 2 og D 3. Garðurin er innigyrdur við einum stakitti, uml. 2 metrar til hæddar. Umstøðurnar í hesum garðinum tykjast hampuliga góðar, men tað er kanska eitt sindur óheppið, at tað sæst inn í garðin uttanífrá, tvs. úr granna-bygningunum. Hesir bygningarnir vera fyri ein part nýttir av Lands-sjúkrahúsinum, men eisini av serforsorgini. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin heldur somuleiðis til í einum teirra.
Møguleikin at nýta hendan garðin er tó ikki tøkur í løtuni, tí arbeitt verður við kloakkini í túninum beint uttanfyri útgongdina til garðin.

Eitt ítrivsrúm er á deildini. Har er ein ribba á vegginum, máttir til at gera fimleik á og ein kondisúkkla. Eisini er eitt orgul, ein gittari, eitt Bob-spæl, eitt borðtennisborð og tvær hillar við bókum. Hillarnar eru plaseraðar so høgt, at neyðugt er at hava okkurt at standa á fyri at røkka eftir bókunum.

Uppihaldsstovan er í hampuligum standi. Har er ein tekøkur og eitt vask. Sitipláss er til eini 15 fólk. Hølið er pent málað í gulum litum. Fitt av grønum plantum eru inni, gardinurnar eru nossligar, og hølið er rættuliga hugnaligt. Ymisk spøl eru tøk, umframt ein gittari. Í uppihaldsstovuni eru eisini ein bókahill, sjónvarp og útvarp. Tað er ikki loyvt at roykja í uppihaldsstovuni.

Eittans baðirúm er á deildini; hetta er útgjørt við einum baðikari, brúsu og einum hondvaski. Hølið er rættuliga stórt og í hampuligum standi, hóast tað er gamalt. Hvítir flísar eru á vegginum.

Meðan arbeitt verður uppá kloakkina, kunnu sjúklinga-WC'ini á deildini ikki nýtast. Í staðin nýta sjúklingarnir starvsfólka-WC'ini og starvsfólkini nýta WC'ini á D 3.

Umboðsmaðurin hevur tosað við eitt trygdarumboð á deildini, sum greiðir frá, at alarmskipanin á deildini er sera gomul og ótíðar-hóskandi. Hann vísir á, at felagsskipanin, har boð kann sendast eftir fólki frá hinum deildunum nokk virkar enn, men at eykalutir ikki

kunnu fáast longur. Harumframt hevur starvsfólkið eisini persónligar alarmar uppi á sær, men hesir hoyrast bert inni á deildini. Eykalutir fáast heldur ikki til hesar alarmarnar.

*Umboðsmaðurin fer í hesum sambandi at biðja Landssjúkrahúsið um at kanna, hvat kann gerast fyri at bøta um trygdina hjá starvsfólkunum hesum viðvíkjandi.*

Úti á ganginum er ein sjúklingatelefon (til telefonkort).

**D 3 Stutt- og langtíðardeild**

Í Matarstovuni á D 3 er pláss fyri 16 fólkum. Hølið er væl hildið við máling, og er prýtt við bláum gardinum, grønum plantum og við myndum á vegginum. Hølið er rættuliga hugnaligt at síggja til. Av teimum, sum eta í hesum hølinum, eru eisini fleiri ambulantir sjúklingar. Uttanfyri Matarhølið er ein køkur, sum hóast gamal at síggja til er í hampuligum standi.

Á deildini er eitt vitjunarrúm. Í hølinum er ein 3-manssofa, 2 djúpir stólar, eitt sofaborð, eitt borð, 3 leysir stólar og ein krakkur. Hølið er annars útgjørt við einum útvarpstóli, nøkrum plantum og nøkrum myndum á vegginum. Talan er um eitt lítið hølið, sum hóast tað er trongt inni, er hampuliga hugnaligt. Umstøðurnar fyri vitjan eru kanska ikki tær bestu.

Eitt lítið WC er knýtt at vitjunarhølinum, soleiðis at vitjandi ikki skulu noyðast at fara inn á deildina, fyri at sleppa á WC.

Gongin er í hampuligum standi, men er heldur myrk, tí at vindeygu eru bert í øðrum endanum.

*Eg fari at heita á Landssjúkrahúsið um at umhugsa, hvussu hendan gongin kundi verið gjørd ljósari.*

Uppihaldstovan er til støddar uml. 4 x 5 metrar. Inni eru sjónvarp, ein telda, 2 sofur, borð og stólar. Sitipláss er fyri uml. 10 fólkum. Hølið er annars prýtt við nøkrum myndum á vegginum, nossligum gardinum og plantum í vindeygunum.

Beint uttanfyri uppihaldsstovuna hava sjúklingarnir høvi til at koma út í ein grønan garð. Hesar umstøðurnar eru tó eitt sindur

skerdar í løtuni, tí at arbeitt verður við kloakkini, sum liggur í túninum. Hesin garðurin er ein felagsgarður fyri D 2 og D 3. Hetta er kanska óheppið, tí D 2 er ein stongd deild, meðan D 3 er opin. Starvsfólkið á D 3 má tí ansa eftir (læsa hurðina), soleiðis at sjúklingar frá D 2 ikki kunnu rýma umvegis D 3. Hetta kann geva trupulleikar, men starvsfólkini á D 3 upplýsa, at samstarvið millum deildirnar virkar hampuliga væl hesum viðvíkjandi.

D 3 hevur tað einastu 4-songsstovuna, sum er á Psykiatriska deplinum. Umframt sengurnar er eitt hondvask inni á stovuni. Stovan er hampuliga stór, men tað kann als ikki vera ynskiligt og heldur ikki nøktandi fyri sjúklingin, at 4 skulu vera á stovu saman. Onkrar myndir eru á vegginum, men annars er stovan ikki prýdd á nakran hátt. Veggirnir eru ráhvítir og „kaldir“ at síggja til. Vanliga verður stovan nýtt til 3 sjúklingar.

Umframt hesa 4-songsstovuna hevur deildin 4 eittsongsstovur og 4 tveysongsstovur. 7 - 8 sjúklingar búgva fast á deildini.

Uppihaldsstovan er rættuliga nosslig. Har eru borð, djúpir stólar og eitt Bob-spæl inni. Stovan er væl hildin, og umstøðurnar hjá sjúklingunum eru hampuligar. Roykt verður inni á stovuni, og ein ventilur er settur í vindeygað fyri at taka tann ringasta roykin.

Umboðsmaðurin fekk høvi at síggja nakrar av stovunum.

Stova 8 er ein 1-songsstova. Stovan er útgjørd við einari song, seingjarborði, 3 leysum stólum, klæðiskápi, hondvaski og spegli. Stovan er vælhildin við máling, men er lítið prýdd. Hvørki WC ella baðirúm hoyra til stovuna. Ein bandspælari er inni á stovuni, og myndir eru á vegginum.

Stova 6 er ein 2-songsstova. Stovan er útgjørd við 2 sengrum, klæðiskápum, hondvaski, 2 djúpum stólum og einum sofaborði. Onkrar myndir eru á vegginum. Stovan er vælhildin við máling, men kundi verið prýdd meira. Eftir mínum tykki er henda stovan ov trong til 2 sjúklingar. Í løtuni býr ein persónur inni á stovuni.

Á deildini er eittans baðirúm. Í hølinum eru brúsa, baðikar, WC og hondvask. Á vegginum eru hvítir flísar, gráir flísar eru á gólvinum, og annars er loftið málað. Málingin er farin at skalla uttanav í støðum undir loftinum, og onkrir flísar í brúsuni er brotnaðir. Baðirúmið treingir sostatt til ábøtur.

Á deildini eru 3 WC’ir, sum eru felags fyri allar sjúklingarnar. Eitt

av WC'unum er rættuliga stórt; tað er málað ljóst grønt í erva, hvítir flísar eru á vegginum og gráir flísar á gólvinum. Vindeyga er á hesum WC'inum, soleiðis at møguleiki er fyri útlufting. Eisini eru 2 smærri WC uppá uml. 2 fermetrar, sum einki vindeyga hava. Hesi WC'ini eru útgjørd við kummu, hondvaski og spegli.

Eitt felags skiftirúm er á deildini til øll starvsfólkini. Innanfyri skiftirúmið er eitt WC til starvsfólkini. Hetta ger, at starvsfólkini mugu kanna eftir, at eingin av hinum kyninum er á WC'inum, tá tey nýta skiftirúmið.

**D 4 Dagdeildin**

Á deildini er eitt aktivitetsrúm, sum verður nýtt til at gera fimleik í. Eitt heldur skirvisligt borðtennisborð er eisini í hølinum, eins og máttir o.l. til fimleik eru tøkar. Aktivitetsrúmið er ljóst og væl hildið við máling. Linoleumið á gólvinum er í góðum standi. Umboðsmaðurin er gjørdur varður við, at vindeyguni bæði leka, og at tað gýsur illa um tey. Eitt hondvask er inni í hølinum, og eitt spegl er yvir vaskinum. Á ganginum er eitt bobspæl. Í løtuni koma 10 sjúklingar dagliga á deildina. Tey møta á deildini kl. 9.30 um morgunin. Á ganginum er ein uppslagstalva, har sagt verður frá, hvat hendir teir ymsu dagarnar í vikuni.

*Eg fari at heita á Landssjúkrahúsið um at fáa bøtt um viðurskiftini viðvíkjandi vindeygunum.*

Á deildini er eitt sokallað samtalurúm, sum verður nýtt sum roykirúm. Hølið er lítið, uml. 3 x 4 metrar, men er í góðum standi, og møblarnir eru góðir. Sjúklingarnir gjørdu tó vart við, at tað ofta er nógvur roykur inni, og at tey tí kundu hugsa sær at fingið onkra útluftingarskipan, kanska við einum ventili í vindeyganum, eins og onkrar av hinum deildunum hava í roykirúmum teirra.

Eg fari at heita á Landssjúkrahúsið um at kanna møguleikarnar fyri einari loysn á hesum trupulleikanum.

Á deildini er ein kombinerað uppihaldsstova og aktivitetsrúm, sum er í hampuliga góðum standi.

Matarhølið er í góðum standi við máling; tað er hugnaligt inni og fitt av grønum plantum.

Eitt hølið er til ljósviðgerð av sjúklingum. Tað eru kommunulæknarnir, sum fyri ein stóran part ávísa sjúklingar til hesa viðgerðina. Hetta verður mest nýtt í vetrarhálvuni til viðgerð ímóti tunglyndi. Her er pláss fyri tveimum sjúklingum, sum kunnu sita við hvør sítt skrivaraborð og fáast við eitthvørt, meðan teir sita frammanfyri hesum ljósunum (Daylite 820). Ein slík viðgerð tekur 2 tímar.

Í uppihaldsstovuni er ein vanlig sofa, ein sofa og ein stólur úr strái, eitt borð, eitt sofaborð, nakrar plantur, eitt útvarp við bandspælara, eitt hondvask og eitt spegl á vegginum yvir vaskinum. Møblarnir eru gamlir, men eru málaðir. Hølið er eisini vakurt málað (ráhvítt) og myndir eru á vegginum. Hølið er rættuliga hugnaligt.

Eitt ítrivsrúm er á deildini. Rúmið er lítið, men er væl hildið. Veggirnir eru ljósareyðir, loftið hvítt og grátt linoleum er á gólvinum. Rúmið er hugnaligt.

Í øðrum endanum av deildini er ein stova. Har eru sofur, djúpir og vanligir stólar, umframt borð inni. Har er eisini eitt orgul og eitt keyboard, sum sjúklingarnir nýta. Sjónvarp og videotól er í stovuni, sum er í hampuliga góðum standi. Myndir eru eisini á vegginum.

Umstøðurnar á hesari deildini síggja út til at vera heilt góðar, gangurin er ljósur og vælhildin. Ein telefon (til telefonkort) er á ganginum.

**D 5 Stutt- og langtíðardeild**

Deild 5 líkist nógv Deild 3 í skapi. Stovurnar 1 og 2 eru einastovur, meðan stovurnar 3 - 10 eru 2-mansstovur.

Uppihaldsstovan er í góðum standi, hon er ljós og vælhildin við máling, veggirnir eru gulir. Har eru djúpir stólar, sofaborð, vanligt borð og leysir stólar. Sjónvarp er inni, ymisk spøl eru á hillunum, myndir eru á vegginum, plantur eru inni og gardinur í vindeygunum. Stovan sær hampuliga gott út.

Umboðsmaðurin hevur sæð onkrar av stovunum.

Stova 2 er ein 1-songsstova; hon er lítil, men ljós og væl hildin við máling. Stovan er gjørd hugnalig við myndum o.l. Stovan er annars útgjørd við einari sjúkrahússong, seingjarborði, klædnaskápi, hondvaski, spegli og einum stóli. Myndirnar á vegginum eigur sjúklingurin sjálvur. Einki WC er til hesa stovuna.

Stova 10 er ein 2-songsstova, men hon verður í løtuni nýtt til ein

sjúkling. Stovan er útgjørd við einari sjúkrahússong, einum seingjaborði, tveimum djúpum stólum, einum sofaborði, einari reol og einum hondvaski. Vindeyguni eru ikki í góðum standi. Málingin er skallað uttanav vegginum undir vindeyganum, eins og glopp er ímillum vegg og vindeyga. Starvsfólkini siga, at tað gýsur um hetta og onkur onnur vindeygu eisini. Lítið er gjørt við at pynta hetta kamarið. Sjúklingurin hevur sítt egna útvarpstól inni á stovuni.

*Eg fari tí at spyrja Landssjúkrahúsið, hvørjar ætlanir eru um at bøta um vindeyguni á D 5.*

Skrivstovan er læst. Á deildini verða bæði innlagdir og ambulantir sjúklingar viðgjørdir. Gangurin er væl hildin við máling; veggirnir eru ljósir og hurðarnar myrkareyðar.

Eittans baðirúm er á deildini. Hetta er rættuliga stórt, hvíttmálað í erva, hvítir flísar á vegginum og gráir flísar á gólvinum. Har er WC'kumma, tvey hondvask, eitt baðikar og ein brúsa. Eisini er ein vaskimaskina, sum sjúklingarnir kunnu nýta, men teimum stendur eisini í boði at lata klæðini inn til vaskaríið á Landssjúkrahúsinum. Umstøðurnar til at turka klæðini eru ikki góðar, tí hesi verða turkað á einum stativi inni á baðirúminum. Baðirúmið sær annars út til at vera í hampuligum standi.

Eins og á Deild 3 eru eisini nøkur WC aftrat tí eina baðirúminum. Eitt teirra er rættuliga stórt, við flísum á veggi og gólvi. Vindeyga er á hesum WC'inum, sum annars er útgjørt við kummu, hondvaski og spegli. Í ganginum uttanfyri er eitt lítið WC. Har er kumma, hondvask og spegl, men einki vindeyga. Hetta WC er tó nossligt og væl hildið við máling.

Inni á WC'unum er tað sambært starvsfólkunum ikki óvanligt at skarn og annað liggur á gólvinum. Trupulleikin í hesum sambandi er, at tá gólvini so skulu spulast rein, rennur vatnið ikki sum ætlað í ristina, sum er í gólvinum, men ístaðin út undir hurðini og út í gongina.

*Eg fari at biðja Landssjúkrahúsið kanna, hvat kann gerast við hendan trupulleikan, og at fáa bøtt um hetta.*

Ein roykistova er á deildini. Har eru djúpir stólar, og pláss er fyri uml. 10 fólkum at sita. Stovan er pyntað, har er sjónvarp, ymsar sangbøkur, bandspælari og eitt orgul. Ein vifta er í vindeyganum, sum kann taka ta ringasta av roykinum, men kortini er fitt av royki í hølinum.

Matarhølið er í hampuligum standi, træloft, gulir veggir og grátt linoleum á gólvinum. Hølið kundi saktans verið gjørt hugnaligari / prýtt eitt sindur meira. Borðini eru gomul, men tó í hampuliga góðum standi. Fleiri av stólunum kundu tó trongt til at verið skiftir út.

Beint uttanfyri matarhølið er ein lítil køkur. Starvsfólkini gera vart við, at uppvaskimaskinan ikki er nøktandi, tí hon stendur ov lágt. Borðpláturnar, sum eru av træi, eru slitnar og flusnaðar soleiðis, at opið er inn í pláturnar í kantinum á slitlagnum. Tá hugsað verður um reinføri, er hetta ikki nøktandi.

*Eg fari at spyrja Landssjúkrahúsið, um ætlanir eru um at skifta hesar borðpláturnar út.*

Vindeyguni síggja út til at vera í hampuligum standi, men eitt starvsfólk hevur gjørt vart við, at vindeyga á stovu 6 ikki kann latast upp.

*Hetta haldi eg ikki vera nøktandi, og fari tí at heita á Landssjúkrahúsið um at fáa loyst hendan trupulleikan.*

**D 6 Bústaður**

Deildin er ein opin deild, tað sum fyrr varð rópt Pensionatið. Hendan deildin verður nýtt burturav til sjúklingar, sum ikki hava tørv á at vera innlagdir longur, men sum ikki kunnu útskrivast, tí at hesir ikki hava nøkur alternativ búpláss. 10 fólk búgva á deildini, og tey hava hvør sína stovu.

Gangurin er rættuliga myrkur. Ein lítil nissja er úti á ganginum, sum verður nýtt sum uppihaldsstova. Har eru sofur og djúpir stólar, pláss er fyri uml. 10 fólkum. Har er rættuliga trongt, men annars sær tað hugnaligt út.

Tað eru tvey baðirúm á deildini. Í øðrum baðirúminum er baðikar, WC'kumma, hondvask og spegl. Á gólvinum eru gráir flísar og hvítir

flísar eru á vegginum. Málingin í erva sær ikki gott út. Hon er farin at skalla uttanav, og hetta treingir til ábøtur. Hitt baðirúmið er minni; har er brúsa og hondvask inni. Hetta baðirúmið er myrkt, har er einki vindeyga. Gólv, veggir og loft er eins og í hinum baðirúminum. Eisini her er málingin farin at skalla uttanav í erva. Yvirav hesum baðirúminum er eitt sera trongt lítið WC, har heldur einki vindeyga er inni.

Stovurnar eru smáar, og hava hondvask, spegl og klæðiskáp inni. Umboðsmaðurin fekk høvi til at síggja tvær av stovunum.

Stova 0-22 hevur linoleum á gólvinum, veggirnir eru tapetseraðir við glasvevi og málaðir, men bera týðulig merkir eftir, at dart er spælt inni á stovuni. Vindeygað er í ringum standi.

Stova 0-32 er sera vælhildin. Stovan líkist 0-22 í skapi, men gólvið er av træi. Sjúklingurin hevur gjørt hesa stovuna rættuliga hugnaliga. Vindeygað er tó í ringum standi.

*Eg fari at spyrja Landssjúkrahúsið, hvørjar ætlanir eru fyri viðlíkahaldi av vindeygunum í hesum bygninginum.*

Matarhølið er ein felags uppihalds- og spísistova, har tað kunnu sita eini 12-14 fólk. Hølið er hampuliga væl hildið við máling. Ein køkur er við síðuna av spísistovuni. Sjúklingarnir fáa døgurðan frá køkinum á Landssjúkrahúsinum, men gera annars sjálvir morgunmat og nátturða. Sjúklingarnir luttaka eisini í køksarbeiðinum annars við at dekka borð og rudda upp v.m. Ein vaktartalva fyri hetta arbeiðið hongur uppi úti í gongini.

Matin frá Landssjúkrahúsinum heinta starvsfólkini í einum trævogni. Hesin vognurin er í sera ringum standi, tá hugsað verður um reinføri. Kassin sjálvur er av træi, og er illa slitin. Málingin innvendiga skallar uttanav, og dettur niðuryvir matíløtini, sum ikki eru tøtt. Umboðsmaðurin varð gjørdur varður við hendan trupulleikan.

*Eg fari at heita á Landssjúkrahúsið um at fáa bøtt um hesi viðurskiftini.*

Deildin hevur eitt roykirúm, ið er av somu stødd sum stovurnar. Har er ein sofa, djúpir stólar, vanligir stólar, eitt skrivaraborð við stóli og

eitt sofaborð. Rúmið er nossligt, og væl hildið við máling. Onkrar plantur eru inni, eins og myndir eru á vegginum.

**D 7 Demensdeildin**

Á hesari deildini eru flestu sjúklingarnir dementir og harvið tungir sjúklingar, sum krevja nógva røkt. Eitt A4-ark við navninum á sjúklinginum hongur á kamarshurð teirra.

Á deildini eru 12 sjúklingar, sum allir hava hvør sína stovu/kamar. Deildin er býtt uppí tvey, soleiðis at 6 sjúklingar eru á hvørjari helvt.

Umboðsmaðurin hevur sæð tvinnar av stovunum.

Stova 4 er útgjørd við einari nýmótans elektriskari sjúkrahússong, seingjarborði, hondvaski við spegli uppiyvir, klædnaskápi, einum djúpum og einum vanligum stóli. Stovan er vælhildin. Myndir eru á vegginum, eins og eitt sjónvarp er inni á stovuni. Hetta eigur sjúklingurin nokk sjálvur.

Stova 3 (yvirav stovu 6) er ein ljós og nosslig stova. Veggirnir eru ljóst málaðir, linoleum er á gólvinum, og vindeyguni eru nýggj. Ein elektrisk sjúkrahússong er inni, eins og eitt seingjarborð, eitt lítið skrivaraborð, tveir djúpir stólar, klæðiskáp, hondvask og spegl. Stovan kundi kanska verið gjørd eitt sindur hugnaligari.

WC'ini á deildini eru rímiliga stór og í hampuligum standi. Tey eru útgjørd soleiðis, at gjørligt er hjá koyristólsbrúkarum at koma inn á WC. Hetta hongur kanska saman við, at fleiri av sjúklingunum her eru røktarkrevjandi tungir sjúklingar. Á WC'inum er ein kumma við stativi, hondvask og spegl.

Uppihaldsstovan er ljós og hugnalig, tríggir veggir eru hvítir, meðan tann fjórði er málaður við grønum og appelsingulum litum. Hetta ger hølið hugnaligt. Har eru sofur, djúpir stólar og borð inni, eins og myndir eru á vegginum. Vindeyguni eru nýggj, og umframt gardinurnar eru plantur í vindeygunum. Umstøðurnar eru góðar, men stovan sær ikki út til at vera nógv nýtt.

Í baðirúminum er eisini ein WC'kumma. Vatnið rennur í kummuni alla tíðina, og tað sær ikki út til, at til ber at skola niður í hesari kummuni. Í baðirúminum eru hvítir flísar á vegginum, í erva eru vegginir málaðir hvítir, og smáir brúnir flísar eru á gólvinum. Eitt hondvask er inni á baðirúminum. Vindeyguni eru í góðum standi, og umstøðurnar síggja annars út til at vera hampuligar.

**Ergoterapiin**

Í hølunum hjá Ergoterapiini er eitt roykirúm til sjúklingarnar beint innanfyri úthurðina. Tað sær út til at vera eitt fyrrverandi baði- ella vaskirúm, sum verður nýtt til hetta endamálið. Veggirnir eru framvegis klæddir við gomlu hvítu flísunum, og einki er gjørt fyri at prýða ella hugna um hetta hølið. Umstøðurnar hjá sjúklingunum at sita her, eru heldur ikki av teimum bestu.

*Eg fari at biðja Landssjúkrahúsið greiða mær frá, um nakrar ætlanir eru um at bøta um hesi viðurskiftini.*

Í Ergoterapiini er eitt aktivitetsrúm til ymsar kreativar aktivitetir, eitt nú kunnu sjúklingarnir mála, seyma og byggja puslispøl. Ein vevur er í hølunum, eins og ein telda, sum sjúklingarnir kunnu nýta. Har eru eisini nakrar hillar við bókum til sjúklingarnar.

Í ergoterapiini arbeiða 4 ergoterapeutar. Hesir taka sær av innløgdum sjúklingum frá øllum hinum deildunum. Størsta týdningin hevur ergoterapiin fyri útslúsingina av sjúklingunum frá sjúkrahúsinum. Farið verður við sjúklingunum út í teirra gerandisumhvørvi, soleiðis at hesir gjøgnum ergoterapiina kunnu fyrireikast til tær umstøðurnar, sum bíða teimum heima.

Ergoterapiin hevur eisini ambulanta viðgerð, tvs. at sjúklingar uttanífrá koma í ergoterapiina. Henda viðgerðin skal fyrst og fremst virka fyribyrgjandi, soleiðis at ikki verður neyðugt at innleggja hesar sjúklingarnar.

Á ganginum er ein reol við bókum, eitt dartspæl og eitt borðtennisborð, sum sjúklingarnir kunnu nýta. Veggirnir eru prýddir við myndum og málningum.

Eisini er eitt høli, har serliga tey langtíðarinnløgdu kunnu sita og gera ymisk arbeiði, t.d. rippa húkar og forvinna nøkur oyru fyri hetta. Deildin er sum heild hampuliga vælútgjørd við bókum, sum sjúklingarnir kunnu nýta.

Ein lítil køkur er, har sjúklingarnir kunnu gera okkurt til matna.

Frammanfyri bygningin er ein lítil havi, uml. 6 x 12 m., sum sjúklingarnir kunnu nýta, antin við at sita uttanfyri og njóta veðrið ella við at røkja havan. Havin sær hugnaligur út; ein málað trægyrðing er uttanum havan, soleiðis at ikki sæst inn uttanífrá.

**Fysioterapiin**

Í Fysioterapiini eitt aktivitets- ella fimleikahøli, har møguligt er at gera ymsan fimleik, eins og ein konditiónssúkkla er til sjúklingarnar. Hølið er ljóst og í hampuliga góðum standi. Ein ribba er á vegginum, og máttur til at gera fimleik á eru til taks í hølinum.

Í hølinum við síðuna av arbeiða fysioterapeutarnir. Har eru tvinnar briksir til hesa viðgerðina. Briksirnar, sum eru í rímuligum standi, standa í sama høli, men eru sundurskildar við einum forhangi, sum eftir tørvi kann dragast frá og fyri. Ein skjótihurð er millum viðgerðarhølið og fimleikahølið, soleiðis at tað ikki sæst millum hesi.

Bæði í ergoterapiini og í fysioterapiini er kanska heldur lágt millum loft og gólv, soleiðis at gangirnir virka eitt sindur trongir í so máta, men hetta kann einki gerast við, so leingi hildið verður til í hesum hølunum. Gangirnir eins og hølini eru prýdd við myndum á vegginum og eru annars vælhildin við máling. Hetta málingaarbeiðið hava m.a. sjúklingarnir verið við til at gera.

**Hárviðgerð**

Í bygninginum er ein lítil hárviðgerðarstova, sum eina ferð um vikuna fær vitjan av einari hárfríðkanarkvinnu. Sjúklingarnir kunnu í hesum sambandi bíleggja sær pláss til at sleppa framat at fáa gjørt hárið.

## 4. Samrøða við sjúklingarnar

Í sambandi við eftirlitsvitjanina varð eitt uppslag sent Landssjúkrahúsinum, har teir einstøku sjúklingarnir, sum høvdu hug til tess, fingu høvi til at fáa eina samrøðu við umboðsmannin.

Eingin einstakur sjúklingur hevði ynskt eina slíka samrøðu, men umboðsmaðurin hevði ein fund við 8 sjúklingar á D 1, sum í felag høvdu ynskt at fáa ein fund við umboðsmannin.

Á hesum fundinum settu sjúklingarnir fram nøkur ynski um ymsar broytingar á deildini. Umboðsmaðurin legði hesi ynskini fram fyri sjúkrahús- og deildarleiðsluna á tí endaliga fundinum, seinni sama dagin.

# 5. Onnur viðurskifti

## 5.1. Belegningur og bústaðarumstøður

Av teimum uml. 70 seingjarplássunum, sum eru á Psykiatriska deplinum verða sambært leiðsluni uml. 40 - 50 pláss nýtt til bústað hjá sjúklingum, sum ikki hava tørv á at vera innlagdir á Psykiatriska deplinum. Orsøkina til, at hesi fólkini kortini búgva á Psykiatriska deplinum, sigur leiðslan vera, at eingi onnur bústaðartilboð eru til hesi fólkini.

Umboðsmaðurin heldur tað ikki vera nøktandi, at fólk eru innløgd á einum sálarsjúkrahúsi, um teimum ikki tørvar hetta av sjúkraávum. Hendan støðan er eftir mínari fatan ikki nøktandi, tí hetta trongir um umstøðurnar hjá teimum viðgerðarkrevjandi sjúklingunum á deplinum. Um aðrir bústaðar-møguleikar vóru til hesi fólkini, hevði tað verið munandi meira rúmsátt hjá hinum 20 - 30 sjúklingunum.

Leiðandi yvirlæknin hevur eisini greitt umboðsmanninum frá, at hesi viðurskiftini virka stagnerandi fyri allan depilin.

*Eg fari tí at spyrja Landssjúkrahúsið og Trivnaðarmálaráðið, hvørjar ætlanir eru um at finna aðrar bústaðir til hesi fólkini.*

Á deildunum D 1, 2, 3 og 5 eru flestu stovurnar 2-songsstovur. Hesar deildirnar hava harumframt nakrar einastovur, eins og ein 4-songsstova er á D 3. Deildirnar D 6 og 7 hava bert einastovur.

Leiðandi yvirlæknin hevur greitt umboðsmanninum frá, at tað serliga er í byrjanini av einari innlegging, at ein sjúklingur hevur tørv á at vera á einari einastovu, meðan hesir betri kunna klára at vera saman við øðrum sjúklingum seinni.

At bygningarnir eru so gamlir spælir sjálvandi eisini inn í hesum sambandi.

Eg haldi ikki, at tað er ein nøktandi loysn, at sálarsjúklingar verða stúvaðir saman á hendan hátt, og als ikki tá talan er um 3 ella 4 songsstovur. Eg haldi tað vera sera óheppið, at sjúklingarnir á D 2, sum eru har meira ella minni ímóti sínum vilja, ikki hava umstøður til at vera fyri seg sjálvar.

*Eg fari tí at heita á Landssjúkrahúsið um at umhugsa, hvussu hesi viðurskiftini hjá sjúklingunum kunnu gerast betri.*

Leiðslan hevur greitt umboðsmanninum frá, at tað ikki er neyðugt at deildirnar D 6 og 7 eins og bústovnurin á Bóndaheygi hoyra til Landssjúkrahúsið, tí at tað í hesum sambandi ikki er talan um sjúkraviðgerð. D 6 og bústovnurin á Bóndaheygi virka sum bústovnar burturav, meðan D 7 virkar sum eitt røktarheim, heldur enn eitt sjúkrahús.

*Eg fari tí at spyrja Landssjúkrahúsið og Trivnaðarmálaráðið, um nakrar ítøkiligar ætlanir eru um at broyta hesi viðurskiftini.*

Leiðslan hevur upplýst fyri umboðsmanninum, at fleiri av sjúklingunum á D 3, 5 og 6 kundu klára seg við at búð á einum sambýli, um hesin møguleikin stóð teimum í boði.

*Eg fari tí at biðja Trivnaðarmálaráðið greiða mær frá, um ella hvørjar ítøkiligar ætlanir eru um flyta hesi fólkini til aðrar egnaðar bústaðir.*

Viðvíkjandi WC- og baðiumstøðunum havi eg ikki annað at siga, enn at tað valla fær verið øðrvísi, so leingi Psykiatriski depilin heldur til í hesum gomlu hølunum á Eirargarði. Eg haldi tó ikki, at tað er nøktandi, at allir sjúklingarnir á deildini skulu deilast um 1 - 2 baðirúm. Hetta ger seg serliga galdandi fyri tey, sum liggja leingi á sjúkrahúsinum.

### 5.2. Atgongdin til fríska luft

Tað er av stórum týdningi, at sjúklingarnir hava høvi til at sleppa út í fríska luft. Fyri flestu sjúklingarnar á opnu deildunum er hetta kanska ein sjálvfylgja, tí at hesir hava frítt at fara, og tí sjálvir kunnu nøkta hendan tørvin. Men serliga fyri sjúklingarnar á D 2, er tað av stórum týdningi, at hesir hava møguleika fyri at koma út í fríska luft dagliga.

Til at nøkta hendan tørvin hevur D 2 ein fittan garð, sum er felags við D 3. Nýtslan av hesum garðinum er avmarkað í løtuni, tí at

arbeitt verður við kloakkskipanini, og garðurin er grivin upp. Talan er annars um ein grønan garð, har umstøðurnar tykjast at vera heilt góðar og hugnaligar. Ein trægyrðing (smáar 2 metrar høg) er uttanum garðin. Umframt at forða sjúklingunum at rýma úr garðinum, hevur hendan gyrðingin við sær, at ikki sæst inn í garðin frá økinum uttanfyri. Tað sæst tó inn í garðin frá grannabygningunum, sum Psykiatriski depilin, Serforsorgin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin húsast í.

Av tí, at talan er um ein felagsgarð við D 3, so er ein ávísur vandi fyri, at sjúklingarnir á D 2 kunnu rýma umvegis D 3, sum er ein opin deild. Starvsfólkið hevur upplýst, at roynt verður at forða fyri hesum við einum samstarvi millum deildirnar, soleiðis at D 3 fær boð, tá neyðugt er at ansa eftir, at sjúklingar frá D 2 ikki sleppa at rýma. Starvsfólkini siga, at hetta samarbeiðið virkar væl, og havi eg tí ongar viðmerkingar til hetta.

Hóast tað stendur sjúklingunum á opnu deildunum frítt at fara út, so eru tað fleiri teirra, sum ikki tora ella megna hetta.

*Eg fari tí at biðja Landssjúkrahúsið um at umhugsa møguleikan fyri at útvega smáar garðar til deildirnar D 1 og D 5, eins og gjørt er í ergoterapiini.*

### 5.3. Nýtsla av politihjálp á deplinum

Leiðslan á deplinum hevur upplýst fyri umboðsmanninum, at tað ikki hevur verið neyðugt at boðsenda løgregluni fyri at hjálpa starvsfólkunum inni á deildunum. Tó kemur tað fyri, at løgreglan verður boðsend fyri at beina fólk burtur, sum gera ónáðir uttanfyri bygningarnar.

### 5.4. Vitjan, posteftirlit og telefonmøguleikar

Umstøðurnar til at taka ímóti vitjandi eru ikki alt ov góðar, serliga um tey vitjandi og sjúklingurin ynskja at kunna sita og tosa v.m. uttan at vera órógvaði. Á D 1 hava tey vitjandi møguleika fyri at sita inni í uppihaldsstovunum og onkuntíð eisini inni á stovuni hjá sjúklinginum. Eisini kunnu hesir sjúklingarnir fara út saman við

teimum vitjandi. Á hinum opnu deildunum verður roynt at umganga, at vitjandi koma inn á uppihalds-stovuna á deildini. D 1 og D 3 hava harumframt eisini eitt vitjunarrúm, har sjúklingurin kann sita í friði saman við teimum vitjandi.

*Hesar umstøðurnar kundu verið munandi betri.*

Viðvíkjandi D 2 er støðan ein onnur. Talan er um sjúklingar, sum ikki kunnu fara út sum teimum lystir, og tí er tað av alstórum týdningi, at hesir hava rímiligar umstøður til at taka ímóti vitjandi. Tey vitjandi sleppa vanliga ikki inn á deildina. Eitt vitjunarrúm er á gongini beint uttanfyri sjálva deildina. Hóast hetta lítla vitjunarrúmið er nossligt og hugnaligt, so haldi eg ikki, at hesar vitjunarumstøðurnar eru nøktandi, serliga ikki um talan er um intima vitjan frá hjúnafeløgum v.m.

*Eg fari tí at heita á Landssjúkrahúsið um at umhugsa, hvussu bøtast kann um hesar umstøðurnar hjá sjúklingunum og teimum vitjandi.*

Leiðslan hevur upplýst fyri mær, at eftirlit fyri ein part verður havt við pakkum o.l., sum verða sendir ella latnir sjúklingunum á deildini. Hetta eftirlitið fevnir um at ansa eftir, at eingir hvassir ella vandamiklir lutir, sum skaði kann standast av, sleppa inn á deildina. Brøv o.l. verða hinvegin ikki eftirkannaði / lisin.

*Eg havi ongar viðmerkingar til, at eitt slíkt eftirlit verður framt av trygdarávum.*

Leiðslan hevur upplýst, at tað stendur sjúklingunum frítt at nýta telefonina. Allir sjúklingar hava atgongd til eina korttelefon, sum stendur á gongini á teimum ymsu deildunum. Eg havi skilt tað soleiðis, at møguleiki er hjá sjúklingunum at fáa hendur á telefonkortum á deildini; í hvussu so er á D 2.

*Um so er, at til ber at fáa slík telefonkort á deildini, havi eg ongar viðmerkingar til hesar umstøðurnar.*

### 5.5. Rúsevni

Depilsleiðslan hevur upplýst fyri mær, at eingir trupulleikar eru av innsmugling av rúsdrekka á depilin, og at tað annars er lætt at halda eyga við hesum. Leiðslan vísti tó á, at tað kann vera verri at forða innsmugling av hassji á deildirnar, men at hetta kortini ikki er nakar gerandistrupulleiki.

### 5.6. Royking

Høvuðsreglan er tann, at ikki er loyvt at roykja inni á deildunum, uttan í teimum hølum, sum eru ætlaði til hetta.

Allar deildirnar, uttan D 2, hava eina roykistovu, har sjúklingarnir kunnu sita og roykja uttan at darva hinum sjúklingunum. Á fleiri av hesum stovunum siga sjúklingarnir at trupulleikar kunnu vera av roykinum, tí at útluftingin ikki er nøktandi. Uppihaldsstovan á D 6 hevur fingið eina rættuliga útsúgvingarskipan, meðan fleiri av hinum deildunum bert hava ein lítlan ventil í vindeyganum í roykistovuni til at hjálpa um roykin. Onkrastaðni er heldur eingin slíkur ventilur; hetta er t.d. galdandi í roykistovuni á D 4.

*Eg fari at biðja Landssjúkrahúsið um at greiða mær frá, hvørjar ætlanir eru um at bøta um roykviðurskiftini í roykistovunum.*

D 2 hevur sum sagt onga roykistovu, men har sita sjúklingarnir og roykja í einari nissju á gongini. Hetta merkir sjálvandi, at nakað av royki altíð verður á gongini, og er hetta tí ikki ein nøktandi loysn. Deildarleiðslan hevur upplýst fyri mær, at arbeitt verður við at gera ein roykiskúrð. Sum eg havi skilt hetta, er ætlanin at gera ein lítlan tilbygning til deildina, har sjúklingarnir kunnu roykja.

*Eg fari at biðja Landssjúkrahúsið um at greiða mær nærri frá hesum ætlanunum, og nær hesin roykiskúrurin væntandi verður klárur at taka í nýtslu.*

### 5.7. Matur

Leiðslan hevur upplýst fyri mær, at sjúklingarnir fáa allan matin frá køkinum á Landssjúkrahúsinum; tó soleiðis at sjúklingarnir á D 6 bert fáa døgurða, meðan teir sjálvir gera morgunmat og nátturða. Umboðsmaðurin fekk høvi at royna matin úr køkinum hendan dagin.

*Burtursæð frá umstøðunum viðv. matarvogninum, ið eru nevndar frammanfyri undir brotinum um D 6, hevur umboðsmaðurin ongar viðmerkingar til hesa matarskipanina.*

### 5.8. Børn og ung

Á fundinum hevur leiðslan upplýst fyri umboðsmanninum, at als ongar umstøður eru til at hava eina vælvirkandi barna- og ungdómspsykiatri á deplinum, tí at tað ikki ber til at hava eina slíka sum ein part av einari vanligari deild fyri vaksin. Skipanin í dag er tann, at flestu viðgerðirnar fara fram á eitt nú Sernámsdeplinum.

*Eg fari í hesum sambandi at spyrja Landssjúkrahúsið og Trivnaðarmálaráðið, um nakrar ætlanir eru um at gera eina barna- og ungdómsdeild á deplinum.*

### 5.9. Harðskapur mótvegis starvsfólki

Leiðslan hevur upplýst fyri umboðsmanninum, at likamligur harðskapur frá sjúklingunum mótvegis starvsfólkunum sjáldan kemur fyri. Starvsfólkini verða tó onkuntíð hótt av sjúklingunum.

Trygdarumboðið á D 2 hevur tó víst á, at trupulleikar eru av, at skipanin til at biðja um hjálp í slíkum førum ikki er tíðarhóskandi, og at eingir eykalutir fáast til hesa skipanina. Skipanin virkar tó enn.

*Eg fari at heita á Landssjúkrahúsið um at umhugsa, hvørjar broytingar eru neyðugar og kunnu gerast hesum viðvíkjandi, soleiðis at starvsfólkini kunnu kenna seg trygg framyvir.*

### 5.10. Goymsla av sjúkrajournalum

Leiðandi yvirlæknin hevur upplýst, at journalirnar hjá teimum sjúklingunum, sum eru í viðgerð á sjúkrahúsinum, verða goymdar á deildarskrivstovunum, meðan journalirnar hjá fyrrverandi sjúklingum verða goymdar sentralt. Sum eg havi skilt tað, eru skrivstovurnar stongdar, tá starvsfólkini ikki eru á skrivstovuni. Leiðslan hevur eisini upplýst, at tað einans eru viðkomandi starvsfólk, sum hava atgongd til sjúkrajournalirnar.

*Í tann mun, at journalirnar eru goymdar undir lási, soleiðis at óviðkomandi ikki sleppa framat hesum, havi eg ongar viðmerkingar til hetta.*

## 6. Tvangsprotokollin

Hóast lóggávan á økinum einki sigur um, at nøkur tvangsprotokol skal førast, so hevur Psykiatriski depilin, umframt at notera nýtsluna av tvingsli í journalina hjá tí einstaka sjúklinginum, valt eisini at føra eina slíka protokol í sambandi við fiksering. Umboðsmaðurin hevur fingið høvi til at síggja hesa protokollina.

Protokollin inniheldur upplýsingar um, hvønn sjúkling talan er um, nær fikseringin ávikavist er byrjað og endað, á hvønn hátt fikseringin er framd, hvør lækni hevur góðkent hesa, og hvørji starvsfólk hava havt ábyrgdina av viðkomandi sjúklingi undir fikseringini.

Umboðsmaðurin hevur onga viðmerking til hesa protokollina.

## 7. Lóggávan

Sum kunnugt er lóggávan á psykiatriska økinum frá 1938. Framburðurin og menningin av allari sjúklingaviðgerð hevur broytt viðurskiftini ótrúliga nógv, síðani hendan lóggávan varð gjørd. Bæði leiðslan á Psykiatriska deplinum og sjúklingarnir á D 1 hava víst umboðsmanninum á, at tørvur er á einari nýggjari lóggávu á økinum, sum er tíðarhóskandi, bæði hvat viðvíkur viðgerðini og rættindunum hjá sjúklingunum. Hesin spurningur er eisini umrøddur á s. 14 - 15 í álitinum Heildarpsykiatri í Føroyum (febr. 2002).

*Eg kann ikki annað enn mæla til, at lóggávan verður gjørd meira tíðarhóskandi, serliga við atliti at rættindunum hjá teimum sjúklingunum, sum onkursvegna eru undir tvingsli, antin í viðgerðini ella tí tey vera afturhildin á sálarsjúkrahúsi.*

## 8. Uppfylging

Sum tað framgongur av ymsu brotunum frammanfyri, havi eg í fleiri førum biðið Landssjúkrahúsið um viðmerkingar viðvíkjandi ymsu umstøðunum. Eg biði um, at hesar viðmerkingarnar / svarini verða send mær aftur umvegis Trivnaðarmálaráðið, soleiðis at ráðið fær høvi til at gera viðmerkingar til tað, sum Landssjúkrahúsið hevur ført fram.

## 9. Kunning

Hendan frágreiðingin verður send Landssjúkrahúsinum og Trivnaðarmálaráðnum. Tá Landssjúkrahúsið og Trivnaðarmálaráðið hava svarað umboðsmanninum uppá settu spurningarnar, verður frágreiðingin við viðmerkingum teirra harumframt send sjúklingunum á deplinum og Løgtinginum til kunningar.

# VI. Skjøl

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4. stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingar-

eindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur
## Kærumál og egin mál

**§ 6.** Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.* Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

## 4. Partur
## Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur
## Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. Stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330–336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur
## Lønar- og eftirlønarviðurskifti

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur
## Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur
## Ígildisreglur

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# Skjal 2

## Vegleiðing um Løgtingsins umboðsmann

### Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

### Hvussu kunnu tygum klaga

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, **hvønn** og **hvat** tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum osv.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

### Hvat kann umboðsmaðurin gera

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin

ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*

Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*

Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

*„Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum...“* (§ 6, stk. 3)

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur

tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.
*„...Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“* (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti“ fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.v. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*

Í umboðsmanslógini stendur:
*„Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.“* (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00 ella venda tygum til skrivstovuna í Niels Finsens gøtu 39, Tórshavn, um tygum hava spurningar.

# *Lógaryvirlit*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir ta lóggávuna, sum er umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir bæði um hesa ársfrágreiðingina og um ársfrágreiðingina fyri 2001. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 02/23.2, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 23.2 í ársfrágreiðingini fyri 2002.

| **Lóggáva, kunngerð v.m.** | **Mál:** |
|---|---|
| Ábyrgd landsstýrismanna (løgtingslóg nr. 90 frá 04.06.1996): | |
| - § 2 | 02/23.2 |
| - § 4 | 02/23.2 |
| - § 5 | 02/23.2 |
| Býarskipanarlógin (løgtingslóg nr. 13 frá 21.05.1954): | |
| - § 12, stk. 1 | 02/21.1 |
| - § 15 | 02/21.1 |
| - § 17 | 02/21.1 |
| Fólkaskúlalógin (løgtingslóg nr. 125 frá 20.06.1997): | |
| - § 26 | 02/27.1 |
| - § 26, stk. 1 | 02/27.1 |
| - § 29 | 02/27.1 |
| - § 29, stk. 5 | 02/27.1 |
| - § 40 | 02/27.1 |
| - § 41, stk. 1 | 02/27.1 |
| - § 41, stk. 2 | 02/27.1 |
| - § 46 | 02/27.1 |
| - § 47, stk. 1 | 02/27.1 |
| - § 47, stk. 3 | 02/27.1 |
| - § 57, stk. 7 | 02/27.1 |
| - § 59 | 02/27.1 |
| Fyrisitingarlógin (løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993): | |
| - § 1 | 02/27.2 |
| - § 1 | 02/27.4 |
| - § 3, stk. 1, nr. 5 | 02/21.1 |
| - § 7, stk. 1 | 02/27.3 |

- § 9 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 10, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 18 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 19 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 20 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 21 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
- § 21 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.5
- § 21 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/11.1
- § 21 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
- § 21 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 22 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 23 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
- § 23 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.5
- § 23 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
- § 23 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 23, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
- § 23, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
- § 24 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 25 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Grundlógin:
- § 14, 2. pkt. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/28.1
- § 73 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
HF-kunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 17.07.1996):
- § 20, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
HF-lógin (løgtingslóg nr. 107 frá 29.06.1995),
- § 15 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 16 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 16, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 16, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 20 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Innlitslógin (løgtingslóg nr. 133 frá 10.06.1993),
- § 4, stk. 1, 2. pkt. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/11.1
- § 4, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
- § 5, stk. 1, nr. 2. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.1
- § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- § 7 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/11.1
- § 11 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/11.1

- § 13, stk. 1, nr. 6 .................................. 02/11.1
- § 16, stk. 1 .......................................... 01/11.1
- § 16, stk. 3 .......................................... 01/11.1
Kommunulógin (løgtingslóg nr. 45 frá 29.06.1972):
- § 4 ................................................... 02/27.1
- § 41 .................................................. 02/21.1
Kommunustýrislógin (løgtingslóg nr. 87 frá 17.05.2000):
- § 12 .................................................. 02/27.1
- § 12, stk. 1 .......................................... 02/27.1
- § 13, stk. 1 .......................................... 02/27.1
- § 13, stk. 2 .......................................... 02/27.1
- § 14 .................................................. 02/27.1
- § 27, stk. 2 .......................................... 02/27.1
- § 55 .................................................. 02/21.1
- § 55 .................................................. 02/27.1
- § 55, stk. 1 .......................................... 02/27.1
Kommunuvallógin (løgtingslóg nr. 44 frá 19.06.1972):
- § 3 ................................................... 02/27.1
Kringvarpslógin (løgtingslóg nr. 22 frá 20.02.1998):
- § 5 ................................................... 01/11.2
- § 5 ................................................... 02/27.4
- § 5, stk. 1 ........................................... 02/27.2
- § 6 ................................................... 02/27.4
- § 6, stk. 1 ........................................... 02/27.4
- § 6, stk. 2 ........................................... 02/27.2
- § 6, stk. 2 ........................................... 01/11.2
- § 13 .................................................. 01/11.2
- § 13 .................................................. 02/27.4
- § 13, stk. 1 .......................................... 01/11.2
- § 13, stk. 2 .......................................... 02/27.4
- § 15 .................................................. 02/27.4
- § 17 .................................................. 01/11.2
- § 18, stk. 2 .......................................... 01/11.2
- § 25 .................................................. 01/11.2
- § 25, stk. 1 .......................................... 01/11.2
Lærararáðskunngerðin (kunngerð nr. 46 frá 09.05.1997):
- § 7, stk. 2 ........................................... 02/28.2

Meirvirðisgjaldsfrítøka (kunngerð nr. 136 frá 17. juni 1993): . . 02/22.1
Meirvirðisgjaldsfrítøka (kunngerð nr. 166 frá 3. des. 1992): . . . 02/22.1
Meirvirðisgjaldslógin (løgtingslóg nr. 136 frá 08.09.1992):
- § 1 . . . . . . . . . . 02/22.1
- § 2 . . . . . . . . . . 02/22.1
- § 2, stk. 3 . . . . . . . . . . 02/22.1
- § 2, stk. 5 . . . . . . . . . . 02/22.1
- § 3 . . . . . . . . . . 02/22.1
- § 4 . . . . . . . . . . 02/22.1
- § 5 . . . . . . . . . . 02/22.1
- § 12 . . . . . . . . . . 02/22.1
Postgjøld (kunngerð nr. 134 frá 11.10.2001): . . . . . . . . . . 02/27.4
Próvtøkukunngerðin (kunngerð nr. 65 frá 27.04.2001):
- § 52, stk. 3 . . . . . . . . . . 02/27.3
- § 53 . . . . . . . . . . 02/27.3
- § 67 . . . . . . . . . . 02/27.3
Skattafyrisitingarlógin (løgtinglóg nr. 169 frá 30.12.1997):
- § 16 . . . . . . . . . . 02/10.1
- § 17 . . . . . . . . . . 02/10.1
- § 17, stk. 4 . . . . . . . . . . 02/10.1
Skipaskráseting (løgtingslóg nr. 9 frá 05.03.1970):
- § 35 . . . . . . . . . . 02/23.2
- § 35, stk. 1 . . . . . . . . . . 02/23.2
- § 36 . . . . . . . . . . 02/23.2
- § 36, stk. 1 . . . . . . . . . . 02/23.2
- § 37 . . . . . . . . . . 02/23.2
- § 37, stk. 2 . . . . . . . . . . 02/23.2
- § 37, stk. 3 . . . . . . . . . . 02/23.2
Starvsskipan fyri kommunalar skattakærunevndir
(kunngerð nr. 48 frá 15.04.1998):
- § 5 . . . . . . . . . . 02/10.1
- § 8 . . . . . . . . . . 02/10.1
- § 9 . . . . . . . . . . 02/10.1
- § 11 . . . . . . . . . . 02/10.1
- § 13, stk. 2 . . . . . . . . . . 02/10.1
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 17.06.1996):
- § 12 . . . . . . . . . . 02/28.2

- § 20 .......................................... 02/27.3
- § 20, stk. 3 .................................... 02/27.3
- § 20, stk. 4 .................................... 02/27.3
- § 30 .......................................... 02/27.3
Studentaskúlalógin (løgtingslóg nr. 106 frá 29.06.1995):
- § 9 ........................................... 02/28.2
- § 10 .......................................... 02/28.2
- § 10, stk. 1 .................................... 02/28.2
- § 10, stk. 4 .................................... 02/28.2
- § 13 .......................................... 02/28.2
- § 13, stk. 1 .................................... 02/28.2
- § 13, stk. 2 .................................... 02/28.2
- § 13, stk. 3 .................................... 02/28.2
Stýrisskipanarlógin (løgtingslóg nr. 103 frá 26.07.1994):
- § 33, stk. 1 .................................... 01/28.1
- § 56 .......................................... 02/27.1
Tænastumannaeftirlønarlógin (løgtingslóg nr. 32 frá 05.07.1971):
- § 2 ........................................... 01/28.1
- § 10 .......................................... 01/28.1
Tænastumannalógin (løgtingslóg nr. 31 frá 05.07.1971):
- § 29 .......................................... 02/28.1
Umboðsmanslógin (løgtingslóg nr. 60 frá 10.05.2000),
- § 4 ........................................... 02/27.2
- § 4 ........................................... 02/27.4
- § 4, stk. 2 ..................................... 01/11.2
- § 5 ........................................... 02/27.4
- § 6 ........................................... 02/27.4
- § 6, stk. 3 ..................................... 02/10.1
- § 12 .......................................... 01/11.2
- § 12 .......................................... 02/27.2
- § 12 .......................................... 02/27.4
- § 18 .......................................... 02/21.1
- § 18, stk. 2 .................................... 02/23.1
Vinnuligur fiskiskapur (løgtingslóg nr. 28 frá 10.03.1994):
- § 7 ........................................... 02/23.2
- § 8 ........................................... 02/23.2
- § 8, stk. 4 ..................................... 02/23.2

# *Leitorð*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nøkur leitorð, sum eru umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir bæði um hesa ársfrágreiðingina og um ársfrágreiðingina fyri 2001. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 02/27.1, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 27.1 í ársfrágreiðingini fyri 2002.


| | Mál: |
|---|---|
| Afturtøka av avgerð | 02/27.1 |
| Almannakunngerðing av kommunustýrisavgerðum | 02/27.1 |
| Almannastovan | 02/10.2 |
| - | 02/10.3 |
| - | 02/10.4 |
| Almennur stovnur | 02/27.2 |
| Ársfundarætlan | 02/27.1 |
| Ársmet | 02/27.3 |
| Átala | 01/11.1 |
| - | 02/10.1 |
| - | 02/10.2 |
| - | 02/10.3 |
| - | 02/10.4 |
| - | 02/23.2 |
| - | 02/27.1 |
| - | 02/27.3 |
| - | 02/28.1 |
| - | 02/28.2 |
| Ávísingarsøla | 02/22.1 |
| Avrit av skjølum | 01/11.1 |
| Avtalubrot | 02/23.2 |
| Bandaðar útvarpsupptøkur | 02/27.4 |
| BLF-sáttmálin | 01/28.1 |
| - | 02/28.1 |
| - | 02/28.3 |
| Broyting av ársmetum | 02/27.3 |
| Bygdamenning | 02/27.1 |

Bygnaðarbroytingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
Deildarleiðari II . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28-3
Deildarleiðari I . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.3
Diskretioner uppsøgn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/28.1
Endursetan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
Fakfelagsbløð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Fakkombinatiónir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
FF-blaðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Fíggjarmálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/28.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/22.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.3
Fiski- og veiðuloyvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.1
Fiskimálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
Fjølmiðlaábyrgdarlóg . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Fjølmiðlanevnd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Flokking . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.3
Fólkaatkvøða um niðurlegging av skúla . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Fráboðan til umsøkjarar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Fráboðan um lógarbrek . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.2
Fyribils fráboðanarskriv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Fyrsti kommunustýrisfundur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Føroya Kommunufelag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Føroya Kærustovnur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.4
Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum . . . . . . . . . . . . 02/27.3
Garantiforskrift . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Góður fjølmiðlasiður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Grundgeving . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.5
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/11.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1

- . . . . . . . . . . 02/28.2
Heimild . . . . . . . . . . 02/27.1
- . . . . . . . . . . 02/28.2
Heimild umboðsmansins mótvegis ÚF . . . . . . . . . . 02/27.4
Hósvíkar kommuna . . . . . . . . . . 02/21.1
Hoyringsskriv . . . . . . . . . . 02/28.2
Innanhýsis arbeiðsskjal . . . . . . . . . . 02/11.1
Innlit . . . . . . . . . . 01/11.1
- . . . . . . . . . . 02/11.1
- . . . . . . . . . . 02/28.2
Innlit í journalkort . . . . . . . . . . 01/11.1
Innlit í tíðindahandrit . . . . . . . . . . 01/11.2
Javnstilling av bløðum í ÚF . . . . . . . . . . 02/27.4
Journalistiska virksemið hjá ÚF . . . . . . . . . . 02/27.4
Journalistiskar metingar . . . . . . . . . . 02/27.4
Kappingaravlaðing . . . . . . . . . . 02/22.1
Kappingarráðið . . . . . . . . . . 02/22.1
Kommunala eftirlitið . . . . . . . . . . 02/27.1
Kommunustýrisfundir . . . . . . . . . . 02/27.1
Konsignatiónsgoymsla . . . . . . . . . . 02/22.1
Konsignatiónsvørur . . . . . . . . . . 02/22.1
Kærumyndugleiki . . . . . . . . . . 02/27.1
Kærurætt . . . . . . . . . . 02/27.3
Landskattakærunevndin . . . . . . . . . . 02/10.1
Landsrættardómur viðv. ALS . . . . . . . . . . 02/27.4
Landsrættardómur viðv. FF . . . . . . . . . . 02/27.4
Landsverkfrøðingurin . . . . . . . . . . 02/28.1
Løgmansskrivstovan . . . . . . . . . . 02/21.1
- . . . . . . . . . . 02/27.1
- . . . . . . . . . . 02/28.1
Lønar- og setanartreytir . . . . . . . . . . 01/28.1
Málsviðgerðartíð . . . . . . . . . . 02/10.1
- . . . . . . . . . . 02/10.2
- . . . . . . . . . . 02/10.3

- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.4
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.5
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
Meirvirðisgjald av heimavirkaðum vørum . . . . . . . . . . . . . . . . 02/22.1
Menningarstovan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/22.1
Mentamálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.3
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.3
Metingarkostnaður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
Metingarnevnd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
Mikladals kommuna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Mismunur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Morgunsendingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Mótrokning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/28.1
Munarløn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/28.1
Niðurlegging av skúlum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Norðuratlantsbólkurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.2
Nýggja stýrisskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
Nývalt kommunustýri . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Ógegni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
Ógilding av kommunustýrisavgerðum . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Ognartøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
Ognartøkuendurgjald . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
Óheftur tíðindaflutningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Óhøviskur málburður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Partshoyring . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Prísir fyri bond og fløgur frá ÚF og SVF . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
Programmábyrgdin í ÚF . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Programmvirksemið hjá ÚF . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Programmvirksemið hjá ÚF og SVF . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
Próvtøkubók . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.3
Redaktionel avgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
Ræðisavmarking . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
Rætti myndugleiki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Samanlegging av stovnum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
Samstarvsevni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1

Samstarvstrupulleikar .................................... 02/28.1
Setanar- og lønarviðurskifti ................................ 02/28.3
Setanarbólkur ........................................... 02/28.1
Setanarbræv ............................................. 02/28.2
Setanarmyndugleiki ...................................... 02/28.2
Setanarpolitikkur ........................................ 02/28.1
Siðvenja ................................................ 01/28.1
Sjónvarp Føroya ......................................... 01/11.2
- ...................................................... 01/11.1
Skattakærunevnd ......................................... 02/10.1
Skattur og avgjøld ....................................... 02/10.1
- ...................................................... 02/22.1
Skipaskrásetingin ........................................ 02/23.2
Skrivligar uppgávur ...................................... 02/27.3
Skúlamyndugleikar á staðnum ............................. 02/27.1
Skúlanevnd .............................................. 02/27.1
Skúlaumdømi ............................................. 02/27.1
Skúlaøki ................................................ 02/27.1
Skúlin á Trøllanesi ...................................... 02/27.1
Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál ...................... 01/28.1
Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m. .................. 02/28.1
Starvsfólkapolitikkur .................................... 02/28.1
Studentaskúlin og HF- skeiðið í Hoydølum .................. 02/28.2
Subjektivur tíðindaflutningur ............................. 02/27.4
Svartlisting ............................................. 02/27.4
Teldupostur ............................................. 02/11.1
Thorvald Stoltenberg ..................................... 02/27.2
Tíðindabløð .............................................. 02/27.4
Tíðindaflutningur ........................................ 01/11.2
- ...................................................... 02/27.2
- ...................................................... 02/27.4
Tilmæli ................................................. 01/11.2
- ...................................................... 01/28.1
- ...................................................... 02/21.1
- ...................................................... 02/27.3
Tilmæli um setan í starv .................................. 02/28.2
Toll- og Skattstova Føroya ................................ 02/10.1

- .......... 02/22.1
Tórshavnar býráð .......... 01/11.1
Tænastumaður .......... 01/28.1
Tænastumannaeftirløn .......... 01/28.1
Undirvísing og gransking v.m. .......... 02/27.1
Undirvísingarárslok .......... 02/27.3
Undirvísingarhøli .......... 02/27.1
Uppsøgn .......... 02/28.1
Útoyggjanevndin .......... 02/27.1
Uttanfyristandandi klagari .......... 02/28.1
Útvarp Føroya .......... 01/11.2
- .......... 02/27.2
- .......... 02/27.4
Útvarpsnevndin .......... 02/27.4
Vanbýti í tíðindaflutninginum hjá ÚF .......... 02/27.4
Vegleiðing um uppafturtøku .......... 02/27.3
Viðtøkuføri kommunustýrisins .......... 02/27.1
Vinnuframagrunnurin .......... 02/10.5
Vinnulívs- og Fiskivinnumál .......... 02/23.1
Vinnumálastýrið .......... 02/22.1
- .......... 02/28.1
Virkandi skúli .......... 02/27.1